MIÐLAR, MENTAN & SEINMODERNITETUR

F I R O U Z G A I N I

MIÐLAR, MENTAN & SEINMODERNITETUR

Ein antropologisk lýsing av føroyskum ungdómi

Fróðskapur
Faroe University Press
Tórshavn 2008

Firouz Gaini: MIÐLAR, MENTAN & SEINMODERNITETUR
Ein antropologisk lýsing av føroyskum ungdómi
Supplementum 48
© Firouz Gaini og Fróðskapur
Umbróting, prent og innbinding: Føroyaprent
Satsur: ITC Garamond
Perma: Føroyaprent
Útgevari: Fróðskapur – Faroe University Press, Tórshavn 2008

ISBN 978-99918-65-19-5

Formæli

Bókin er ein stytt útgáva av ph.d-ritgerðini hjá mær. Smáar broytingar og rættingar eru gjørdar í mun til ritgerðina, hvørs almenna verja fór fram á Fróðskaparsetri Føroya í desember 2007.

Tað var mest sum av tilvild, at eg fór undir eina ph.d verkætlan í 2001. Eftir at hava lisið á lærdu háskúlunum í Oslo og Keypmannahavn, umframt at hava gjørt eitt feltarbeiði í Suðurfraklandi, í samfull sjey ár, var hugurin mest til at fara í *vanligt* arbeiði við javnari fastari arbeiðstíð. Tó bleiv tað til gransking. Seinastu árini hevur gerandisdagurin hjá mær í stóran mun verið stýrdur av ph.d verkætlanini, ið hevur givið mær ómissandi royndir og vitan, hóast gongdin viðhvørt hevur kenst sum eitt sisyfosarbeiði, ið ongantíð røkkur á mál.

Áhugi mín fyri ungdómi og mentan í granskingarhøpi gongur aftur til serritgerðina um norðurafrikanskan ungdóm í Nice í Fraklandi, ið varð latin inn á Institut for Antropologi í Keypmannahavn í 1999. Lopið úr Nice til Havnar er tó sera stórt, og eg má viðganga, at ph.d verkætlanin ikki kundi byggja á serritgerðina, burtursæð frá tí kvalitativa háttalagnum, og tí var arbeiðið í Havn veruliga ein nýggj byrjan.

Verkætlanin varð stuðlað fíggjarliga av Mentamálaráðnum eftir at Granskingarráðið hevði tikið undir við umsókn mínari. Takk til tykkum. Vísindagrunnur Føroya Sparikassa skal eisini hava takk fyri upphædd, ið hjálpti mær seinastu mánaðirnar í arbeiðsgongdini. Søgu- og Samfelagsdeildin, Fróðskaparsetur Føroya, í J.C. Svabosgøtu sjey var karmur um mína verkætlan. Eg takki starvsfólkinum á deildini – granskarum, vísindastarvsfólki og deildarskrivarum – fyri gott samstarv og íblástur. Jóan Pauli Joensen, professari í søgu og fólkalívsfrøði, var vegleiðari til mína granskingarverkætlan. Takk til tín fyri mennandi samstarv, fakliga leiðbeining, jalig uppskot, og tað stóra álitið tú vísti mær. Eg takki eisini Jógvani Mørkøre,

samfelagsfrøðing, ið eg hevði mong eggjandi faklig orðaskifti við, har hann, við síni hollu vitan um føroysk viðurskifti, lærdi frá sær.

Mong onnur fólk í Føroyum og uttanlands hava hjálpt mær við góðum ráðum og teirra servitan á økinum. Eg takki Pál Weihe, lækna og leiðara á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, ið hevur fylgt við í mínum arbeiði og givið mær atgongd til sera virðismikil hagtøl um ung í Føroyum. Eg takki ph.d Gesti Hovgaard á Granskingardeplinum fyri Økismenning í Klaksvík (síðan 2005 eisini á Roskilde Universitet), ið hevur stóran áhuga fyri ungdómsgransking, fyri gott samstarv og atgongd til áhugaverd úrslit úr stórari spurnakanning.

Uttan fyri Føroyar skal eg fyrst og fremst takka øllum í norðurlendska NorFA ph.dnetverkinum fyri ungdómsgranskarar, ið eg var partur av 2002-2006. Takk til samskiparan, prof. Helena Helve úr Finnlandi, altjóða viðurkendur ungdómsgranskari, ið hevur latið fleiri dyr upp fyri mær í tí fjølbroytta norðurlendska granskingarumhvørvinum.

Í sambandi við innsavningina av tilfari í Havn skal eg takka Niels Nattestad, skúlastjóra, og Erland Ludvig, lærara, á Venjingarskúlanum, fyri stóra hjálp, tí tað var á hesum lærustovni, at høvuðsparturin av mínum feltarbeiði fór fram í 2003. Og eiga øll heimildarfólk, øll í skúlaflokkinum *hjá mær*, stóra takk uppiborna fyri at loyva mær at vera í tímunum viku eftir viku. Eisini starvsfólkið á Margarinfabrikkini (Virkishús fyri børn og ung í Havn) á heysti 2003 skal hava tøkk fyri at lata meg frítt ganga og eygleiða og práta við ungfólkið í húsinum.

Lív Joensen, móður míni, takki eg fyri rættlestur og málsliga ráðgeving. Familjuni, fyrst og fremst lítlu Simonu, takki eg fyri gott tol. Annars er bara at siga, líkasum aðrir høvundar vanliga gera, at pláss er ikki her at nevna øll tey, ið hava hjálpt og stuðlað mær í mínum arbeiði. Tit eru ikki gloymd.

Kapitlarnir

Bókin, ið fyriliggur her, er skipað í tólv kapitlar. Inngangurin allýsir týðandi hugtøk, gevur eitt yvirlit yvir ungdómsgranskingina í tjúgundu øld, og gevur ein samandrátt av hypotesum og spurningum, ið verkætlanin tekur støði í. Síðan kemur ein viðgerð av hugtøkunum mannfrøði og mentan. Háttalagið í granskingini (við høvuðsdenti á skúlafeltarbeiði) verður eisini lýst í hesum kapitli. Triði kapittul hyggur at ungdóminum úr einum søguligum sjónarmiði, har serliga tíðarskeiðið eftir 1970 verður lýst. Her verður eisini hugt at ungdómslívinum í eini kommunu í útjaðaranum. Síðan kemur kapittul (nr fýra) um familju og børn í Føroyum. Og fimti kapittul, ið nevnist *Skúli og mentan*, kannar á hvønn hátt skúlin ávirkar føroyska ungdómsmentan í dag. Eisini er stutt yvirlit yvir skúlasøgu okkara. Kapittul seks er um frítíðarlívið hjá ungdóminum. Her verður m.a. kannað, hvørjir munir eru á skipaðum og óskipaðum frítíðarvirksemi. Eisini verður bólkurin av sosialt marginaliseraðum ungdómi lýstur. Næstu kapitlarnir (nr sjey og átta) eru um nýggju elektronisku miðlarnar, ið spæla ein týðandi leiklut í teimum flestu ungdómsmentanunum í landinum, nevnliga fartelefonirnar og alnetið. Í lýsingini av alnetinum verður serliga hugt at kjatting, ið nógv ung brúka nógva tíð til, og sum er við til at skapa forvitnislig sosial netverk, ið røkka um alt landið. Síðan er kapittul um tónleikalívið hjá teimum ungu. Kapittul tíggju er um maskulinitet í Føroyum. Her verða ymiskar týpir av ungum monnum allýstar. At enda kemur kapittul um arbeiðslív og framtíðarætlanir ungdómsins við serligum atliti til fiskivinnuna. Her verður hugt nærri at ynskjunum og raðfestingunum hjá ungdóminum tá vaksnammatilveran er í huganum. Kapittul tólv tekur samanum og orðar nakrar niðurstøður.

Teir flestu kapitlarnir í hesum riti eru grundaðir á greinir, ið eg seinnu árini havi skrivað á føroyskum, donskum og enskum máli. Aftast er neyvt yvirlit at finna, ið vísir hvørjar vísindaligar greinar, eg havi brúkt til bókina.

[1]

INNGANGUR

Føroyska samfelagið broyttist nógv í tjúgundu øld, og avleiðingarnar av kreppuni, vit høvdu síðst í áttatiárunum eru djúptøknari og álvarsligari enn mong halda. Tað byrjaði sum ein búskaparlig kreppa, men hevur eisini ávirkað mentanarlig, sosial og familjuviðurskifti. Ein bólkur, ið sjáldan verður nevndur í almenna kjakinum, er ungdómurin – tey, ið ikki minnast tíðina áðrenn búskaparkreppan tók seg upp. Tað er tó ikki *bara* kreppan, ið spælir inn, tá vit tosa um ungdómsmentan í Føroyum. Nógv ung hava tætt samband við onnur lond, tí vinir og partar av familju teirra búgva uttanlands. Útlendskar sjónvarpsrásir og alnetið ávirka eisini rákini í mentanini og lívsstílinum hjá ungdóminum.

Føroyskur ungdómur livir í einum opnum, framkomnum og miðlaríkum samfelagi, ið stendur í eini skiftistíð har kjakast verður um virðir og normar, ið ymiskir samfelagsbólkar knýta seg til.

[HVÍ KANNA UNGDÓM?]

Myndir av ungdómi

Ungdómurin í dag livir undir øðrum fortreytum enn foreldraættarliðið gjørdi, og tað er av týdningi, at vit fáa eina dagførda lýsing av hesum samfelagsbólkinum. Fyri at skilja tey ungu (og trupulleikar, tey hava at dragast við) noyðast vit at kanna, hvussu mentan, livikor og familjuviðurskifti teirra eru. Ein trupulleiki í Føroyum er, at okkara *mynd* av familjuviðurskiftunum og mentanini í landinum er gomul og ofta ótíðarhóskandi. Hon svarar sjáldan til veruleikan í samfelagnum ár 2008. Meirilutin av børnum og ungdómi liva í eini kjarnufamilju saman við systkjum og foreldrum, men ikki nógv meiri enn helvtin av børnunum. Nógv liva við øðrum ella hvørgum av foreldrunum. Foreldrini kunnu vera fráskild, búgva uttanlands, ella er annað teirra møguliga deyð/ur. Familjubygnaðurin er fløkjasligur, sum í grannalondunum, og hetta ávirkar samleikan hjá teimum ungu.

Tørvur er á hesi verkætlan, ið kann hjálpa lærarum, politikarum, námsfrøðingum, sálarfrøðingum og øðrum, ið arbeiða við ungdómi

í Føroyum. Verkætlanin er mannfrøðilig og letur í stóran mun ungdómin *tala fyri seg*. Verkætlanin grundar á sjónarmið og áskoðanir hjá ungdóminum sjálvum. Stórur tørvur er á gransking av teimum modernaðu Føroyum. Burtursæð frá búskaparligum kanningum, so hava vit ikki nógva samfelagsgransking av Føroyum eftir kreppuárini.

Gransking av ungdómsmentan

Ungdómsmentan er stórt granskingarøki í samfelagsvísindum uttanlands. Og tað sær ikki út til at áhugin fyri gransking av ungdómsmentan og -bólkum fer at minka komandi árini, heldur tvørturímóti, men meginparturin av tilfarinum er um ungdómsbólkar í stórbýum í Vesturheiminum. Sum oftast er granskingin haraftrat um etniskar minnilutabólkar, serkendar lutmentanir ella sosialar stættir: til dømis um ungar pakistanar í Manchester, arbeiðsleysan ungdóm í París og technoungdóm í Stockhólmi. Í smáum samfeløgum eru ungdómsbólkar ofta skipaðir á annan hátt.

Hóast nógv hevur verið sagt og skrivað um ungdómsmentan, er talan um eitt lutfalsliga nýtt evni í mannfrøðini. Í bókini *Youth Cultures* (1995) sigur Vered Amit-Talai:

> *If anthropology is the study of humankind, why has it dealt mostly with men, to an increasingly extent with women, to some degree with children, and old people, but very little with youth as a subject matter? Perhaps, like many other adults, anthropologists view youth as not to be taken very seriously: occasionally amusing, yet potentially dangerous and disturbing, in a liminal phase.*

Munurin á sosiologiskari og mannfrøðiligari gransking av ungdómi er, at mannfrøðingar í nógv størri mun brúka kvalitativ háttaløg, til dømis luttakandi eygleiðing og feltarbeiði, og noyðast sostatt eisini sjálvir at tulka tað tilfar, ið verður savnað inn. Mannfrøðingar knýta nógv ymisk data saman fyri at skapa *heildarmyndir* av rákum og mynstrum í mentanini. Haraftrat royna teir í stóran mun, eins og

nógvir sosiologar gera, at kanna relatiónir millum aktørar, millum stovnar og millum sektorar í samfelagnum. Mítt granskingararbeiði er mannfrøðiligt og hevur fjølbroytt tilfar, ið hevur sera ymiskan uppruna: fjølmiðlar, alnet, prát, samrøður, eygleiðingar, kvantitativar kanningar o.s.fr.

Tað eru fá ár síðani mannfrøðingar av álvara fóru at skriva um ung sum sjálvstøðugan samfelagsbólk við egnari mentan: „Youth culture is what young people are concerned with, and there is more cultural agency in it than most earlier studies have acknowledged" (op cit). Sosiologar hava harafturímóti arbeitt við ungdómsbólkum í mong ár.

Mín hugsan er, at sovorðin gransking í smáum samfeløgum, sum til dømis Føroyum, hevur stóran fakligan týdning, tí ungdómsmentanin er ikki býtt sundur í hóp av lutmentanum sum í stórum býum aðrastaðni. Allir føroyingar hugsa ikki eins, liva ei heldur eins, tó er í ungdómsmentanini ikki grundarlag fyri avmarkaðum undirbólkum, ið hava radikalt øðrvísi lívsstíl enn hini. Teir einstaklingar, ið ikki finna nakað forum fyri síni áhugamál í Føroyum, noyðast at liva við tí (ella flyta av landinum).

Eisini er áhugavert, í altjóða høpi, at vísa hvussu sterka ávirkan rák úr ungdómsmentanini á meginlandinum hava á ung í Føroyum, ið eru meira modernað enn flestu útlendingar ímynda sær. Hugsið bara um hvussu nógv tey eru, ið eiga fartelefonir, teldur við alneti og parabolsjónvarp heima við hús. Um ungdóm, fjølmiðlar og modernitet sigur danski granskarin Kirsten Drotner (1999: 15):

> *At være et moderne barn og en moderne ung betyder, at man skal lære ved at lære, ikke ved at gøre. Dette paradoks indstiftes først blandt borgerskabets sønner, men breder sig gradvis til også at omfatte [...] unge. Deres liv deles op i adskilte sfærer som familie, skole og fritid. Inden for alle disse sfærer lærer unge i dag at forholde sig til modernitetens kompleksitet og til dens adskilte vidensområder, og medierne*

er blevet centrale kilder til at forstå de enkelte områder og sfærer samt se forbindelserne imellem dem.

Ung í dag eru fyrsta ættarliðið, ið er vaksið upp við fartelefonum, alneti og parabolsjónvarpi – bæði í Føroyum og í restini av Vesturheiminum.

Bólkar í samfelagnum

Síðan ár 2000 havi eg roynt at fylgja við í øllum tí, ið hevur gingið fyri seg í Føroyum, ið hevur við ungdómin at gera. Tað sigur seg sjálvt, at hetta er ein trupul uppgáva, ið ikki kann loysast til fulnar, tí ógjørligt er at fáa fatur í øllum tí, ið gongur fyri seg í samfelagnum. Sostatt eru lýsingarnar hjá mær bæði avmarkaðar og í ávísan mun persónligar. Eg havi tó gjørt eina roynd at skapa eina heildarmynd av bólkinum og tíðini, ið hugt hevur verið eftir. Ungdómur, mentan, miðlar og samleiki eru høvuðshugtøk, eg ynski at kanna og knýta saman.

Ofta tykist tað, í fyrstu syftu, at vera lætt at lýsa og greina føroyska samfelagið, tí fólkatalið er so lítið og oyggjarnar so smáar, men skjótt vísir tað seg, at tað ikki er nøkur einføld uppgáva at lýsa bólkar og mentanir í landinum. Tað er ongin semja um hvussu samfelagsbólkarnir eiga at lýsast. Við øðrum orðum kann lýsingin skapa eina mynd, ið nógv meta kann skaða samfelagið. Hetta er áhugavert, tí tað sigur nakað um ein kollektivan samleika, føroyingar eiga.

Tá tosað verður um ungdóm, stinga trupulleikarnir seg eisini upp, tí ongin greið semja er um, hvussu bólkurin skal allýsast – hvat er ungdómur fyri nakað? Haraftrat er torført at býta ungdómin sundur í lutmentanir ella aðrar avmarkaðar bólkar – hvørjir munir eru á føroyskum ungdómi? Hetta er ikki nakar serføroyskur trupulleiki. Ungdómur er ein rættiliga flótandi kategori, ið kann lýsast uppá fleiri mátar. Í Føroyum er tó eisini talan um eitt mentanarligt eyðkenni, tí her er tað ikki bara ungdómurin, ið hevur ilt við at finna sín bás; talan er um nógvar samfelagsbólkar í landinum.

Hesi viðurskiftini gera tað til eina stóra avbjóðing at lýsa ungdóm, mentan og samleika, tí sosialu kategoriirnar, ið aðrastaðni í Evropa eru *natúrligur* partur av tí modernaða samfelagnum, framvegis eru rættiliga duldar í Føroyum. Lýsingarnar av bólkum eru subjektivar og kontekstuellar, so torført er at siga nakað alment um samfelagsbólkarnar, ið øll kunnu taka undir við. Alt hetta, ið her er nevnt, hevur týdning fyri at skilja ungdómin og mentanina í landinum í dag. Talan er um eitt fyribrigdi, ið kann fáa okkum at skilja nógv onnur samfelagslig eyðkenni.

Ungdómur í almenna kjakinum

Føroyska samfelagið kann býtast upp í nógvar avmarkaðar bólkar. Við at brúka hugflogið kunnu hópin av bólkum í samfelagnum eyðmerkjast, ið umboða ymisk sjónarmið og virði, og sum ofta standa í sínámillum stríði um politisk og moralsk mál í tí almenna kjakinum. Fleiri bólkar vera næstan ongantíð nevndir, ella einans í neiligum vendingum, meðan aðrir sita tungt á valdinum at lýsa *røttu* áskoðanina. Viðmerkjarin Erhard Jacobsen nevnir í lesarabrævi í Sosialinum (13/7 2004) tann

> *miðvísa ágang, sum ávísir bólkar í okkara samfelag uppliva, til dømis hjún, sum liva saman ógift, samkynd ella fólk, sum vóru ímóti apartheid. Uttan nakra sum helst eftirkannan vórðu og verða hesi løgd undir at vera syndarar, svínsk, nassarar, tápulingar, ella tað, sum verri er.*

Ungdómurin, ið ofta umboðar tollynt virði, er ein hóttan ímóti teimum gomlu á trúnu samfelagsins. Ungdómurin setir krøv (til dømis til arbeiðsmarknaðin og útbúgvingarskipanina), sum tey ráðandi ikki liva upp til.

Tað er eitt stórt lop frá sosiala veruleikanum í Føroyum *anno* 2008 og til idealiseringina av siðbundnari mentan, ið fólkið ikki livir eftir í dag. Henda ójavnvág ímillum fyrimynd og veruleika, fyrr og nú, gomul og ung, setur týðiligu spor í tí almenna kjakinum. Ungdómurin fær

av órøttum mangan ábyrgdina fyri neiligar broytingar í samfelagnum, ið í grundini eru partur av eini óundankomandi modernisering av samfelagnum, ið verður alt tættari knýtt at umheiminum. Erhard Jacobsen sigur um solidaritet, at „tað er skeivt at ákæra ungdómin fyri líkasælu og fyri ikki at vísa solidaritet, tí ungdómurin er – tað eg haldi meg vita – helst væl meira at sær komin moralskt enn vit tilkomnu“ (13/7 2004).

Ungdómurin, ið ikki er nakar einstáttaður bólkur, skal um nógvar gyrðingar fyri at fáa viðurkenning í samfelagnum. Hóast føroyska samfelagið er lutfalsliga einsháttað og samansjóðað, so eru tað, um ein setur sjóneykuna á landið, nógvir sosialir og mentanarligir bólkar í einum kompleksum samspæli, ið skapa tann sosiala veruleikan, vit hava. Hædd má takast fyri landafrøðiligum, sosialum og átrúnaðarligum faktorum tá ein ger eitt yvirlit yvir samfelagsgondina. Haraftrat er munurin á ættarliðunum ein týðandi partur av myndini.

Ungdómur og val

Granskingin hjá bretska sosiologinum Anthony Giddens umboðar viðkomandi ástøði til gransking av viðurskiftum í einum seinmodernaðum samfelag. Giddens hevur granskað hugtøk sum modernitet, samleika, og mentan, ið øll hoyra heima í hesi verkætlan. Giddens sigur, at fólk velja sínar gerðir strategiskt og royna alt tey kunnu at fáa tað so gott sum gjørligt. Men samstundis, sigur hann, eru vit øll undir sterkum trýsti, tá vit velja; trýstið avmarkar okkara møguleikar at velja. Tann sosiali strukturin er, sigur Giddens, bæði fortreytin fyri at gerðir eru møguligar og, samstundis, tað sama sum allar gerðir tilsamans. Hetta kallar hann fyri *the duality of structure*. Mótsetningurin millum tað individuella og tað samfelagsliga sjónarmiðið verður upploystur í ástøðinum hjá Giddens.

Ástøðið hjá Giddens kann brúkast at kanna hvønn leiklut fjarsamskifti, foreldur og skúli hava fyri ungdómsmentanirnar; hvussu nógv hesi ávirka ungdómin. Ungdómurin er ein kollektivur aktørur, ið eisini ávirkar umhvørvið sítt. Ávirkanin gongur báðar vegir.

Modernaða menniskjað er refleksivt. Tað ognar sær nýggja vitan og royndir, ið virka sum grundarlag fyri framtíðar avgerum. Vit liva í einum heimi, har vandin fyri, at úrslitini av okkara gerðum ikki verða sum vit høvdu roknað við, alla tíðina lúrir. Hvussu ávirkar hetta okkara samleika og lívsstíl? Í bókini *Modernity and Selfidentity* greinar Giddens hvussu samleikin hjá tí modernaða menniskjanum skapast. Giddens (1991: 14) sigur at

> *[s]elvets refleksive projekt, som består i at opretholde sammenhængende, men konstant reviderede biografiske fortællinger, finder sted i en kontekst af mangfoldige valgmuligheder, der filtreres gennem abstrakte systemer [...] Jo mere traditionen mister sit tag, og jo mere dagliglivet rekonstitueres på baggrund af det dialektiske samspil mellem det lokale og det globale, desto mere tvinges individerne at træffe valg om livsstil blandt mange forskellige muligheder.*

Hugtakið lívsstílur er bæði knýtt at traditión og aktør. Í hesum riti verður samspælið millum traditión og modernitet, millum struktur og aktør, lýst.

Ungdómur og samfelagsbroytingar

Føroyskur ungdómur hevur ikki áður verið fyrimál hjá fólki, ið granskar føroyska samfelagið. Granskingin, hvørs úrslit nú fyriliggja, umboðar fyrstu veruligu roynd at lýsa ungdómin í landinum vísindaliga. Endamálið við verkætlanini hevur verið, at hyggja nærri at ungdóminum í landinum í dag úr einum mentanarfrøðiligum sjónarhorni. Og hóast feltabeiðið fór fram í høvuðsstaðnum, umfatar verkætlanin alt landið, tí nógv innsavnað tilfar er av bygd.

Mannfrøðilig gransking minnir ofta nógv um sosialsálarfrøðiliga, sosiologiska, søguliga ella fólkalívsfrøðiliga gransking, men serliga eyðkennið hjá mannfrøðingum er háttalagið, har nógv tilfar kann brúkast til *dokumentatión* viðvíkjandi mentanarligum og sosialum bólkum í samfeløgum – til dømis eygleiðingar og persónligar upplivingar.

Hvat vita vit í grundini um yngru ættarliðini í Føroyum, havi eg hugsað. Hesi seinastu árini hava føroysku miðlarnir tó givið ungdóminum gætur sum ongantíð áður, so ungdómurin er ikki eins ósjónligur, sum hann hevur verið.

Ein trupulleiki við verkætlanum av hesum slag er, at mentanarligar lýsingar av ungdómi nærmast eru aveldar, longu tá tær verða almannakunngjørdar. Hvørt ár koma nýggj rák og nýggir stílar, ið ávirka tilveruna og virðini hjá ungdómsfjøldini.

Miðað verður eftir at geva eina heildarmynd av mentanarliga samleika ungdómsins, heldur enn at skerja ættarliðið og velja avmarkaða lutmentan við serligum virðum at granska. Ætlanin er at lýsa ungdómin við støði í egnum frágreiðingum hansara og at knýta ungdómsmentanina í dag til stóru broytingarnar, ið føroyska samfelagið hevur verið fyri seinastu tíggjuárini.

Mentanarligi samleikin hjá ungdóminum er settur saman av lokalum og globalum stílum og siðum, og at hetta er nakað, ið eyðkennir seinmodernitetin, ið hevur sett sín dám á føroyska samfelagið síðan umleið 1990. Hetta er ein høvuðshypotesa í ritinum. Haraftrat viðger ritið størri samfelagsbroytingar, ið hava ávirkað mentanina hjá ungdóminum seinastu árini.

Ungdómur á ferð

Ungdómsgransking kann sigast at vera framtíðargransking. Framtíðin endurspeglast í nógvum úr ungdómsmentanini í samtíðini. Ung eru mangan kjarnin í samfelagnum í ókyrrum skiftistíðum; sambært Alberto Melucci (í Miles 2000: 2) eru tey,

> *the primary subject of dramatic transformation that affects contemporary society and experience them most directly. Parents, teachers and adults can learn about themselves by listening to youngsters.*

Ungdómsgransking hevur stórt samfelagsligt virði, nakað nógv hava ilt við at skilja, tí ung ikki eru vaksin og harvið ikki eru myndugir borgarar. Men júst hetta, at ung umboða ein veikan (ómyndugan) bólk, kann sigast at gera ungdómsgranskingina áhugaverda. Granskingin kann eisini veita einstaklingum og bólkum eina hjálp:

> *Given that young people are invariably marginalised within the wider society [...] empirical research with young people provides an opportunity to increase our understanding of their lives and in some situations to contribute to academic or public debates which play a part in social constructions of youth.*
> *(Valentine et al 1998: 23)*

Ungdómurin er á ferð, vandaferð, frá tryggari tilveru sum barn til ørkymlandi vaksnamannalív við ábyrgd. Ungdómstíðin er, í heimsmyndini hjá vaksnum, full av mýtum og fordómum, ið romantisera og hálova fría ungdómslívinum ella vanæra ungdómin, tí hann verður skýrdur at umboða vandamiklastu hóttanina ímóti skili og ordan í samfelagnum.

Jeg sidder og stirrer ud så
vide, ud i det forgangne og
evigt svundne, Ungdommens Land,
hvor jeg ikke mere har borgerskab,
og som jeg hemmeligt misunder Jer,
der endnu har frit spil dernede,
især hvad angår jeres dejlige
regenerationsevne
(W. Heinesen)

Ungdómurin umboðar ikki einans fólk í ávísum lívfrøðiligum aldri, tí talan er eisini um sosialt, sálarfrøðiligt og mentanarligt hugtak, ið onnur fólk hava samband við, tí tey eru ung í sinninum ella hava virðir og lívsstílar, ið vanliga verða roknað sum partur av ungdómsmentanini. Ungdómurin er, sigst ofta, blómandi og mergjaður lívsmáttur við óskerdum vilja.

> *Bert fá fáa høvi til at svæva miðgarðsormin og tøma havið – tey inna beinleiðis avreksverk sum sjálvt Tórgudur var ikki førur fyri – til tey ein dagin finna seg í hornatøkum við ellina. Tá hjálpir onki, ungi maður, hvussu tey leika í. Skjótt hanga tey og grína í deyðans veldiga opnahjalli. Og har er ongin sprellan, vita tygum.*
> *(J.P. Heinesen 1981: 127)*

Tey ungu sprella, liva, men lívið er stutt, sigur skaldið, og fróðskapur og styrki koma ikki í senn í lívinum. Hesar útbreiddu lýsingarnar av ungdómi, ið hava fylgt okkum síðan Sokrates' dagar, eru eyðkendar av at vera langtandi ella revsandi skoðan av farnum tíðum, tí tað eru eldru ættarliðini, sum fortelja um ung. Sokrates (469-399 f.Kr.) var ikki mildur í sínum dómi:

> *Tey ungu í okkara døgum elska marglæti. Tey hava ringan atburð, vanvirða myndugleikar, hava onga virðing fyri eldri fólki og práta heldur enn at arbeiða. Tey reisa seg ikki longur upp tá ið eldri koma inn í eina stovu. Tey siga ímóti sínum foreldrum, reypa í veitslum, slúka dessertina við døgurðaborðið, krossa beinini og fara illa við lærarunum.*
> *(mín týðing)*

Ungdómurin hevur altíð verið óskikkiligur, er vanlig niðurstøða, ið skal vísa, at støðan í dag ikki er verri enn fyrr. Eisini kundi verið sagt, hóast tað sjáldan verður framborið, at tey vaksnu altíð hava forsyndast yvir síni børn, tá hesi koma í kynbúningarárini. Listafólk og onnur hava tó mangan ungdómin sum fyrimynd, sum „salt í tilverunnar grindatunnu" (Johansen 2004: 13). Og uttan „hetta saltið dovnar tvøstið og rotnar".

Ung verða í fjølmiðlunum ofta lýst sum ólátað og einsháttað við støði í neiligum tíðindum, ið miðlar boða.

Ungdómurin verður eygleiddur, men sjáldan hoyrdur. Lýsingarnar vit fáa av barndóms- og unglingaárunum koma oftast frá eldri fólki, ið minnist hvussu tað var at vera ungur; sostatt verða farnar tíðir lýstar eftir minninum, og ikki nútíðin av ungdóminum sjálvum. Tað er her trupulleikin ofta liggur. Tað er neyðugt at sleppa fordómum og mýtum, so vítt sum gjørligt, áðrenn farið verður í holt við at greina og gera niðurstøður um ungdómin.

Ungdómurin er kategori, ið veksur og minkar, flytist og rørist, alt eftir hvussu vit allýsa børn og vaksin, tí ungdómurin er eitt slag av buffara ímillum børn og vaksin. Søguliga er hugtakið ungdómur ikki gamalt. Sum vit fara at síggja, eru bólkurin og hugtakið knýtt at ídnaðarsamfelagnum og modernaða tjóðstatinum.

[HVAT ER UNGDÓMUR?]

Hugtakið ungdómur

Fyrstu ferð ung nágreiniliga verða lýst sum samfelagsbólkur er í bókini *Émile* hjá Jean-Jacques Rousseau, ið fyrstu ferð kom út í 1762. Ungdómsgranskingin er tó nógv yngri enn sum so, tí hóast Rousseau ofta sigst vera arkitekturin aftan fyri ungdómshugtakið, so er tað ikki fyrr enn væl inn í tjúgundu øld, at vísindaligar kanningar fara at seta ungdómin í brennidepilin. Sjálvt *børn*, soleiðis sum vit í dag skilja orðið, er rættiliga nýtt hugtak í evropeiskari søgu. Søgumaðurin Philippe Ariès sigur, at undan átjandu øld vóru børn ikki viðurkend sum egin kategori; hann uppdagaði í síni rannsókn, at børn nærum ongantíð vóru at síggja á ikonmyndum úr miðøldini og meinti, at orsøkin var, at børn tá høvdu verið roknað sum *miniaturvaksin* (Ariès 1962).

Ungdómshugtakið var í átjandu og nítjandu øld serliga sett í samband við sosialiseringina og útbúgvingina av børnunum úr borgarastættini

(Illeris et al 2002: 12). Eftirhondini vaks bólkurin tó, tí arbeiðarabørn fóru eisini at ganga í skúla sum liður í strevinum hjá teimum ráðandi at fáa tamarhald á øllum børnum í landinum. Eisini bleiv skúlagongdin longd í áratali. Í byrjanini av tjúgundu øld fekk fjøldin av børnum úr øllum stættum so smátt atgongd til skúlarnar.

Ungdómsgranskingin fór fyrstu tíggju-tjúgu árini í tjúgundu øld av álvara at mennast, í fyrstani serliga í USA, tí har høvdu sosiologar og sálarfrøðingar uppdagað vælskipaðar ungdómsbólkar, ið vóru farnir at gera vart við seg í stórbýunum. Sosiologarnir á lærda háskúlanum í Chicago (chicagoskúlin) gjørdu slóðbrótandi kanningar av innflytarum úr ymsum pørtum av Evropa, sum høvdu búsett seg í New York, Boston, Chicago og øðrum stórbýum (Coulon 1992 og Hannerz 1980). Heilt fram til sekstiárini var USA næstan einaráðandi í ungdómsgranskingini, men tað var sum flestum kunnugt eisini í USA, at tey ungu fyrst blivu partur av vaksandi forbrúks- og undirhaldsmentanum.

Eftir seinna veraldarbardaga fóru granskarar í Stórabretlandi og USA nágreiniliga at kanna ungdómsmentanir, og nógv orka varð løgd í at kanna ungu *ótamdu* menninar úr arbeiðarastættini, tí hesin bólkurin varð lýstur sum vandamikil samfelagshóttan í tí almenna rúminum (Valentine et al 1998: 10). Birminghamskúlin, ið átti sítt blómingarskeið síðst í sjeytiárunum, hevur ávirkað nógv av tí, ið er skrivað um ung síðstu tjúgu árini. Hann hevði sterkar røtur í chicagoskúlanum og aðrari amerikanskari harkaliðsgransking, men var eisini ávirkaður av nýggjum mannfrøðiligum ástøðisrákum, serliga semiotikkini og strukturalismuni.

Í 1977 skrivaði Paul Willis bókina *Learning to Labour*, ið lýsir, hvussu tólv skúladreingir úr arbeiðarastættini standa ímóti ráðandi hugsjón skúlans; teir nokta at boyggja seg fyri nøkrum, og úrslitið av áhaldandi uppreistrum teirra er, at teir endurskapa ta veiku støðu, ið arbeiðarastættin frammanundan hevði. Tað er ein neilig ringrás, ið teir ikki sleppa burturúr. Dreingirnir úr arbeiðarastættini hava, sambært Willis, stóra vanvirðing fyri teimum, ið royna at klintra upp

eftir tí sosiala tignarstiganum við at lesa uppá og virða lærararnar. Teir eru stoltir av at vera vánaligir næmingar og hava eydnuna við sær í ungdómslívinum annars, men tá teir koma út í arbeiðslívið, yvirtaka teir ólærda arbeiðið hjá pápunum. Stoltleikin hjá arbeiðarastættini verður sostatt tann størsta forðingin fyri at ungdómurin sleppur burtur úr ússaligu støðu síni í samfelagnum.

Í áttatiárunum broyttust ungdómsmentanirnar í Stórabretlandi nógv, og eftirhondini fóru ungdómsgranskarar eisini at peika á veikleikar, ið teir sóu í verkætlanini hjá birminghamskúlanum, ið serliga hevði hugt at lutmentanum úr arbeiðarastættini í Onglandi. Í dag er torført at finna ungdómsbólkar, ið skilja seg líka týðiliga frá øðrum bólkum sum til dømis *Teddy Boys* og seinni punkarar gjørdu í sjeytiárunum. Og birminghamskúlin hevur helst gjørt ov nógv av, tá munirnir ímillum lutmentanir og innara eginleika bólkanna vóru lýstir. Birminghamskúlin var mest áhugaður í at kanna relatiónirnar ímillum sosialu bólkarnar í samfelagnum, serliga arbeiðaraungdómin mótvegis restini av tí bretska ungdóminum, og vildi ikki rættiliga kennast við individuella margfeldið innan fyri einstøku lutmentanirnar. Eisini er vert at nevna, at birminghamskúlin lýsir ungdómin uttan at veruliga geva honum sína egnu rødd. Tey ungu gera og fortelja ymist, men ikki beinleiðis viðvíkjandi mentanarliga samleikanum, so tað eru sosiologarnir, ið *avdúka* tey struturellu viðurskiftini, ið stýra lívinum hjá einstaklingunum.

Í dag eru ungdómsmentanirnar meira flótandi eindir enn fyrr, so tað er torført at seta neyvt mark ímillum eindirnar, tí ungdómurin flytir seg støðugt og hevur fløkjaslig net av sosialum relatiónum. Seinastu tjúgu árini hevur ongin ráðandi skúli verið við-víkjandi ástøðiligu menningini av ungdómsgranskingini, og nýggja ættarliðið av granskarum má sigast at vera farið í nógvar vísindaligar ættir. Tað er ógjørligt at royna at greiða frá øllum tí, ið gongur fyri seg á økinum, og tí fari eg bert at lýsa tann partin av granskingini, ið eg knýti míni granskingarúrslit til. Almennar broytingar í samfelag-num hava stóra ávirkan á mentan og samleika ungdómsins, og tað er hetta, ið mín vísindaligi áhugi fyrst og fremst savnast um.

Lýsingar av ungdómi

Tað eru nógvar allýsingar av ungdómi, ungdómsgranskarar hava brúkt. Epstein (1998: 4) sigur til dømis um samleikan hjá ungdóminum, at

> *it has been said that adolescence is the period in the lifecourse in which individuals are most likely to be alienated [and] according to Erikson (1968), adolescence is the period in one's life in which choices begin to be made and identities formed. It is through this process of identity formation that cliques and subcultures tend to flourish.*

Sibley (í Skelton og Valentine 1998: 5) sigur um mentanarliga viðbrekna og óstøðuga markið millum ung og vaksin:

> *The limits of the category 'child' vary between cultures and have changed considerably through history within Western, capitalist societies. The boundary separating child and adult is a decidedly fuzzy one. Adolescence is an ambiguous zone within which the child/adult boundary can be variously located according to who is doing the categorising. Thus, adolescents are denied access to the adult world, but they attempt to distance themselves from the world of the child. At the same time they retain some links with childhood. Adolescents may appear threatening to adults because they transgress the adult/child boundary and appear discrepant in 'adult' spaces…These problems encountered by teenagers demonstrate that the act of drawing the line in the construction of discrete categories interrupts what is naturally continuous. It is by definition an arbitrary act and thus may be seen as unjust by those who suffer the consequences of the division.*

Ungdómur er, siga Fornäs og Bolin (1995), (a) eitt lívvirkisfrøðiligt (fysiologiskt) tíðarskeið í lívinum, ið byrjar við kynsbúningini og endar, tá kroppurin er fult útviklaður og ein ikki veksur longur; og eitt (b) sálarligt tíðarskeið í lívinum, ið gongur ígjøgnum alla ungdómstíðina og heldur ofta á nógv ár aftrat. Ungdómur er eisini ein sosial kategori,

framed by particular social institutions – especially school, but certain rituals as well such as confirmation or marriage, legislation directed towards age limits and coming of age, and social acts such as living home, forming a family, getting educated and finding a profession.
(op cit)

Ungdómur er lívsskeið (millumstøða millum børn og vaksin), ið vanliga byrjar í ellivutrettan ára aldri og endar tá ein hevur etablerað eina vaksnamannatilveru, oftast við egnum búskapi, arbeiði, húsi og møguliga familju. Mørkini eru tó sera ógreið. Formliga verður ein persónur í Føroyum *vaksin* og fær samfelagsligu rættindi teirra vaksnu, tá hann fyllir átjan ár. Men átjan ár verður samstundis sæð sum tíðin, tá ung-dómstilveran blómar. Og tey ungu hava, verður sagt, sera stórt frælsi at velja lívsleið og -stíl í dag.

Hugtakið ungdómur broytist við tíðini; tíðarskeiðið (ungdómstíðin) verður longri og longri og markið millum ung og vaksin er flótandi. Næstan øll, óansæð aldur, knýta seg á onkran hátt til ungdóms-mentanina: lívsstíl, klæðir, tónleik, o.s.fr. Ungdómstíðin verður í romantiskum ljósi sæð sum frælsi, spontanitetur, skapanarevnir og eydna; men eisini í neiligum ljósi sum harðskapur, rúsevnir, ábyrgd-arloysi og arbeiðsloysi. Ungdómurin er eftirhondini ein sera sterk samfelagskategori, flestøll spegla sær í.

Ungdómstíðin kann síggjast sum tíðin tá tær stóru avgerðirnar skulu takast. Hendan allýsingin er knýtt at stóru samfelagsbroytingunum, ið hava verið í Vesturheiminum seinastu 20-30 árini. Talan er um fyribrygdið, ið Ziehe kallar *mentanarliga fríseting,* og Giddens kallar skiftið til *seinmodernitetin*.

Moderne mennesker er tendentielt og ideologisk frigjort fra bindinger til sted, stand, slægt, religion og til dels fra køn – fra alle de instanser der i traditionelle samfund medvirker til at adfærd, normer og holdninger bliver ens og fasttømrede fra generation til generation indenfor den enkelte klasse eller

gruppe og indenfor hvert af kønnene. Tidligere var den enkelte langt mere fastlåst, de fleste kunne regne med at følge i deres forældres spor, kulturelt, socialt og arbejdsmæssigt. (Illeris et al 2002)

Ungdómurin er ikki til at stýra (minni nú enn nakrantíð), tí foreldrini og skúlin eru bara tveir av fleiri *lærarum* hansara. Útlendskar sjónvarpsstøðir, alnetið, teldubrøv, fartelefonir, smsboð og annað innan nýggju kunningartøknina hevur givið ungdóm-inum høvi, at sjálvur avgera hvørja vitan hann nemur sær. Ungdómurin velur í stóran mun sjálvur sín samleika og lívsstíl. Tað er ongin, ið krevur at ein drongur skal fylgja í fótasporunum hjá pápa sínum viðvíkjandi yrkisleið og livihátti. Hann er fríur at velja sína virkissleið og íblásturin til lívsleiðina kann koma úr nógvum ymsum keldum.

Siðvenja og mentanarlig barlast eru ikki altýðandi fyri sosialiseringina av ungdóminum longur, tí hann skapar sín egna persónliga samleika útfrá úrvali av súmbolum, teknum, tulkingarhættum og virðum úr veruleikanum. Tey ungu skulu so at siga skapa sín egna status. Nógvar strukturellar gyrðingar eru, ið kunnu forða tær í at náa tíni lívsmál, men í prinsippinum er ungdómurin púra fríur at velja sær eina lívsverkætlan. Og at vera fríur er bæði krevjandi og avbjóðandi, tí tú noyðist áhaldandi at taka avgerðir, at velja kós, og tað er ikki bara sum at siga tað, tá ein er ungur og droymandi.

Danski sálarfrøðingurin Sven Mørch (2001) sigur, at ungdómsmentanin er vorðin individualiserað; tú hevur tína persónligu mentan, og harvið hevur tú eisini fingið ábyrgdina av tínum egnu avgerðum í lívinum. Ung velja tó strategiir í felag, soleiðis at tey standa saman um ein lívsstíl og ein mentanarligan samleika.

Fyri at læra nakað um ungdómsmentanirnar í landinum er ein noyddur at royna at svara hesum spurningum: (1) hvat eru mest týðandi hendingarnar í lívinum hjá ungdóminum? (2) hvat fyri upplivingar og hendingar seta sín dám á gerandisdag ungdómsins? (3) hvat fyri pláss (rúm) brúka tey ungu í frítíðini hjá sær? (4) hvussu er familjulívið

hjá ungdóminum skipað? (5) hvat fyri elektroniskar miðlar brúka tey ungu (og hvussu)? (6) hvat fyri mentanarlig rák og virði ávirka ungdómslívið? (7) hvussu samskifta tey ungu sínámillum? (8) hvat fyri trúarbólkar ávirka ungdómin í landinum? (9) hvat fyri fyrimyndir hevur ungdómurin? (10) hvat fyri dreymar hevur ungdómurin?

Ungdómsmentan er eitt hugtak, ið kann lýsast sum hættir, ið ung fólk og tannáringar brúka til at skilja seg frá mentanina hjá foreldrunum og samfelagnum; ungdómsmentanin er oftast at síggja í eini rød av ymiskum lutmentanum. Ungdómsmentanir komu fram sum eitt samfelagsligt mótrák (mótvegis búskaparligum, politiskum og útbúgvingarligum broytingum) í Evropa eftir 1945.

Ungdómsmentanir broytast í stóran mun frá ættarliði til ættarlið. Lutmentan verður í mannfrøðini og sosiologiini fatað sum ein bólkur av persónum, ið hava nøkur serlig eyðkenni viðvíkjandi atferð og virðum, ið eru við til at gera tey *øðrvísi* í mun til størru mentanina, ið persónarnir annars kunnu sigast at hoyra til. Aldur kann vera avgerandi fyri, hvar markið millum lutmentanir liggur – men eisini sosial, etnisk, átrúnaðarlig, politisk og seksuell viðurskifti. Mentanarligur samleiki er samleikin hjá einum bólki ella eini mentan, ella hjá einum einstaklingi, so leingi viðkomandi verður ávirkaður av tilknýti sínum til bólkin ella mentanina.

Mentan er hugtak, ið kemur av *cultura* (grikskt), ið kemur av *colere*, ið merkir at velta. Mannfrøðingar brúka hugtakið at lýsa hvørjar eginleikar og førleikar menniskju hava at bólka (klassifisera), geva meining og samskifta sínar royndir súmbolskt.

Nú fara vit at hyggja nærri at ungdómsmentanargranskingini og hugtøkunum, ið hoyra henni til. Hvat er serligt við ungdómsgransking í mun til aðra gransking?

[UNGDÓMSGRANSKING]

Ung eru ofta nýskapandi marknabrótarar, men tá tey verða vaksin verður alt, sum var nýtt og forvitnisligt, brádliga *vanligt* – høvuðsrák í samfelagnum. Talan er ikki um nakað serføroyskt fyribrigdi, tí soleiðis er gongdin í flestøllum samfeløgum. Ung eru kenslusom og opin, taka tað ókenda til sín og skapa nakað nýtt og øðrvísi í ungdómsmentanini. Bloch (í Fornäs 1995: 2) sigur, at „among young people, among relatively free creative people, and in times of rapid change, future tendencies show themselves especially intensive".

Ungdómstíðin er tann besta ella ringasta tíðin í lívinum, eitt blítt dreymaland ella daprasta marran yvirhøvur, ið vaksin fólk leingjast eftir, sakna ella øvut royna at gloyma fyri at lekja bløðandi sálarlig sár. Í ungdómstíðini skulu dreymarnir standa sína roynd. Sum barn ber alt til, onki er spilt.

Ungdómurin er sera fjølbroyttur samfelagsbólkur og eigur ikki altíð at vera settur upp ímóti øðrum aldursbólkum, tí tey ungu eru, sigur Miles (2000: 3), „an index of social norms"; tey eru líka ymisk sum onnur fólk í samfelagnum. Í dag verða ung ofta eisini sett í samband við forbrúksmentan og materialismu, sum tá ið Karin í bókini *Duldar Leiðir* (Reinert 1996: 15) hugsar:

> *Nei, Karin vitsti ikki so nógv um børn og ung, men hon brúkti eyguni, hon sá hvussu forkelaði og spilt tey vóru, hvussu fólk ofta sjálvi máttu vera fyriuttan, fyri at børnini skuldu sleppa at dusa sær í merkjavørum, og aðrari heimsins fáfongd. Var tað ikki fullkomið skilaloysi, so vitsti hon ikki meira, hvat skil var ella ikki.*

Ungdómstíðin er viðbrekin fyri øll, tí unglingaárini eru tað skeið í lívinum, tá ein-staklingar mest sannlíkt verða fremmandagjørdir (Epstein 1998: 4).

Hvørt ættarlið av ungdómi er øðrvísi enn tað farna; samfelagið

broytist, tíðirnar skifta, og serliga, meini eg, í nýggjari tíð, hava samfelagsbroytingarnar verið djúpar og grundleggjandi her á landi. Sostatt verður munurin á ungdómstíðini úr minninum hjá eldri fólki og ungdómslívið í dag rættiliga stórur; og her kemur sonevnda grøvin ímillum ættarliðini fram.

Viðhvørt tykist hugtakið ungdómsmentan at vera avloyst av hugtakinum lívsstílur, ið sambært fleiri granskarum hóskar betur til lýsingar av ungdómi í dag. Tey ungu skapa netverk av sosialum sambondum rundan um seg, ið byggja á val og frával hjá einstaklingum í samansettari samleikaskapan.

Lívsstílur kann allýsast á fleiri hættir. Í sosiologiini verður hugtakið oftast knýtt til vanar og ítriv hjá serstakum sosialum bólkum, men eisini til forbrúksmentan. Bretsku ungdómsgranskararnir Andy Furlong og Fred Cartmel (1997: 53) siga um lívsstíl og frítíð, at tey ungu nú á døgum fáa alt størri valmøgulleikar:

> *In the 1990s, young people are able to select from a wide range of leisure pursuits and through the development of specific modes of consumption are encouraged to adopt styles which highlight their individuality. At the same time, the media and leisure and consumption industries play a central role in the post-industrial economy and, through the use of advanced marketing strategies, large corporations are able to shape the preferences of consumers.*

Frítíð og forbrúk verða mangan knýtt saman, tí at pengar eru komnir upp í sera nógv frítíðarvirksemi. Sera ymist er, hvussu frítíðin hjá ungfólki verður skipað; summi luttaka í nógvum formliga skipaðum virksemi fyri bólkar, meðan onnur eru mest fyri seg sjálvi ella í leysum óskipaðum bólkum. Lívsstílurin samansjóðar frítíðina og arbeiðslívið ella skúlagongdina í eina heild, ið hevur stóran leiklut í skapanini av tí mentanarliga samleikanum hjá einstaklingum.

Émile hjá Rousseau lýsir uppalingina av børnum, serliga dreingjum,

úr borgarastættini og nemur við evni sum átrúnað og moral. Bókin er ikki vísindaligt verk, men heldur eitt slag av vegleiðing til familjur um, hvussu børn eiga at uppalast til góðar borgarar. Rousseau sigur, at lykilin til veruligt frælsi liggur í at varnast, hvussu stóran týdning samfelagið hevur fyri menningina av menniskjum (Stigen 1982: 580). Tað er maðurin í húsinum, ið, sambært Rousseau, hevur høvuðsábyrgdina fyri barnauppalingini (op cit). Barndómurin er, sigur Rousseau, hægsta blómingartíð lívsins. Barnið skal uppalast í frælsi og læra av egnum royndum. Rousseau gevur barninum virði í sær sjálvum, roknar tað ikki sum íborið ónt, og hetta er onki minni enn kollveltandi hugsanarháttur, ið vendir klassisku fatanina á høvdið.

> *Nu er vort barn rede til at forlade barnestadiet og blive et selvstændigt væsen... Vi har gjort ham til et handlende og tænkende væsen. For at gøre ham til et fuldkomment menneske står det kun tilbage at gøre ham til et elskende og følende væsen, det vil sige fuldkommengøre fornuften ved hjælp af følelsen.*
> *(Rousseau í Damsholt 2005)*

Líka síðan romantikkina, sigur Kirsten Drotner (1999: 12), hevur ungdómurin verið lýstur sum serligt súmbol fyri broyting og pínslu; hugsið bara um *Die Leiden des jungen Werthers* (2005), ið Goethe skrivaði í 1774. Hin glataði Werther berjist við ovursterku ungdómskenslum sínum fyri kærleikanum, frælsinum og listini uttan at megna at fáa tamarhald á øra hjarta sínum.

Vanlig almenn ungdómsmentan (MYC, *mainstream youth culture*) breiddi seg tíðliga í nítjandu øld,

> *mainly among the segment sent off to school by their parents, many of whom were benefiting from the affluence of early industrialization. It began with upper-middle- and upper-class males, then spread to females and has trickled down through the classes since.*
> *(Coté 1990: 172)*

Amerikanski sálarfrøðingurin Stanley Hall skrivaði í 1904 slóðbrótandi bókina *Adolescence*, sum er ein tann fyrsta vísindaliga viðgerðin av ungdómi, og sum eisini skapti grundarlagið undir ungdómssálarsjúkufrøðini í allari tjúgundu øld.

Fýra ár frammanundan, í 1900, hevði svenska Ellen Key skrivað bókina *Barnets Århundrade*, sum er jaligur hugtakandi lesnaður úr tíðini, tá almennu vónirnar til samfelagsmenningina og moderniseringina veruliga vóru í hæddini. Fyri fyrstu ferð skuldu børn og ung blíva sædd sum eitt ríkt tilfeingi og ein serligur bólkur við serligum leikluti í samfelagnum. Í byrjanini av tjúgundu øld fekk fjøldin av børnum úr øllum stættum so smátt atgongd til skúlarnar. Í Danmark bleiv til dømis fólkaskúlin, ið avloysti almúgaskúlan, stovnaður í 1903 (Illeris et al 2002: 13).

Um aldarskiftið fyri hundrað árum síðani varð nógv áhugavert skrivað og sagt um børn og uppaling, um skúla og heim, og fleiri týðandi granskarar royndu at fáa stovnar, ið tóku sær av børnum, at virða børn sum sjálvstøðug skapandi menniskju við rættindum og frælsi. „What the best and wisest parent wants for his own child“, segði John Dewey (í Martin 1992: 40) til dømis, „that must the community want for all its children“.

Hugtakið heim – *home*, *casa* – varð sera týðandi í kjakinum og skuldi fáa skúlar at skapa eitt umhvørvi, ið kundi sigast at vera *heimligt* og trygt hjá børnunum. Tað ljóðar møguliga sum ein sjálvfylgja í dag, men tað er tað ikki, og var tað enn minni ár 1900. Italski høvundurin og nýskapandi námsfrøðiligi ástøðingurin Maria Montessori, er kend fyri sína metodu, ið barnagarðar og vøggustovur, skúlar og barnaheim, kring allan heim hava brúkt sum grundarlag undir síni skipan. Montessori sigur, at skúlin skal vera sum eitt heim, eitt skúlaheim, ið børnini trívast í og gleða seg at koma til.

Sosiologarnir úr Chicago arbeiddu mest við sonevndum *community studies*, har av-markaður bólkur verður lýstur sum ein lutfalsliga sjálvstøðug eind í stórsamfelagnum, og bara ein lítil partur av

kanningunum setti ungdómsbólkar í fokus. Tó vóru harkalið av ungum monnum (*gangs*) úr ymsum etniskum bólkum, ið stríddust um landafrøðilig øki í stórbýnum, eitt eyðkent granskingarevni í Chicago. Viðgitna bókin *Street Corner Society* (Whyte 1955) um gerandislívið hjá fátækum ungum italskum innflytarum í innara Boston er ein tann kendasta bókin komin frá chicagoskúlanum. Gransking av og kjak um *ungdómstrupulleikar* er sera gomul siðvenja, ið enn er á dagskránni, og sum chicagoskúlin kannaði meira ella minni gjølla í mongum verkætlanum (Valentine et al 1998: 4).

Longu í nítjandu øld „tematiseredes unge mænds påståede kriminelle tilbøjeligheder og unge kvinders påståede seksuelle løsagtighed af ansvarlige voksne“, sigur Drotner (1999: 21). Harðskapur, brotsverk, ungmannaherlið o.s.fr., lýst í fjølmiðlunum, settu arbeiðaradreingirnar í ringt ljós, tí tað vóru teirra lívsstílar og virðir, ið ávarað varð ímóti. Vitan um hesi ungfólkini skuldi, varð sagt, brúkast at hjálpa teimum at blíva góðar samfelagsborgarar sum vaksin. Vitanin var ofta politiskt og átrúnaðarliga litað og váttaði gamlar fordómar um ávísar samfelagsbólkar.

Ungdómsmentanir við nýggjum lívsstílum, tónleiki, dansi, mótaklæðum, bilum og filmum komu fram í USA, men ávirkaðu síðan ung úr øllum vesturheiminum (Fornäs 1995: 5). Chicagoskúlin, ið vanliga verður knýttur at tíðarskeiðnum 1915-40, umboðar mest týðandi kelduna til íblástur hjá nýggju ungdómsgranskingini, ið vaks fram í fimmtiárunum, tá áhugin hjá kriminologum, sálarfrøðingum og sosiologum fyri misbrotum og frávikum av álvara varð vaktur (Valentine et al 1998: 10).

Ungdómsgranskingin snúði seg í fimmtiárunum um máttleysar bólkar sum arbeiðarastættina, innflytarar og lógbrótarar. Boðskapurin var, at ungdómurin var vandamikil og møguliga brotsligur. Í dag verður granskingin úr fimmtiárunum ikki roknað fyri at vera vísindaliga nøktandi, tí ov lítið av empiriskum tilfari varð savnað og brúkt at *prógva* at tey ungu blivu brotslig og frávíkjandi (op cit).

Ein kanning av tí gitna brotsliga bólkinum *Teddy Boys* (Fyvel 1963) úr Onglandi, ið varð gjørd síðst í fimmtiárunum, er ein tann fyrsta empiriskt vælgrundaða granskingin av ávísum ungdómsbólki (Valentine et al 1998: 11). *Teddy Boys* vóru væl samskipaðir og høvdu ein serligan stíl, ið Fyvel lýsir sum eina arbeiðarastættar-avbronglan av klædnastílinum hjá miðalstættini. Sagt varð um *Teddy Boys*, at teir „myndarliga royndu at mótmæla eini objektivari hóttan um eyðmýking av serligum pørtum av arbeiðarastættini" (Illeris et al 2002: 15, mín týðing). Síðan komu *rocks*, *mods*, *punks* og aðrar lut-mentanir, og skjótt var Ongland vorðið ráðandi miðdepil fyri bæði ungdómsmentanir og -granskarar:

> *Just as American music in the late 1960s was overshadowed by the British beat, spearheaded by the Beatles and the Rolling Stones, somewhat the same became true a few years later in the arena of youth culture research. In the 1970s the English researchers connected with the Centre for Contemporary Cultural Studies in Birmingham (Stanley Cohen, Phil Cohen, Paul Willis, Dick Hebdige, Angela McRobbie) came to the fore.*
> *(Fornäs 1995: 5)*

Sosiologarnir á *Centre for Contemporary Cultural Studies* á lærda háskúlanum í Birmingham í Onglandi royndu at halda seg frá teimum ógvorðaðu lýsingunum av tí bretska ungdóminum (serliga dreingjunum), ið fjølmiðlarnir dagliga sendu út til fólkið (Miles 2000: 4). Teir royndu at geva eina meira objektiva og jarðbundna mynd av tí unga ættarliðnum enn undangongumenn teirra høvdu gjørt, m.a. við at taka ástøði úr ymsum vísindagreinum til sín. Amerikanska bókin *Outsiders* hjá Becker (1963) var sera týðandi íblástur hjá birminghamsosiologunum, og saman við bókunum hjá sosialsálarfrøðinginum Erwin Goffman fekk hon interactionist (eisini nevnt transactional og labelling) sjónarmiðið fram, ið kann sigast at umboða eitt grundleggjandi skifti í sosiologiini (Epstein 1998: 7). Ein persónur, roknaður sum frávíkjandi, kann við interactionástøðinum sigast at vera settur í bás sum frávíkjandi av øðrum persónum; og

ein ungdómsbólkur, sum setir seg upp ímóti samfelagnum, kann sigast at verða markaður sum frávíkjandi, júst tí hann útinnir meira mótstøðu enn aðrir bólkar í samfelagnum. Við øðrum orðum verður ein eyðmerktur av sjónarmiðunum hjá øðrum og er harvið ikki føddur sum *natúrliga* frávíkjandi.

Tað vísti seg tó skjótt, at trupulleikar stóðust av hesum amerikanska ástøðinum, tí hædd varð ikki tikin fyri upprunanum hjá ungdómsmentanunum, sum í Stórabretlandi týðiliga var at finna í teimum sosialu stættunum. Epstein (op cit) sigur:

> *At this point it became apparent that a comprehensive approach that accounted for both the processes of subcultural formation and the structural basis of subcultural affiliation was necessary if the Centre was going to provide sociology with an account of modern youth that was theoretically sound and verifiable within the social reality of youth.*

Haldgóða loysn á hesum trupulleikanum funnu sosiologarnir við at knýta súmbolska interactionástøðið til fleiri onnur ástøði, til dømis hegemoni- og stættarástøði hjá Gramsci, hugmyndirnar hjá Adorno og frankfurtskúlanum um forbrúksmentan og semiotikkina hjá Barthes. Ung úr arbeiðarastættini verða sambært birminghamskúlanum gaman í ofta frávíkjandi og brotslig, men tað kemst fyrst og fremst av, at tey nógv oftari enn onnur ung blíva stemplað (op cit).

Sosiologarnir royndu at vísa, hvussu ungdómsbólkar bera seg at fyri at standa ímóti ráðandi mentanina, ið ikki gevur teimum nakra rødd (Miles 2000: 4). Við sínum egnu súmbolum og teknum, ið verða knýtt at stættini og mentanini hjá ungdómsbólkinum, og sum geva teimum *meining*, megna tey at standa ímóti trýstinum frá hegemonisku mentanini.

Mentan og sosial stætt blivu í sjeytiárunum greipað, nakað, ið møguliga hóskaði til tann bretska kontekstin, men ikki til øll lond, og

sum birminghamskúlin seinni hevur fingið harðar ábreiðslur fyri. Hegemonisk og fólkslig mentan eru hvør sítt, har ið fyrrnevnda verður skapt av teimum máttmiklu í samfelagnum, hvørs sosiala støða gevur møguleikan at skapa eina ráðandi mentan (Epstein 1998: 9). Mentan er sostatt nakað, ið er ójavnt býtt í fólkinum. Tað er eitt slag av kapitali stættirnar stríðast um at vinna ella varðveita. Hugtakið mentan verður, úr neomarxistiska sjónarmiðnum hjá birminghamskúlanum, brúkt í fleirtali, og tey ungu hava virðir og stílar, ið hoyra til júst teirra ungdómsmentan. Mentan er her

> *[a] distinctive way of life embodied in beliefs and customs, social relations, institutions and material objects. All these aspects of the subculture were referred to as 'maps of meaning' which shape the subculture and make it intelligible to its members. The most mundane object could be appropriated by youth groups and take on specific meanings. Forms of adornment such as safety pins, ripped clothing, leather, chains, tattoos, might be appropriated to symbolise offensive decoration.*
> *(Valentine et al 1998: 13)*

Tá ein verjir sína lutmentan og stætt verður torført, fyri ikki at siga ógjørligt, at flyta upp eftir tí sosiala tignarstiganum. Tey ungu úr arbeiðarastættini vardu seg ímóti hegemonisku mentanini við at (súmbolskt) mótmæla og spotta tey virðir og ta støðuna, ið marginalisera ungdómin úr teimum lægstu stættunum (Hall og Jefferson 1975).

Mannliga lutmentanin hjá arbeiðarastættini, hvørs virðir og reglur dreingirnir liva eftir, brynjar teir væl til eitt lív við hørðum lágløntum arbeiði á *the shop floor*. Tá teir koma út á arbeiðsmarknaðin uppdaga teir, at støðan her er júst tann sama sum í skúlanum; eisini her eru teir við undirlutan, stýrdir av teimum valdsmiklu úr miðal- og yvirstættunum. Dreingirnir standa niðast í tí sosiala tignarstiganum, kenna seg fremmandar í skúlanum og gera júst, sum teimum lystir. Mannligu virðini hjá dreingjunum (at berjast, drekka, stjala, vera

saman við gentum o.s.fr.) ger teir til hetjur í ungdómstíðini, men ikki seinni í lívinum. Tað kann næstan sigast at vera ein fella, sum teir detta í.

Willis kemur í bókini hjá sær fram til, at arbeiðarastættin í Stórabretlandi strukturelt er við undirlutan, og at tey mentanarligu virðini og súmbolini hjá arbeiðarunum ikki gera støðuna betri; til dømis tá hin víðgongdi arbeiðaraungdómurin vanvirðir alt bókligt arbeiði umframt kvinnur, innflytarar og aðrar máttleysar bólkar í samfelagnum. Trupulleikin er, heldur Willis, at dreingirnir (*the lads*, sum hann kallar teir) ikki gera sær eina mynd av samfelagnum, og teir trúgva, at teir fáa nakað burtur úr mótmentan síni í skúlunum líka til teir seinni í lívinum uppdaga fylgjurnar av at vera undirstætt.

Í áttatiárunum fóru fólk at hyggja at øðrum bólkum í samfelagnum. Hvar vóru genturnar í granskingini úr Birmingham? Hvar vóru tey ungu úr yvirstættini? Ung úr etniskum minnilutum vóru heldur ikki serliga sjónlig í hesi gransking, hóast tey svørtu vóru ein sera týðandi partur av til dømis tónleika- og dansiumhvørvinum í býunum. Líka fram til í dag hava ungdómsgranskarar serliga hugt at teimum, ið skilja seg burtur úr fjøldini; teimum, ið liva á eggini.

Teir bólkarnir, ið birminghamskúlin hevði havt áhuga fyri, ungum bretskum monnum, hart raktir av tí ovurstóra arbeiðsloysinum í sjeytiárunum, ið argaðu og spottaðu tey múgvandi, blivu heimsgitnir ígjøgnum bøkurnar, ið Willis, Hall, Cohen og aðrir birminghamsosiologar lótu úr hondum. Ídnaðarbýirnir í Midlandslandslutinum í Onglandi vóru sosialu starvsstovurnar hjá ástøðingunum á lærda háskúlanum í Birmingham.

Ein annar vansi er, at onki varð nevnt um, hvussu tær stóru samfelagsbroytingarnar ávirkaðu ungdómin og lutmentanirnar. Myndin er rættiliga statisk. Heldur ikki varð sambandið ímillum almennu stovnarnar og ungdómin tikið upp til viðgerðar. Birminghamskúlin hevur verið fyri álvarsligum ákærum fyri at laga ungdómsbólkarnar til ástøðiligu grundsjónarmið granskarans: „rather too much youth

research has served theoretical positions of its writers than the articulated needs of the young people who have been the subject of that research“ (Williamson í Miles 2000: 12).

Í okkara tíð, seinastu 30 árini, hevur nógv verið tosað um eitt stórt skifti í samfeløgunum kring Evropa, ið verður rópt skiftið frá tí modernaða til tað seinmodernaða ella postmodernaða samfelagið. Hetta skifti hevur havt sera stóran týdning fyri ungdómsmentan, lívsstíl og samleika hjá ungdóminum. Andsøgnin í modernitetinum „medfører, at de fleste unge i dag er mere økonomisk og socialt afhængige af voksensamfundet end for blot totre generationer siden, samtidig med at de er blevet mere kulturelt og ofte også psykologisk selvstændige“ (Drotner 1999: 14).

Tað eru ikki einans ungdómsgranskarar, ið hava givið skiftinum gætur, tí meginparturin av diskursunum í hug- og samfelagsvísindini í dag nerta við hetta umskifti, ið hevur havt ávirkan á bæði list, mentan og samfelagsskipan. Tó vil eg siga, sum Sernhede, at ungdómsmentan í hesum viðfangi er eitt serliga áhugavert evni, tí „tað finst eitt serstakliga ítøkiligt og intimt samband ímillum dagsins umbroytiligu samfelagsviðurskifti og mentanarliga virksemi ungdómsins“ (1996: 131, mín týðing).

Tað er í ungdómsmentanini, at ein sær tað, sum verður *vanligt* í samfelagnum í næstu framtíð. Tey ungu eru tey fyrstu, sum tulka samfelagsbroytingar mentanarliga og súmbolskt, og sum harvið geva tí nýggja og ókenda *meining*. Tey ungu eru seismografar – viðkvæmir tulkarar av samtíð okkara (Lalander og Johansson 2002: 23).

Ungdómurin er, sigur Sernhede (1996: 193), í einum lívsskeiði, tá tann innari heimurin er eyðkendur av opinleika og ótryggleika. Seinmodernaða samfelagið (eitt hugtak, ið Fornäs kom við í 1987 [Sernhede 1996: 133], hóast tað vanliga verður sett í samband við Giddens) hevur sett ungdómin í brennidepilin, so at øll fólk, ið royna at uppdaga broytingarnar og menningargongdina í samfelagnum, ikki bara granskarar, nú venda eyguni ímóti ungdóminum.

Moderniseringin av samfeløgum og mentanum vesturheimsins byrjaði í átjandu øld, hóast røturnar til tað modernaða ídnaðarsamfelagið ganga nógv longur aftur í tíð. Tað borgarliga kapitalistiska ídnaðarsamfelagið var longu í fyrru helvt av nítjandu øld eyðkent av ógvusligum og skjótum broytingum, ið onki eldri tíðarskeið nær námindis hevði klárað. Alt, ið er fast flytur seg, alt heilagt gerst verðsligt, søgdu Marx og Engels. Sostatt er tað ikki nakað nýtt, at borgarliga samfelagið broytist við rúkandi ferð, men seinastu tíggjuárini er ferðin tó farin so nógv upp, og broytingarnar blivnar so mikið djúpar, at ein er farin at tosa um eitt nýtt seinmodernað samfelag (Löfgren og Norell 1992, Sernhede 1996).

Í Evropa verður skiftið til tað seinmodernaða samfelagið oftast tíðarfest til sekstiárini, hóast tað er torført at seta árstal á slíkt; tað veldst nógv um, hvørji viðurskifti ein velur at hyggja at. Sernhede (1996, mín týðing) sigur um Svøríki, at

> *møguliga kann endin av 1950'árunum og byrjanin av 1960'árunum roknast sum ein „broytingar-" ella „rembingartíð", tá ið tann mentanarliga moderniseringin við framvøkstri av miðla- og kunningartøknisamfelagnum av álvara kemur fram og umskapar menniskjunnar gerandislív.*

Nógvar aðrar broytingar kunnu nevnast; sonevnda útbúgvingarkollveltingin og stóra fráflytingin úr útjaðaraøkjum verða mangan nevnd í hesum viðfangi umframt broytingar í bústaðar- og familjumynstrunum, sum fáa virðini og mentanina úr tí gamla bóndasamfelagnum at vikna (op cit). Munir eru landanna millum, og Føroyar hava eina aðra søgu enn til dømis Svøríki. Búskapurin mentist eisini av seinkapitalistisku strukturbroytingunum, meðan tað eru serliga mentanarlig viðurskifti, ið seta karmin um seinmodernitetin.

Týski námsfrøðingurin Thomas Ziehe tosar um mentanarliga *fríseting* og ognartøku (Ziehe og Stubenrauch 1983), ið hann setur í samband við mentanarligu moderniseringina í seinnu helvt av tjúgundu øld, ið inniber størri individualisering, refleksivitet og valmøgulleikar.

Ástøðið hjá Ziehe minnir nógv um tað hjá Giddens, hóast teir ikki brúka somu hugtøk. Marx tosaði í síni tíð um fríseting av kapitali sum fortreyt fyri marknaðarbúskapi, meðan Ziehe tosar um fríseting av mentan sum fortreyt fyri tí seinmodernaða refleksiva samleikanum.

Hugsjónir, skikkir og siðvenja missa so hvørt sítt virði, sigur Ziehe, tá fólk verða frígjørd frá bindingum, ið plagdu at stýra tilveruni (Illeris et al 2002: 22). Modernað menniskju eru, ideologiskt sæð, ikki bundin at staði, stætt, ætt, átrúnaði ella nøkrum øðrum, slær Ziehe fast. Fyrr vórðu menniskju stýrd av siðvenju og roknaðu við at fylgja í fótasporunum hjá foreldrunum – mentanarliga, sosialt og átrúnaðarliga. Vit vita tó, at fólk í veruleikanum ikki eru so frels frá sosiala og mentanarliga umhvørvi teirra, sum Ziehe vil vera við; men í dag taka flestøll tað fyri givið, at einstaklingar sjálvir velja sína lívsleið. Seinmodernaða samfelagið er eyðkent av *opnum* relatiónum, pluralismu og ambivalensi (Bäck-Wiklund 2003: 46).

Individualiseringin, eyðkenni fyri seinmodernitetin, hevur gjørt tað til eina persónliga refleksiva verkætlan at skapa sær ein mentanarligan samleika (Giddens 1991). Tað er ongin, ið veruliga væntar, at hin einstaki skal satsa upp á gamlar lívsformar, ið fyrr skipaðu og góvu lívinum meining og innihald, men um onkur kortini velur sær eitt lív, ið minnir um tað úr farnum tíðum, so er talan ikki um nakað *natúrligt* val longur (Sernhede 1996: 134). Talan er bara um eitt av mongum valum, sum vit eru noydd at taka. Ongantíð áður hava vit havt so nógv *tilfar* at viðgera teir spurningar, ið nema við samleika okkara og at geva gerðum okkara *meining*, og tað er júst hetta, ið Ziehe (Ziehe og Stubenrauch 1983) kallar mentanarliga ognartøku.

Seinmodernaða samfelagið setir onnur krøv til bæði ung og gomul enn tað, vit vóru von við. Vitan er týðandi tilfeingið í nútíðarsamfelagnum – bæði hjá einstaklingum og stovnum. Vitan er tilfeingi, sum skal fáa teg at velja rætt. Tað er ikki bara ein spurningur um at eiga vitan, men um hvørja praktiska og súmbolska vitan ein hevur ognað sær. Ein trupul avbjóðing hjá einstaklingum er at

> *you may and you must lead your own independent life, outside the old bonds of family, tribe, religion, origin and class; and you must do this within the new guidelines and rules which the state, the job market, the bureaucracy etc. lay down.*
> *(Beck og Beck-Gernsheim 1996: 36)*

Nýggj vitan og nýggjar royndir broyta støðu tína í samfelagnum, og meðan framhald og stabilitetur vóru eyðkenni fyri modernaða samfelagið, so eru ivi og vandi eyðkenni fyri seinmodernaðu tíðirnar (Giddens 1991). Fyrr tók siðvenjan so at siga avgerðirnar fyri einstaklingin, men í dag hevur ungdómurin mangar møguleikar viðvíkjandi arbeiði, útbúgving, lívsstíli og øðrum pørtum av lívinum og framtíðini. Krøvini til útbúgving eru nógv hægri, enn tey hava verið, og hetta hevur elvt til nýggjar formar fyri sosiala marginalisering (Heggen et al 1999).

Samleiki er í dag ikki nakað, tú eina ferð ognar tær og sum síðan liggur fast; í tí seinmodernaða samfelagnum verður samleikin áhaldandi royndur (Sernhede 1996: 137). Tað, sum fyrr varð roknað sum óbroytandi, sum partur av persónmenskuni, kann nú broytast eftir egnum ynski.

Tað seinmodernaða lívið setur hin einstaka andlit til andlits við hesi avbjóðing: tú mást liva títt egna sjálvstøðuga lív (uttan mun til gomlu bondini til familju, stætt, uppruna ella átrúnað) og tað noyðist tú at gera sambært nýggju stevnumiðunum hjá statinum, arbeiðsmarknaðinum, o.s.fr. (Beck og Beck-Gernsheim 1996: 36).

Bauman, ið hevur eina nakað daprari mynd av nýggju tíðunum enn til dømis áðurnevndu Ziehe og Giddens, sær seinmodernitetin sum eitt nýtt skeið, har ið mentanin og samfelagið, sum vit kendu, upploysast, so tey verða nærmast ókennilig. Hann sær ógvusligu individualiseringsgongdina í heiminum sum eina hóttan ímóti tí, ið ger samfelagið til eitt samfelag – ímóti tí, sum skapar sosialar felagsskapir (Bauman 2001).

Kendu ástøðini, ið ungdómsgranskarar vísa mest til, hóska ofta betur til býfólk enn ung á bygd. Um støðuna í Norðurnoregi, ið minnir um Føroyar, verður sagt:

> *I hvilken grad vil for eksempel Bourdieus teorier, som tar utgangspunkt i et franskt klassedelt samfunn, være relevant for nordnorske samfunn som har vært relativt lite differensierte? I hvilken grad kan vi forvente at Becks, Giddens og Ziehes teorier, som tar utgangspunkt i høyindustrialiserte og sterkt moderniserte samfunn i Sentral-Europa og USA, skal passe for nordnorske forhold som tross en rekke endringer likevel kan karakteriseres som rurale, perifere og med en viss tilknytning til tradisjonelle primærnæringer?*
> *(Karlsen 2001: 39)*

Hin landafrøðiligi evropeiski útjaðarin er eisini vísindaligur útjaðari uttan áhuga fyri kendar teoretikarar. Ikki er óhugsandi, at seinmodernað menniskju hava ilt við at opna eyguni fyri teimum serligu viðurskiftunum í smáum útjaðarasamfeløgum, ofta eyðkend av sterkum lokalum samleika og livandi mentanararvi, ið tey ungu hava tætt tilknýti til.

Ungdómurin broytist, samfelagið broytist, men hvussu skjótt og hvønn veg? Hvussu við ungdómsmentanini? At trína inn í seinmodernitetin og fáa ein refleksivan modernaðan samleika merkir ikki, at traditiónir og mentanararvur hvørva fyri altíð. Siðvenja

> *should not be regarded – to give it another prescriptive reading – as being necessarily static, backward, and conservative. Traditions also must be seen as very dynamic, contemporary, and forward-looking, because they are actively part of everyone's daily life in the modern world.*
> *(Luke 1996: 116)*

Seinmoderniteturin tekur bæði nýtt og gamalt, modernitet og traditión, til sín, og letur einstaklingar brúka tilfarið sum teimum lystir,

fyri at skapa sær mentanarligar samleikar, og tað kemur klárt til sjóndar í lívstílunum hjá teimum ungu í dag (Fornäs et al 1995).

Lívsstílur sum fyribrigdi er tætt knýttur at samfelagsgongdini við avtraditiónalisering og modernisering, har forbrúk og elektroniskir miðlar verða alt meira týðandi. Í samfelagsvísindini, har hugtakið lívsstílur kom fram í áttatiárunum, er málið at kanna

> *how people act and create meaning in everyday life, especially in those areas where one can act more independently. Lifestyle is [...] the specific pattern of everyday activities that characterizes an individual. Each individual's lifestyle is unique: it is not identical to anyone else's. But at the same time, lifestyles orient themselves towards the common and the social [...] We choose lifestyles in relation to other people.*
> *(Reimer í Miles 2000: 18)*

Hóast sagt verður, at ung frítt velja sær lívsstíl, so eru avmarkingar, bæði búskaparligar og mentanarligar, ið forða nógvum í at luttaka í ymsum ítrivum í frítíðini, og sum ger tað ógjørligt hjá nógvum at fylgja forbrúksmynstrunum, ið eru partur av fleiri ungdómsmentanum. Nógv kenna seg útihýst og avbyrgd frá lívsstílum, ið skapa ungdómsbólkar, ið lýsingarherferðir í miðlunum gera til fyrimyndir. Sostatt eru stættarmunirnir ikki burturi, siga Furlong og Cartmel (1997 og 1999), hóast tað er vorðið torførari at lýsa og greina teir í seinmodernitetinum, og tað er her at ein av teimum størstu avbjóðingunum hjá ungdómsgranskarum liggur.

Fá kend mannfrøðilig verk lýsa ungdómin, og tey, sum gera tað, hyggja serliga at familjulívi og ættarbondum. *Coming of Age in Samoa* hjá amerikonsku Margaret Mead (1928) var slóðbrótandi bók í mannfrøðiini við livandi og undirhaldandi lýsing av uppvøkstrinum hjá gentum á *eksotisku* kyrrahavsoynni Samoa. Bókin hjá Victor Turner um *rites de passages* nevnir ung, ið skulu ígjøgnum rituellar skiftissiðir fyri at blíva vaksin (Wulff 1995: 3). Burtursæð frá hesum gomlu

klassikarunum, so er lítið at heinta um ung í tí mannfrøðiliga skattkamarinum. Nógv síggja, úr einum sosialiseringssjónarmiði, ikki ung sum annað enn *ófullfíggjað* vaksin og ikki verulig heil menniskju, ið vita hvat lívið snýr seg um (op cit). Hesi siga ung vita minni enn vaksin, heldur enn at leggja dent á, at ung hava eina aðra vitan, ið hevur samband við støðu teirra í samfelagnum. Wulff (1995) finst harðliga at mannfrøðingum og sigur:

> *It is time for anthropologists to make a more substantial contribution to the study of youth culture, to view young people as cultural agents and to illuminate their perspectives towards a wide range of general themes in social life: gender, class, ethnicity, race, globalization.*

Ungdómsgransking er tvørfaklig gransking, ið umfatar fjølbroyttar vísindagreinir og sera ymisk ástøði. Granskingin er so víðfevnd, at kjak um ástøði, háttalag og sjónarmið ofta verða rættiliga fløkjaslig og ógreið, so ein fær hug at spyrja seg sjálvan, hvat ungdómsgransking veruliga er. Er nakað, ið sameinir ungdómsgranskarar yvirhøvur? Teir granska eyðvitað ungdóm, men teir læna ástøði og frágreiðingar frá nógvum vísindagreinum, tí tað eru ongi serstøk ástøði, sum einans hoyra ungdómsgranskingini til. Birminghamskúlin er eindømi uppá granskingarumhvørvi, ið legði alla orku í ungdómsgransking og sum skapti ástøði, ið so gott sum øll nýggjari ungdómsgransking beinleiðis ella óbeinleiðis grundar á.

Mentan, modernitetur og samleiki eru tey evni, ið norðurlendskir ungdómsgranskarar hava arbeitt mest við. Áhugin fyri ungdómsgransking er vaksin munandi eftir at seinmodernitetur varð eitt høvuðsevni í samfelags- og hugvísindunum fyri 20-30 árum síðani, tó serliga eftir 1990. Í seinmodernitetinum verður mentanin moderniserað, langt aftaná moderniseringina av politisku og búskaparligu skipanunum í Evropa (Bjurström 2005, Ziehe og Stubenrauch 1983). Mentan, íroknað ungdómsmentan, kemur í hásæti.

[2]

MANNFRØÐI OG MENTAN

Mannfrøði er læran um menniskju sum partar av mentanarligum bólkum. Mannfrøðingar royna at lýsa øll menniskju í øllum tíðarskeiðum, hóast tað serliga eru sonevnd *siðbundin* samfeløg, ið hava havt teirra áhuga. Mannfrøðin er heildarspekilig og roynir at greina sambandið ímillum stovnarnar í einum samfelag og eina mentan, umframt sambindingina samfelagmentan. Mannfrøðin er mentanarrelativistisk og byggir á regluni um, at samfeløg skulu lýsast og fatast við støði í teirra egnu fortreytum.

Hugtakið *mentan* er sera umfatandi í mannfrøðiligum høpi. Óteljandi allýsingar hava verið frammi, men klassiska allýsingin hjá E.B. Tylor ljóðar (mín týðing):

> *Mentan ella siðmenning í sínum víða etnografiska týdningi er tann samansetta heildin, sum ávirkar vitan, trúgv, list, moral, lóg, siðir og allar aðrar førleikar og vanar, ið menniskjað ognar sær sum samfelagslimur.*

Mentanin sigur okkum, hvussu fólk samskifta sínámillum, hvussu náttúran verður fatað og skipað, hvussu samfelagsskipanin verður tulkað og vard, hvussu bólkar fáa ein samleika, o.s.fr. Mentanin er bæði hugsað og ítøkilig.

Í tjúgundu øld mentist vísindagreinin mannfrøði, og í okkara tíð er hon viðurkendur partur av vísindaheiminum í øllum londum. Mannfrøðingar arbeiða í dag líka nógv í tí modernaða heiminum sum í fjarskotnum siðbundum samfeløgum.

[EITT SINDUR UM HUGTØK]

Vit og hini

Mentan, sum hugtakið vanliga verður nýtt í mannfrøðiligari gransking, hevur seinastu árini verið fyri eini endurskoðan og endurnýggjan. Klassiska mentanarhugtakið hevur fleiri veikleikar.

Týðandi partur av evropeiskari samfelagsvísind grundar á ímynd av mentanarliga tilgjørdum øðrum *(hini)*, ið er radikali mótsetningur okkara *(vit)*, men henda lýsing svarar ikki til veruleikan í modernaða heiminum, hóast ímyndin møguliga var álítandi fyri hundrað árum síðani. Verkætlanin hjá mannfrøðingum var, at skapa *hini*, við støði í hugtøkum úr mannfrøðiliga diskursinum. Í hesum diskursi verður (1) mentan sæð sum eitt avbyrgt univers av felags siðvenjum, hugmyndum og áskoðanum, og (2) samfelag sum avbyrgt univers av strukturum, ið fungera av sær sjálvum, óheftir av ávirkan uttaníframá. Seinna dømið hoyrir til funktionalistisku samfelagsáskoðanina.

Fleiri grundleggjandi ástøði í evropeiskari heimspeki hava skapt hina vælkendu lýsing av bláu klótuni sum uppbygda av tíðleysum og sjálvstøðugum mentanarheimum, hvør einstakur við sjálvstøðugum sosialum og áskoðanarligum kervi. Heimspekiligu hugmyndir vesturheimsins hava í eftirkrígstíðini spjatt seg til øll heraðshorn og hava ávirkað sjálvsmynd menniskjanna kring allan heim. Við at framhevja eksotisku og radikalu *munirnar* millum okkum (vesturlendingar) og *tey*, so verður alt, sum er øðrvísi við *hinum* blást upp, og ein fær falskan varhuga av, at heimsbúskapur og vestlig nýtslumentan ikki raka fólk í sokallaðu menningarlondunum. Mannfrøðingar plagdu at granska fjarskotnastu bygdirnar fyri at finna *prógv* fyri radikalu mununum.

Flestu atfinningarnar móti hesum mentanarhugtaki grunda í stuttum á, at ov stórur dentur varð lagdur á ordan, sameining og fastleika, samstundis sum fyribrigdini tvídráttur, andsøgn og súmbolskt vald av órøttum vóru ósjónlig í hugtakinum.

Ein aðaltrupulleiki í granskingini hevur verið tað at rokna mentan fyri nakað, ið kan fremja ting í sær sjálvum – sum eitt lutliggjørt fyribrigdi, ið ikki verður ávirkað av einstaklingum. Tað at síggja eina mentan sum grundleggjandi *corpus* við egnum lívi er knýtt at áðurnevnda mannfrøðiliga áhuganum fyri øllum tí eksotiska og *øðrvísi*. At meta mentan sum nakað ein er føddur við (arvar) og ikki kann broyta seinni í lívinum samsvarar ikki við tað tilfar, mannfrøðingar innsavnaðu síðst í tjúgundu øld. Við øðrum orðum er

fjarstøðan millum eygleidda veruleikan og gamla mentanarhugtakið stór og ikki góðtakandi. Hóast tað ikki hevði verið samskifti millum mentanir, so merkir tað ikki, at tær endurskaptu seg mekaniskt uttan rúm fyri nýhugsan og menning.

Vanligt var fyrr at ímynda sær mentan sum felagsogn samfelagsins og at siga hana vera sundurskilda frá og óhefta av einstaklingunum í samfelagnum. Tó, vísir tað seg, hava fólk heilt ymisk mál og ynskir og harvið gera tey eisini ting, ið stríða móti skikkjum og siðvenju í mentan teirra. Mál og mentan verða tillærd við at luttaka í virkseminum hjá sosialum bólkum. Tað ein lærir, kann lýsast sum neyðugar fortreytir fyri at práta, virka og tulka í samfelagnum, ein livir í. Málið hjá mannfrøðingum er at geva eina frágreiðing av júst hesum við at skapa ein frymil fyri tí, sum er neyðugt at vita fyri at kunna práta rætt og sýna sømiligan atburð í samfelagnum.

Mál og mentan eru ongantíð javnt býtt millum limirnar í samfelagnum, og øll hava sína serstøku tulking av máli (*idiolekt*) og mentan. Eitt aðalmistak í mannfrøðiligari gransking er, at oftast verður tikið útgangsstøði í einum heilum samfelag, sum um tað finst nøkur tilhoyrandi eindarmentan. Eitt samfelag hevur í veruleikanum røð av skikkjum, ið hoyra til ymsar undirbólkar í stórsamfelagnum.

Mál og mentan eru grundað á virksemi og atferð hjá menniskjum, og tey eksistera í bólkum, um (og bara um) regluligt samskifti er millum einstaklingar í virksemiskontekstinum. Fólk, ið samskifta í samband við serlig ítriv, noyðast, at hava eina felags vitan um, hvussu tingini skulu gerast, og hvussu trupulleikar verða loystir. Ongin luttekur í øllum virkseminum í samfelagnum. Mentanarliga *make-up* samfelagsins má ikki skoðast sum monolitisk eind, ið avger atferðarmynstur hins einstaka, men heldur sum blendingur av uppfatanum og sjónarmiðum, knýtt at rúgvu av fjølbroyttum virksemi. Tað, fólk vænta sær av samskifti við øðrum, er skiftandi frá einari støðu til aðra og frá einum virksemi til annað; øll hava ymisk mentanarlig *repertoire*.

Nýggj sjónarmið

Norski mannfrøðingurin Fredrik Barth (1989) hevur smíðað hugtakið *kunnleikasiðir* sum annað val enn *mentan*. Kunnleikin er kapitalurin, ið einstaklingar taka við sær í sosialari interaktión: hugsanir, evnir, taksonomiir, og aðrir málsligir frymlar. Barth sigur, at sosial og mentanarlig vitan er sosialt ójavnt býtt millum fólk. Einasti rætti háttur at granska í mannfrøði er at útinna empiriskar kanningar, har granskarin sjálvur eygleiðir sosiala samskiftið millum fólk og lurtar eftir egnu lýsingum teirra av mentanini. Á henda hátt kann ein avdúka *mentanarligu streymarnar* í samfelagnum. Byrjanarstøðið má altíð vera hin einstaki, ið ikki einans hugsar um (mentanarligar) siðvenjur, men eisini um persónligu materiellu og sosialu avleiðingarnar av gerðum sínum. Barth hevur eitt praktiskt grundarlag fyri ástøði sínum, tí hann leggur høvuðsdentin á aktørarnar (virkandi persónar) og á ítøkiliga sosiala interaktión. Hann heldur, at ein endurskoðan av mentanarhugtakinum má innibera:

> *[1] Meining (mentan) verður skapt av sambandinum millum teknini og lesaran av teknunum. Barth finst at mannfrøðiligum ástøði, ið sær meiningina í ella millum teknini.*
> *[2] Mentan er sosialt sundurlutað millum fólk – felags hjá nøkrum og ikki hjá øðrum.*
> *[3] Aktørar standa altíð í onkrari serligari støðu. Fólk hava ólíka sosiala vitan og tosa útfrá hvør síni position í samfelagnum. Neyðugt er tí at hyggja at samrøðunum hjá teimum lokalu.*
> *[4] Valið og gerðin hjá einstaklinginum er altíð úrslit av einum samspæli millum evnisligar orsøkir og sosiala interaktión, t.v.s. altíð í mun til ætlanina hjá aktørinum.*

Handan avgerðir okkara standa sokallaðir mentanarligir frymlar, og hesir stýra gerðini til at passa til eitthvørt mentanarligt *mál* vit hava sett okkum. Mentanarligir frymlar innihalda sera stóra nøgd av mentanarligari vitan, ið er neyðug fyri at vera førur fyri at taka avgerðir og at tala rætt. Frymlarnir kunnu sigast vera ketur av prototypiskum hendingum, ið breiða seg út í einfaldaðum heimum. Flest øll í samfelagnum hava internaliserað frymlarnar, men fólk

verða av ymsum orsøkum eggjað til at nýta frymlarnar til avgerðir í dagligdegnum (Holland og Quinn 1987).

Tá hugt verður at relatiónini mannfrøði–ungdómsmentan, so er at siga, at mentan eisini her kann tulkast sum abstraktión, ið lýsir ávís eyðkenni, ið vit meta eru áhugaverð og týðandi fyri mentan, samleika og samskifti ungdómsins. Eitt eyðkenni við ungdómsgranskingini hjá mannfrøðingum er, at ungdómslívið verður lýst útfrá sínum egnu fortreytum og sostatt ikki uttan víðari kann samanberast við aðrar lutmentanir í samfelagnum.

Sum mannfrøðingur ert tú noyddur at seta teg gjølla inn í viðurskiftini hjá ungdóminum, áðrenn tú kanst geva eina álítandi lýsing av bólkinum. Harvið er mannfrøðiliga granskingararbeiðið ofta sera tíðarkrevjandi. Feltarbeiðið kann taka frá tveimumtrimum mánaðir og upp í fleiri ár. Haraftrat skulu tey ungu sjálvi vera við til at lýsa sína mentan, tí ungdómsmentan er (eins og aðrar mentanir og lutmentanir) hugsað og ítøkilig í senn. Fyri at lýsa ungdómsmentanina noyðist tú at kenna til virði, súmbol, stílar og mál hjá ungdóminum. Haraftrat ber illa til hjá mannfrøðingum at siga, at ein ávís mentan er betir ella verri enn aðrar, tí tað veldst um hvørji virðir liggja til grund fyri metingini.

Ungdómsmentanargransking kann eisini geva sera týðandi vitan, ið kann hjálpa okkum at menna skúlar og hægri lærustovnar í landinum, tí mentanarligi samleikin hjá ungdóminum ávirkar, hvørji ynski hann hevur, tá hann skal raðfesta og taka avgerðir viðvíkjandi starvsleið í framtíðini.

[ARBEIÐSHÁTTUR]

Tilfarið, ið liggur til grund fyri mínum úrslitum, er rættiliga fjølbroytt. Talan er bæði um kvantitativt og kvalitativt tilfar, úr Havn og av bygd, úr skúla og frítíð, og hóast næmingar úr framhaldsdeildini (fjúrtansekstan ára gomul) eru í brennideplinum, so eru bæði yngri

og eldri persónar tiknir við í pørtum av verkætlanararbeiðinum. Nógv tilfar hevur skrivligar keldur; tað er úr bókum og avísum, tó eisini av alnetinum serliga tá hugt verður at kjattmentan og teldunýtslu.

Feltarbeiðið í skúlanum var tannn mest tíðarkrevjandi parturin av innsavningararbeiðinum, hóast tað ikki fyllir so nógv í ritgerðini. Spurnakanningar, smáar og stórar, hava eisini givið mær innlit í ymisk viðurskifti, ið siga nakað um lívsstíl, mentan og framtíðardreymar ungdómsins. Samrøður við lærarar, skúlastjórar, granskarar, sosialráðgevarar og onnur fólk, ið hava tætt samband við ungdómin í sínum arbeiði, hava eisini givið mær nógv; tær hava víðkað sjónarringin. Tvær landsumfatandi spurnakanningar, báðar frá 2003, hava givið mær sera virðismikið tilfar, ið setur avmarkaða feltarbeiðið í ein størri karm.

Spurnakanningar í Føroyum

Tann eina kanningin, ið var partur av ESPAD (*The European School Survey Project on Alcohol and Other Drugs*) kanningini, ið Pál Weihe, yvirlækni og leiðari á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, tekur sær av í Føroyum, umfataði allar níggjundaflokkarnar í øllum fólkaskúlunum í landinum. Eg hevði mínar egnu spurningar á tí stóra ESPAD-spurnablaðnum, ið annars mest snýr seg um royki- og drekkivanar, rúsevnanýtslu og harðskap hjá teimum ungu í Føroyum og restini av Evropa. Í samstarvi við skúlamyndugleikar landsins fingu næmingarnir spurnabløðini útflýggjað í skúlatíðini, og tíð var eisini sett av at svara spurningunum í friði og náðum. Umleið 700 spurnabløð vórðu útfylt og savnað saman til greiningar á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu.

Hini kanningini, partur av verkætlanini *Youth, Transition and the Future of the Fisheries*, stóð Granskingardepilin fyri Økismenning í Klaksvík fyri. Hetta er ikki mín kanning, hóast eg havi lænt hesi sera áhugaverdu úrslitini frá teimum. Í hesari kanningini luttóku umleið 1.000 persónar úr øllum níggjundaflokkum landsins, umframt øll, ið ganga í miðnámsskúlum á síðsta ári. Kanningin hjá

Granskingardeplinum fyri Økismenning minnir um kanningina hjá Pál Weihe og mær, hóast fyrrnevnda hyggur mest at útbúgving, arbeiðslívi og framtíðarplanum við framtíð fiskivinnu Føroya sum høvuðsevni.

Fyrireiking av feltarbeiði

Verkætlanin er mannfrøðilig, og tí er feltarbeiði týðandi arbeiðsháttur. Feltarbeiði er kvalitativt háttalag, har tilfar (data) verður savnað inn við at práta við fólk, gera samrøður og luttaka í ymsum virksemi (*participant-observation*). Fyri at skilja sjónarmiðini hjá heimildarfólkinum noyðist granskarin at lurta eftir teimum, fylgja teimum í gerandislívinum og gera sær eina heildarmynd av sosialu netverkum teirra. Fyri at feltarbeiðið skal føra til vísindaliga áhugaverd kanningarúrslit, er neyðugt at fyrireika seg væl: seta hypotesur upp og knýta verkætlanina til hóskandi mannfrøðiligt ástøði. Hvat úrslit væntar ein sær? Hvussu skulu upplýsingarnir frá heimildarfólkinum tulkast? Hvat kann kanningin siga okkum, ið vit ikki vistu frammanundan? Nógv hevur verið sagt um feltarbeiði sum háttalag, og Ellen (1984: 27) sigur at,

> *the anthropologist's presence affects the observed situation so that observation of it cannot be assumed to be completely free of distortion, thus rendering problematic the basic aim of reporting 'what is really happening there'.*

Tað er sera umráðandi hjá einum mannfrøðingi at vera greiður yvir hetta (at hann ávirkar granskingarúrslitini) og taka hædd fyri avleiðingunum, og duga at meta um, hvat er rætt og skeivt.

Tá eg fyrireikaði feltarbeiðið, noyddist eg at spyrja meg sjálvan: hvar finni eg heimildarfólk? Eg ætlaði at fáa fatur í einum bólki av ungfólki, ið samskiftir sínámillum í gerandisdegnum, men sum tó ikki umboðar avmarkaðan lívsstíl ella serstaka lutmentan, og sum haraftrat er til reiðar at taka stór persónlig val viðvíkjandi starvsleið og lívsleið.

Eg ynskti at fáa fatur í hesum avmarkaða bólki, áðrenn hann upploysist, tá tey ungu velja sær hvør sína persónliga leið í ørgrynnuni av útbúgvingar- og arbeiðstilboðum, ið eru til taks. Tí valdi eg ung í (kravdari) skúlagongd í framhaldsdeild fólkaskúlans. Genturnar og dreingirnir í framhaldsdeildini hava eitt rættiliga virkið frítíðarlív. Og hóast tey hava ymislig sosial- og familjunetverk, so er skúlagongdin hjá teimum øllum tvungin, og tað gav spurningi mínum eitt greitt svar: heimildarfólkini eru at finna í skúlastovuni.

Skúlaflokkarnir í fólkaskúlunum í Havn eru vanliga settir saman av næmingum, ið búgva í grannalagi skúlans, hóast undantøk eru, og floksfelagarnir eru sostatt mangan úr somu gøtum, harvið eisini javnan vinir uttan fyri skúlagátt. Týðandi sosialir munir kunnu ikki sigast at eyðkenna býlingarnar í høvuðsstaðnum, hóast sosiobúskaparligu lívsumstøðurnar hjá einstaklingunum úr ymiskum húskjum og familjum kunnu vera sera ójavnar. Ongin skúli verður tó beinleiðis settur í samband við hvørki fátækra- ella yvirstættarbústaðarøki.

Valið fall á Venjingarskúlan, har eg sjálvur havið verið næmingur sum barn. Fortíð mín sum næmingur á skúlanum ávirkaði avgjørt valið, eftirsum eg var hugaður at gera rannsókn í kendum umhvørvi. Í samstarvi við skúlaleiðsluna og lærarar valdi eg mær ein áttanda flokk í skúlanum.

Fyri ikki at órógva skúlagongdina hjá næmingunum meira enn neyðugt, var tað bara tann *eini* lærarin, ið noyddist at geva mær tíð og pláss, tá ið hann annars hevði áttandaflokkin. Lærarin hevði stóran áhuga fyri mína gransking og var sera beinasamur, tá ið eg skuldi hitta næmingarnar fyri at gera samrøður, spurnakanningar og líknandi. Næmingarnir vandu seg so líðandi við at síggja meg í skúlastovuni, og soleiðis varð eg partur av tímanum, tá flokkurin hevði viðkomandi lærara.

Eg legði frá byrjan áherðslu á støðu mína sum uttanveltaður hvat skúlagongdini viðvíkur. Eg fortaldi teimum ungu, at eg ikki var settur at gera nakra kanning fyri lærararnar ella leiðsluna á skúlanum,

men at verkætlanin var mín og hoyrdi til granskingarstovnin Fróðskaparsetur Føroya, ið onki beinleiðis samband hevur við fólkaskúlaverkið. Í byrjanini var, hóast alt, eitt sindur torført hjá næmingunum at skilja, hvat tað *veruliga* var eg gjørdi her.

Eg merkti beinanvegin, at eg var komin inn í ein góðan flokk, sum lærarar siga, við friðarligum og skikkiligum næmingum. Eg hevði valt skúlan sjálvur, men skúlastjórin og lærarin høvdu valt flokkin, so tað var neyvan heilt av tilvild, at tað bleiv ein so mikið góður flokkur. Skúlaflokkurin verður tó ikki, fyri mær, minni áhugaverdur av at vera góður. Hann er eins veruligur og umboðandi sum aðrir áttanda flokkar í býnum. Tó verða úrslit míni ávirkað av, at tað varð júst hesin flokkurin, ið gav mær míni mest týðandi heimildarfólk. Til dømis tá frítíðarítrivini hjá ungdóminum verða lýst, sæst at næmingarnir ganga til nógv skipað frítíðarvirksemi, meðan ongin til dømis brúkar Margarinfabrikkina.

Heimildarfólk

Nú eg hevði fingið fatur á heimildarfólki, hvat skuldi íkast teirra til verkætlan mína vera? Hví skuldi eg hava ein bólk av fjúrtan-fimtan ára gomlum næmingum til verkætlanina? Granskingin í skúlaflokkinum varð útint við tí fyri eygað, at lýsa partar av mentanarliga samleikanum og lívsstílunum hjá ungdómi í Havn. Við trimum lyklahugtøkum í geyma (lívsstílur, frítíð og framtíð) ætlaði eg, útfrá vanligari mannfrøðiligari mannagongd, at savna tilfar saman, síðan skipa og orða nýggju vitanina og at enda samskipa hana. Sum í føgrum bókmentum, sigur Peacock (1996: 83),

> *so in ethnography the message comes not through explicit statement of generalities, but as concrete portrayal. The readers must decode the description in order to grasp for themselves the underlying values.*

Grundin til at eg valdi fjúrtan-fimtan ára gomul var, sum nevnt, at eg ynskti at hitta tey ungu, stutt áðrenn tey noyðast úr eini tryggari

og vardari tilveru í fjálga fólkaskúlanum og út á sjálvvalda ókenda lívsleið. Ætlanin var at hyggja at tí savnaða blandaða hópinum, áðrenn hann fór sundur og út í allar ættir, alt eftir hvørjar raðfestingar næmingarnir høvdu valt fyri framtíðina. Ávirkanin uttan úr heimi, serliga ígjøgnum modernaðar elektroniskar miðlar, á mentanarliga samleikan og lívsstílin hjá ungdóminum í landinum er vaksin nógv.

Samrøður við lærarar á fleiri skúlum hava eisini givið mær sera virðismiklar upplýsingar og áhugaverdar viðmerkingar, tá ið eg royndi at kanna, um skúlalærarar tóku undir við ella avvístu mínar hypotesur og niðurstøður. Fyri meg var tað týðandi at royna at eftirkanna mínar egnu tulkingar við at samskifta og samstarva við fólk, ið starvast í skúlunum í landinum.

Gransking og eygleiðing

Ein partur av feltarbeiðinum, ið ikki altíð er serliga lættur at lýsa og greina í orðum, er sonevnda luttakandi eygleiðingin (*participating observation*), ið mannfrøðingurin tilvitandi ger, tá hann er úti og savnar tilfar saman. Hjáveran í skúlastovuni var fyri meg ein áhugaverdur háttur at síggja tey ungu í samskifti sínámillum og við læraran, og at eygleiða munirnar á næmingum og bólkum av næmingum. Skúlin er ein *arena*, ið formar stóran part av gerandisdegnum hjá teimum í skúlaaldri, og sum haraftrat skapar ein týðandi part av sosiala netverkinum hjá einstaklinginum. Eygleiðingin gevur eina mynd av einum avmarkaðum umhvørvi, har aktørarnir (næmingar og lærarar) hava hvør sín serliga leiklut, ið teir skulu liva upp til. Samstundis er neyðugt at minnast, at eygleiðarin ikki er ósjónligur; hann ávirkar eisini tey, ið hann eygleiðir. Tað er ógjørligt at vera ein ósjónlig fluga á vegginum í stovuni, eins og tað eisini er ógjørligt at royna at vera ein næmingur sum hini.

Í kvalitativum granskingararbeiði, til dømis luttakandi eygleiðing og samrøðu, er granskarin altíð ein tulkari, ið onkursvegna ávirkar síni heimildarfólk. Granskarin verður tó eisini sjálvur tulkaður av sínum

heimildarfólkum, og tí eru persónmenska og verumáti við til at stýra samskiftið ímillum mannfrøðing og heimildarfólk. Kyn, aldur, sosial bakgrund og onnur viðurskifti, kunnu ávirka samskiftið, hóast ein ikki skal gera ov nógv av, hvat hesum viðvíkur. Tað er meira týðandi at vera dugnaligur granskari enn at til dømis hava rætta aldurin, tá mannfrøðingurin skal út at hitta síni heimildarfólk.

Í mannfrøði er stóra avbjóðingin at knýta stórar almennar niðurstøður saman við úttalilsunum hjá einstaklingum; at flyta seg smidliga ímillum *mikro* og *makro*, og at duga at skapa heildarmynd útfrá báðum. Í kvantitativum granskingararbeiði, stórum spurnakanningum til dømis, er torført at fáa eyga á *veruligu* menniskjuni, tí øll data verða tulkað sum tøl, ið passa inn í talvur og strikumyndir. Luttakandi eygleiðing er ikki altíð egnað sum granskingarháttalag, tí nógv sosial og mentanarlig fyribrigdi kunnu ikki granskast við beinleiðis eygleiðing. Ein skal altíð, tá háttalag verður valt, fyrst spyrja: hvat er tað eg vil finna útav? Hvørjum er tað eg leiti eftir? Kvalitativa háttalagið hóskar væl til serligar verkætlanir, kvantitativa til aðrar. Sostatt útfylla háttaløgini hvørt annað, heldur enn at vera í kapping.

Persónligar feltarbeiðsroyndir hava til fyri stuttum verið kveistraðar burtur úr flestøllum mannfrøðiligum bókaverkum (*Tristes Tropiques* hjá Claude Lévi-Strauss [1955] sum kendasta undantakið), tí dult varð yvir tí subjektiva leiklutinum og kenslunum hjá granskarum í mannfrøðiligum verkum (Ellen 1984: 87). Inniliga samskiftið ímillum granskara og granskingarevni, serliga í mannfrøðiligum verkætlanum, men eisini í aðrari sosialari og hugvísindaligari gransking, hevur gjørt tulkingar og hugleiðingar av háttalagnum í sær sjálvum sera áhugavert (Powdermaker 1966, Ellen 1984, Davies 1999).

Hvat er áhugavert?

At byrja við var tað ein undarlig kensla at vera komin aftur í barndómsskúlan og draga gamla lærara mín upp í granskingarverkætlan við at brúka áttanda flokk hansara sum keldu í innsavningararbeiðnum.

Eldhugi hansara smittaði yvir á næmingarnar, tí teir vórðu sera hjálpsamir og lættir at arbeiða saman við, hóast eg ikki vildi verða viðfarin sum nakar mætur lærari við yvirvaldi.

Eg haldi at næmingarnir í flokkinum í Venjingarskúlanum vóru eitt sindur ørkymlaðir at byrja við, hóast lærarin hugagóður royndi at forklára, hvør *fremmandamaðurin*, sum kom inn í stovuna, var, tí eg var hvørki næmingur ella lærari. Eg hevði ongan greiðan ótvískildan leiklut í skúlaflokkinum, og tí var eg ikki bara ein fremmandur, men eisini onkursvegna óskiljandi. Men eg var heima, í mínum egna býi og landi, og tað var ein støða, ið eldru ættarliðini av mannfrøðingum ikki rættiliga kendust við, av tí at teir næstan uttan undantak leitaðu til fjarskotnar og lítið kendar leiðir at savna tilfar inn. Vit tosaðu sama mál, kendu somu ítróttar- og tónleikastjørnur, vóru sjálvt úr sama skúla í Havn, og tískil noyddist eg avgjørt at hugsa um tær serligu avbjóðingarnar, ið tað inniber at gera verkætlanir *heima*.

Føroya lítlu stødd, ið ger tað ógjørligt at vera fullkomiliga anonymur í nøkrum sosialum høpi, setir granskaran í viðkvæma støðu, ið eigur at greiðast, fyri at seta orð á fyrimunir og vansar í sambandi við feltarbeiðsverkætlan í smáum lutfalsliga einsháttaðum samfeløgum.

Ofta verður sagt, at feltarbeiði í ikki-vesturlendskum samfeløgum kann geva granskaranum nýggja fatan av egnari mentan (eina forvitnisliga og fjølbroytta mynd av heimlandinum), ið ger tað kenda fremmandakent (*eksotiskt*) og øvugt. Men sum eisini vrakar etnosentriskar hugmyndir um vesturlendska mentanarliga yvirvág yvir fornum *primitivum* samfeløgum. Hvørt samfelag og hvør mentan tykist lutfalsliga logiskt uppbygt og innanhýsis samanhangandi, tá útgangsstøði verður tikið í egnu fyritreytum samfelagsins (Barth 1980). Tað *natúrliga* og ósagda í egnum samfelag (tað, ið verður tikið fyri givið sum *veruleikin*) kann úr einum fremmandum sjónarhorni verða fatað sum óskiljandi og høpisleyst mentanarligt fyribrigdi.

Gransking heima og úti

Fyrimunirnir av at gera feltarbeiði heima kunnu eisini vísa seg at vera ein loyndur trupulleiki, um granskarin sum eygleiðari, gerst blindur og ikki megnar at skilja kjarna frá restini, tí hann ikki beinir nakað ávíst fyribrigdi í brennidepilin. Sostatt fær hann ikki eyga á áhugaverd og viðkomandi mentanarlig fyribrigdi, ið í veruleikanum hava uppiborið eftiransni og samanberandi greining. Sum *insidari* gloymir hann at halda eina vísindaliga frástøðu til *vanligar* gerandisligar normar og hendingar íkring. Tað krevur eitt óvanligt sinnalag, sigur Whitehead (í Wadel 1991: 19), at uppdaga tað eyðsýnda.

Fyrimunirnir av at vera heima eru tó mangir og gera teir nógvar truplar verkætlanir lættari at gjøgnumføra, tí granskarin og heimildarfólkið hava nógva *sínámillum vitan* (Giddens 1976); hetta fær sosiala samskiftið at flóta og avmarkar eisini mest vanligu mentanarligu misskiljingarnar (Wadel 1991: 18-19). *Heima* hevur mannfrøðingurin, vónandi, eina breiða almenna bakstøðisvitan um tey sosialu, mentanarligu, politisku og búskaparligu viðurskiftini, umframt eitt holla vitan um søgu og landalæru landsins.

Tað slapst ikki undan, at nakrir næmingar í áttandaflokkinum kendu onkran, ið kendi meg, ella høvdu hoyrt um meg, tí soleiðis eru umstøðurnar nú einaferð, tá ein býr og arbeiðir í samfelagi við 49.000 og 18.000 íbúgvum í ávikavist landinum og høvuðsstaðnum. Samfelagsgranskarar í Føroyum noyðast at brúka skapanargávur og hugflog at tryggja heimildarfólkinum navnloysi í prentaðum greinum og bókum. Eg gjørdi heimildarfólkunum greitt beinanvegin, at ongi nøvn fóru at verða nevnd, og at verkætlanin var fullkomiliga óheft av skúlamyndugleikunum, so at tey skuldu skilja, at tey ikki fingu karakterir ella døming fyri útsøgn í samrøðum og práti. Eg fortaldi teimum, at mál mítt tvørturímóti var at fáa teirra sjónarmið um ymisk viðurskifti fram í ljósið. Á hendan hátt skiltu tey, at ætlan mín ikki var at læra tey nakað, men tvørturímóti, at lata tey fortelja mær nakað.

Ætlanin var ongantíð at kanna skúlaflokkin ella skúlaskipanina

í sjálvum sær, men at nýta hendan formliga pallin sum karm og byrjanarstøði til feltarbeiðið hjá mær. Eg fór til skúlan ístaðin fyri at fara til samkomuhúsið, ítróttarøkið ella ungdómsklubban fyri at sleppa undan at avmarka feltabeiðið til eina lutfalsliga snævra kategori av ungdómi, ið einans umboðar ávís virði og stílar. Og eg var fyrst og fremst áhugaður í at kanna einstaklingarnar og sosiala lív teirra, ikki útbúgvingarskipanina og skúlastovuna. Eg vitjaði Margarinfabrikkina, hóast ongin úr skúlaflokkinum plagdi at ganga har, tí hesin stovnurin (Virkishús fyri børn og ung í Havn) er einasta stað, ung uttan skipað frítíðarítriv kunnu fara til á kvøldi, um tey ikki hava hug at ganga úti og vála.

Samrøður og uppgávur

Eg gjørdi semistruktureraðar einstaklingasamrøður við allar næmingarnar; eg setti opnar spurningar, ið lagaðu seg eftir samrøðuni, so allir næmingarnir ikki tosaðu um júst tað sama. Samrøðurnar tóku í flestum førum 20-30 minuttir,og snúðu seg mest um frítíð, lívsstíl, familjuviðurskifti og framtíðarætlanir. Vanligt leyst prát við næmingar, bæði í skúla og aðrastaðni, er tó ofta líka áhugavert, tí tá verður notat ikki skrivað niður og tað ger tey ungu ofta minni afturhaldandi. Haraftrat eru ofta fleiri fólk hjástødd, tá prátað verður um leyst og fast, og tað er ein týðandi munur frá viðtaluni undir fýra eygum.

Viðhvørt, tá eg hevði lærarasessin, kundi eg spyrja allar næmingarnar í senn um ymist, men tá minti støðan beinanvegin um *vanligan* skúlatíma og fá hættaðu sær at taka orðið. Tey mest framligu søgdu sína meining, men hon var tó kanska ikki meira áhugaverd enn tað hini í flokkinum hugsaðu. Tó kundi eg sum *lærari* geva teimum ymsar lættar uppgávur, ið tey royndu at gera, hóast næmingarnir ikki roknaðu hetta sum vanligt heimaarbeiði. Tær uppgávurnar, ið vóru lutfalsliga tíðarkrevjandi, tímdu tey flestu í flokkinum ikki at brúka tíð til. Sostatt miseydnaðist okkurt, meðan annað eydnaðist heilt væl.

Eg skal tó viðganga, at eg ikki hevði væntað at allar mínar ætlanir

fóru at fáa viðburð, so alt í alt kann eg ikki vera annað enn nøgdur við avrikið hjá flokkinum. Viðvíkjandi miseydnaðu ætlanunum, so var talan fyrst og fremst um uppgávur, ið eg setti tey ungu at gera í frítíðini, tí tað rokna nógv fyri tíðarspilla. Við øðrum orðum var stórur munur á at brúka tíð til mína verkætlan í skúlanum og í frítíðini, tí í skúlanum noyðast næmingarnir óansæð at fylgja boðum lærarans.

Næmingarnir fingu spurnabløð at útfylla í tímanum, og tað gekk bæði skjótt og væl at fáa hetta frá hondum. At sita og svara spurningum um viðurskifti hjá ungdóminum í høvuðsstaðnum tykist vera nógv stuttligari enn ymist annað, ið verður gjørt í skúlanum. Av øðrum uppgávum, sum eg gav teimum í tímanum, kann nevnast, at tey vórðu biðin at skriva niður, hvat ið tey halda sigur nakað um tey sjálvi (samleika). Á lista við upp til tjúgu punktum skuldu tey skriva, til dømis, navn, aldur, bústað, ítróttargrein og ting, ið tey eiga.

Heimildarfólk míni fegnaðust um at hitta ein persón, ið lurtaði eftir teimum, heldur enn, sum næmingar annars eru vanir við, at lata tey í andakt sita og lurta og læra. Í mannfrøðiligum granskingararbeiði sæst ofta, at nøkur heimildarfólk (kjarnuinformantar) duga betur at samskifta og hava meira viðkomandi vitan enn hini; granskarar „virtually always develop key informants, individuals who for various reasons are either very effective at relating cultural practices or simply more willing than most to take the time to do so“ (Davies 1999: 71).

Myndatilfar

Fotomyndir eru vælegnaðar sum data í mannfrøðiligari gransking, hóast tað enn eru lutfalsliga fá, ið brúka hetta háttalagið. Fyri at fáa næmingarnar í áttandaflokkinum at geva eina *mynd* av sær sjálvum fingu tey fototól við filmi, og tað eydnaðist rættiliga væl. Næmingarnir, 24 í tali, fingu hvør sítt eingangstól útflýggjað og boð um at taka myndir (helst allar 27 myndirnar í filminum) av

fólki, plássum, lutum og øðrum, ið sigur nakað um, hvør tey eru. Síðan, tvær-tríggjar vikur seinni, skuldu tey geva mær tólini aftur. Úrslitið var, at eg fekk 22 tól og meira enn 500 fotomyndir. Ein stórur partur av myndunum eru tiknar í skúlanum og vísa næmingar úr flokkinum. Hesar myndirnar líkjast sera nógv. Tó hava nógv eisini tikið myndir av familju, vinum, kømrum, húsum, teldum, hundum o.s.fr.. Nøkur tónleikaáhug ung hava eisini tikið fototólini við sær til Prix Føroyar konsertina í Norðurlandahúsinum (2003).

Myndir geva aðrar upplýsingar enn vanligar samrøður og eygleiðingar. Myndir frysta eina serliga støðu, ið tað annars er torført at *fanga* við berum eygum, av tí at so nógv hendir og rørir seg í senn. Við at geva næmingunum fototól, sum teir kunnu taka við sær, hvar teir enn fara, uttan at hava meg í hølunum á sær, so verður tilfarið munandi ríkari og fjølbroyttari enn tað annars hevði verið. Ein fotomynd, ella ein rød av myndum, ið hoyra saman, kann síggjast sum eitt dýrmett ískoyti til restina av tilfarinum. Tað er ikki bara myndevnið í sær sjálvum, sum er áhugavert; ein skal eisini spyrja: hví tekur viðkomandi júst hesa myndina? Hvat vil næmingurin vísa? Myndir eru fyri meg, sum nevnt, eitt ískoyti til restina av tilfarinum, og tí verða myndirnar ikki viðgjørdar fyri seg, men saman við øðrum tilfari.

Góð úrslit og mistøk

Allar ætlanirnar fyri skúlafeltarbeiðið eydnaðust ikki líka væl. Eg gav sum sagt næmingunum ymist heimaarbeiði, spurnabløð, mynda-uppgávur og líknandi at gera í frítíðini. Frammanundan høvdu næmingarnir annað heimaarbeiði at gera, sum tey enntá fingu karakter fyri. Ein dag býtti eg notatbøkur út til næmingarnar og bað teir skriva tekstir ella tekna myndir um gerandisdagin (uttan fyri skúlan) hjá sær, fyri síðan tveir-tríggjar mánaðir seinni, stutt áðrenn summarfrítíðina, at geva mær bøkurnar aftur. Tað gekst ikki sum ætlað, tí flestu bøkurnar høvdu ikki so mikið sum verið opnaðar, tá eg spentur savnaði tær inn fyri at finna blankar síður.

Her gjørdi eg í minsta lagi trý mistøk: (1) uppgávan var ov óavmarkað og óklár fyri næmingarnar at skilja endamálið við henni; nakrar fáar skapandi og ágrýtnar sálir høvdu fylt sínar bøkur við persónligum frásagnum, restin hevði ikki nortið tær; (2) ætlanin var at fáa næmingarnar at skriva í bøkurnar um kvøldið, men, sum sagt, næmingar geva ikki uppgávum av hesum slag raðfesting í frítíðini, ið frammanundan er fylt við alskyns skipaðum og óskipaðum ítrivum; (3) sannlíkt er at úrslitið hevði verið jaligari, um bøkurnar persónliga vórðu býttar út til dømis tá eg hevði persónligar samrøður við næmingar, heldur enn at stilla tær allar í ein stakk á lærararborðinum framman fyri øllum í skúlatímanum. Eg átti at vitað betur, men, eldhugaður av hugskoti mínum, gloymdi eg hesar eyðkendu trupulleikar, ið hoyra feltarbeiðinum til.

Eg veit, at nógvir granskarar hava gjøgnumgingið líknandi trupulleikar í sínum arbeiði, hóast tað næstan ongantíð verður nevnt í innføringsbókunum í vísindagreinini. Smáar miseydnaðar verkætlanir eru, um tær yvirhøvur verða nevndar, loyndar frágreiðingar ímillum tær bjørtu søgurnar um sigrar í feltarbeiðinum. Miseydnaðar royndir eru eisini sigandi søgur, ikki altíð um vantandi førleika, men um áhugaverdar óvæntaðar støður, ið kunnu geva nýggja vitan um serligar metodologiskar trupulleikar.

Eg vil siga, at øll mín tíð á skúlanum var eitt stórt feltarbeiði, bæði í flokkinum, á lærarastovuni og rundanum skúlan. Her havi eg kannað empiriina hjá mær, tosað við ung og lærarar, og roynt at testa hypotesur. Tað var torført at fáa nóg mikið av tilfari til ritgerðina í feltarbeiðinum, og tí havi eg eisini brúkt ymist annað tilfar úr øðrum kanningum til flestu kapitlarnar í bókini hjá mær. Tey flestu úr skúlaflokkinum, sum eg kannaði í 2003, búgva framvegis í Havn, og áhugavert er at síggja, hvussu tey hava tað í dag. Tá eg hitti ung úr flokkinum í býnum, spyrji eg ofta hvat tey fáast við nú, og tey flestu mugu sigast at klára seg stak væl í samfelagnum. Til dømis eru nakrir dreingir úr flokkinum, ið spældu tónleik og høvdu ein rocktónleikabólk, í dag kendir tónleikarar, ið luttaka á festivalum kring landið.

Uttan eina roynd fæst onki úrslit, og fyri hvørja væleydnaða vísindaliga verkætlan eru fleiri smáar miseydnaðar kanningar, ið tó sjáldan verða nevndar. Við at taka neiliga partin við í tekstinum kann háttalagið mennast til gleði fyri komandi granskarar og verkætlanir.

Etikkur

Etisku fyrilitini í granskingararbeiði við ómyndugum ungdómi eru sera týðandi, tí arbeiðið fevnir um børn, løgfrøðiliga sæð, uttan heimild at taka týðandi avgerðir uttan foreldrasamtykki. Tað er tó ikki bara úr løgfrøðiligum sjónarmiði, at heimildarfólkið er veikari parturin. Ung eru í lutfalsliga viðkvæmari støðu tá tey samskifta við granskara, ein vaksnan persón við (hugsandi) valdi at ávirka tey ungu á óetiskan hátt, ið ikki kann góðtakast. Tí er sera umráðandi hjá granskaranum at altíð minnast ta ójøvnu valdsstøðuna í hesum samskifti fyri at sleppa undan ótilvitaðari valdsmisnýtslu, ið lættliga kann beina fyri almenna trúvirðinum (Lalander og Johansson 2002). Granskarin eigur altíð at fortelja heimildarfólkinum, hvat slag av verkætlan talan er um, og hví hann ætlar at brúka júst tey til heimildarfólk.

Skúlaflokskanningar umfata einstaklingar, skúlaflokkar og skúlastovnar. Granskarin noyðist at hugsa um allar aktørarnar tá hann tekur etisk og praktisk fyrilit upp til kjaks í verkætlanarfyrireikingini. Verkætlanin hjá mær fylgdi tí, ið kann sigast at vera kjarnin í mannfrøðiligum arbeiði:

> *The three steps – experience, establishing an identity in the new setting, and intepretation – hint at the peculiar combination of subjectivity and objectivity, adventure and work, romanticism and pragmatism, that constitute socalled participant observation.*
> *(Peacock 1996: 54)*

Mannfrøðingar byrja „with particulars, and then analyses, generalises, and compares and the gifted ones may also illuminate the human

condition“ (Powdermaker 1966: 54). Mannfrøðingar arbeiða eftir einum tyssi av etiskum og vísindaligum forskriftum og góðtaka ikki snarvegir til hugtakandi úrslit, um avleiðingin er at rættindini hjá heimildarfólkunum ikki verða vird til fulnar.

[3]

UNG Í EINI BROYTINGARTÍÐ

Í hesum kapitli fari eg at siga eitt sindur um ungdómin í Føroyum sum bólkur í brennideplinum í samfelagi í broyting. Hvørjar broytingar hava vit sæð í tjúgundu øld, ið hava ávirkað ungdómin, so at hann hevur fingið ein nýggjan leiklut og status í samfelagnum? Fyri at lýsa støðuna seinastu tíggjuárini havi eg brúkt fleiri stórar kanningar, ið serliga hyggja at búskaparkreppuni og stóru fráflytingini av landinum, at ungdómslívinum í kommunu í útjaðaranum og at virðum og ynskjum hjá ungdómi í trimum vesturnorðurlendskum samfeløgum.

Ungdómurin á veg fram

Í eldri tíðum var ein í Føroyum barn, til ein bleiv vaksin; skiftið frá barna- til vaksnamannalívið var rættiliga ítøkiligt og broytti tilveruna hjá tær fullkomiliga. Tað var sera týðandi í siðbundna samfelagnum, at fólk vóru flokkað í bólkunum *børn* og *vaksin*, tí kámutar millumstøður høvdu einans skapt óskil í skipanini.

Samfelagið var grundað á tvíningin barnvaksin, har hvør bólkur hevði sín serliga leiklut. Egghvassa skiftið var ein *rite de passage*, har barnið súmbolskt varð flutt inn í heimin hjá teimum vaksnu. Fermingin var kirkjusiðurin, sum gjørdi børnini vaksin. Tá prestur legði hondina á høvdið, broyttist tín støða, og tú fekst nýggja tign í samfelagnum. Dreingirnir fóru til dømis til skips. Genturnar fóru út at tæna ella seinni í tíðini at arbeiða í fiski. Tá tú vart fermdur, hevði tú skyldu at hjálpa ættfólki tínum, tú vart partur av arbeiðsmegini og kundi enntá smakka tær á, um onkur eldri bjóðaði. Norski mannfrøðingurin Thomas H. Eriksen (1993: 65, mín týðing) sigur um siðir og status:

Øll samfeløg mugu finna eina loysn á hesum trupulleikanum: Hvat skal ein gera fyri at flyta ein persón úr einari lívsfasu í aðra? Hvussu kann ein fáa eitt barn at blíva vaksið; hvussu kann ein við vissu til ásetta tíð siga, at nú er ein vaksin vorðin ein av teimum gomlu í bólkinum? Loysnin er næstan altíð at finna í umskiftissiðum. Hesir siðir eru sterkt dramatiseraðar fyriskipanir, har ein persónur ella heilur aldursbólkur fer úr einum statusi í annan.

Sum kunnugt, so var støðan fyrr tann, at altíð gekk drúgv tíð, áðrenn stórar hendingar av meginlandinum fingu ávirkan í Føroyum. Tað er ikki fyrr enn síðst í tjúgundu øld, at vit verða samansjóðað við altjóðagjørda heimssamfelagið, og at *tíðarmunurin* millum okkum og hini so smátt hvørvur.

Skúli og arbeiði

Síggja vit føroyskan ungdóm í einum søguligum høpi, var tað so, at í tí gamla bóndasamfelagnum vóru ung sett til arbeiðis so skjótt tey vóru nóg stór til at gera nyttu. Tað var ikki óvanligt, at fólk uppfataðu skúlarnar, ið komu eftir 1872, sum órógvandi, tí skúlin tók børnini frá arbeiðinum í bygdini. Seinni, tá sluppfiskiskapurin kom, var ikki óvanligt at dreingir fóru til skips tólv ára gamlir, men teir flestu mundu vera fjúrtan-fimtan, áðrenn teir fóru til skips fyrstu ferð. Men longu næsta árið vóru teir (fimtan-sekstan ára gamlir) roknaðir sum vaksnir menn (Joensen 1975). Teir, ið høvdu verið til skips í tvey ár, kundu læra til skipara. Drongur kundi sostatt fáa fiskiskiparaprógv longu áðrenn hann var átjan ár. Støðan var tann sama hjá lærlingum. Lærlingar kundu fáa læruplass tá teir vóru fjúrtan ár og harvið vera sveinar longu átjan-nítjan ára gamlir (op cit). Soleiðis var støðan fram til umleið 1950.

Tað vóru sera fá ung, ið fóru í studentaskúla og í hægri útbúgving, men tá vit koma til sekstiárini broytist hetta, samstundis sum ein modernisering av skúlaverkinum og undirstøðukervinum fer fram. Abbar og ommur at ungdóminum í dag høvdu aðrar fortreytir enn foreldur at ungdóminum í dag. Hóast foreldrini ikki eru uppvaksin við sjónvarpi og kunningartøkni, so er hetta komið í teirra lív, meðan tey vóru ung.

Kynsleiklutirnir hjá abbunum og ommunum vóru rættiliga greiðir, men longu í ættarliðnum hjá foreldrunum er hetta so smátt við at broytast, tí nú arbeiða bæði foreldrini úti og tey noyðast at finna eina loysn viðvíkjandi heimi og børnum. Í dag eru vøggustova og barnagarður oftast tilhaldsstaðið hjá børnum frá tey eru eitt-tvey ára gomul.

Longri skúlagongd

Fyri at skilja støðuna hjá føroyskum ungdómi í dag, er tað av stórum týdningi fyrst at seta seg inn í nakrar hendingar, sum hava broytt samfelag okkara. Ídnaðargerð og moderniseringin av tí føroyska samfelagnum komu sera seint í mun til á evropeiska meginlandinum, men tað gekk ikki long tíð, so vóru vit eisini farin brestandi inn í seinmodernaða vitanarsamfelagið. Við øðrum orðum, so var modernaða tíðarskeiðið stutt og meldurkent í Føroyum, næstan allar umleggingarnar hendu í senn. Tað sum tók einar tvær øldir í Evropa vardi einans 40-50 ár her heima.

> *De bevidsthedsmæssige og kulturelle former der kan registreres på Færøerne i dag, stammer fra forskellige kulturlag i de sidste 150 års historie. Dele af Færøerne er tidligt pga handelen (Joensen 1975: 18) rykket frem mod europæisk borgerlig kultur, – uden at have et industrisamfund som fundament, og derfor uden at disse kulturformer fik nævneværdigt gennemslag uden for de højere embedsmands- og købmandskredse (Joensen 1979: 2). Andre dele af Færøerne har helt op til efter 2. verdenskrig fastholdt bondekulturen, mens hovedparten gradvist siden 1872 er gået ind i en polykulturel omstillingsproces, med en sideløbende satsning på landbrug og fjernfiskeri og efter 2. verdenskrig også en egentlig industrialisering af fiskeriet og dermed omfattende følgeindustrier på land.*
> *(Poulsen 1980: 15)*

Aftaná ungdómsuppreistrarnar í Vesturheiminum síðst í 1960'árunum varð ungdómurin ein sjónligur og virksamur samfelagsbólkur við markantum hugsjónum. Nú fekk hann egnar lívsstílar og mentanarlig eyðkenni. Hann varð tann skapandi mátturin í samfelagnum og varð settur í samband við nærum alt nýskapandi í mentanini.

Hóast føroyskur ungdómur gjørdi nógv um seg bæði innan tónleik, list og politikk og hevði stóra ávirkan á mentanina í landinum, so var onki veruligt alment kjak um ung í Føroyum. Ikki fyrr enn síðst í

tjúgundu øld. Ungdómurin hevur tó í langa tíð sjálvur kjakast um støðu sína í samfelagnum, um sína mentan og framtíð í landinum, ikki minst í ungdóms- og partapolitiskum høpi, og hugleiðingarnar um skiftið frá bóndasamfelagi til ídnaðarsamfelag hava ikki verið heilt fáar. Í tíðarritinum *Kjak!*, sum hevði eitt stutt lív, stendur drúgv, áhugaverd og eitt sindur hugtung grein um føroyskan ungdóm á einum vegamóti:

> *Tey sum eru fødd áðrenn 1930 kunnu við rættuliga stórari vissu siga, at arbeiði teirra kom at líkjast nógv tí hjá foreldrunum. Oftast fóru genturnar í fiskaarbeiði ella út at tæna, og dreingirnir til skips. Tey kundu tí hvat arbeiðskunnleika viðvíkur brúka foreldrini sum fyrimynd og gera brúk av erfaringunum hjá teimum. Tey, sum í dag ganga í skúla hava rættuliga fáar møguleikar at brúka erfaringar hjá foreldrunum, partvís tí tær helst vera ov gamlar og tí ónýtiligar tá tann ungi kemur til arbeiðis, og partvís tí, at tann ungi neyvan kemur at hava sama arbeiði sum mamman ella pápin: tekniski útviklingurin hevur gjørt vinnulívið so spesialiserað, og er arbeiði at fáa, so eru møguleikarnir nógvir og valið trupult [...] Tey ungu ivast í øllum og hava blakað mangt gott gamalt fyri borð og hava helst ikki fingið nakað haldgott ístaðin. Tey kunnu tí ofta tykjast nakað rótleys.*
> *(Høgnesen 1982: 18)*

Kreppa og fráflyting

Fyrr komu føroysk børn í arbeiði í fjúrtan ára aldri. Tað var bara úrvalsliðið, ið tók hægri útbúgving. Samfelagið er broytt nógv seinastu tíggjuárini, og í dag hevur føroyskur ungdómur nøkulunda somu áhugamál og virðir sum ung í restini av Norðurlondunum og Evropa. Føroyar hava ein stóran bólk (ungdómin), ið er farin úr fólkaskúlanum, men enn ikki er farin í arbeiði. Men mentanarligu kategoriirnar úr fornum tíðum skapa framvegis ungdómsmyndina hjá foreldraættarliðnum. Ungdómurin livir undir heilt øðrum fortreytum enn foreldur teirra gjørdu í sínari tíð, og tað er av týdningi at dagføra vitanina um støðuna hjá ungdóminum í tí føroyska samfelagnum.

Talva 1. Ung í Havn í tølum (januar 2005)

	gentur	dreingir	ískt
12 ár	167	168	335
13 ár	189	172	361
14 ár	161	204	365
15 ár	152	172	324
16 ár	127	151	278
17 ár	127	142	269
18 ár	127	143	270

kelda: Hagstova Føroya

Í Føroyum vaks uttanlandsskuldin øgiligt eftir eitt tíðarskeið við ovurnýtslu og kunstigum hákonjunkturi, og í 1990 var hon komin upp í átta milliardir krónur. Arbeiðsloysið var yvir tjúgu prosent fyrst í 1990'árunum, og í 1992 var man noyddur at stovna almenna arbeiðsloysisskipan. Tað hevði man ongantíð áður havt í Føroyum.

Talva 2. Nettouttanlandsskuld og BTÚ

	BTÚ (mió kr)	Skuld (mió kr)	Skuld (% av BTÚ)
1982	3.348	1.605	47,9
1984	4.412	3.060	69,4
1986	5.574	5.045	90,5
1988	6.520	7.755	118,9
1990	5.946	8.517	143,2
1992	5.509	8.302	150,7
1994	4.943	3.024	55,0

kelda: Arge 2000

Meðan kreppa var í landinum, vóru nógvar familjur noyddar at spara á øllum økjum fyri at yvirliva. Summi høvdu einans ráð til mat, ofta við eini hjálpandi hond frá skyldfólki. Sparingarnar raktu børnini og tey ungu hart, tí tey sluppu ikki at luttaka í ymsum sosialum og mentanarligum virksemi vegna búskaparstøðuna hjá foreldrunum (Arge 2000). Ferðir, nýggj klæði, biografkvøld, og líknandi *luksus* var heilt útilokað.

Flytingin av landinum til grannalond sum Ísland, Noreg og Danmark aldar upp og niður. Tá arbeiðsloysið er høgt søkja nógv ung til aðrar arbeiðsmarknaðir, til dømis til Danmarkar í 1960'árunum. Í 1968 vóru helvtin (netto) av teimum, ið fluttu til Danmarkar fimtannítjan ára gomul:

> *Hevði tað verið so, at tey, ið fara burtur, komu javnt nógv úr báðum kynum og øllum aldursbólkum og vinnugreinum, so hevði vandin ikki verið so stórur. Men so er ikki. Flytingin er úrveljandi. Vissir bólkar verða harðari raktir enn aðrir. Sum flestøll munnu hava varhugan av, eru nógv tey flestu, ið flyta, heilt ung. Nettoflytingin (te. talið av flytingum úr Føroyum minus talið av flytingum til Føroya) fer serliga illa við aldursbólkunum 15-19 og 20-24 ár.*
> *(Andersen 1971: 6-7)*

Tað er ongin einføld frágreiðing, ið sigur okkum, hví ung í hópatali fluttu av landinum fyrst í nítiárunum, hóast kreppan sum heild kann roknast sum høvuðsorsøkin til flytingina. Tey flestu undir tjúgu ár fluttu saman við familju, maka ella vinum. Útisetakanningin (tøl frá 1991 og 1994) vísir eisini, at tey flestu, ið fluttu til Danmarkar vóru undir 30 ár (Arge 2000).

Talva 3. Orsøkir til at flyta til Danmarkar (%)

	15-19	20-24	25-29 ár
fyri at fara í útbúgving /læru/skúla	29,5	74,4	66,9
fyri at fáa arbeiði	4,9	8,9	12,6
vegna stóra persónliga skuld í Føroyum	0	0	0
vegna vánalig útlit í Føroyum	6,6	3	3,8
við fam/maka, ið fór í arb/útb/læru/skúla	52,5	9,8	12,3
aðrar orsøkir	6,6	3,9	4,4
N	61	305	390

kelda: Arge 2000

Teir flestu føroyingarnir í Danmark búgva í Keypmannahavn. 86 prosent av teimum, ið fluttu úr Føroyum til Keypmannahavnar í 1991 og 1994 vóru undir 35 ár, og bara 4,3 prosent vóru yvir 45 ár (Arge 2000). Tey flestu, ið fluttu í hesum tíðarskeiðnum skuldu byrja uppá eina hægri útbúgving í Danmark.

Ung lesandi vilja gjarna aftur til Føroyar, men ikki fyrr enn tey eru liðug við útbúgvingina og hava útlit til eitt gott starv heima í Føroyum (op cit). Longsulin heim er tilstaðar hjá nógvum, tó eru ambitiónirnar eisini høgar. Flytimynstrini millum Føroyar og Danmark eru, fyrr sum nú, knýtt at nógvum viðurskiftum í tí føroyska samfelagnum – fyrst og fremst búskaparstøðuna og arbeiðsloysistølini, men eisini at sosialum og mentanarligum viðurskiftum, ið trýsta ávísar bólkar út og aðrar inn í landið.

Av teimum við loknari útbúgving siga tey flestu, at tey flyta heim tá tey „kunnu fáa eitt hóskandi starv heima í Føroyum“, og harnæst: „eg flyti nokk ikki aftur“. Ung við útbúgving eru meira mobil og jalig enn eldri ófaklærdir útisetar; tey flyta ikki aftur fyri einhvønn prís.

Talva 4.
Flyti eg aftur til Føroya, so verður tað, tá ið ... (%)

	15-19	20-24	25-29 ár
eg eri liðugur við útbúgving/læru/skúla	20	31,8	22,7
eg kann fáa hóskandi arbeiði í Føroyum	21,7	32,1	33,9
umstøðurnar í FO sum heild eru batnaðar	3,3	8,3	12,9
aðrar umstøður	15	10,6	14,7
eg vænti ikki at flyta aftur til Føroya	36,7	15,9	15,2
ikki upplýst	3,3	1,3	0,5
N	60	302	387

kelda: Arge 2000

Flestu føroyingar hava lutfalsliga lætt við at falla til í Danmark. Teir hava lært danskt í fólkaskúlanum og hava gott innlit í donsk viðurskifti. Nógv fáa lutfalsliga lætt arbeiði, eisini í tíðum við arbeiðsloysi í Danmark, tí teir hava ein sterkan vilja til at klára seg sjálvar tá teir eru uttanlands. Tað skal, kann sigast, vera ein góð grund til at flyta heimanífrá. Teir flestu varðveita sambandið við heimlandið, til dømis við ferium til Føroya og luttøku í tí fjølbroytta føroyska felagslívinum í Danmark. Tó eru eisini ung, ið als ikki fáa tað burtur úr uttanlandsuppihaldinum, ið ætlanin annars var, og skunda sær heimaftur til klettarnar, áðrenn komið er á mál útbúgvingarliga.

Talva 5. Seinasta árið havi eg... (%)

	15-19	20-24	25-29 ár
verið í Føroyum og ferðast (til dømis summar/jól)	33,3	30,8	28,4
javnan fylgt við í tíðindunum heimanífrá	14,5	17,6	20
nakrar ferðir etið føroyskan mat í Danmark	36,2	29,1	29,3
onkuntíð tikið lut í felagslívinum hjá útisetum	15,9	22,5	22,3
N	138	915	1215

kelda: Arge 2000

Allar oyggjarnar í landinum vórðu ikki líka hart raktar av fráflyting og arbeiðsloysi í byrjanini av 1990'árunum. Sunnara helvt av Suðuroynna og Sandoyggin í síni heild høvdu størstu fólkatalsafturgongd í prosentum. Harðast raktu kommunurnar mistu upp ímóti 30-40 prosent av sínum íbúgvum, meðan aðrar, sum Tórshavnar og nakrar smáar norðast í landinum, ikki merktu nevniverda afturgongd (Arge 2000). Verður hugt at arbeiðsloysinum, so vóru Suðuroyggin og Sandoyggin eisini harðast raktu øki landsins. Hesar oyggjarnar umboða ein part av tí føroyska útjaðaranum, hóast tær eru stórar. Serliga tey ungu av bygd flyta til Havnar og aðrar býir.

Ein høvuðsorsøk til at Suðuroy og Sandoy vórðu serliga hart raktar av búskaparkreppuni var, at búskaparligu strukturarnir í hesum økjum vóru meira einsrættaðir og sárbærir enn nógva aðrastaðni í landinum. Í kommunum við fiskivinnu sum einasta vinnulívsgrundarlag, og

serliga í bygdum við flakavirkjum, fekk man størstu niðurgongdina. Hovgaard og Apostle (2002: 15) siga, at

> *it is fair to say that the Faroes have undergone a true transformation. The effects around the country have been immense, and the consequences harsh. Much work is put into the creation of new formal structures and systems. However, little effort has been made to understand the crisis and the subsequent restructuring of the Faroese economy from a concrete social perspective...*

Ung fólk flyta enn úr útjaðaranum og til miðstaðarøkini. Mangan hoyrist eldri fólk í útoyggjum siga: „tey ungu koma ikki aftur, tí onki er at koma aftur til! Vit mugu skapa fortreytirnar fyri at tey ungu skulu fáa hug at venda aftur“ (Útoyggjaálitið 2001).

Ung í Vági

Lat okkum hyggja eitt sindur nærri at Vági, ein lutfalsliga stór bygd, ið liggur í Suðuroyar sunnaru helvt. Vágs kommuna umfatar Vág og tvær minni grannabygdir: Hov og Porkeri. Kommunan var sera hart rakt av kreppuni í nítiárunum. Størsta arbeiðsplássið, flakavirkið, lat aftur og var stongt í fleiri ár. Fólkið í arbeiði á tveimum teimum størstu arbeiðsplássunum í kommununi taldi 275 mitt í áttatiárunum og umleið 25 tíggju ár seinni; í sama tíðarskeiðið fór manningatalið á skipunum í bygdini frá umleið 120 niður í umleið 80 (Holm og Mortensen 2002: 61). Vágur luttók í eini samanberandi kanning frá 2000 um ung í tólv útjaðarakommunum í sjey londum. Londini vóru Føroyar, Kanada, Ísland, Noreg, Svøríki, Finnland og Russland. Kommunurnar í kanningini vóru

Talva 6. Tólv kommunur í samanberandi kanning

	íbúgvar
Digby, Kanada	9.000
Storuman, Svøríki	4.000
Chisasibi, Kanada	2.900
Pajala, Svøríki	7.800
Ísafjørður, Ísland	3.274
Fårosund & Roma, Svøríki	9.400
Vágur, Føroyar	1.400
Inari, Finnland	7.700
Storfjord, Norge	1.900
Teriberka, Russland	1.732
Båtsfjord, Norge	2.400

Frágreiðingin eitur *Northern Futures Young Voices* (Bjørndal og Aarsæther 2000) og er partur av UNESCO-fíggjaðu verkætlanini *Circumpolar Coping Processes Project* (CCPP). Eg fari nú at hyggja nærri at tølunum og úrslitunum fyri Vágs kommunu í hesi kanning. Heimildarfólkið úr Vági vóru ung í fimtan-sekstan ára aldri. Ung í Vági fortelja í frágreiðingini fyri útlendingum hvussu lokalsamfelagið, tey hoyra til, er.

Talva 7. Tað tey ungu dáma best í kommununi (%)

	Vágur	12 kommunur
familjuna og vinir	6	13
sosiala umhvørvið	43	33
náttúruna, ítriv úti	16	23
lítið pláss	0	7
skúlan	2	2
annað	33	22

kelda: Bjørndal og Aarsæther 2000

Sosiala umhvørvið er, sum vit síggja, sera týðandi hjá tí føroyska ungdóminum á bygd, og „øll kenna hvønn annan“, sigur ein sekstan ára gomul genta. Av tí, sum tey ungu í Vági harafturímóti ikki eru serliga nøgd við, stendur „væntandi frítíðartilboð“ ovast á listanum. Síðan kemur „væntandi arbeiðsmøgulleikar“. Í Suðuroy var til dømis onki badmintonfelag, onki ríðifelag, onki talvfelag, ongin vanlig café og ongin ungdómsklubbi (Økismenningarálitið 2001). Tó er eitt sindur meira til ungdómin í Vági og Tvøroyri í dag enn í nítiárunum.

Talva 8. Tað, ið tey ungu eru mest ónøgd við í sínari kommunu (%)

	Vágur	12 kommunur
sosialar trupulleikar	0	4
sosiala umhvørvið	7	15
ov fáir handlar	5	6
ov lítið pláss	2	12
stór frástøða	2	10
fá frítíðarítriv	46	26
ringar arbeiðsumstøður	18	4
veðurlagið	0	3
N	44	670

kelda: Bjørndal og Aarsæther 2000

Tey ungu í Vági hava ikki nógv gott at siga um lokala arbeiðsmarknaðin, bara átta prosent lýsa búskapin í kommununi í høvuðsheitum jaliga. Harafturímóti er meira enn helvtin av ungdóminum væl nøgdur við sosiala umhvørvið í bygdini; ongin úttalar seg beinleiðis neiliga um sosiala umhvørvið. Tó er stór ónøgd við felagsøki og hentleikar í bygdini; meira enn helmingurin av teimum ungu í kanningini finnast at støðuni, og ein drongur úr Hovi sigur: „tað eru ov fá fólk her, bygdin er ov lítil. Um vit høvdu havt ein fótbóltsvøll og eitt bygdarhús her, so hevði eg verið nøgdur“.

Talva 9. Áskoðan um fýra lokal viðurskifti

áskoðan	jalig	javnt	neilig	onga
um búskap/arb.marknað	8	28	40	24
um sosial viðurskifti	56	0	0	44
um felagsøki/hentleikar	8	8	52	32
um tilknýti til staðið	56	36	8	0

kelda: Bjørndal og Aarsæther

Tann lokali samleikin og tilknýtiskenslan eru sterk í bygdini líkasum aðrastaðni í landinum. 56 prosent av teimum ungu í Vági úttala seg jaliga um heimstaðin. Av teimum tólv kommununum í CCPP verkætlanini eru tað bara Vágur og Ísafjørður, ið fáa jaligar viðmerkingar frá meira enn helminginum av heimildarfólkunum viðvíkjandi hesum spurningi. Í Vági geva 36 prosent eitt balanserað svar, ið vísir til bæði góðar og minni góðar kenslur um heimstaðin. Ein ungur vágbingur sigur til dømis: „mín heimbygd er av teimum vakrastu í Føroyum... vit eru tann minsta bygdin í fyrstu deild [í fótbólti]. Bygdin er ikki stór, men heldur ikki so lítil“ (Bjørndal og Aarsæther 2000).

Nógv ung halda, at Vágur er vakurt og gott stað at búgva, hóast tey hava ætlanir um at flyta burtur. „Heimstaður mín hevur góðar kvalitetir – men er ikki nakað stað fyri meg“, er útsøgn, ið ofta hoyrist. Nógv siga, at Vágur er gott stað at vera hjá børnum, ferðafólkum og gomlum. Ein drongur úr Porkeri sigur: „í løtuni dámar mær at búgva í Porkeri, men eg kann ikki ímynda mær, at verða verandi her, onki arbeiði er at fáa“. Tey ungu hava ikki serliga stórar vónir til tann lokala arbeiðsmarknaðin. Tey flestu vilja gjarna fáa sær eina útbúgving, men tað eru eisini tey, ið helst vilja fylgja í fótasporunum á foreldrunum, arbeiða í fiski, sum hesin fimtan ára gamli drongurin: „mær dámar ikki tankan um, at sita allan dagin framman fyri einum telduskíggja.

Eg vil nógv heldur vera fiskimaður ella hava eitt vanligt arbeiði. Tað er ósunt at vera sjómaður, men um tað er tað einasta arbeiðið at fáa, so taki eg tað til takkar".

Ítróttur (serliga bóltspøl sum fótbóltur, hondbóltur og flogbóltur) eru ótrúliga væl umtókt ímillum børn og ung í Føroyum. Nógvastaðni í landinum er ítróttarfelagið tann einasti karmurin um skipað frítíðarvirksemi burtursæð frá átrúnaðarligum virksemi. Lokalu ítróttarfeløgini skapa eitt sosialt umhvørvi, har børn og ung hittast til ítróttavenjing –og kapping alt árið. Ítróttarfeløgini er, saman við skúla og familju, sera týðandi fyri sosialu sambondini og netverkini hjá ungdóminum.

Tey ungu sakna ein ungdómsklubba, har tey kunnu hittast um kvøldið, og ein genta sigur: „um eg skuldi avgjørt, hvat ið skuldi verið gjørt fyri at fáa Vágsbygd at verða eitt betri stað at liva, so haldi eg, at eg hevði gjørt ymist fyri ungdómin. Mær hevði dámt betur her í bygdini, um vit høvdu skipað fyri einum ungdómsklubba, har man hitti onnur ung fólk..." (Bjørndal og Aarsæther 2000).

Virðir og áskoðan um samfelagið

Granskingarfrágreiðingin *De unges livssyn i Vestnorden* frá 2000 (Jónsson et al), útgivin á Háskóla Íslands, samanber ung úr Íslandi, Grønlandi og Føroyum, við fokus á virðir og áskoðanir teirra um samfeløgini, tey liva í. Úr Føroyum luttóku 120 persónar við miðalaldri áljóðandi 18,5 ár; tveir triðingar vóru úr Havn.

Tann føroyski ungdómurin svarar, av fýra valmøguleikum, at „búskaparligur vøkstur" er mest týðandi stevnumið landsins komandi tíggju árini. Verjan (hernaðarlig) hevur rættiliga lága raðfesting í Føroyum, minni enn fimm prosent halda tað mest týðandi stevnumiðið vera at syrgja fyri eini sterkari verju av landinum.

Talva 10. Mest týðandi stevnumið landsins fyri komandi tíggju ára skeið (%)

	Føroyar	Ísland	Grønland
at varðveita búskaparligan vøkstur	70,7	40,7	68,5
at lata fólk fáa størri ávirkan á arbeiðsplássinum og í lokalum spurningum	17,1	46,3	14,8
at gera býin og landið vakrari	7,3	5,2	13
at syrgja fyri at landið hevur sterka verju	4,9	7,8	3,7

kelda: Jónsson et al 2000

Tey ungu fáa síðan sama spurning aftur, men við fýra nýggjum svarmøguleikum, og eisini her leggur føroyski ungdómurin dent á búskaparligu framtíðini hjá landinum. Heili 62 prosent meina, at man í nærmastu framtíð eigur at fáa búskapin í fasta legu, meðan stríðið ímóti brotsverkum av tíggju prosentum verður sæð sum mest týðandi stevnumiðið fyri komandi tíðunum. Tað er ikki av tilvild, at búskaparstøðan stendur sera frammaliga í tonkunum hjá tí føroyska ungdóminum, tá hugsað verður um, at kanningin varð gjørd fá ár eftir búskaparkreppuna í Føroyum. Ongin ynskir seg aftur til ringu tíðirnar fyrst í nítiárunum.

Talva 11. Mest týðandi stevnumið landsins fyri komandi tíggju ára skeið (%)

	Føroyar	Ísland	Grønland
at fáa búskapin í fasta legu	62,6	42,9	57,9
at stríðast ímóti brotsverkum	9,9	22,9	17,5
at arbeiða fyri einum samfelagi, har idéir / hava størri týdning enn pengar	12,1	15,3	15,8
at arbeiða fyri einum minni ópersónligum – og meira menniskjansligum samfelagi	15,4	18,9	8,8

kelda: Jónsson et al 2000

Tey ungu hava sum heild stóra virðing fyri fólkakirkjuni í Føroyum. Kirkjan er týðandi partur av mentanarliga samleikanum hjá nógvum, kanska mest á bygd, og 25 prosent av ungdóminum í Føroyum sigur seg hava „sera stórt álit“ á fólkakirkjuni. Tilsvarandi tøl fyri Ísland og Grønland eru ávikavist 12,5 og tíggju prosent. Føroyingar hava eisini lutfalsliga stórt álit á øðrum almennum stovnum; til dømis hava 60 prosent „sera stórt álit“ ella „stórt álit“ á løgregluni. Løgtingið er nakað lægri í metum hjá ungdóminum; bara ein triðingur hevur „sera stórt“ ella „stórt“ álit á Løgtinginum.

Tað kemur kanska ikki heilt óvart á nakran, tá hugsað verður um tær mongu atfinningarnar, sum vórðu vendar ímóti politikarum landsins fyri leiklut teirra í búskaparkreppuni, og bankagøluna, ið skapti álvarsama tvístøðu ímillum Føroyar og Danmark.

Talva 12. Føroyar: Hevur tú álit á statsmaktini? (%)

	sera stórt	stórt	minni	als ikki
Fólkakirkjan	25,9	38	22,2	13,9
Skúlaskipanin	4,6	51,4	37,6	6,4
Rættarskipanin	12,8	47,7	32,1	7,3
Løgreglan	13,1	46,7	33,6	6,5
Løgtingið	4,8	35,2	47,6	12,4

kelda: Jónsson et al 2000

Áskoðanirnar um hjúnabandið sum stovn eru rættiliga ymiskar í hesum trimum oyggjasamfeløgum í útnorðri. Tað er stórur munir á meiningunum um, hvørjar fortreytir eru tær mest týðandi fyri at fáa eitt gott og eydnuríkt hjúnaband í lag. Familjusambondini eru sum heild rættiliga sterk og tann mentanarligi samleikin hjá ungdóminum verður fyrst og fremst skaptur av familjuni og lokalsamfelagnum. Meira enn 90 prosent av ungdóminum svarar, at trúskapur er „sera týðandi“ fyri at fáa eitt eydnuríkt hjúnaband. Nevnast kann her, at „einans“ 73 prosent av ungu grønlendingunum eru samdir í hesum pástandi. Ein lutfalsliga stór inntøka er ikki „sera týðandi“ fyri føroyingar samanborið við grannalondini vestanfyri. Ung gift pør í Føroyum liva ofta við stórum (kensluligum og búskaparligum) stuðli frá sínum nærmastu – hóast tey gjarna høvdu viljað verið heilt sjálvstøðug.

„Tað er rætt, at stættarhugtakið er trupult og at tað kann vera háfloygt“, sigur søgufrøðingurin Erland V. Joensen (2003: 18), „men tað er ikki óhóskandi, tí at munir eru eisini á fólki í Føroyum og sostatt eisini í Havn...“. Stættarmunir hava ikki tann sama leiklutin í Føroyum sum í størri ídnaðarsamfeløgum í Evropa. Sosialu netverkini hjá einstaklingunum fara tvørtur um øll hugsandi sosiobúskaparlig mørk. Í sosialum netverkum verða fólk knýtt at hvørjum øðrum í sambondum, ið allir partar kenna seg fáa ein ágóða av. Tveir triðingar av teimum ungu í Føroyum siga, at ein bakgrund úr somu sosialu

stætt er „óviðkomandi“ sæð í mun til tað eydnuríka hjúnabandið. Minni enn fýra prosent rokna tað sum sera týðandi fyri hjúnabandið at vera úr somu sosialu stætt.

Talva 13. Føroyar: Hvussu týðandi er hetta fyri eitt eydnuríkt hjúnaband? (%)

	sera	eitt sindur	ikki týðandi
trúskapur	93	7	0
at sýna hvørjum øðrum virðing	86,6	12,5	0,9
tollyndi	82	17	1
stór inntøka	7,1	48,7	44,2
at ikki búgva hjá verforeldrunum	34,5	32,7	32,7
góð íbúðarviðurskifti	20,4	58,4	21,2
gott seksuelt samlív	59,1	35,7	5,2
at hava bakgrund úr somu stætt	3,6	29,7	66,7
at hava sama átrúnaðarliga sannføring	23	41,6	35,4
N 120			

kelda: Jónsson et al 2000

Tey ungu í útnorðri vóru, at døma eftir hesi frágreiðing, sum heild sera væl nøgd við tilveruna, og hava eina sterka trúgv uppá tey samfeløg, sum tey búgva í. Tey eru stolt av heimlandinum og mentanini; samstundis eru tey tó egin og rættiliga atfinnandi viðvíkjandi fleiri av teimum *gomlu* siðbundnu virðunum í mentanini.

Nógv av tí, ið hevur verið lagt fram í hesum kapitli, kann sigast at skapa eitt (samtíðar)søguligt grundarlag, ið mín kanning kannar nærri og roynir at enduskoða, fyri at fáa lýst ungdómin í dag úr fleiri

ymiskum sjónarhornum. Kreppuárini í Føroyum hava, beinleiðis ella óbeinleiðis, rakt allar núlivandi føroyingar, men hjá teimum ungu í dag tykist alt hetta onkursvegnað longu gamalt og ótíðarhóskandi. Ein stovnur, ið er broyttur sera nógv í seinnu helvt av tjúgundu øld, er føroyska familjan.

[4]

FAMILJA OG BØRN

Foreldur og systkin

Í Tórshavnar kommunu búgva 19.300 fólk, harav 2.100 eru undir sjey ár (2005). Umleið 37 prosent av íbúgvunum eru undir 25 ár. Fólkatalið í Føroyum er 49.000, tað hægsta nakrantíð.

Talva 14. Íbúgvar í Føroyum (2005)

aldur	menn	kvinnur	ialt	%
0-6 ár	2.583	2.396	4.979	(10%)
7-16 ár	3.987	3.794	7.781	(16%)
17-24 ár	2.684	2.298	4.982	(10%)
25-64 ár	12.958	11.254	24.212	(50%)
65– ár	2.936	3.489	6.425	(13%)
Ialt	25.148	23.231	48.379	(100%)

(kelda: Hagstova Føroya)

Familjan hevur altíð verið grundarsteinurin í tí føroyska samfelagnum. Tey sosialu netverkini og bondini spretta í stóran mun úr familjueindini, ið er ein kjarni fyri allari sosialari skipan. Frá gamlari tíð hevur familjan eisini verið tann stovnur, ið hevur staðið við ábyrgdini fyri flestøllum uppgávum, ið nema við likamligu, sálarligu og mentanarligu vælveru og menning barnsins.

Allir næmingarnir í áttandaflokkinum, ið eg kannaði í 2003, hava systkin, flestu teirra eitt ella tvey systkin, tó ein trý og ein fýra systkin. Bara fimm næmingar liva ikki saman við báðum foreldrunum, hesir búgva hjá mammuni, tó møguliga (ógreitt svar) tveir hjá pápanum. Næstan helvtin, níggju næmingar, hevur búð uttanlands, teir flestu í Danmark; ein næmingur hevur búð í Noregi og tveir uttan fyri Norðurlond. Teir flestu av hesum níggju næmingunum hava búð uttanlands fyrstu liviárini (kreppuárini), tó nøkur í sjey-átta og tólv-trettan ára aldri. Hjá øllum er talan um skeið uppá eitt-trý ár í útlondum. Tríggir næmingar hava gingið í skúla uttanlands:

í Danmark, Noregi og Onglandi. Annars hava næstan øll einans gingið á Venjingarskúlanum, tveir næmingar tó eisini í Klaksvík og Kommunuskúlanum (í Havn). Næmingarnir kennast væl og hava sínar nærmastu vinir í flokkinum.

Familjuskipan

Í Føroyum hava vit tað, ið mannfrøðingar kalla eina egosentriska kognatiska familjuskipan (Eriksen 1993); tað merkir, at ættin verður roknað ígjøgnum bæði foreldrini, og at tú sjálvur ert miðdepilin í skipanini. Tú ert við øðrum orðum í ætt við alla familjuna hjá faðir tínum og alla familjuna hjá móður tíni. Um øll ætt tín skal teknast í strikumynd, íkemur ein risastór, avdúkandi og fløkt netskipan, sum (um nóg nágreiniliga verður farið til verka) fatar um næstan øll fólk í landinum. Fólk hugsa ikki dagliga um hetta, tí tað eru bara nøkur fá úr hesi stóru fjøldini, sum tú kennir persónliga og hittir regluliga. At ættarskipanin er egosentrisk merkir eisini, at nógv av teimum tú ert skyldur við, hava eina familju, ið tú sjálvur ikki hoyrir til.

Kognatiskar ættarskipanir eru ógvuliga vanligar í vesturheiminum, har ættin sum heild kann sigast at hava minni (ella øðrvísi) týdning fyri vanlig fólk enn aðrastaðni. Vinir, arbeiðsfelagar, limir í áhugabólkum og onnur, sum hoyra til sosiala netverk títt, avloysa tann partin av familjuni, tú ikki kennir – ella ikki vilt kenna. Nútímans menniskjað, kanska serliga býarmenniskjað, vil sleppa at velja frítt, hvør ið skal vera partur av hennara egna kervi av kenningum og vinum. Eitt slag av einstaklingslyndi (individualismu) hevur loyst einstaklingin frá sterku ættarbondunum.

Familjubond og netverk

Næstan allar føroyskar familjur búgva í egnum privatum sethúsum, hóast, serliga í høvuðsstaðarøkinum, modernaðar íbúðir eisini verða bygdar í dag til tey, ið ikki hava ráð til ella ynskja sær sethús. Kvinnurnar eru virknar á arbeiðsmarknaðinum og kunnu sostatt ikki taka sær av teimum smáu børnunum í arbeiðstíð. Tað eru alt fleiri

børn, ið vaksa upp hjá einum ella hvørgum av foreldrum sínum, og føroyska familjumynstrið í dag er ein samansett og fløkjaslig søga, óansæð um siðbundna myndin av eini familju í javnvág framvegis er *natúrlig* í tonkunum hjá teimum flestu. Eisini eru børn, kanska serliga í høvuðsstaðnum, ið ikki kenna mammusystrar, pápabeiggjar, ommur og onnur skyldfólk serliga væl, hóast tey kanska hittast nakrar ferðir árliga til rundar føðingardagar og veitslur.

Í Føroyum hava vit eina familjuskipan, ið minnir um hana, ið eru í útjaðaraøkjum í Noregi, Danmark og Íslandi. Nógv fólk kenna ikki bara foreldur og systkin síni, men hóp av øðrum skyldfólkum, ið mangan eisini búgva í grannalagnum ella í minsta lagi sama býi ella somu bygd. Ein høvuðsorsøk til at familjurnar halda saman er hin landafrøðiligi nærleikin, sum ger tað møguligt at hittast javnan. Annað, sum ger seg galdandi her, er, at vit í Føroyum samtíðis hava eitt sera framkomið og fjøltáttað samfelag og gomlu bygdamentanina, ið hevur djúpar røtur í fólkinum.

Tað eru tó ikki bara smá og fjarðskotin evropeisk samfeløg, ið hava varðveitt sterku ættarbondini. Í býlingi í East London, Bethnal Green nevndur, er gerandisdagurin als ikki so, sum fólk flest ímynda sær stórbýarlívið. Stórhúskið (tað eru eini trý ella fýra ættarlið, umframt mammusystrar, mammubeiggjar og onnur) hevur sera stóran leiklut í tí sosiala lívinum hjá íbúgvunum í Bethnal Green. Ein kvinna úr býlinginum, sum minnir eitt sindur um føroyska bygd, sigur soleiðis: „Strangers are all right but you prefer your own every time…[and]… all my family gather at Mum's every Saturday afternoon…“ (Young og Willmott 1990: 49-51). Tey ungu á økinum finna saman, giftast, flyta inn í íbúð í somu gøtu sum foreldur hennara ella hansara og vitja foreldrini dag og dagliga. Bethnal Green er ein lítil bygd í stórbýnum, og líknandi dømi eru óivað í øllum stórbýum.

Brúdleyp og børn

Hvussu stóran týdning familjan hevur í Føroyum, sæst, tá ið brúdleyp, barnadópur, fimtiáraføðingardagur, jarðarferð og líknandi hendingar

koma fyri. Fólk úr øllum ættum koma til hátíðarhald í ættini, og oftani hava gestir ferðast ta longu leið úr fremmandum londum fyri at vera við. Eitt brúdleyp við fleiri hundrað gestum er ikki óvanligt í Føroyum, men í grannalondunum á meginlandinum eru brúdleyp í hesari stødd verulig undantøk. Tað er ov dýrt hjá teimum at halda eina slíka stóra veitslu, og familjurnar eru harumframt spjaddar bæði landafrøðiliga og reint mentanarliga.

> *Det moderne bryllup er noget andet end de traditionelle bryllupper, selv om det stadig er samme rite de passage. Det er også en personlig markering. Livets store fest, hvor brud og brudgom sættes i centrum. Bryllup er stadig ikke noget privat anliggende, men en offentlig anliggende, som man ønsker, at andre mennesker skal vide besked om.*
> (Joensen 2003: 12-13)

Av tí at útboðið av íbúðum er sera avmarkað í Føroyum, og húsini eru ov dýr hjá ungum hjúnum at keypa, so er vanligt, at tey nýgiftu búgva heima hjá foreldrunum at øðrum av hjúnunum ta fyrstu tíðina. Eru tey heppin, so er ein kjallaraíbúð, sum tey kunnu leiga í húsinum hjá foreldrunum. Harvið er vanligt, at eini trý ættarlið (um ungu hjúnini hava børn) búgva undir sama taki, og ommur og abbar síggja á tann hátt nógv til ommu- og abbabørnini. Hetta er ein foreinkling, men tað sigur nakað um føroyska samfelagið. Í Danmark flyta tey flestu heimanífrá, tá tey eru umleið átjan ára gomul, annars verður hildið, at teimum bilar okkurt. Tá ið flutt verður í egin hús í Føroyum, so standa húsini ofta beint við barndómsheimið hjá honum ella henni. Sum í Bethnal Green.

Føroyskar gentur fáa børn í yngri aldri enn gentur í grannalondum okkara. Aðrastaðni verður nógv skrivað og tosað um tær avleiðingar, ið tað hevur við sær at fáa barn í sera ungum aldri: spiltar yrkismøguleikar, fíggjarligar útreiðslur, avmarkaða frítíð, at vera bundin o.s.fr. Ein møgulig orsøk til munin á áskoðanini hesum viðvíkjandi millum Føroyar og grannalondini er, at møðurnar at teimum ungu mammunum ofta stuðla børnunum og ommubørnunum, so at tann

unga mamman ikki stendur hjálparleys og einsamøll við sínum pinkubarni. Ofta er familjan hjá pápanum eisini hjálpsom, so at alt lagar seg væl. Nakað annað er, at mótstøðan ímóti fosturtøku sum heild er sterkari í Føroyum enn í grannalondunum, serliga av átrúnaðarligum orsøkum. Tað er eisini ein løgfrøðiligur spurningur, tí lógirnar fyri fosturtøku eru strangari og øðrvísi í Føroyum enn í grannalondunum.

Barnatilvera

Hvussu viðurskiftini millum børn og foreldur eru skipað, veldst nógv um mentanina og samfelagsskipanina, og tey kunnu broytast nógv ígjøgnum tíðina. Í vesturheiminum, einamest í USA, verður uppfostran (*nurturance*) fatað sum nakað, ið hevur samband við kærleika, nærleika og samstarv, í mótsøgn til kappingina og marknaðarkapitalismuna í stórsamfelagnum. Familjan verður sostatt ein súmbolskur mótsetningur til arbeiði. Tað er alt annað enn alheimsligt, tí samfeløgini og lívskorini eru so ymisk í teimum ymsu londunum.

Ættarbond og familja í einum evropeiskum samfelag, har kjarnufamiljan er tann (almenna) mentanarliga fyrimyndin hjá fólki, er als ikki bara tryggleiki, kærleiki og hugni innan fyri privata felagsøkið hjá familjuni, ið við veggjum og vindeygum halda tað ópersónliga kapitalistiska samfelagið úti. Í veruleikanum eru sambondini fløktari enn so, og skyldskaparbondini hava ikki alt at siga – heldur ikki í Føroyum.

Umfatandi institutionaliseringina av barnatilveruni fingu vit lutfalsliga seint til Føroya, og tað eru framvegis fólk og bólkar í samfelagnum við sterkari mistrúgv til uppgávurnar og leiklutirnar hjá (útbúnum) barnanámsfrøðingum í modernaða føroyska samfelagnum, tí institutionaliseringin, hevda atfinnandi røddir, ger familjueindina veika og hóttir sterku samfelagstign hennara – ikki minst í mun til barnauppaling. Heim og familja umboða framvegis nøkur av sterkastu súmbolunum fyri samleika og mentan føroyinga (Forchhammer 1998).

Føroyska familjan er rættiliga *demokratisk*, á tann hátt at børn og vaksin, kvinnur og menn, hava sera óformlig og vinarlig bond sínámillum, ið forða fyri sterkum stigskipaðum familjuskipanum. Familjan er ein felagsskapur við næstan javnsettum limum. Børnini eru í nógvum familjum sera frí, tí at laissez-faire áskoðanin viðvíkjandi barnauppaling er lutfalsliga sterk í Føroyum. Fáar avmarkingar verða settar teimum yngstu, og børn luttaka í flestu ítrivunum, sum foreldrini takast við. Børn verða ikki krógvað burtur ella sett til viks í tryggari frástøðu frá vaksnum persónum. Børnini spæla allastaðni og verða sjáldan avbrotin av vaksnum í sínum spæli.

„Tað er jú *bara* børn", verður ofta mælt í verju barnanna ímóti uppíblanding og revsing frá vaksnum. „Tað er jú *bara* barnaspæl", verður viðhvørt sagt, tá bólkar av børnum gera ónáðir ella plága tilvildarlig fólk í grannalagnum. Børn hava sostatt sera leysar teymar og verða hvørki fordømd sum grov og óhøvisk ella forkelað sum kongar og drottningar í familjuni (sokallað *curlingbørn*).

Myndin av børnum broyttist týðiliga eftir at modernaðir elektroniskir miðlar í 1980'árunum komu til landið; miðlarnir vórðu nú ein tann mest ráðandi keldan til kunning í føroyskum heimum. Børn og ung, siga Hauan og Heggli (2002: 10), „are defined as if dictated by nature, the development from infant to adult is seen as a more or less automatic and natural process, but the ideals are of a cultural nature". Almenna fatanin av tí, ið hoyrir barnamentanini til, endurspeglar almennar mentanarligar frymlar og virðir, og er tískil knýtt at serstakari tíð og ávísum konteksti.

Børn eru ikki *bara* børn, „they are also confronted with images that tell them how they should behave and appear as kids" (Hauan og Heggli 2002: 15). Tað, ið sigst vera natúrligt hjá børnum, fyrimyndarliga sæð, verður borið út í modernaðu miðlunum, ið ávirka sjálvsfatan barnsins við sínum sterku handilsligu og politisku raðfestingum. Børn eru sostatt sum (aldurs) ómyndugir og veikir samfelagsborgarar løtt at (mis)brúka í almennum kjaki um heit politisk evni.

Stóra frástøðan millum idealmyndina av familjuni og gerandislívið hjá børnum í Havn órógvar samfelagskjakið og skapar ofta ógreiðar og skeivar metingar í politiska orðaskiftinum um rættindi og tørv barnsins. Tann mátin,vit fara við børnunum, gevur uttanfyristandandi eygleiðarum (granskarar) innlit í samtíðarmentanina. Tað eru, sigur Daun (1982: 51) um Svøríki,

> *numerous ideas and notions about children in our society that can serve as paths towards enhanced insight into our culture, in other words, into concepts which guide people in their reflections about themselves and the world around them.*

Familjan og heimið eru ikki einastu karmarnir í spælinum og gongdini, upplivingunum og royndunum úr gerandisdegnum hjá barninum, hóast familjan sum stovnur framvegis hevur ein lyklaleiklut í samfelagnum. Familjan er ein felagsskapur. Føroyska familjan er tó ikki vorðin modernað individualistisk eind í líka stóran mun sum í fleiri øðrum londum í vesturheiminum. Føroyska familjan er ikki avmarkað til at virka sum „a supportive network like other sorts of networks“ (Mørch og Andersen 2005).

Uttan familju stendur tú rættiliga einsamallur í Føroyum, av tí at sosiala tignin og leikluturin hjá einstaklinginum í stóran mun verða lýst við støði í familjugrundarlagnum og -netverkinum hjá viðkomandi persóni. Uttan familju hevur tú eitt avmarkað formligt stuðulskervi til taks, ið fram til hesi síðstu árini hevði rættiliga lága politiska raðfesting í Føroyum, tí at øll, varð sagt, høvdu eina góða familju at stuðla sær og hjálpa børnunum á ókendu rásini frá barna til vaksnamannatilveruna.

Barnavinarligt samfelag?

Føroyskar kvinnur eru raskast at fáa børn í Norðurlondum fáa vit at vita í fjølmiðlunum. Fleiri ferðir um vikuna skriva bløðini um nýggjastu føroyingarnar, ið síggja dagsins ljós á eini av føðideildunum

í landinum, ella uttanlands. Fleiri børn fáa eisini sína fyrstu mynd prentaða í blaðnum. Vekt og longd barnsins verður altíð skrivað. Ofta standa nøvnini á foreldrunum (ella bara mammuni) og systkjunum, umframt bústaðin, eisini á sera vælumtóktu síðuni í bløðunum. Ættleidd børn úr Bulgaria, Kolumbia og øðrum fjarskotnum londum verða ikki gloymd; tey fáa somu viðferð. Tey verða eisini lýst sum nýggir føroyingar, ið júst eru komin til barnavinarligu oyggjarnar í Norðuratlantshavi. Bløðini hava nágreiniligar listar við yvirliti yvir føðingar, andlát, barnadóp, fermingar, brúdleyp, silvurbrúdleyp o.s.fr.

Familjan verður sjáldan býtt sundur í aldursbólkar við serligum leikluti og ávísari tignarstøðu, líka lítið sum fólk hava verið skipað í sosialar og etniskar bólkar í landinum upp ígjøgnum tíðirnar. Tann sera fría barnatilveran verður av teimum flestu roknað sum nakað gott og sunt í samfelagnum (ein natúrligur partur av føroyskari mentan) og tað skal veruliga ganga galið, áðrenn børnini skulu bøta fyri herverk, stuldur ella líknandi. Tað eru nógvar smáar *Emil í Lønnebergi*-týpur, ið vaksa upp í landinum, kanska serliga á bygd, har lítið er av vandamiklari ferðslu og álvarsomum brotsverkum. Øll kenna hvør annan; øll vita nøkulunda hvat hini fáast við.

Børn og politikkur

Seinastu árini eru børn í alt størri mun komin undir almenna umrøðu, og tey eru nú snúningsdepilin fyri nógv týðandi kjak um sosialar, mentanarligar, útbúgvingarligar og politiskar spurningar í landinum. Eldri stereotypiir um børn hava fingið nýggja styrki, samstundis sum tær eisini eru fyri álopum úr fleiri ættum – frá atfinnandi røddum, serliga ímillum ung sjálvi, men eisini frá barna og ungdómsgranskarum og sosialráðgevum. Børn eru á jaligan og neiligan hátt vorðin partur av almenna kjakinum. Styrkta umrøðan av børnum er ein fylgja av (sein)moderniseringsgongdini í Føroyum;. Tað refleksiva individualiserða samfelagið veksur fram og opnar kjakið í samfelagnum og setir spurnartekin við nógvar eldri siðvenjur og áskoðanir.

Alt fleiri føroysk børn ganga í barnagarði í tvey-sjey-ára aldri, og alt fleiri starvsfólk í føstum starvi á dagstovnum eru námsfrøðingar við føroyskari, danskari ella aðrari útbúgving. Barnagarðarnir eru vorðnir meira modernaðir. Á øllum stigum verður samfelagið institutionaliserað, og harvið veksur eftirspurningurin eftir serfrøðingum munandi. Undirstøðukervið hjá samfelagsstovunum verður moderniserað og harmoniserað.

Í hesum kapitli havi eg lýst familjuna í Føroyum sum partur av grundarlagnum, ið skapar tann ungdóm og tær ungdómsmentanir, ið vit hava í Føroyum í dag. Tær broytingar í familjumynstrinum og í mentanarligu myndini av familjuni, sum vit hava verið vitni til seinastu árini, siga nógv um almenna skiftið úr siðbundnum til seinmodernaðar tíðir. Familjan er sera týðandi faktorur, tá vit lýsa ungdómsmentanir. Ein annar stovnur í samfelagnum, ið eisini hevur sterka ávirkan á mentanarliga samleika ungdómsins, er skúlin.

[5]

SKÚLI OG MENTAN

Í Norðurlondum og Evropa annars verður kjakast dúgliga um leiklutin hjá skúlanum í tí seinmodernaða samfelagnum, har vitan og førleiki ikki longur eru avmarkað til eitt pent prógv frá viðurkendum lærustovni. Í Føroyum hevur almenna kjakið um vánaligu føroysku úrslitini í PISA-kanningini verið lívligt. Lærdómur, praktiskar royndir og breið vitan hava eftirhondini líka nógv við frítíð sum skúla at gera. Sannleikin er tann, óansæð um tað ljóðar keðiligt ella gleðiligt, at tey ungu í dag læra líka nógv uttan fyri skúlagátt sum í skúlastovuni, og tí noyðist skúlin at laga seg til tær nýggju tíðirnar fyri at yvirliva sum lærustovnur og fundament í samfelagnum. Í hesum kapitli royni eg, við egnum nýggjum tilfar og skrivligum keldum, at hyggja nærri at ymiskum viðurskiftum, ið hava ávirkað skúlan í Føroyum. Ætlanin er at vísa hvønn leiklut og status lærustovnar hava í okkara tíð.

[SKÚLIN FYRR OG NÚ]

Søguligt yvirlit

Menningin á skúlaøkinum hevur verið sera stór í Føroyum í tjúgundu øld. Í 1861 varð Færøernes Mellem- og Realskole, vanliga bara nevndur realskúlin, stovnaður, og helt hann til í bygninginum, sum í dag hýsir Gamla bókhandli (H. N. Jacobsens Bókhandil), fram til 1916, tá hann flutti niðan í høli sunnan fyri tann nýggja (gula) kommunuskúlan. Í 1962 varð realskúlin, ið hevði havt sera stóran týdning fyri samfelagið í hundrað ár, lagdur saman við Tórshavnar Kommunuskúla. Nú bar til at taka preliminerprógv á fleiri skúlum í landinum. Læraraskúlin varð stovnaður í 1872, men hevði ikki egin høli fyrr enn í 1968. Nøkur ár frammanundan, í 1962, varð skúlin sjálvstøðugur við egnum lærarum og rektara. Læraraskúlin var partur av Færøernes Mellem- og Realskole ta fyrstu øldina, og talan var tá bara um ta einu og somu útbúgvingina, við lærugreinunum kristni, danskt, landalæra, rokning, skriving, sangur, fimleikur og námsfrøði (Petersen 1994). Føroyskt var fyrstu ferð á tímatalvuni í 1907. Læraraskúlin var, líka til skúlaverkið varð føroyskt, eitt statsseminarium. Síðan 1938 hevur læraraútbúgvingin tikið fýra ár. Læraraskúlin er broyttur nógv, tillagaður samfelagsstøðuni, og verður júst nú, í 2006-2007, aftur umskipaður.

Føroyingar við donskum prógvi hava altíð verið í skúlaverkinum í landinum. Læraraskúlin skuldi undirvísa framtíðarlærarum til bygdaskúlarnar. Lærarin fekk ein stóran leiklut í bygdasamfelagnum, og við starvinum sum lærari fylgdi mangan deknastarvið. Nógvir lærarar vóru haraftrat urguspælarar í kirkjum á bygd. Lærarin setti við øðrum orðum ofta dám á bygdina alla.

Realskúlin var einasti lærustovnur av sínum slag fram til 1923, tá ið Suðuroyggin fekk ein fyrsta og annan millumskúlaflokk. Tvey ár seinni, í 1925, kundu fyrstu næmingarnir so taka Almindelig Forberedelseseksamen (preliminerprógv) í Suðuroy. Klaksvík, ið líkasum Suðuroy, var øki í stórari búskaparligari menning, fekk millum- og realskúla í 1935. Í 1937 stovnaði løgtingið tveyára studentaskeið. Síðan hendi ikki meira á skúlaøkinum fyrr enn eftir seinna veraldarbardaga.

Fleiri nýggir framhaldsskúlar komu eftir krígslok á bygd, fyrst í Vestmanna, hóast myndugleikarnir upprunaliga høvdu ætlað at savna alt saman í høvuðsstaðnum. Aftaná Vestmanna komu Fuglafjørður og Glyvrar, síðan eisini Sørvágur og Miðvágur/Sandavágur, har ung kundu fáa real- ella preliminerprógv. Nýggja skipanin frá 1962 skipaði framhaldsskúlan eftir tveimum rásum – har ein førdi til realprógv og hin gav møguleikan at ganga í áttanda, níggjunda og tíggjunda flokk. Í 1979 varð skipanin broytt, so at realskúlin fall burtur. Í 1971 vóru fjúrtan framhaldsskúlar í landinum; í dag kunnu meira enn 90 prosent av teimum ungu fara í framhaldsdeildina uttan at noyðast at flyta heimanífrá. Gongdin hevur skapt nýggjar møguleikar, viðvíkjandi lívsleið og lívsstíli, hjá teimum ungu, ið búgva á smáplássum og útjaðaranum sum heild (Petersen 1994).

Háskúlarørslan

Skúlin er ein natúrligur hornasteinur í menningini av einum framkomnum samfelagi og í mentanarligu framtíðarraðfestingum landsins. Stórar politiskar ósemjur hava havt samband við gongdina í útbúgvingarpolitikkinum í landinum. Í grein í bókini *Føroyski skúlin* stendur m.a.:

Nú eru aðrar tíðir í Føroyum, enn táið hin gamli latínskúlin var á lívi, landið er ríkari, lívið bjóðar størri mál, fólkið er nógv meira, tað hevur hug at koma sær framá og vinna sær kunnleika, hevur kent seg sjálvt sum ein tjóðflokk og hevur sett sær høg tjóðskaparlig mið, so tað er eyðvitað, at fólkið má eiga sær góðar, lærdar og andliga sjálvbjargnar menn. Men vegurin er langur og kostingarsamur fyri flest øllum at fara út til Danmarkar heilt á ungum aldri, og er tað ofta so skikkað, at mangir av teim, ið út fara á ungum døgum teirra, ikki hava lært Føroyar at kenna og eru ikki góðir føroyingar, táið teir heiman fara, og verða tað ikki altíð seinri til fulnar.

(Nielsen 1998: 151)

Føroya Fólkaháskúli verður mangan settur í samband við tjóðskaparrørsluna og landspolitikkin. Háskúlin frá 1899, sum Símun av Skarði og Rasmus Rasmussen stovnaðu og róku í Klaksvík og Føgrulíð á Borðoynni, áðrenn hann í 1909 flutti til Havnar, hevur havt sera stóran týdning fyri alt mentanarlív í Føroyum í tjúgundu øld. Háskúlin var í mong ár hin einasti, ið bjóðaði undirvísing á føroyskum máli. Tær fyrstu fullfíggjaðu føroysku gudstænasturnar vóru hildnar á skúlanum við Jákupi Dahl, seinni próstur, sunnudagar (Petersen 1994). Nógv ung, eisini úr øðrum skúlum og felagsskapum, savnaðust á Háskúlanum í Havn – til dømis læraraskúlanæmingar og ung úr tí virkna ungmannafelagnum Merkinum.

Nýggjar útbúgvingar

Við tvey-ára studentaskeiðnum, stovnað í 1937, opnaðist møguleikin fyri at fyrireika hægri lestur í heimlandinum, men tey fyrstu árini varð einans nýmálsligt prógv boðið út. Støddfrøðiligt/náttúruvísindaligt studentsprógv fingu vit ikki fyrr enn í 1947. Skeiðið varð longt, úr tveimum upp á trý ár í 1959, og í 1962 varð skeiðið lýst sum studentaskúli (gymnasium), ið flutti niðan í Hoydalar. Tað stóra talið av studentum kom ikki fyrr enn nú, í seinnu helvt av sekstiárunum, og í 1973 fingu vit eisini HF-prógvið, ið var eitt alternativ til tað vanliga studentsprógvið. Í 1974 vórðu, eftir breiðum politiskum ynski, fleiri HF-skeið stovnað uttan fyri høvuðsstaðin: í Klaksvík og Suðuroy. Í

1980 varð eisini møguligt at taka HF-skeið við Gøtugjógv. Og tvey ár seinni, í 1982, fingu vit nýggjan studentaskúla í Gøtugjógv: Eysturoyar Studentaskúli og HF-skeið. Í dag liggur hesin skúlin í Kambsdali. Nú ber eisini til at taka students- og HF-prógv í Suðuroynni.

Skiparaútbúgving varð stovnað í Føroyum í 1892, eftir at skip landsins í longri tíð høvdu verið mannað við fólki við siglingarroyndum, tó í flestu førum uttan nakra formliga útbúgving (Petersen 1994). Royndir skiparar settu sjálvir skúlan ígongd, fyrst sum privatskúla á vetri, har ungir menn kundu taka skiparaprógv. Í 1906 royndu nakrar eldsálir at seta stýrimansskúla á stovn, men tíverri vardi ævintýrið bara í trý ár. Í 1962 varð nýggjur stásiligur sjómansskúli bygdur. Tórshavnar navigatiónsskúli varð stovnaður í 1928. Føroya Maskinmeistaraskúli, ið hevur útbúgvið bæði maskinmeistarar og maskinistar, fekk í 1966 egin høli og er í dag skipaður sum ein savnaður stovnur saman við Føroya Sjómansskúla. Klaksvík fekk eftir seinna veraldarbardaga egnan skiparaskúla.

Sjúkrasystrarnar hava kunnað tikið útbúgvingina hjá sær í Føroyum síðan 1960, tó skuldi partur av skeiðnum takast í Danmark líka fram til 1976, tá Sjúkrasystraskúlin megnaði at standa fyri allari útbúgvingini. Skúlin hevur verið í stórari menning síðan sjeytiárini, og síðan 2005 hevur Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya, sum hann nú eitur, status sum hægri útbúgvingarstovnur, ið gevur bachelorprógv.

Fyrst í 1930'num komu handilsskúlar og tekniskir skúlar, skipaðir sum kvøldskúlar, til fleiri størri bygdir. Teknisku skúlarnir vóru ætlaðir handverkara lærlingum og handilsskúlarnir teimum, ið ætlaðu at arbeiða í handlum. Í 1949 varð møguligt at taka serligt handilsprógv – handelsmedhjælpereksamen við ella uttan fremmandamál. Síðan 1960 hava bara Tórshavn og Klaksvík tekniskar skúlar í landinum; er lærugreinin hjá einum lærlingi í Føroyum ikki umboðað á einum av teimum teknisku skúlunum, so noyðist viðkomandi at fara leiðina til Danmarkar ella annað land.

Føroya Handilsskúli verður stovnaður sum yvirskipaður stovnur

í 1967, við høvuðsdeild í Havn og deild á Kambsdali. Skúlin er í stórari menning og spælir ein týðandi leiklut í nútíðarsamfelagnum. Landsstýrismaðurin við mentamálum hevur ætlanir um at leggja Fróðskaparsetrið, Sjúkrarøktarskúla Føroya og Føroya Læraraskúla saman í ein lærdan háskúla ella eitt nýskipað fróðskaparsetur (Joensen 2006: 230).

Skúli og menning

Skúlin kann síggjast sum eitt serligt tilfeingi, ið kann vera við til at menna lokalsamfelagið, ikki minst í útjaðaraøkjum og at skapa eitt gott samstarv og eina heild millum ættarliðini (Hovgaard 1998: 264). Fólkaskúlin hevur stóran týdning í menningini av einstaklingum í tí modernaða samfelagnum, samstundis sum krøvini til skúlan gerast størri í einum samfelagi í skjótari menning og broyting. Skúlin hevur ikki altíð verið nakað, ið øll høvdu atgongd til ella enntá sóu nakra nyttu í.

> *Formliga kravið til skúlagongd hevur [í tríatiárunum] enn havt lítið at siga fyri stóran part av unga ættarliðnum, men praktiska lívið í bygdini hevur verið avgerandi tátturin. Betri útbúgvingar vóru aloftast nær tengdar at praktiska lívinum í bygdunum: fiskiskipara- og stýrmansprógv, sjómansskúli og kokkaskeið. Annars var sjálvandi okkurt skrivstovuarbeiði, sum gjarna fall til onkran ungan, ið var hildin hava serligar gávur [...] Hægri teoretiskur lesnaður var bara untur teimum heilt fáu.*
> *(Hovgaard 1998: 251)*

Í Føroyum eru 58 fólkaskúlar, nógvir teirra rættiliga smáir bygdaskúlar. Nítjan skúlar hava bara *ein* lærara og 40 skúlar hava færri enn tíggju lærarar (Kjølbro 2006: 10). Einans fjúrtan skúlar hava fleiri enn tjúgu lærarar. Átjan framhaldsdeildir eru. Í øllum landinum eru umleið 7.700 næmingar og 620 lærarar í fólkaskúlanum. „Fakligu atlitini tala fyri“, sigur Jan Mortensen (stjóri í Vinnuhúsinum), „at næmingar fara úr lítla bygdaskúlanum í størri skúla frá 6. flokki“ (Kjølbro 2006: 8). Hann meinar, saman við hinum limunum í strategibólkinum, ið

hevur skrivað frágreiðing um *útbúgving í Føroyum*, at skúlarnir eru ov nógvir og smáir sum nú er.

Á Frælsinum í Havn varð ein stórur skúlabygningur reistur og tikin í nýtslu í 1968, Venjingarskúlin, og síðan vígdur á hvítusunnu 1969. Málið var at skapa ein skúla, ið var bygdur saman við tí nýggja læraraskúlanum, so at næmingar læraraskúlans kundu sleppa at royna seg í starvsvenijing (www skulin.fo/ven). Ytri skúli, har fyrstu og annar flokkarnir halda til, og Heimari skúli, har tíggjundi flokkur heldur til, hoyra til Venjingarskúlan, hóast teir ikki liggja á somu gøtu. Venjingarskúlin arbeiðir, sambært upplýsingum á heimasíðuni (www skulin.fo/ven), miðvíst fyri:

- mennandi innskúling
- at einstaki næmingurin fær ment síni skapandi og praktisku evni
- at okkara næmingar menna síni evni at arbeiða og hugsa sjálvstøðugt
- góðum samstarvi millum heim og skúla

Skúlin hevði at byrja við 530 næmingar, men seinastu mongu árini hava teir tó verið beint undir 500. Skúlin hevur 21 flokkar og 41 lærarar.

Útbúgving og lærdómur

Skúlarnir eru í skiftistíð, tí tann mentanarligi og sosiali kapitalurin, ið er neyðugur fyri at tryggja sær eina góða framtíð, broytist støðugt, mennist og fæst úr nógvum ymsum kontekstum, ið onki beinleiðis samband hava við skúlarnar. Skúlarnir eru eisini í harðari kapping við privat skeið og opin kjakforum fyri servitan innan alskyns áhugamál. Her er talan serliga um miðnámsskúlar og hægri lærustovnar, tí tey yngstu eru ikki før fyri sjálvi at søkja sær vitan uttan fyri skúlagátt.

> *The present crisis in public education is evident and no longer denied by politicians, educationalists and researchers. All studies, whether right- or left-wing, whether educational [...],*

> *cognitive-psychological [...], sociocultural [...], sociological [...], or assessmentoriented such as the international PISA study (OECD 2001), have come to the basic conclusion that education needs to be updated in order to serve the demands of society as well as individuals.*
> *(du Bois-Reymond 2004)*

Samstundis sum nógv børn og ung, ið eg havi prátað við, siga seg læra sera nógv ímillum vinir og í skipaðum frítíðarvirksemi og keða seg illa í skúlanum, so førir búskaparliga globaliseringin kring allan heim til hægri politiska raðfesting av útbúgving og gransking. Øll lond vilja vera fremst við at hava ta mest dugnaligu arbeiðsmegina og hitt mest framkomna granskingarumhvørvið; men spurningur er, hvussu ein skal útbúgva tey ungu fyri at fáa tey bestu úrslitini hesum viðvíkjandi. Svarið er ikki einfalt – hóast lærarar kanska halda tað. Í ES verður gjørt nógv burtur úr ikki-formligari útbúgving:

> *The European Union's recent interest in formal – but even more so in nonformal – education and learning must be seen in direct relationship with intensified economic competition on a world scale. This economic preoccupation is precisely the reason for the ambiguities in the muchused concepts in the European documents and discourses on 'nonformal learning/education' and 'knowledgebased society'.*
> *(du Bois-Reymond 2004)*

Tey ungu, eg havi tosað við, ið keða seg illa í skúlanum, eru kanska taparar innan skúlagátt, men ofta vinnarar aðrastaðni, og hesi høvdu kanska fingið góð prógv, um skúlin ikki var so afturhaldandi sum hann er. Individualiseringsgongdin í samfelagnum ger eisini, at tey ungu í vaksandi mun sjálvi skulu velja, hvar og hvat tey ynskja at læra. Avbjóðingin hjá almennu lærustovnunum má vera at finna útav, hvussu ein kann motivera næmingarnar. Næmingarnir eru ikki nakar trupulleiki í sær sjálvum. Skipanin er knúturin, ið má loysast upp.

> *People do not only learn in schools. This is not new wisdom, but it has gained increased attention in recent decades. Education is now seen as dynamic learning processes which take place at work and in daily life situations as well as in traditional educational institutions (Engestrom 1994, Rogoff 1990) and leisure activities, new technology and mass media have been defined as 'new learning environments' or 'new learning arenas' for modern children and adolelescents.*
> *(Bjarnadóttir 2004)*

Føroyski skúlin kann, um hann megnar at endurnýggja seg, fáa eins stóran leiklut í framtíðini sum í tjúgundu øld. Tað krevur, at hann fer at læra børn og ung tað, ið krevst fyri at klára seg sosialt, mentanarliga og búskaparliga í einum seinmodernaðum samfelagi í einum heimi við alsamt harðari kapping. Fyri at skapa hendan skúlan er neyðugt at hava djúptøkna vitan um børn og ung, tí tað eru tey, ið skulu ígjøgnum skúlaskipanina og síðani út í arbeiðslívið. Hvat verður lært hvar? Og hvønn týdning hevur lærdómurin fyri førleikar og dugnaskap? Hvar mennast tey ungu?

> *It is known that children and adolescents learn in groups inside and outside schools. Educational goals in many western schools have changed; pupils are now supposed to learn social skills and life skills, i.e. to master the problems of daily life as well as traditional school subjects, which means that the elements of socialization and personal development in the concept of learning have become visible in the curriculum and in the educational discourse.*
> *(op cit)*

Hugtakið førleiki (*competence*) kemur ofta framum vitan ella dugnaskap og hegni, tá tosað verður um útbúgving í okkara tíð. Førleiki verður brúkt um vitan ella dugnaskap, ið kann síggjast og metast. Men haraftrat verður førleiki mangan brúkt um teir innaru

eginleikarnar hjá persónum, tað vil siga um førleikar, ið persónurin sigur seg eiga, uttan at onnur neyðturviliga kunnu eygleiða hesar. Førleiki sigur nakað um, hvat tú ert førur fyri at gera. Førleiki er at megna at brúka vitan ella dugnaskap til at gera nakað, ið ein serlig støða krevur av tær. Sambært danska ungdómsgranskaranum Sven Mørch (2005) vísir førleikin til tað, ið fólk eru (ella eiga at vera) før fyri at gera í tí modernaða heiminum.

Førleiki er nakað tú sjálvur ert við til at lýsa og skapa, og hevur sostatt bæði við útbúgving í og uttan fyri skúla at gera. Hugtakið kann brúkast til nógv meira enn reinan vitanarførleika og hevur samband við tað refleksiva samleikaarbeiðið hjá ungdóminum í tí seinmodernaða samfelagnum. Eitt er førleiki, annað er potentiali; og tað er neyðug at hava bæði. Tey ungu skulu ikki bara finna útav, hvør tey eru; tey skulu finna útav, hvussu tey vilja vera.

> *Hey hey…Eg eiti [Kára] og eg eri 14 ár. Eg gangi í 8.A á Venjingarskúlanum. Í míni frítíð gangi eg til fimleik, men tað er bert um veturin. Eg eri eisini við í ungdómskórinum hjá Ebenezer, har gangi eg eisini á møti. Mær dámar eisini sera væl at tekna, og eg vil kanska eisini vera klædnadesignari, eg havi teknað onkrar myndir í hesi bókini [bók, ið eg gav næmingunum]. Í frítíðini eri eg eisini nógv saman við vinum, bæði vinum í flokkinum og uttan fyri mín flokk. Annars veit eg ikki nógv meira at skriva.*
> *(genta í áttandaflokki, Havn 2003)*

Í mínum granskingararbeiði hava eg klárt sæð, at avbjóðingarnar, sum tey ungu skulu taka støðu til, eru meira fløkjasligar enn nakrantíð, og kenslan av at hepnast væl ella miseydnast fullkomiliga verður ávirkað av hópin av viðurskiftum, ið hava m.a. við sosialar,

sálarligar, mentanarligar og vitanarførleikar at gera. Hvat fyri førleiki, ið er áhugaverdur og neyðugur, er haraftrat nakað, ið er knýtt at kontekstinum, ein hyggur at. Umstøðurnar avgera, hvat fyri vitan ella førleika hjálpa tær fram. Tað er, havi eg sæð á skúlum og øðrum stovnum í Føroyum, týðandi at duga at umstilla seg skjótt, seta seg smidliga inn í nýggj viðurskifti, og at samskifta við ókend fólk, ið eisini áhaldandi skulu umstilla seg til nýggjar umstøður.

Tíverri eru – havi eg sæð í mínum samrøðum í skúlum – nógv ung, ið stríðast við ymsar persónligar trupulleikar, roknað sum óegnað, tí tey ikki megna at fylgja við í stranga skúlanum, hóast tey hava ríkt tilfeingi, ið kann opna dyr fyri teimum í óformligari útbúgving, har pláss er fyri teimum *veiku* ella skapandi persónunum. Tað vísir seg eisini sambært evropeiskum kanningum (du Bois-Reymond 2004), at nógv av teimum, ið skapa nakað nýtt og øðrvísi, sonevndir *trendsetarar*, hava havt ringar royndir við tí formliga skúlanum, tí hann hevur verið ov avmarkandi. Tað eru hesi fólk, ið øll vilja hava í tí seinmodernaða samfelagnum, har kappingin er hørð og altjóða, og har *nýhugsan* er sterkari virði enn sterka gamla vitanin. Hesi fólkini hava ein øðrvísi *learning habitus*, ið er ávirkaður av útbúgving innan og uttan fyri skúlagáttina.

Tað *góða* framkomna samfelagið hevur ikki bara brúk fyri einum góðum skúla. Tað hevur eisini brúk fyri øllum teimum, ið læra aðrastaðni enn í skúlastovuni. Og tí skal ein ikki gloyma at hyggja at teimum *óformligu skúlunum*, ið eru í fjølmiðlum, frítíðarvirksemi, felagsskapum o.s.fr., tá ein tosar um førleika og menning. Útbúgving fer fram allastaðni. Skúlin kann tryggja sær eina framtíð við at taka eitt stórt fet úr tí gamla ídnaðarsamfelagnum og tjóðarbyggingini og til tað seinmodernaða vitanarsamfelagið, ið langt síðani er komið til oyggjarnar.

Talva 15.
Hví dámar tær ella dámar tær ikki at ganga í skúla?
- Eg haldi at...
skúlin er góður, tí vinirnir eru har
undirvísingin er ov løtt ella torfør
innandura umhvørvið og innbúgvið er slitið og ósunt
onki er at gera í fríkortérinum
fá ella ongi valfak eru
ov nógv skúlating eru
skúlin byrjar ov tíðliga um morgunin
lærararnir eru gamaldags og gera mismun
karakterir eru órættvísir
10. flokkur er eitt spillár
tað er gott at hava verkætlan

(Álit um Ung 2006)

Skúlagongdin

Úr feltarbeiðinum: eitt sindur áðrenn klokkan átta á morgni fyllist skúlin við børnum og ungdómum, ið skulu hava tíma, dagsins fyrsta, í einum av teimum mongu skúlastovunum, ið hesin stóri skúlin í vesturbýnum í Havn hevur. Tey yngstu larma illa, dreingirnir renna í gongini, gera seg upp fyri gentunum, og savnast í smáum bólkum, at práta um, hvat ið kvøldið í gjár fór til, og hvat dagurin, ið júst er byrjaður, man fara at bjóða. Nøkur teirra síggjast bara í skúlanum, meðan onnur eisini hittast í frítíðini. Síðan koma lærararnir við lyklum sínum og opna hurðarnar; næmingarnir hvørva skjótt inn í stovur sínar. Nøkur koma tó darlandi aftaná, eitt sindur seinkað av einhvørjari orsøk og sníkja seg spakuliga inn í stovurnar, har floksfelagarnir longu sita í andakt og lurta eftir læraranum. Taskur verða opnaðar og bøkur og skriviblokkar koma á borðið.

Hvat skal eg so gera við teimum í morgun? Stúri eitt sindur, tí eg væl veit, at eg havi trupulleikar við hesum næmingunum, ella rættari við mínum sambandi við næmingarnar í einari undirvísingarstøðu.

Løgið, tí tá eg hitti hesar næmingar í øðrum høpi, sum garðvakt, í matarsteðgi og uttan fyri skúlatíð, er eingin trupulleiki yvirhøvur við sambandinum. Og eg, sum nettupp skuldi verið útbúgvin at greiða mína undirvísingarskyldu fyrst og fremst.
(fólkaskúlalærari, 2007)

Týski námsfrøðingurin Thomas Ziehe (1983: 254) vil hava kenslurnar inn í skúlan: „det at man tillader, iagttager og udlever følelser – det være sig følelser af glæde, sorg eller angst – disse læremål er elimineret fra de 'sædvanlige' læreprocesser". Lærdómurin hevur nógvar keldur, kanska serliga í okkara tíð, nú modernaðu loftmiðlarnir eru partur av gerandisdegnum hjá ungum og vaksnum í øllum landslutum, og vert er at hugsa um *usædvanlige læreprocesser* (Ziehe) tá skúlaskipanin verður umrødd. Hvørjar karakterir geva næmingarnir skúlanum, kundi eisini verði spurt. At geva karakterir er lættasta uppgávan, at hjálpa og menna børnini, so ongin verður gloymdur, er størsta uppgávan.

Ein stórur partur av føroyska ungdóminum fer uttanlands til hægri lestur eftir at hava lokið miðnámsskúlaprógv. Útisetarnir hava í fleiri ættarlið verið ein heilt serligur bólkur av føroyskum ungdómum, ið hevur eitt ríkt mentanarligt felagslív lestrarárini. Bólkurin er eisini sera áhugaverdur tá hugsað verður um mentan, samleika og framtíðarvisjónir føroyinga.

[LESANDI Í DANMARK]

Heitið *lesandi* verður nýtt um sera nógv ymisk fólk, tað veldst um kontekstin. Ikki lætt at eintýðugt siga hvør, ið skal kallast lesandi og hvør ikki. Hetta er sum so eisini ein óneyðug uppgáva. Eg fari nú at royna lýsa nøkur høvuðseyðkenni fyri tilveruna sum útiseti og lesandi við støði í egnum royndum og kanningum: hvat fyri lívsstíl ella lutmentan hava tey lesandi? Eg havi sjálvur verið partur av hesum umhvørvi árini 1996-99 og styttri tíðarskeið eftir ár 2000.

Kategoriin *lesandi* er so fjøllbroytt, at hon í sær sjálvum ikki sigur serliga nógv um fólkini, hon fevnir um. Eg havi føroysk lesandi í Keypmannahavn sum grundarlag fyri tekstin, og eg skipi tey í fýra undirbólkar útfrá lívsstíli. Bólkarnir útihýsa ikki hvør annan, so tað ber saktans til at hoyra til fleiri, hóast lesandi altíð, eftir mínari meting, hoyra mest heima í einum av bólkunum. Tað er møguligt at onkur lesandi ikki kennir seg hava tilknýti til nakra av mínum kategorium, og tað er helst, tí at viðkomandi persónur ikki er ungdómur longur ella tekur eina útbúgving, ið ikki er bóklig. Við hesum er sagt, hvørjar avmarkingar eg seti viðvíkjandi *lesandi* í hesum teksti.

Skiftistíð í lívinum

Lesandi standa í truplari millumstøðu (liminalfasu) ímillum tvær samfelagspositiónir. Lesandi eru hvørki vanlig arbeiðsfólk ella skúlanæmingar, hvørki vaksin ella børn. Føroyingar í Danmark eru hvørki heima ella úti í tí fremmanda.

Tað ber til at nýta hugtakið *rite de passage* um menningina, ið lesandi gjøgnumliva. Ein skiftisrita hevur tríggjar partar: [1] Separatión – [2] Transitión/Liminal – [3] Inkorporatión. Undir útbúgving er ein í liminalfasuni: uttan fyri etablerða samfelagið, ella á markinum millum tvær kategoriir fyri status og position í samfelagnum. Fólkalívsfrøðingurin Arnold van Gennep (1960) hevur skrivað kent verk um *rites de passage*, har han lýsir súmbolska týdningin, hesi ritual

hava fyri samfelagið. Hóast *rites de passage* ikki eru serliga týðilig og vældefinerað í Evropa samanborið við siðbundin samfeløg, so meini eg avgjørt, at lesandi kunnu sigast at uppliva skiftistíð av líknandi slag.

Inkorporatiónin (aftur til samfelagið) hendir súmbolskt, tá prógvið verður handað, og ein er klárur at fara út á arbeiðsmarknaðin at finna sítt pláss og vinna pening o.s.fr. Stutt sagt skal ein nú liva upp til krøv, ella í minsta lagi ynski, samfelagsins. Liminalfasan í *rites de passage* er (súmbolskt) sera vandamikil, tí her stendur persónurin á markinum millum tvær kategoriir og kann sostatt ikki klassifiserast sum onnur í samfelagnum. Tað er ikki fyrr enn ein er komin ígjøgnum (súmbolsku) inkorporatiónina, at ein aftur stendur trygt innan fyri samfelagskarmarnar (Gennep 1960).

At vera lesandi er eisini ein samleiki, og í ávísum kontekstum er samleikin sum *lesandi* sera týðandi fyri teg. Samleikin hjá øllum er bygdur upp í stigum, ið hvør sær hevur relevans í ávísum konteksti. Tú kann til dømis vera vágbingur, føroyingur, sonur, maður, málmaður í fótbólti og lesandi – alt hetta, og meira aftrat, er við til at skapa tín samleika, men tú nýtir ikki øll heitini í senn.

Føroyska bygdin í Danmark

Nógvir føroyingar, ið lesa í Danmark, nýta nógva tíð og orku til at luttaka í tiltøkum ið hava við heimlandið at gera. Í Keypmannahavn, ið er bústaðurin hjá meira enn 10.000 føroyingum (fólk við tilknýti til Føroyar), eru sera nógv tilboð til tann, ið hevur hug at koma saman við landsmonnum. Føroyahúsið kenna øll, og tað kann sigast at vera ein miðdepil fyri nógv av tí, ið hendir í *føroysku bygdini*. Umframt Føroyahúsið og tey mongu sjálvstøðugu feløgini (fyri átrúnað, ítrótt, dans o.s.fr.) so hava tey, ið eru virkin í føroysku bygdini, stór sosial netverk, ið umfata allar føroyingar, sum tey hava samband við.

Stereotypiin fyri hin lesandi í hesum bólkinum býr á Øresundskollegiet, hevur nógv føroysk vinfólk á kollegiinum, lesur føroysku bløðini, gongur á Skarv, og vitjar annars Føroyahúsið, tá veitslur eru har.

Hetta rokni eg sum ein lívsstíl, tí tað er týdningarmikið fyri hesi fólk at royna at liva, sum um tey vóru stødd heima í Føroyum – eins og nógv onnur innflytarasamfeløg gera í Keypmannahavn og øðrum evropeiskum býum. Orðið *ghetto* verður ofta nýtt at lýsa sovorðnar tættknýttar bólkar, har ið fólkini búgva og liva tætt upp at hvør øðrum. Mær dámar ikki hugtakið, tí tað hevur ein neiligan dám, nakað eitt slíkt samfelag (*community*) ikki hevur uppiborið, tí tað hevur í veruleikanum eins nógvar jaligar síður. Tað gevur einstaklinginum eina kenslu av tryggleika at halda saman við teimum, sum ein kennir seg knýttan at. Um føroyingar í Danmark hevur Sigurð Joensen sagt:

> *Tað er so mangt, sum best eydnast okkum í felagsskapi. Í stuttum sagt, eydnast tað okkum best í felagsskapi at varðveita okkara mál og mentan. Í staðin fyri at ganga einsamallur hálvdeyður í heimlongsli, og syrgja Føroyar, hittast vit og uppliva Føroyar í samveru, vit eru í Føroyum, hví ikki tað, Føroyar eru ikki bara hasar oyggjarnar, vit ikki sleppa til nú, men fyrst og fremst fólkið, ið hoyrir til teirra, hvar tað enn balist: vit eru ein partur av Føroyum.*
> *(Joensen 1987 [1941])*

Hóast støðan er nógv broytt síðan stríðsárini, so havi eg sað, at myndin passar væl til partar av *diaspora*-bólkinum í Keypmannahavn í dag. Tó skal ein vera varin við at sammeta tað at vera góður við heimlandið og at hava heimlongsul við tað at hava tað føroyska umhvørvið í Keypmannahavn sum arenu fyri lívsstíl. Við lívsstílinum fylgir ikki nøkur serstøk politisk sjón. Lívsstílurin hevur við øðrum orðum onki beinleiðis samband við ynskið um sjálvstýri Føroya, ið onkur kanska kann freistast til at halda. Lívsstílurin sigur fyrst og fremst nakað um sosiala netverkið og áhugamálini hjá persóninum. Ofta avdúkar lívsstílurin lívsáskoðanina hjá viðkomandi persóni. Bólkurin – virkin í føroysku bygdini – kann býtast sundur útfrá politiskari áskoðan (samband–sjálvræði), men tað er óviðkomandi í hesum teksti.

Politiskur ungdómur

Ein bólkur av lesandi útisetum er virkin í politiskum arbeiði, havi eg lagt til merkis, og nýtir nógva tíð til hetta. Ofta snýr tað seg um partapolitisk feløg, men talan kann eisini vera um studentapolitikk ella grasrótarørslu. Tað vóru uttan iva fleiri idealistiskir og politiskt virknir studentar í 1960' og 1970'árunum, men tá var úrvali av idealistiskum politiskum feløgum ikki serliga fjøllbroytt. Marxisman var, sum kunnugt, sera ráðandi sum ideologi.

Ung í hesum bólki, vísir tað seg, fylgja ofta væl við í altjóða politiskum viðurskiftum. Tey lesa nógv, bæði bløð og bøkur, ið umrøða viðkomandi samfelagsspurningar. Tey seta sær høg mál og arbeiða hart fyri at fáa starv, ið er áhugavert og hóskar til samfelagshugsjón teirra. Málið er ofta at verða politikkari, granskari, blaðmaður, rithøvundur ella líknandi. Summi vilja helst arbeiða í og fyri Føroyar, meðan onnur hugsa meira altjóða, tá framtíðarstarvsleiðin er í huganum. Tey, sum eg havi tosað við, eru ikki so staðarbundin. Í *Det dyrebare liv* (1958) stendur um Jørgen-Frantz Jacobsen:

> *Hans første kronik ser dagens lys og vækker opmærksomhet både i Danmark og på Færøerne, han opfordres til at skrive flere, indbydes til at holde foredrag i Studentersamfundet, deltager i en diskussionsaften i Studenterforeningen, hvor også statsminister Stauning og fhv. færøsk amtmand og justitsminister Rytter deltager, og hvor begge disse politiske storheder forgæves søger at sætte ham på plads....”Hvis jeg som Grundtvig havde kunnet nøjes med tre timers søvn i en stol om natten...!“*

Jørgen-Frantz Jacobsen var ein politisk virkin lesandi, sum sæst, men vegna sjúku og ov nógv skriviarbeiði, noyddist hann at avmarka sínar ambitiónir á tí intellektuella frontinum. Lesandi í hesi kategoriini eru ofta individualistiskir strembarar, ið ikki geva sær nógva tíð til skemtilig sosial tiltøk saman við øðrum studentum.

Kollektivur lívsstílur

Hjá teimum, ið júst eru flutt úr Føroyum, og samstundis flyta heiman á fyrsta sinni, verður samveran við øðrum lesandi, ið búgva á studentabústaðinum, ofta ein sera týðandi partur av gerandisdegnum. Á studentabústaðinum hittir ein nógv fólk, ið standa í somu lívsstøðu sum ein sjálvur, og mangan verður lívið á studentarbústaðinum rættiliga tíðarkrevjandi og kollektivt, av tí at man ger nógv saman við grannunum hjá sær. Á stórum studentabústøðum eru ítróttarlið, veitsluhølir, barrir, filmsýningar og annað, umframt alt tað, ið gongur fyri seg í felagskøkinum, sum kamar títt hoyrir til (um ein ikki hevur privatan køk).

Tey, ið búgva her og nýta sína frítíð saman við øðrum frá studentabústaðnum, eru lutfalsliga ung og ofta støk. Nógvir føroyingar búgva á studentabústøðum, og ofta halda teir saman, uttan tó at avbyrgja seg frá øðrum lesandi. Studentabústaðirnir eru helst tað pláss, hvar føroyingar lættast koma í samband við danskarar og útisetar úr øðrum londum.

Umframt tað, ið fyrigongur á studentabústaðnum, so hava føroyskir kollegianarar ofta samband við studentar frá læristovninum, teir ganga á. Lívsstílurin, ið knýtir seg til studentabústaðin, er áhugaverdur fyrstu tíðina, ein er útiseti, men eftirhondini víðka flestøll síni sosialu netverk, so at tað røkkur longur enn til studentabústaðin. Og man troyttast kanska av teimum, man býr saman við.

Urban ungdómsmentan

Ein partur av teimum lesandi, serliga av teimum fyrst í tjúguárunum, livir eftir tí eg kalli eina urbana vestliga ungdómsmentan, ið kanska serliga sæst í stórum býum við fjølbroyttum undirhaldslívi. Størsti parturin av teimum lesandi hevur eitt tilknýti til hesa ungdómsmentan, men nøkur hava meira enn *bara* eitt tilknýti til hendan lívsstílin. Fólk, ið nýta nógva tíð til at fara til tey *røttu* diskotekini, tær *røttu* konsertirnar og til at fylgja við í øllum tí nýggjasta innan til dømis tekno-, jungle- og funktónleik hava tað sum ein lívsstíl. Av stórum

týdningi sum statusvirði innan hesa ungdómsmentan eru serlig klæðir, verumáti, musikkstílur og líknandi.

Lesandi við hesum lívsstílinum leggja ofta lítið í at leggja ætlanir langt fram í tíðina, tí „lívið skal livast nú“. Sjónvarp og útlendsk móta- og tónleikabløð hava eisini ein stóran leiklut hjá teimum, ið hoyra til hendan bólkin. Fyri nógv er hetta bara ein tilvera í nøkur fá ungdómsár; aftaná etablera tey seg meira sum *vaksin* fólk.

Onnur lesandi

Støðan hjá føroyingum, ið hava familju, er nakað øðrvísi. Pør við børnum hava ofta nógv annað at hugsa um, og tey hava kanska ikki tørv á og tíð til nógvar aktivitetir uttan um familjueindina. Sum longu nevnt eru eisini munir á teimum, ið eru farin undir vanligar universitetsútbúgvingar og tey, ið velja tekniskar útbúgvingar.

Um búskaparstøðuna hjá teimum lesandi kann sigast, at tey flestu hava rættiliga avmarkaðar inntøkur og eru sostatt bundin av lestrarstuðuli. Lestrarstuðulin verður givin teimum, ið standa sínar prótvtøkuroyndir, og hetta er við til at skapa eitt næstan ævigt prótvtøkutrýst á lesandi.

Samleikin hjá lesandi

Tá ið tú ert saman við fólki, ið hava heilt onnur størv og búskaparligt tilfeingi enn tú sjálvur, tá kann tað vera, at tú tekur fram tín samleika sum *lesandi*; tá ið tú ert á ferð í útlondum og tosar við onkran, tú av tilvild hittir, tá tekur tú fram tín samleika sum *føroyingur*. Við hesum royni eg at siga, at samleikin ikki er nakað viðføri, ið altíð er avgerandi fyri tín status, og sum ongantíð broytist. Samleikin er samansettur og tú kannst *aktivera* tann partin av honum, sum tú (strategiskt) ynskir at sína fram í samrøðuni.

Í modernaðum samfeløgum sum teimum vesturevropeisku hevur man nógvar valmøgulleikar, tá ið talan er um samleika og lívsstíl.

Føroyingar, ið lesa í Keypmannahavn, hava sum øll onnur fólk í dag ein samansettan samleika við nógvum virðum og áhugamálum. At vera føroyingur er týðandi, tá ein vil vísa á týðandi munir millum tjóðir og mentanir. Samleikin snýr seg um differensiering: hann skipar munir ímillum fólk. Ongin munur, ongin samleiki (ei heldur mentan).

> *Av góðum orsøkum taka føroyingar hægri útbúgvingar uttanlands, og fyri tey flestu merkir hetta Danmark. Nógvir føroyingar eru sostatt útisetar í ungdómsárunum, og vanliga hevur hatta verið roknað sum nakað positivt. Tú hevur upplivað eitt annað samfelag, og kann harvið fáa eina víðskygdari heimsmynd – enn um tú bara hevði búleikast í Føroyum.*
>
> *Men aðrar avleiðingar eru eisini av hesum, og tær eru ikki eins lættar at fáa eyga á. Til dømis er tað heilt greitt, at tað hevur avleiðingar fyri føroyska samfelagið, at tann bókligt lærdi parturin av øllum ungdómsárgangum noyðist av landinum. Og tað hevur somuleiðis samfelagsligar avleiðingar, at lesandi føroyingar fyrst og fremst verða kvalificeraðir til tað danska samfelagið. Mest umráðandi er kortini, at tað føroyska umhvørvið uttanlands er øðrvísi enn heima í Føroyum.*
> *(Thomassen 1996: 4)*

Lívsstílur, lívsáskoðan og samleiki eru, havi eg sæð, samanknýtt fyribrigdi í dag. Og mentan er ikki nakað beinleiðis viðføtt og óbroytiligt. Samleikin er í stóran mun eitt úrslit av egnum valum. Fyri at hetta skal eydnast, má ein tó fáa viðurkenning frá teimum, ið ein samanber seg við; ein noyðist at liva upp til nakrar fyrimyndir.

Útisetarnir, ið her hava verið lýstir, eru fólk, ið fáa sær eina hægri útbúgving og harvið koma at seta sín dám á Føroyar, tá teir einaferð venda aftur til klettarnar. Talan er eisini um fólk, ið taka mentanarlig, etisk og átrúnaðarlig virði við sær til Danmarkar, men ofta broyta samleika tíðina tey búgva í útlondum. Annars er tað vanligt, at lesandi í Danmark koma aftur við nýggjum hugskotum til Føroyar. Meðan eg búði og las mannfrøði í Keypmannahavn, og var partur

av føroyska útisetaumhvørvinum, kannaði eg støðuna hjá føroyskum lesandi. Tað gjørdi eg m.a. sum blaðstjóri og blaðmaður í tíðarritinum Fjølnir. Eg hevði sjálvur vinfólk og kenningar, ið kunnu sigast at hava sera ymiskar lívsstílar. Hesi fólkini fingu meg at skapa nakrar kategoriir av útisetum, ið hesin teksturin byggir á.

Familjan og skúlin umboða sera týðandi partar av gerandisdegnum og sosialu netverkunum hjá ungdóminum í Føroyum, men frítíðin er ikki minni áhugaverd viðvíkjandi fyribrigdunum ungdómsmentan og ungdómslívsstílur.

[6]

FRÍTÍÐARLÍV

Hugtakið *frítíð* verður her allýst sum tað, ið gongur fyri seg, tá fólk hava frí frá skúla, arbeiði og øðrum skyldum; tá tey hava frælsi at gera tað, tey vilja; frítíð merkir her frælsi frá øðrum skyldum og uppgávum (Furlong og Cartmel 1997). Nógv frítíðarvirksemi er handilsligt, inniber peninganýtslu og er sostatt knýtt at brúkaramentanini.

Skipað frítíðarvirksemi líkist skúlaundirvísingini og hevur alt størri leiklut sum *arena* fyri óformliga læru og útbúgving (Bjarnadóttir 2004: 300). Og tað merkir, at skipaða frítíðarvirksemið hevur flutt seg og nú ofta stendur nærri formligum útbúgvingarstovnum enn óskipaðum frítíðarítrivum. Eisini sæst, at tey, ið ikki trívast í skúlanum, ofta missa sambandið við og áhugan fyri útbúgvingarskipanini, sigur Jensen (2005: 12), „because they have nothing but bad experiences there, and it quickly becomes very difficult for this group to return to the formal learning that is required for them to advance in their lives and careers".

Óskipað frítíðarítriv eru ítriv, ið børn og ung sum oftast sjálvi seta í gongd og stýra, uttan beinleiðis uppílegging og leiðbeining frá vaksnum. Virksemið eru lutfalsliga óskipað, uttan nakra kapping millum ung, og oftast grundað á sjálvbodna luttøku. Óskipað frítíðarítriv eru ikki, sum flestu struktureraðu, neyðturviliga knýtt at føstum tíðum á degi og í viku.

Spæl er týðandi táttur í óskipaðu frítíðarítrivunum hjá ungdóminum. Tað er ikki lætt at seta nakað eintýðugt mark ímillum spæl og annað virksemi, serliga ikki tá børn eru í brennideplinum, men sum heild hoyrir spæl til óskipað frítíðarvirksemi, har fólk stuttleika sær uttan at hava serlig feløg ella formligar reglugerðir sum karm. Frítíðin kann eisini „obtain a compensatory function in that you do very different things from what one does in school. However it can also function as an extension of school – doing homework for example" (Fornäs et al 1995: 167).

[SPÆL, TRÚARLÍV OG NÁTTARLÍV]

Leikluturin hjá sosialum stættum og kyni, tá frítíð ungdómsins verður kannað, er, sambært Furlong og Cartmel (1999: 22-23), ikki so greiður sum ofta hildið:

> *Although leisure and lifestyles continue to reflect gender and class locations, there is evidence that these divisions have blurred as a consequence of the influence of leisure industries and the common experience of delayed transitions [...] Males and females from all social classes tend to have more free time than previously and engage in a greater range of leisure pursuits.*

Sonevndi frítíðarídnaðurin er í stóran mun úrslit av sterkum handilsligum áhugamálum innan modernaðu miðlarnar og globalu undirhaldsmentanina. Forbrúk er eitt annað týðandi hugtak í hesum høpi. Forbrúk hevur í mannfrøðini (Barnard og Spencer 2002: 128) ofta verið allýst soleiðis:

> *Consumption is the meaningful use people make of the objects that are associated with them. The use can be mental or material; the objects can be things, ideas or relationships; the association can range from ownership to contemplation.*

Hetta er ein breið og heldur leyslig lýsing, men hon leggur dent á, at objektið, ið verður nýtt, *skal* geva brúkaranum *meining.* Forbrúk er her eitt hugtak, ið tekur hædd fyri sosialum og mentanarligum prosessum (ikki sum *forbrúk* í vanligari ástøðiligari búskaparfrøði) og inniber harvið eina fjøltáttaða fatan av tørvinum og ynskinum hjá fólki, sum forbrúkið hevur til uppgávu at nøkta (op cit). Íðan, eru ung meðni, spyr Miles (2000), „in control of their consumption pattern, or are they being controlled?“. Onki einfalt svar er til hendan spurningin. Frítíðin er tað øki, har ungdómsmentanir koma týðiligast til sjóndar, har tær verða endurskaptar og samskiftar, har

sosialu netverkini eru virkin, og har, ikki at gloyma, nýtslumynstur eisini koma til sjóndar.

Talva 16.
Um forbrúk: Hvørji av hesum eigur tú sjálvur?

Fartelefon	22
Fløguspælari	21
Alnetsamband heima	18
Sjónvarp	15
Súkkla	14
Vanlig telda	14
PlayStation	11
DVD / video	10
Musikktól	9
Føroysk klæðir	5
Videokamera	3
Fartelda	3
Prutl	2

Kelda: kanning, áttandaflokkur í Havn 2003. N=23

Væntandi (búskaparligt) tilfeingi til at luttaka og virka sum fullgyldur limur í nýtslumentanini er støða, ið trýstir nøkur ung út á eggina – til tann avbyrgda ungdómin við sínum serligu lívsstílum. Luttøka í marknaðinum, sigur Miles (2000), „becomes a 'need', so that the young people feel they need to be conspicuously sporting the latest styles and show their awareness of the latest trends".

Óskipað og skipað frítíðarítriv eru ikki ósambæriligar eindir, ið koyra ungdómin í tvíningar, tí øll luttaka viðhvørt í óskipaðum frítíðarvirksemi av onkrum slag. Teimum ungu dámar væl at vera saman við vinum í frítíðini. Um ung í høvuðsstaðnum verður í nýggjum áliti sagt:

At vera saman við vinfólki er heilt greitt tað, ið ungdóminum dámar best at gera í frítíðini. Fleiri av teimum best umtóktu frítíðarítrivunum eru slík, har tey ungu eru saman og felags um eitthvørt, eitt nú, tá tey íðka ítrótt, ballast, ganga í samkomu, eru saman við familjuni ella fara í biograf. Onnur væl umtókt ítriv, ið ikki neyðturviliga eru í sosialum høpi, eru eitt nú at lurta eftir tónleiki og at hyggja í sjónvarp.
(Álit um Ung 2006: 25)

Ung í Føroyum hava, eins og ung í grannalondunum, nógva tíð til ymisk ítriv, tá skúladagurin er av. Tíðin til óskipað ítriv er tó, sambært mínum kanningum, minkað nógv, eftirsum sera nógv ung ganga til nógv ymisk skipað ítriv; tannáringar hava ikki longur tíð at ganga og *onki gera*, tí næstan hvørt kvøld í vikuni er fótbóltsvenjing, klaverspæl, kvøldarbeiði, og líknandi á skránni. Skipaðu frítíðarítrivini býta haraftrat frítíðina hjá ungdóminum upp í partar, so at tey ungu verða knýtt at fleiri ungdómsbólkum við fjølbroyttum virðum og stílum; harvið verður fragmenteringin av samleikanum eisini djypri.

Mær dámar væl at spæla PlayStation2, og teldu, eg plagi at súkkla viðhvørt, og eg sparki ofta bara fyri stuttleika, og tað er skeg, og so geri eg skúlating eisini. Eg plagdi ofta at vera í Skopun, tað er tað besta eg veit. Eg havi ikki nógv meir at siga tær. Hatta er tað, ið eg fyri tað mesta geri.
(drongur 14 ár, dagbók, Havn 2003)

Summi, eg havi prátað við, brúka nógva tíð í einsemi í frítíðini, meðan onnur trívast best við at luttaka í bólkum. Mynstrið fyri frítíðarítriv hjá einstaklinginum er knýtt at aldri, kyni og sosiala og mentanarliga bakstøði.

Many studies of young people's leisure activities have highlighted the maintenance of strong gender divisions which are often seen as more significant than class or differences associated with 'race'.
(Furlong og Cartmel 1997: 54-55)

Sera ídna og fjølbroytta frítíðin hjá nógvum ungdómum, ið eg kenni, er eitt úrslit av egnu ynskjum teirra (ella eisini av ynskjunum hjá foreldrunum) um at vera virkin limur í frítíðarbólkum. Tey ungu stremba eftir at fáa førleikar og royndir, nýggj netverk og vinabond, ið hjálpa teimum á tí óslætta vegnum til vælferð og tign í privat- og arbeiðslívinum; eydnu til at vinna sær sosiobúskaparligan og mentanarligan status, høgt í metum, fyri framtíðina.

Frítíðin er vorðin tað fremsta økið, har stórar lívsverkætlanir verða skaptar. Lærdómur og førleiki eru eisini knýtt at frítíðini í dag, nakað, ið er týðandi at kanna nærri, tá ið royndir og sosialu og bókligu eginleikar ungdómsins í tí seinmodernaða samfelagnum verða greinað (Furlong og Cartmel 1997). Skúlin (ella arbeiðið) er ikki longur, havi eg lagt merkis til, høvuðsparametrið fyri framgongd og eydnu í lívinum; frítíðarlívið lýsir tín lívsstíl. Tíðarstýring og -nýtsla til skúla, heim og frítíð eru vorðnar ein avbjóðing, ið inniber áhaldandi val og raðfestingar hjá einstaklingum, har ivi og vági altíð eru til staðar. Einstaklingar eru, siga Furlong og Cartmel (1999: 26), noyddir áhaldandi at rokna út vandarnar, ið hava ávirkan á

> *all aspects of their daily lives, and this intensification of individualism means that crises are perceived as individual shortcomings rather than the outcome of processes which are largely without the control of individuals.*

Frítíðarítrivini, ið allýsa ungdómsmentanirnar, lýsa eisini tað, ið kann kallast *mainstream* og øðrvísi (alternativur) ungdómur. Finski ungdómsgranskarin Seppälä (í Lalander og Johansson 2002: 184) vísir á áhugaverdan hátt, hvussu pør av mótsetningum kunnu lýsa munir úr sjónarmiðinum hjá tí sonevnda alternativa ungdóminum:

WE	THEY
Alternative	mainstream
Free	under commercial steering
Authentic	false
Rebellious/radical	conformist/conservative
Minority	majority
Heterogeneous	homogeneous

Ungdómshús, til dømis Margarinfabrikkin í Havn, kunnu roknast sum øki fyri óskipað frítíðarvirksemi, hóast tað er lutfalsliga fast skipað – serligar opningstíðir, vaksin starvast á staðnum, reglugerðir fyri atburð o.s.fr. Tó er rúm fyri nógvum hugskotum og spølum, ið tey ungu sjálvi standa fyri. Tað krevur ikki nakra serliga fyrireiking ella persónliga tillaging at luttaka í virkseminum. Ein óhátíðarligur dámur eyðkennir umhvørvið, og ongin verður revsaður fyri ikki at møta upp. Tað er frítt at koma og fara.

> *Alongside...organised leisure pursuits, there are of course free, spontaneous activities – parties, socialising with family and friends, hobbies, individual musicmaking, play and physical exercise, dancing and entertainment, mediaconsumption (for example listening to music), reading, TV, films and theatre. Also in this category are resting, daydreaming, musing – ways of spending time that are diminishing.*
> *(Fornäs et al 1995: 168)*

„Eg geri ongan ítrótt“, sigur ein genta í Havn, ið eisini nevnir, at „vit hava eina góða familju“. Hon er tilvitað um, hvussu nógv ítróttin hevur at týða hjá nógvum í hennara aldri, eitt skipað ítriv, ið nógv brúka fleiri kvøld um vikuna til. Hon hevur eina góða familju, sigur hon. Hetta kunnu vit meta sum ein sosialan kapital og eitt netverk, ið hon fær stóran ágóða av. Ein drongur, ið eg práti við, sigur, at hann hevur sjónvarp í kamarinum hjá sær. Tað er ikki óvanligt

hjá fjúrtanfimtan ára gomlum í dag, men hjá hesum unglinginum, ið eisini sigur seg eiga fartelefon (nakað meira enn 90 prosent av javnaldrunum eisini eiga) hava elektronisku lutirnir stórt virði og umboða kanska meira *luksus* enn hjá nógvum øðrum. Tey ungu nevna næstan ongantíð átrúnaðarlig viðurskifti í kanningini hjá mær, hóast eg í samrøðum havi fingið at vita, at heilt nógv teirra eru virkin í samkomum og ganga javnan til møtir.

> *Í gjár var eg mest úti og sparkaði, tá ið eg kom heim var eg at kroppi, og so aftan á fór eg í brúsi, har var eg í ein tíma, tá ið eg kom upp spældi eg teldu.*
> *(„dagbók" hjá dreingi 14 ár, Tórshavn 2003)*

Frítíð og frítíðartilboð

Føroyskur ungdómur luttekur yvirhøvur í sera nógvum skipaðum frítíðarvirksemi. Helmingurin av teimum, ið eg havi spurt, er virkin í ítrótti, og hjá summum er okkurt fast á skránni hvørt kvøld í vikuni. Tey, ið eg havi prátað við, ganga til ballett, svimjing, klaver, sang, ungdómsmøtir í samkomum, eru skótar, spæla flogbólt, o.s.fr. Men onnur ung halda til niðri í býnum, har tey brúka tey almennu rúmini sum fríøki uttan fastar rammur og reglur (Paulsen et al 2003). Her stýra tey sjálvi gongdini; her hitta tey vinir og kenningar; og her brúka tey pengar. Reimer (1995: 128) sigur: „Young people have a great deal of free time and considerable interest in consumption and entertainment (even if the financial means to pursue them is lacking)". Býurin er fyri øll, men sera nógv, ung sum gomul, brúka hann næstan ikki, og harvið gerast tey, ið brúka býrúmið, sera sjónlig.

Talva 17. Hvussu ert tú nøgdur við frítíðartilboðini til børn/ung í Tórshavn?

Eg eri sera væl nøgdur	5,3 prosent
Eg eri nøgdur	20,4
Eg eri toluliga nøgdur	35,6
Eg eri ónøgdur	38,7

Kelda: Álit um Ung 2006 (teldupostkanning við 499 luttakarum í 13-17 ára aldri)

Ein bólkur fer í Ebenezer, annar í biograf; ein bólkur fer á Margarinfabrikkina, annar er í Steinatúni; onkur fer til Frelsunarherin, annar í Tórshøll ella Café Natúr. Hini koyra bara ígjøgnum býin, meðan tey eygleiða fólk í gøtunum.

Tó eru eisini børn, ið ikki hava hug at binda seg til skipað virksemi av hesum slag, og tað er hesin bólkur, ið ofta verður gloymdur. Serliga í Havn, har færri børn og ung fara út í náttúruna at spæla, fiska og ganga túrar, er tørvur á at fáa frítíðar- og ungdómshús upp at standa. Í frágreiðingini *Børn og ung í Tórshavnar Kommunu* (1996) standa nøkur áhugaverd uppskot at lesa. Á síðu 21 stendur:

> *Eitt ynski, sum kom sjónliga fram á framtíðarsmiðjuni hjá stovnsleiðarum, dagrøktarmammum og foreldrum, er at fáa eina mentanarmiðstøð fyri børn í kommununi. Ein mentanarmiðstøð skal vera fyri øll børn í býnum. Foreldur, pedagogar, dagrøktarmammur ella onnur skulu kunna brúka miðstøðina saman við børnunum.*

,

Viðvíkjandi virkseminum í hugsaðu mentanarmiðstøðini verður skotið upp, at:

> *fáa rithøvundar [...] at lesa ævintýr og yrkingar [...] Fáa yrkis og áhugaleikarar at skipa fyri dramaskeiðum [...] Fáa heima-virkisfeløg at vísa/læra børnini gamalt føroyskt handverk. Fáa pensionistar at vitja, fyri at fáa samband millum børn og eldri [...] Fáa samband við musikkskúlan.*

Tað eru serliga ung í aldrinum fimtan-átjan ár, ið eru ónøgd við støðuna, tí tey eru ov ung at sleppa inn í til dømis Eclipse ella aðrar klubbar, men føla seg samstundis ofta nakað *gomul* í Margarin-fabrikkini. Tað sær út til at ung í hesum aldursbólki eru dottin niður ímillum, eru forsømd, og avleiðingin er, at nógv teirra bara ganga og vála í miðbýargøtum um kvøldarnar og næturnar. Onnur gera ymist heima hjá sær sjálvum:

> *Eg plagi vanliga at tekna líknandi, sovorðið her [vísir til tekning av gandakalli við stórum høgum hatti og síðum skeggi, eitt sindur sum Gandalf í Ringanna Harra]. Eg havi altíð teknað líka síðan barnagarðin. Tað, sum er nokkso keðiligt er at man er ikki saman við øðrum, í barnagarðinum meðan næstan allir hinir vóru úti og sparkaðu fótbólt, sat eg næstan alla tíðina inni og teknaði. Eg tekni ikki líka nógv í dag men eg tekni enn!*
> *(drongur 14 ár, Tórshavn 2003)*

Álitið, ið Tórshavnar kommuna gav út í 2006, mælir til at tey ungu m.a. fáa:

- betri umstøður til tónleikavenjingar og –framførslur
- miðvísan ítróttapolitikk
- ungdómsráð eins og eldraráð
- baðiland
- skoytubana
- listaskúla
- ungdómsráðgeving
- SSP samstarv (millum skúla, sosialar myndugleikar og løgreglu)

„Kommunan eigur“, verður sagt, „at stovna fleiri virkis- og ungdómshús“. Og, sum eg eisini havi nevnt, tey ungu, ið nærkast átjan ára aldri hava ikki hug at vera saman við teimum tólv-fjúrtan ára gomlu. Meira má gerast fyri tey sekstan-seytjan ára gomlu í kommununi.

Fyri børn og ung hava spæl og kreativitetur stóran týdning fyri ta sosialu og mentanarligu menningina, og „mens de organiserede aktiviteter udføres i rammer, der sættes og styres af de voksne, så er børnene selv med til at sætte rammerne for den frie leg, der i stor udstrækning foregår på deres egne præmisser“ (Forchhammer 1998). Ung mennast eisini, tá ið tey onki hava at gera; tað er í grundini ikki gott at hava ov nógv um oyrini hvønn dag, tí so fær ein ikki stundir at hugsa um alt tað, ið hendir rundanum ein, og sjálvsfatanin verður veikari.

Børn spældu nógv í Havn og á bygd fyrr, og alt, ið náttúran hevði at bjóða uppá, fekk onkran leiklut í spælinum. Børnini livdu sum vera man í síni egnu verð, tey leikaðu sín egna leik, men ofta var teirra spæl ein spegilsmynd av tí arbeiði, tey vaksnu tókust við.

> *Á sandinum [í bygd við Sundalagið], sum var miðstøða fyri øllum leiki, gjørdu børnini sær hús av sandi og skip av sandi, har tiptu tey sær hyljar til at sigla í við skipum, har runnu tey dystaleik, spældu ymsar bóltleikir og onnur spøl. Har bardust dreingirnir, og har klandraðust genturnar, har var látur og har var grátur.*
> *(Johansen 1970: 143)*

Um trivnaðin í høvuðsstaðnum peikar álitið hjá Tórshavnar Kommunu á fleiri av teimum somu viðurskiftunum, ið eg havi kannað, hóast mynd teirra kann tykjast nakað einføld. Sum heild trívast tey ungu í Tórshavnar kommunu væl. Tey eru virkin í frítíðini, íðka nógvan ítrótt, lurta eftir tónleiki, og tey hava vinir og tryggar umstøður heima. Tey drekka nakað illa í vikuskiftunum, trívast einki serligt í skúlanum, og so ganga tey ofta í tveimum bólkum: tey sum ballast og ganga í býnum, og tey trúgvandi, sum ganga á møti og fara á ungdómslegu (Álit um Ung 2006: 5).

Talva 18. Hvørji frítíðarítriv íðkar tú regluliga? (set ein ella fleiri krossar)

Tónleikur og filmur	550
Ítróttur	478
At lesa bøkur	386
KT (og internet)	301
Átrúnaður	166
Handarbeiði	134
Bilar og motorsúkklur	131
Uttandura ítriv	117
At fiska og sigla	85
Ekstremur ítróttur	80
Politiskt virksemi	38
Annað	14
N=9000	

(Klaksvík-kanning 2003)

Nógv ung, ið eg havi havt samband við í míni kanning, eru nógv heima við hús í frítíðini hjá sær, og hesi brúka ofta nógva tíð upp á sjónvarp, video/DVD, teldur og elektronisk spøl sum PlayStation og Nintendo. Tá ið sjónvarpið kom til landið hildu fólk, at børn ongantíð fóru at spæla úti longur, bara sita óvirkin framman fyri skíggjan og hyggja at útlendskum sendingum dagin langan. Tað er ongin ivi um, at børn og ung í 1990'árunum vóru (og enn eru) stórnýtarar av elektroniskum miðlum, og at tey sum heild spæla minni úti nú enn fyrr, men ikki øll hava egið kamar og egið sjónvarp. Og tá er bara ein máti, at sleppa úr umsjón foreldranna uppá, við at fara út, um ikki annað, so fyri at vitja vinir og familju, ella bara spáka sær ein túr. Nógv av teimum, ið eru heima í frítíðini, tíma ella vilja ikki ganga í býnum um kvøldarnar, tí tey kenna seg ótrygg og fremmand í umhvørvinum.

Ein trupulleiki í dag er kanska eisini, at fólk verða sett í bás útfrá aldri, verumáta og stíli. Tey vaksnu halda seg fyri seg sjálvi. Tað sama

gera tey ungu. Tey ungu, ið eg havi prátað við, leggja alstóran dent á aldurin. Ein fjúrtan og ein sekstan ára gamal hoyra til dømis til ymiskar bólkar. Tað er óheppið, um aldursbólkarnir ikki eru meira blandaðir, soleiðis at bæði ung, vaksin og gomul kunnu vera í somu stovu. Tey ungu, vísa mínar eygleiðingar, verða nógv ávirkað av sínum vinum og javnaldrum og missa eitt sindur av sambandinum við fortíðina, tað sum tey vaksnu og eldru hava at læra frá sær.

Tað vóru sera nógv, kring alt landið, sum stóðu á skíðum fyrr, og oftast vóru skíðirnar heimagjørdar. Stavar brúkti man ikki. Tað var áðrenn sjónvarp, teldur og annað til undirhalds kom inn í stovurnar. Í bókini *Tey vóru ung undir krígnum* (Didriksen 1996: 145-146) fortelur ein kvinna um lívið í stórari bygd:

> *Sum ung spældi eg hondbólt, men gavst, tá eg fór til Havnar at læra. Omanfyri hjá okkum var ein tennisplena, sum kom longu í 1903, og møguligt var at ganga til fimleik og fótbólt. Sjónleikur varð framførdur á hvørjum vetri, og kvøldskúli var við ymiskum tilboðum sum handarbeiði og matgerð.*
>
> *Vit høvdu nógv útispøl sum at hoppa band, langbólt, lofta, fonglast og røkta fórið. Nytrur spældu vit við sum yngri, men tær blivu býttar út við pennar, tá vit gjørdust eldri [...] Um veturin stóðu dreingirnir á skíðum og skoytaðu, meðan genturnar sletaðu.*

Tey ungu sita tó ikki bara inni í stovunum í dag; sum vit skulu síggja, so er sera nógv ymist, bæði uttandura og innandura, á skránni í fjølbroytta gerandislívi teirra.

Ung í Havnargøtum

Stóru bardagarnir, sum ungir dreingir úr ymsum gøtum og býlingum í Havn, skipaðir í herdeildum við leiðara, plagdu at hava móti hvørjum øðrum, eru farnir í søguna. Bardagar eru enn, men býurin er ikki longur býttur upp í býlingar, sum stríðast sínámillum (Jacobsen 1988). Ungdómurin hevur í dag sosial netverk, ið røkka langt út um býlingin og býin, og ungdómsbólkar verða í størri mun skipaðir

við støði í áhugamálum, virðum og lívsstíli hjá hinum einstaka. Erik Ludvigsen (í Madsen 1994) fortelur um harðar bardagar í Havn í tríati- og fjørutiárunum:

> *Tá berjast skuldi fór ein avstað við timburstokkum og stórum greinum, men mær dámdi tað ikki, og eg var nakað bangin eisini, so eg stóð altíð aftastur, har ikki so nógvur vandi var; teir størstu, sterkastu og djarvastu vóru fremstir. Tað hendi av og á, at onkur varð løstaður.*

Tá tey ungu í Havn savnaðust á Vaglinum um kvøldarnar fyri 30 árum síðani, østu nógv eldri seg upp um teirra lívsstíl og frítíðarítriv. Í oktober 1974 stóð neiligur tekstur í Tingakrossi undir tí fordømandi heitinum *Koyr teir til skips*:

> *…Teir fóru tá fjúrtan ára gamlir [til skips] – kendu seg sum rættar menn – og gjørdu eisini mans arbeiði…[Nú] liggur hesin mikli kappi og reikar um á gøtunum á sínum nýggja skutara og heldur seg kunna bera seg at, sum honum sjálvum lystir, har er ongin, sum setir hann til stikkuna.*
> (TJAK! nr.2 1982)

Eg havi lagt merkis til at ungdómurin í dag førir eitt stríð fyri at fáa atgongd til almenn pláss í býnum. Nógv hevur í seinastuni verið tosað um (ikki bara í kommunupolitiskum valkjaki) at fáa til dømis konserthøll og ungdómshús upp at standa í býnum. Dansiviðurskiftini hjá teimum ungu undir átjan ár eru eisini regluliga uppi til kjak. Rampin til skateboard í Gundadali sigst eisini vera niðurslitin og ov lítil. Bardagin um rúmini í býnum er tó als ikki nýggjur, tí sera nógv av hesum málum vóru eisini frammi í sjeyti- og áttatiárunum, til dømis kjakið um ungdómshús og dansiviðurskifti í Havn. Talan var tá um veruligan ungdómsuppreistur, har løgreglan og misnøgd ungfólk í fleiri førum stoyttu saman á Vaglinum í Havn. Tiltikni uppreisturin í 1979 stóðst av nógvum ymsum ávum, men skrivingin í bløðunum peikaði fyrst og fremst á versnað dansiviðurskifti í býnum. At ungdómurin gerst ágangandi, sigur ein mamma í blaðnum NÚ (1979)

er ein natúrlig avleiðing av, at hann kennir seg kroystan, og at eingin lurtar eftir honum. Tí haldi eg at tað kann sigast vera positivt, at tey ikki bert seta seg niður og siga, at so gerst ikki við. Trupulleikarnir mugu takast upp og viðgerast, og støðan í løtuni er undir allan kritikk.

Í 1974 var eisini stórur ófriður í miðbýnum, har ung heilt niður í tólvfjúrtan ára aldur vórðu handtikin og koyrd út á løgreglustøðina í ýlandi bilum. „Havnin er størsta vertshúsið í verðini", segði Jens Klerens fúti í bløðunum (NÚ 1974), og gav rúsdrekkalógini høvuðsábyrgdina fyri ófriðin og harðskapin. Ófriðurin í Havn, segði Klerens, har „løgreglan handtekur ein mann hvønn átjanda tíma alt árið" (op cit), kemst av, at fólk savnast at drekka alla aðrastaðni enn í dansihølum og matstovum, og at tey ungu onki egið stað hava at halda til á. Bannað er at drekka á matstovum, í biografum, og allastaðni har fólk koma saman".

Havnin hevur leingi av bangnum foreldrum verið sædd sum vandamikið pláss við nógvum fellum og freistingum, serliga hjá ungdómi, ið dámar at smakka sær á, og longu í 1921 segði Jákup Dahl um føroyskar sjómenn:

Og óivað er tað, at mong ein móðir, sum letur synir sínar út frá sær til sjós, ikki stúrir so nógv fyri teimum, meðan teir eru á sjónum, sum hon stúrir fyri teimum, tá ið teir koma í land, og fyri øllum tí, ið teimum tá kann verða fyri.
(í TJAK! nr.2 1982)

Foreldur stúra serliga fyri synunum á sjónum, tá ið farið verður í land í fremmandum londum, men havnarbýurin við Tinganes var eisini stórur og løgin hjá fólki úr smábygdum. Jákup Dahl segði omanfyri nevndu orð, tá Sjómansheimið í Havn hjá sjómansmissiónini varð bygt. Símun, høvuðspersónur í bókini *Fiskimenn* (Joensen 1977), sigur eitt sindur ørkymlaður, komin í land í tættbygda høvuðsstaði okkara: „Vit ganga niðan til veitslu, dans og gleim, og stutt frá syngja og prædika tey, mær tykist tað vera so løgið, alt hópar seg saman í sama stað". At býurin kendist fløkjasligur og villingarsamur hjá nógvum unglingum,

ið vuksu upp á bygd og vitjaðu høvuðsstaðin á sumri ella fóru í skúla í Havn, sæst týðiliga í nógvum tekstum. Havnin á Ólavsøku 1939, so sum Sanna (í Mortensen 1996) minnist hana, var

> *ein ímynd av kátum ungdómum, veitslurómi, marglittum ljósperum í longum røðum, blaktrandi fløgg, hugnaliga Havnará við lítlum gosvatni og lítlum, duffandi báti, og gullregnið á Amtmansgarðinum [...] alt so romantiskt og ævintýrkent í hennara eygum.*

Í dag, vísa mínar kanningar, eru ung ofta meira innandura enn uttandura í frítíðini, tí nýggir miðlar eru komnir inn í húsini. Nógv ung spæla PlayStation og líknandi telduspøl sum hesin drongurin úr áttandaflokkinumí Havn, ið í síni notatbók m.a. skriva um frítíðarlívið:

> *Hey, eg eri fimtan ár, mær dámi væl at súkkla. Hvønn mánadag, týsdag og mikudag gangi eg við bløðum. Tá ið eg ikki skal nakað, so eri eg sum oftast heima og spæli teldu ella hyggi í sjónvarp ella spæli PS2 ella eri úti við vinunum. Tá ið konsertir eru, so eri eg har sum oftast. Eg skuldi fara til G-festival, men eg skal til Danmarkar, so tað nái eg ikki.*

Nógv av teimum, ið eru heima í frítíðini, vilja ikki ganga í býnum um kvøldarnar, av tí at tey kenna seg ótrygg og fremmand í umhvørvinum. Tað er ongin loyna, at umhvørvið er vorðið harðari og meira innilokað á tann hátt, at mørkini ímillum ungdómsbólkarnar eru skarpari nú enn fyrr. Náttarravnarnir eru eisini komnir til Føroyar at fylgja við í náttarlívinum. Ungdómurin í Havn livir í mentanarliga fjøltáttaðum býi, har fleiri serstakir ungdómsbólkar brúka býin sum leikpall, har einstaklingar hitta vinfólk og fremmandafólk og vísa seg fram fyri at fáa viðurkenning frá javnaldrum og øðrum.

Trúarlív, náttarlív og skemt

Dansurin og átrúnaðarligu fundirnir hava ígjøgnum alla tjúgundu øld býtt føroyska ungdómin upp í bólkar, ið halda til á ymsum plássum

í býnum, hóast einans fáir metrar mangan skilja samkomuhús frá dansihøll. Tann serliga tvístøðan ímillum samkomu og dans, trúgv og rúsdrekka, ið kemur so sterkt til sjóndar í tí føroyska samfelagnum, hevur ávirkað fleiri ættarlið av føroyskum unglingum og ger tað sanniliga enn. Tað er oftast í framhaldsdeild fólkaskúlans, sambært mínum tilfari, at hin átrúnaðarligi virkni ungdómurin fær skap sum egin ungdómsbólkur, ið heldur seg burturi frá dansinum og náttarlívinum hjá hinum. Frítíðarítrivini sameina tó í nógvum øðrum førum hesar bólkar av javnaldrum í høvuðsstaðnum.

Tann átrúnaðarliga virkni ungdómurin umboðar eini 20-25 prosent av øllum ungdóminum í Havn (Viderø 2003). Hvussu skarpt landafrøðiliga markið var ímillum *átrúnaðarligu* rúmini og dansin kemur fram í hesi skemtiligu lýsing av Havnini undir krígnum í fjørutiárunum:

> *Tá eg bleiv eldri, fór eg til dans í Tórshøll, har opið var frá klokkan 9 um kvøldið til midnátt. Mitt í dansinum var ein hálvur tími støðgur, og tá fóru vit vanliga ein túr oman á keiøkið. Tað kundi vera heilt ófýsið, tí vit skuldu fyrst framvið Ebenezer, har vit blivu bannað langt niður í helviti, og so framvið Frelsunarherinum, men teir vóru meira hampiligir; longri niðri var Hvítusunnusamkoman. Tá dansurin í Tórshøll skuldi halda fram aftur, máttu vit sama veg aftur.*
> *(Erik Ludvigsen í Madsen 1994)*

Tey ungu undir átjan ár, ið dáma at ganga í dans, hava ikki nógvar valmøgulleikar, tá ið vikuskiftið er í nánd. Viðvíkjandi dansiumstøðunum er skilið í høvuðsstaðnum so ringt, at tað ofta er frægari á bygd, og tí er tað er ikki óvanligt, at fjúrtan-sekstan ára gomul úr Havn fara til DJ-show (diskotek fyri ung) í Vestmanna, á Kambsdali ella í Fuglafirði, tá ið onki dansitiltak er í høvuðsstaðnum. Burtursæð frá diskotekunum í Badmintonhøllini (sum nú eru steðgað m.a. vegna klagur frá grannunum) og á Margarinfabrikkini, ið verri enn so eru á skránni hvørja viku (umframt at hesi støðini serliga lokka tey yngstu, tólv-sekstan ára gomlu), so er náttarlívið í Havn stongt land fyri ung undir átjan ár.

Eg havi tó sæð, at nógv ung, heilt niður í tólv-trettan ára aldur, luttaka partvís í náttarlívinum í miðbýnum í vikuskiftunum, tí tey ganga og mala uttan fyri klubbarnar og tosa við eldri ungdómar, ið fara á barr, meðan tey bíða til klokkan verður fýra á morgni og klubbarnir lata aftur. Tá fara øll út í gongugøtuna, og her blandast tey yngstu upp í bólkin (Paulsen et al 2003). Nøkur ung fara enntá upp klokkan hálvgum fýra um náttina, lata seg í pen klæði og síðan út fyri at luttaka í *veitsluni* í gongugøtuni.

Tað er við øðrum orðum serliga tey sekstan-átjan ára gomlu, sum eru slept upp á fjall. Tey detta ímillum tveir aldursbólkar, ið hava rímiliga góð dansiviðurskifti, og eru sostatt eitt sindur *heimleys* í býarmyndini. Tey kenna seg ov gomul til Margarinfabrikkina, men sleppa ikki inn á ølstovur og diskotek, ið hava átjan ella tjúgu ára aldursmark. Samkomurnar hava harafturímóti ymisk tiltøk til átrúnaðarliga virkin ung í hesum aldursbólki. Ein fjúrtan ára gomul genta í Havn fortaldi mær í samrøðu (2003) eitt sindur um dansiviðurskiftini:

FG: Eg sá, at tað var eitt skelti har úti í gongini [í skúlanum] um, at tað var diskotek á skúlanum; plagar tú at fara til tað nakrantíð?
Elin: Nei – tað er bara til sjeynda flokk.
FG: Bara til sjeynda flokk? Eg meini tað stóð til níggjunda?
Elin: Ja, men ongin úr níggjunda fer.
FG: Tað stóð á seðlinum fjórða til níggjunda flokk.
Elin: Ja, tað er mest fjórða og fimta ... og nøkur úr sætta, men…
FG: Tað er for stórur aldursmunur?
Elin: Ja
FG: So, tú plagar at ganga í Badmintonhøllina, tá tað er okkurt har?
Elin: Ja.

Hans, ið gongur í áttandaflokkinum (2003), dámar væl at ganga í skúla og at vera saman við vinum, men gongur ikki í býnum:

> *Hans (kalla vit hann her) er fjúrtan ára gamal drongur, ið altíð hevur búð í Havn, hóast foreldrini eru av bygd, mamman úr Klaksvík og pápin úr Fuglafirði. Hans dámar væl at ganga í skúla og hevur nógv frítíðarítriv. Í skúlanum dámar honum best motorlæru, ið tey høvdu sum fak í eitt hálvt ár, men sum hann sera gjarna hevði viljað havt restina av skúlaárinum. Hans ætlar sær í tíggjundaflokk og kundi tonkt sær at lært til bilmekanikara seinni. Tað tekur fýra ár á tekniska skúla, síðan skal man í læru hjá onkrum bilmekanikara. Hann vil helst fara í gongd beint eftir fólkaskúlan. Annars arbeiðir hann hjá Poul Hansen fýra seinnapartar/kvøld um vikuna í frítíðini hjá sær. Tað dámar honum væl, og tað gevur nakað av peningi, ið kemur væl við hjá einum skúlanæmingi. Hans dámar væl at vera saman við vinum og at sita heima og spæla telduspøl. Úti hjá vinunum spæla teir eisini ofta telduspøl, til dømis PlayStation, ið hann ikki sjálvur eigur. Hann hevur, sum tey flestu, íðkað ítrótt í fleiri ár, men íðkar onki í løtuni. Í trý ár spældi hann flogbólt, síðan onki í eitt ár, síðan badminton í eitt ár, seinni fór hann at kava og tað ger hann viðhvørt enn. Hann plagar ikki at ganga í býnum í vikuskiftunum og er næstan ongantíð í biograf. Hann hyggur tó ofta at filmum heima og hjá vinum. Í summar (2003) ætlar Hans sær á legu í Zarepta, men hann fer eisini, sigur hann, til skips við einum í familjuni hjá mammuni. Á Ólavsøku skal hann til Týsklands á átrúnaðarliga legu saman við øðrum ungdómum úr Føroyum. Ferðin til Suðurtýsklands tekur umleið tíggju dagar í alt; legan, ið er til tey trettan-átjan ára gomlu, varar seks dagar. Í 2002 var Hans eisini á (átrúnaðarligari) legu í Týsklandi. Hann ferðast saman við vinfólki úr samkomum. Luttakararnir koma úr meiri enn tjúgu londum, og enskt er høvuðsmálið á leguni. Hans er vanur at vera á legu, tí hann hevur verið á Zarepta í Vágunum líka síðan hann dugdi at ganga hvørt ár, uttan tá hann tíggju ára gamal ferðaðist uttanlands við familjuni.*

Mamman hevur arbeitt á Zarepta, hjálpt til, í nógv ár og tók altíð Hans við sum barn. „Man er mest á møti og sovorðið, og so hevur man fríløtur...“ sigur hann um Zarepta. Annars er hann sera virkin í Brøðrasamkomuni í Havn, har hann luttekur í sunnudagsskúlanum, gongur til sunnudagsmøtir og haraftrat javnan fer til ungdómsfundirnar, ið eru hósdagar. Nógvir floksfelagar hansara hoyra eisini til Brøðrasamkomuna og hittast á ungdómsfundunum í Ebenezer hósdagar. „Næstan helvtin av flokkinum“, sigur hann, „gongur hósdagar“. Færri fara til stór møtir sunnudagar. Hans er næstan ongantíð á alnetinum, hann tímir ikki, men fer viðhvørt at finna okkurt gott telduspæl, sum hann ikki eigur. Hann brúkar ongantíð teldupost: „t-post adressan riggar ikki, og eg havi slettis ikki gjørt mær eina nýggja...“. Hann hevur kjattað nakrar ferðir, men tímir ikki longur. Viðhvørt, umleið eina ferð um mánaðin, fer familjan til Klaksvíkar at vitja skyldfólk. Í Fuglafirði er hann ikki ofta, men viðhvørt fara tey ein túr inn í bygdina á veg heim úr Klaksvík. Hvørt ár síðan 1999 hevur hann eisini ferðast uttanlands, antin á (átrúnaðarligar) legur – við ella uttan familju – ella bara í feriu. Í 1999 koyrdu tey úr Danmark til Italia og Fraklands og vóru burturi í meira enn ein mánað.

Hans hevur, sum vit síggja, eina tilveru, ið í stóran mun er knýtt at einum umhvørvi, ið savnast um eina átrúnaðarliga samkomu í landinum. Hann er ein vanligur føroyskur unglingi við fjølbroyttum áhugamálum og lutfalsliga stórum og víðum sosialum netverki. Tó er týðiligt, at tað er hitt átrúnaðarliga umhvørvið, ið skipar fyri og setur karmar um tað mesta av virkseminum, ið drongurin luttekur í og er *partur* av. Øll familjan, sigur hann, hoyrir til samkomuna, men tað merkir ikki, at drongurin ikki hevur vinir og floksfelagar, ið standa uttan fyri Brøðrasamkomuna. Eitt eyðkenni í føroyskum ungdómsmentanum í dag er, at fleiri ung fara inn og út úr átrúnaðarligum umhvørvum, sum tey líka skulu kanna nærri, eftirsum vinir teirra hoyra til samkomur. Nógv ung eru forvitin, vilja vitja øðrvísi ungdómsbólkar og royna eitt sindur av hvørjum, áðrenn tey finna tað, sum tey halda passa best til sín. *Sanna* er úr skúlaflokkinum hjá Hans:

Sanna (kalla vit hana her) er fjúrtan ára gomul genta, ið býr í Havn, men er ættað av Sandi. Hon hevur tvey systkin, eina systur og ein beiggja, sum eru nítjan og 28 ára gomul. Henni dámar væl at ganga í skúla, rokning er besta fakið, og hon kundi tonkt sær at blivið lækni. Møguliga fer hon til Danmarkar at lesa víðari, men tað er ov tíðliga at siga nakað um tað. Henni dámar sera væl at vera saman við vinum og ganga í býnum í frítíðini. Tá vinirnir hittast, leiga tey ofta ein film at hyggja eftir heima hjá onkrum. Sanna plagar at fara á DJ-show (ungdómsdiskotek), tá ið tað er í býnum, men tað er tíverri ikki hvørt vikuskifti. Tey ungu undir átjan ár hava ikki onnur støð at fara at dansa, burtursæð frá Margarinfabrikkini, ið tó sera sjáldan hevur diskotek, men javnan skipar fyri konsertum og líknandi. Har gongur Sanna tó ikki. Sannu dámar væl at lurta eftir tónleiki og hon hevur fylgt væl við í Prix Føroyar kappingini. M.a. var hon til finaluna í Norðurlandahúsinum, har bólkurin Gestir úr Eysturoynni vann. Tað dámdi henni væl. Hon var eisini, saman við vinum, til fleiri undanumfør. Gestir, vinnarabólkurin, var øgiliga væl dámdur í flokkinum í Venjingarskúlanum. Sanna gongur til ballett og fimleik. Fýra gentur úr flokkinum ganga til ballett í Yndi (Yviri við Strond). Hon hevur dansað ballett í tvey ár og gingið til fimleik í umleið átta ár. Hon hevur mangan verið við í almennum framsýningum í fimleiki og ballettdansi. Í summar (2003) er onki serligt á skránni. Hon ætlar sær ikki at arbeiða, ei heldur at ferðast uttanlands. Annars plagar familjan at fara ein túr til Danmarkar at vitja beiggjan á sumri. Sanna hevur alnet heima og brúkar tað rættiliga nógv, tí henni dámar stak væl at kjatta. Kjatt er tað einasta, sigur hon, sum hon brúkar alnetið til. Hon kjattar næstan hvønn dag á faroese_chat og kennir nøkur fólk á kjattinum. Fleiri teirra kennir hon eisini í veruliga lívinum. Hon hevur kjattað, síðan hon var tólv ár. Men hon brúkar eisini alnetið til teldupost og at heinta tónleik at taka niður. Hon skrivar teldubrøv til vinirnar. Annars eru tað rættiliga fá í flokki hennara, sum kjatta. Tey tíma ikki. Sanna hevur ikki privata teldu á kamarinum, tey hava eina felagsteldu

heima, og kjattar vanliga umleið ein tíma hvørja ferð (hvønn dag), hon er á alnetinum. Hon hoyrir ikki til nakra samkomu og gongur ikki til møtir. Sanna er næstan ongantíð á bygd.

Sanna og Hans eru floksfelagar og hava eitt sindur í felag. Tey hava vinfólk, frítíðarítriv, framtíðarætlanir, tankar um skúla og skúlagongd o.s.fr., men tey kunnu samstundis sigast at hoyra til ymisk umhvørvi í býnum, tí lívsstílarnir eru ikki eins. Tey eru partar av og luttakarar í ymsum ungdómsmentanum, ið tó ikki hava nakað eintýðugt og vatntætt mark sínámillum. Vit kunnu eisini hyggja at einum øðrum næmingi úr sama flokki, *Boga*, fyri at fáa eitt annað dømi um ung við fjølbroyttum áhugamálum í Havn:

Bogi (kalla vit hann her) býr í Havn, men hevur foreldur, ið koma úr Skálavík og Rituvík. Bogi brúkar tað mesta av sínari tíð – burtursæð frá skúlatíðini – til tónleik. Men, sum so nógvir tónleikarar vísa seg at gera, so dámar honum eisini væl „at teldast...arbeiða við teldu og sovorði...“. Bogi er trummuspælari í einum bólki, ið síðan 2003 er vorðin kendur um alt landið. Tað var bólkurin ikki, tá eg prátaði við Boga; men hann ivaðist ikki í, at teir fóru at koma fram. Bólkurin, tríggir vinmenn úr sama flokki, setti sær høg mál. Teir tríggir dreingirnir byrjaðu at venja og spæla tónleik saman í fjórða flokki. Teir venja/spæla javnan, men hava ongar fastar venjingartíðir. Teir spæla heima hjá Boga og tónleikurin kann kallast okkurt slag av hørðum rokki. Bogi samanber bólkin við MUSE, ið er kendur útlendskur rockbólkur. Hinir í bólkinum spæla gittar, teir hava ongan bass-spælara enn, sigur Bogi, og viðhvørt hevur bólkurin spælt fyri áhoyrarum á skúlanum. Bólkurin hevur eisini heimasíðu, ið má sigast at vera rættiliga snøgg og framkomin. Bogi hevur sjálvur gjørt hana. Annars dámar honum væl, tá hann arbeiðir við telduni, at „lurta eftir musikki, veit ikki, brenna fløgur og filmar og sovorði...og so onkuntíð eisini spøl og sovorði...“. Hann tímir ikki longur at íðka ítrótt, sigur hann, men fyrr spældi hann flogbólt. Viðvíkjandi framtíðini og arbeiðslívinum, so

ætlar Bogi sær at blíva bilmekanikari, roknar hann við, men onki er avgjørt. At ganga í skúla „tað er so nøkurlunda“, sigur hann, og dámar best at hava tónleik í skúlanum. Lívfrøði dámar honum eisini. Bogi plagar ikki at ganga í býnum, uttan kanska um onkur serlig konsert er á skránni, til dømis Prix Føroyar; tá fara hann og vinirnir heilt til Fuglafjarðar at lurta. Bogi og vinirnir plaga heldur, um ongin Prix Føroyar konsert er, at sita heima „og hyggja at film og sovorði... eta nógv kips og drekka sodavatn...“. Bogi kjattar næstan ongantíð á alnetinum; „tað var mest akkurát í byrjanini“, sigur hann. Á tí føroyska tónleikapallinum dámar Boga – og hinum báðum í bólki hansara – best Gestir. Bólkurin er (í 2003) teirra stóra føroyska tónleikarliga fyrimynd. Bogi heldur, at Havnin manglar eitt veruligt stað til konsertir, eitt tónleikahús, ið ikki er sum Norðurlandahúsið. Tað er nakað, sum nógv ung og gomul í Havn sakna. Havnin manglar, sigur Bogi, eitt felag sum GRÓT í Gøtu, ið hevur hjálpt so nógvum bólkum fram (til dømis Clickhaze og Eivør Pállsdóttir). Bogi gongur viðhvørt í kirkju, men hoyrir annars ikki til nakra samkomu. Átrúnaði og politikki hevur hann ongan áhuga fyri. „Eg skilji onki av hasum politikkinum“, sigur hann. Tónleikurin er tað, hann hugsar mest um.

Bogi spælir tónleik saman við tveimum javnaldrum, ið ganga til møtir í eini samkomu í býnum, men hann er sjálvur úr familju av kirkjufólki. Bogi kemur, sum so nógv onnur ung í hansara støðu, viðhvørt inn um gáttina í einum átrúnaðarligum umhvørvi í býnum, uttan at vera veruligur luttakari sjálvur. Hann kennir seg frían til at taka egnar avgerðir og ræðist ikki at fylgjast við ungfólki úr fríkirkjum (og enntá fara við til okkurt møti í Ebenezer). Hann er ikki bangin fyri at missa fótafesti og sín egna samleika. Hann er eitt sindur innanfyri, men mest uttanfyri, ella bæði í senn, og hevur ikki bundið seg til nakað (viðvíkjandi átrúnaðarligum bólkum) fyri lívið. Soleiðis hava nógv ung tað í dag, tó ikki øll.

Hans er í heilt aðrari støðu, tí næstan alt netverk hansara er innan

fyri samkomuni. Samkoman er týðandi partur av samleika hansara, og tað krevur eitt øgiligt stig og dirvi av honum at broyta lívsstíl og átrúnaðarligan samleika. Sostatt hava tey ungu á Venjingarskúlanum, hóast ungdómsmentanirnar líkjast og tey sosialu netverkini fara um mørk, ikki somu positión og sama status í samfelagnum. Tey hava tilknýti til ymsar bólkar og fjølbroytt umhvørvi, ið ávirka virðini og lívsstílarnar. Tað er ikki lætt at síggja hesi viðurskifti beinanvegin, tí nútíðarsamfelagið, har einstaklingar í lutfalsliga stóran mun sjálvir velja sær lívsstílar og ungdómsmentanir, hevur gjørt mørkini ímillum bólkarnar meira (ella *at síggja til* meira) flótandi enn tey hava verið.

> *Vit spurdu Berg [Debes Joensen, prest], nær ung av álvara byrja at hugsa um átrúnaðarligar spurningar. Bergur heldur, at tá ið tey ungu eru ímillum 15 og 20 ár, byrja tey av álvara at hugsa um hetta. Nøkur eru tó uppaftur yngri. Tey flestu, sum eru 20 ára gomul, hava tikið eina avgerð hesum viðvíkjandi. Kirkjan roynir at skipa fyri ymiskum fyri tey ungu. Hann heldur, at tey flestu ungu ganga høgt uppí konfirmatiónfyrireikingina og fáa nógv burturúr hesari tíðini.*
> *(Miðlabreytin á Argja Skúla, Dimmalætting 12/2 2003)*

Samkomurnar vita, at tey ungu, ofta í fimtan-sekstan ára aldri, fara úr tí átrúnaðarliga umhvørvinum og gera tískil eitt stórt arbeiði fyri ikki at missa tey yngru ættarliðini, tá tey byrja at ganga í býin og kanska enntá smakka sær á. Tað eru tí nógv tilboð fyri ung, ið halda seg til samkomurnar. Bara 24 prosent av teimum ungu ganga, sambært *Álit um Ung* (2006), ongantíð í kristnum samkomum. Samkomurnar royna at fáa so nógv sum gjørligt at koma til tiltøkini fyri børn og ung.

Rúna hugsar nógv um sína trúgv og livir eftir besta førimuni eftir henni. Hon trívist væl í skúlanum og kann lýsast soleiðis:

Rúna er fimtan ár og hevur tveir beiggjar, ið eru seytjan og sjey ára gamlir. Mamma hennara er sjúkrasystir og pápin arbeiðir í sjónvarpinum. Hon er uppvaksin í Havn, men foreldrini eru av bygd. Hon gongur í Ebenezer fleiri ferðir um vikuna. Serliga til ungdómsmøti hóskvøld og vanlig *møti sunnudagar. Á ungdómsmøti talar onkur fyrst, síðan verður sungið, og annars prátar man við vinirnar og onnur úr samkomuni. Tey flestu á ungdómsmøti eru í hennara aldri – og eitt sindur eldri. Tey, ið halda talurnar, eru viðhvørt eisini ungdómar. Tey biða eyðsæð eisini nógv. Rúna syngur í ungdómskórinum. Størsta tiltakið í vikuni er møti sunnudagar kl seks. Øll í nærmastu familju hennara hoyra til Brøðrasamkomuna. Og í skúlaflokki hennara eru, sum nevnt, heilt nógv, ið ganga í Ebenezer. Rúna gongur ikki í dans (diskotek), men onkuntíð í biograf. Hon sigur, at hon kann fara í dans um hon vil: „...man kann alt...tað er bara...eg veit ikki...tá man klárar tað...". Man velur sjálvur, sigur hon, men tað er eitt sindur* vandamikið. *Hon hugsar um Gud hvønn dag. Rúna trýr uppá Jesus: „ja altso eg trúgvi uppá Jesus og at hann kemur aftur, ella at hann doyði fyri meg...so er man frelstur...og ja...øll í mínari familju eru trúgvandi...". Hon lesur nógv úr bíbliuni, eitt sindur hvørt kvøld, fyrst Nýggja Testamentið, síðan Gamla Testamentið. Bæði Testamentini eru líka týðandi fyri hana. Hon hevur tó ikki lisið alt Gamla Testamentið enn. Tað er hon í holt við. Í Ebenezer hava tey bíbliutímar har ymist úr bíbliuni verður viðgjørt. Og haraftrat hevur hon ein* bíbliubólk *saman við nøkrum vinkonum úr skúlaflokkinum. Tær avtala at lesa brot úr bíbliuni og at síðan práta um evni úr hesum tekstum. Og bíbliubólkurin hevur ein* leiðara, *eina tjúgu ára gamla gentu, ið hjálpir og* vegleiðir *Rúnu og hinum gentunum. Eina ferð um vikuna práta genturnar við leiðaran. Men tað er tó ikki so at tær hava lektiur ella líknandi. Spurd um munirnar á vanligum*

kirkjufólki og baptistum nevnir hon dópin beinanvegin. At tey í Brøðrasamkomuni ikki verða doypt sum pinkubørn, men seinni í lívinum: „...tá man er frelstur, trýr at Jesus doyði og sovorði...so kann man blíva doypt". Eg spyrji, um ein annar munur er, at baptistar ikki skulu drekka rúsdrekka – men hon svara avgjørd at „tað avger man sjálvur". Tað er ein persónligur spurningur. Eisini fortelur hon um Zarepta, har hon regluliga er á legu. Tá eg spyrji, hvat man ger á Zarepta svarar hon „alt møguligt...tað er so ræðuliga nógv man kann gera". Hon hevur, tá vit práta saman (2003), júst verið á eini legu í Zarepta. Tað var fyri ung – ikki familjulega. Annars dámar henni væl at hyggja at filmum og sita og práta heima saman við vinum. Hon veit ikki rættiliga, hvat hon skal gera eftir níggjunda flokk.

Dansurin og trúgvin seta sín dám á ungdómin, ikki so at hesi bæði ikki kunnu sameinast, tí tað ber væl til, men netverkini og sosialu bondini hjá einstaklingum savnast ofta kring antin dansihølir ella samkomur í vikuskiftunum, tá tey koma upp í fjúrtan-fimtan ára aldur.

SMS

Eg havi eisini, ikki óvæntað, í mínum kanningum sæð, at SMS (sølumiðstøðin) er ein týðandi miðdepil hjá ungdóminum í Havn, har sera nógv í tólv-átjan ára aldri savnast hvønn seinnapart eftir skúlatíð at stytta sær stundir og vera saman við vinum og kenningum. Tey sita uttan fyri kioskina, á torginum á ovaru hædd, og í matstovunum Perlan, Sunset Boulevard og Burger King, har tey tó eru noydd at keypa eitthvørt fyri at fáa frið at sita. Talan er um ung úr øllum býnum, í vikuskiftinum eisini bygdafólk, og tað eru fleiri orsøkir til at tey velja at savnast í SMS. Talan er um stórt innandura høli, sum øll hava fría atgongd til; her eru altíð nógv fólk og handlar í hópatali við alskyns mótavørum til ung og gomul. Her er trygt og eisini hevur ein kensluna av at vera navnleysur (Lieberg 1992a og 1992b).

Handilsmiðstøðir sum SMS eru nógv umhildin savningarstøð hjá ungdómi í smáum og miðalstórum býum kring alt Evropa og USA. Her er mest sannlíkt at hitta nógv fólk ein ikki kennir á einum stað, uttan at vera staddur í avmarkaðum og serkendum umhvørvi hjá serligum samfelagsbólki. Handilshús og -miðdeplar, sigur Lieberg (1992b: 171), „framstår idag som viktiga sociala miljöer i våre städer. De har i allt större utsträckning kommit att ersätta torget och marknadsplatsen som mötesplats och arena för ett offentligt stadsliv".

SMS gevur teimum ungu kensluna av at vera úti í tí stóra heimi, tí altjóða forbrúksmentanin er her í hásæti við øllum tí nýggjasta úr Keypmannahavn, London og New York. Tá Burger King fyri nøkrum árum síðan lat upp í SMS var áhugin ímillum tannáringarnar í øllum landinum ovustórur, tí henda amerikanska matstovan umboðar lívsstílar og virðir, sum verða marknaðarførd í modernaðu fjølmiðlunum hvønn einasta dag. Um tey ungu ikki keypa nakað í matstovunum í SMS, so verða tey av starvsfólkinum biðin um at flyta seg; ofta keypa tey sær so bara ein milkshake ella okkurt líknandi fyri at sleppa at blíva sitandi. SMS er umtókt av nógvum, sum ikki hava so nógv annað á skránni, tá skúlin er liðugur; tey, sum ikki ganga til skipað ítriv í frítíðini. Tað er eitt spennandi stað at vera halda nógv ung.

> *Spändingen [av at vera ímillum nógv fremmandafólk] framkallas inte enbart av trängseln som sådan utan också av osäkerheten att inte riktig veta vad som skall hända härnäst, vem man skall möta etc. Möjligheten till den här typen av oväntade möten, flirter etc, samt upplevelsen att bara befinna sig på armbågsavstånd från en massa människor man inte känner, gör varuhusmiljön extra spännande och intressant att vistas i.*
> *(Lieberg 1992b: 186)*

Í nógvum býum verður tað roknað sum ein trupulleiki, at ung savnast í handilshúsum sum SMS uttan at hava pengar at brúka, tí tey stjala og plága hinar kundarnar, men soleiðis er ikki í Føroyum.

Tey ungu passa seg sjálvi og sita fyri tað mesta og práta og hyggja at øðrum ungdómum í SMS. Ung, sum halda til í handilshúsum hvønn dag verða aðrastaðni ofta løgd undir at vera sosialt veikir og kriminellir persónar.

Skateboard

Ung við skateboard brúka býin dúgliga, vísa mínar kanningar, men tey hava seinastu árini verið sera ónøgd við umstøðurnar at standa á skateboard í Havn. Rampin í Gundadali, har nógv ung við skateboard hittast, er rættiliga slitin, og tí ynskir skateboardungdómurin sær inniliga eina nýggja breyt ella innandurahøll at hava til nýtslu í framtíðini. At standa á skateboard í ferðsluni í miðbýnum er vandamikið, ikki minst niðri á Farstøðini, har stórir lastbilar og bussar koma og fara. Hóast skateboardmentanin umfatar nógv fólk, verður hon ikki vird og stuðlað í sama mun sum ítóttarfeløgini, ið hava sera góðar vallir, hallir og venjingarumstøður at ráða yvir (Paulsen et al 2003). Ein fimtan ára gamal drongur eg prátaði við (2003) brúkar sera nógva tíð til skateboard í gerandisdegi sínum. Hann ætlar sær møguliga til Danmarkar at arbeiða í skateboardhandli eftir níggjundaflokk. Spurdur hvar hann plagar at standa á skateboard, svarar drongurin: „Vit plaga at standa við Shell [á Frælsinum], og so…onkuntíð plaga vit at fara at koyra ígjøgnum býin, og so fara vit til rampuna…í Gundadali“. Hann fortelur eisini um átrúnaðarligar fundir (í Klaksvík), har tey ungu standa á skateboard í kjallaranum, meðan møti er uppi yvir teimum. Tey ungu við skateboard kunnu sostatt sama kvøld ganga ímillum: skateboard, møti, skateboard, møti o.s.fr.

Tey flestu, ið hava skateboard í Føroyum, eru dreingir, men undantøk eru (Gaini 2005b). Eisini á bygd, havi eg sæð, er skateboard veruliga komið framaftur sum ítriv hjá tí yngra ættarliðinum eftir at hava ligið í dvala í mong ár (Forchhammer 1998). Ung við skateboard brúka ikki bara rampan uppi í Gundadali í síni frítíð; tey eru eisini ofta at síggja niðri við Farstøðina á Eystaru bryggju, uttan fyri nýggja bygningin hjá Landssjúkrahúsinum, á parkeringsøkinum hjá Fíggjarmálaráðnum á

Argjum og aðrastaðni. Ein fimtan ára gamal drongur úr Havn (2003), *Sámal*, dámar sera væl at standa á skateboard:

> *Eg brúki nógva tíð av degnum til at standa skateboard, eg og ein, ið eitur Bogi, skata oftast saman, men vit plaga at vera fleiri. „Bogi og tey“ eiga eitt kamera, so vit plaga at taka uppá (um tað er gott veður). Skateboard er mega skeg tá man byrjar at duga, og so kann man altíð læra seg okkurt nýtt! Tað fyrsta hálva árið stendur man bara oman ígjøgnum brekkur, men tað blívur keðiligt! So skal man læra seg at hoppa „ollie“. Aftan á tað blívur tað nógv stuttligari. Skateboard kann eisini vera mega deprimerandi, kanska viss tú ikki klárar okkurt tricks og allir hinir klára tað.*

Sámal, úr áttandaflokkinum í Havn, dámar eisini at tekna. Hann hevur nógv at fortelja mær, tá vit práta um gerandislívið:

> *Sámal hevur tvey systkin: tveir yngri beiggjar. Pápin er úr Havn og mamman úr Fuglafirði. Burtursæð frá tveimum árum í Danmark tá hann var umleið tvey-fýra ár, so hevur Sámal altíð búð í Havn. Honum dámar væl at ganga í skúla, hóast heimaarbeiðið ikki er serliga stuttligt at gera. Enskt og rokning eru fakini, sum honum dámar best í skúlanum. Hann roknar við at fara í student, men ikki beinanvegin eftir níggjunda (ella kanska tíggjunda) flokk, tí hann vil gjarna hava eina pausu ímillum. Hann hugsar um at møguliga fara til Danmarkar at arbeiða í einum skateboardhandli eina tíð. Tað er nakað, hann sera gjarna vil. Hann hevur staðið á skateboard í umleið 1,5 ár, men tað fyrsta hálva árið lærir man seg bara at standa á fjølini. Tað eru sera nógv, sigur hann, ið standa á skateboard í Føroyum. Handilin X-size selur, veit hann, heilt nógv skateboard til ungfólk úr øllum landinum. Í hesum handli keypir Sámal eisini klæðir, ið hóska til skateboardmentanina. Hettublusur og víðar buksur... Í flokkinum hjá Sámal eru bara tveir næmingar, tveir dreingir, ið standa á skateboard. Ein triði, úr parallelflokkinum, stendur eisini á skateboard saman*

við Sámal. Tað er stórur vandi fyri at fáa snuddir og skaðar, tá staðið verður á skateboard. Sámal hevur keikt sama fót heilar tríggjar ferðir í trekk; hann er júst byrjaður at standa á skateboard aftur. Fyri at læra ymisk tricks hyggja Sámal og vinmenninir at skateboardfilmum, sum teir antin keypa í X-size ella finna á alnetinum. Tað tekur langa tíð, sigur hann, at læra kynstrini ordiliga. Tú noyðist at venja nógv – royna og royna heilt til tað lukkast. Í filmunum sær man fólk standa á skateboard mitt í stórbýum [í USA], ofta har tað ikki er loyvt at standa. Tað er spennandi. Men tað eru eisini filmar, ið vísa fólk, ið standa á skateboard á rampum. Tað er nakað heilt annað. Skateboard er eitt slag av ítrótti við kappingum, men ikki hjá øllum skateboardarum. Tað kann eisini lýsast sum list, sigur hann, har man roynir at vísa nakað hugtakandi. Sámali dámar væl at tekna og hyggja at filmum. Hann hevur teknað smá monstrum, sum skateboardbólkurin kann brúka sum okkurt slag av búmerki. Teir eru fimm dreingir, ið skapa ein bólk, t.v.s. at teir standa saman á skateboard. Teir eru tríggir úr Venjingarskúlanum og tveir úr Argja skúla. Annars kenna allir, ið duga væl at standa á skateboard í Havn, hvør annan. Teir hittast javnan í býnum. Teir hava tosað um at gera kappingar, men øll ynskja ikki at kappast. Tað eru nógv, ið ikki rokna skateboard sum ítrótt, ið skal hava kappingar, meistarar, o.s.fr.. Annars spælir Sámal eisini telduspøl, ið snúgva seg um skateboard. Tey eru góð, men eitt sindur ov løtt, sigur hann, tí hann hevur spælt tey so ofta. Á alnetinum kennir hann eisini nógvar heimasíður, ið snúgva seg um skateboard, til dømis heimasíður hjá handlum í Danmark og aðrastaðni. Skateboard er nógv meira enn bara ein fjøl at renna á. Tað eru sera nógv sløg av fjalum, sigur hann, og allar hava sítt serliga snið og sína serligu góðsku. Eitt vanligt skateboard kostar einar 2.000 krónur. Men fjalirnar slítast skjótt og tey, ið standa á skatboard hvønn dag, noyðast at skifta tær út fleiri ferðir um árið – ofta fýra-fimm ferðir um árið. Sámal hatar kappingar, hóast hann fyrr hevur luttikið í kappingum í øðrum ítróttargreinum, sum hann plagdi at venja

og luttaka í. Hann hevur roynt at trena fótbólt, hondbólt, flogbólt, karate, judo. Svimjing og fimleik. Annars gongur Sámal til møtir í eini samkomu. Hann plagar eisini at fara á Zarepta á sumri. Tað roknar hann eisini við at fara í ár.

Hóast rættiliga nóg standa á skateboard, so eru umstøðurnar ikki góðar sum er. Tey, ið standa á skateboard, verða sjáldan nevnd, tá tosað verður um frítíðarvirksemi í býnum, serliga tí skipaða (ítróttur, samkomur, tónleikaskúlin o.s.fr.), og hava tískil ringt við at fáa stuðul og nakað pláss til skateboard í býnum.

Margarinfabrikkin

Margarinfabrikkin í Magnus Heinasonargøtu í Havn er eitt slóðbrótandi virkishús fyri børn og ung, har tey ungu hava høvi at stytta sær stundir saman við aldursfeløgum undir skipaðum umstøðum. Fabrikkin hevur nógv ymist at bjóða sínum gestum; m.a. sjónvarp/video, karaoke, pool, airhockey, borðtennis, fótbóltsspæl, og teldur við telduspølum og alneti. Eisini kunnu tey ungu hugna sær saman við øðrum børnum, ungum og starvsfólkum. Og gestirnir kunnu keypa sær okkurt í kioskini á fabrikkini. Fabrikkin, sum varð stovnað í 1995 av Barnabata, hevur opið klokkan 11.30–22.00 gerandisdagar, og eini hundrað fólk vitja húsið hvønn dag (Álit um Ung 2006). Fabrikkin hevur umleið 180 limir í 2005-2006. Um dagin eru tey yngstu í húsinum, umleið átta til trettan ára gomul, og síðan koma tey, ið ganga á framhaldsdeildini í fólkaskúlanum, tó eisini nøkur upp í átjan ára aldur. Skipað verður fyri nógvum ymiskum tiltøkum, ið børnini og tey ungu kunnu tekna seg til og luttaka í. Hugsað verður um at skapa eitt umhvørvi, ið bæði gentur og dreingir trívast í. Konsertir og barnadiskotek eru javnan á skránni í fabrikkini. Annars verður eisini farið út úr húsinum saman við teimum ungu: útferðir, fiskitúrar, skateboard, ítrótt, o.s.fr. Virksemið er sum heild sera fjølbroytt og í støðugari menning. Starvsfólkið í virkishúsinum hevur nógv góð hugskot, sum verða gjøgnumførd saman við teimum ungu. Fabrikkin er royk- og rúsfrí, og roynt verður at hava heilsugóðar vørur til sølu í kioskini. Teimum ungu

dáma væl Margarinfabrikkina tí tey her verða eftirspurd og tikin í álvara (Ellingsgaard 2005: 14).

Talva 19. Heldur tú at foreldur tíni blanda seg ov nógv í títt lív?

Ja	6
Nei	14
Eitt sindur onkuntíð...	3
Veit ikki	1

Kelda: kanning í áttandaflokki í Havn 2003. N=24

Margarinfabrikkin er eitt gott tilboð frá kommununi til børn og ung, men tað er ikki nóg mikið við einum ungdómsklubba í høvuðsstaðnum. Býurin er vaksin nógv, og ungdómurin hevur sera ymisk áhugamál og virðir. Hjá teimum, ið búgva í nýggjum útbýlingum ella grannabygdum, er rættiliga langt at fara til Margarinfabrikkina. Hølisviðurskiftini hjá virkishúsinum eru haraftrat, sambært leiðsluni í húsinum, ikki nóg góð, og ynskiligt hevði verið at fingið meira pláss og møguliga nýggjan bústað aðrastaðni í býnum (Álit um Ung 2006). Starvsfólkið í Margarinfabrikkini í Havn hevur eisini verið við til at stovna ein nýggjan ungdómsklubba í Klaksvík eftir sama leisti sum Margarinfabrikkin. Hugsjónin aftan fyri Margarinfabrikkina er, sigur leiðarin Bogi Andreasen, at skapa eina ætlan, sum setur krøv til góðskuna og innihaldið í tiltøkum fyri ung (Ellingsgaard 2005: 14). Hann heldur at eitt gott tiltak skal innibera meira enn reint undirhald, og rúsfríu tiltøkini hjá fabrikkini hava sum heild verið væleydnað og eru enntá vorðin *fyrimynd* fyri onnur ungdómstiltøk í Havnini. „Børnini trívast væl her, og talið av børnum hvønn dag sigur nógv“, sigur Bogi Andreasen. Vit fáa nógv aftursvar frá foreldrum, og tey eru bara positiv“ (Dimmalætting 25/3 2005).

Margarinfabrikkin liggur fáar minuttir til gongu frá Steinatúni, og tað eru nógv av teimum somu, tú her sært. Á kvøldi, klokkan 18 til 22, er Margarinfabrikkin opin fyri teimum trettan-átjan ára gomlu, og eini 50 ung fólk savnast í Havnar einasta ungdómsklubba hvørt kvøld. Fabrikkin hevði í fleiri ár havt orð fyri at vera staðið hjá sokallaðum *babyrokkarum* og øðrum ótillagaðum ungdómum, ið ofta komu frá syndraðum heimum við tungum sosialum trupulleikum, men her eru broytingar nú at hóma, tí leiðslan á Margarinfabrikkini arbeiðir fyri at fáa ein breiðari skara av ungfólki at vitja og brúka ungdómsklubban, til dømis við at broyta innrætting og banna royking í húsinum. Leiðslan roynir at geva húsinum eitt gott umdømi í býnum, so at fleiri børn og foreldur fara at kenna seg trygg við tilboðini frá fabrikkini. Tey flestu á Margarinfabrikkini ganga hvørki til ítrótt ella átrúnaðarligar fundir; tey hava onga aðrastaðni at fara og tíma av ymiskum orsøkum ikki at sita heima um kvøldarnar.

Flestu ungdómarnir í Føroyum hava eitt fjølbroytt frítíðarlív við nógvum virksemi saman við bólkum av javnaldrum, ið geva einstaklinginum eitt sterkt netverk. Tó eru eisini ung, ið eru útilokað frá øllum hesum. Tey eru útihýst frá vanligu ungdómsmentanunum og kunnu sigast at hava eina sosialt marginaliserða støðu, ið gevur teimum daprar framtíðarvónir.

[MARGINALISERING]

Ein partur av ungdóminum, ið rekst í gøtunum á kvøldi, hevur djúpar sosialar og sálarligar trupulleikar, og er í ferð við at blíva marginaliseraður í samfelagnum. Hesi ungu hava tíverri ongastaðni at fara uttan kanska Margarinfabrikkina og koma mangan úr sosialt tyngdum heimum, har harðskapur og rúsdrekka (og viðhvørt rúsevnir) eru partur av gerandisdegnum. Mínar samrøður hava eisini givið mær eina sterka ábending um, at tá hesi ungu finna saman og skapa ein ungdómsbólk (ella lutmentan) við egnum virðum og siðvenjum, so verður sera torført at sleppa úr umhvørvinum aftur, tí nú eru tey stemplað sum vandamikil fyri onnur ung.

Krøvini til útbúgving eru eisini, sum vit ofta hoyra, nógv hægri enn tey hava verið, og hetta hevur elvt til nýggjar formar fyri sosiala marginalisering í samfelagnum. Stutt skúlagongd elvir til avmarkaðar arbeiðsmøguleikar og mangan eisini til sosiala marginalisering. Tað verða alt færri størv til ófaklærd fólk. Tann ungdómur, eg havi tosað við, ið verður marginaliseraður, kennir seg heimleysan og útihýstan heima, í skúla, í frítíðarklubba og aðrastaðni í gerandislívinum. Tú hevur ábyrgdina av tær sjálvum, og tey útihýstu ungu eru tapararnir í hesum sosiala spælinum. Familjubond geva hinum einstaka ein sálarligan tryggleika – eina barlast fyri at *eydnast* í samfelagnum.

Marginalisering er „the process of falling into a marginal position" í samfelagnum, og eitt óynskt úrslit av einum veikum tilfeingi og/ella fráviki frá ráðandi normum (Nyyssölä 1998). Tað kann innibera arbeiðsloysi, fátækradømi, einsemi, avbyrging ella mentanarliga stigmatisering. Marginaliseraðir einstaklingar og bólkar hava ymsar hættir at standa ímóti tí ráðandi sosiala normalitetinum. Marginalisering vísir sum oftast til væntandi førleikar hjá einstaklingum at brúka samfelagsligt vald við tí óhepna úrsliti, at tey verða sosialt avbyrgd (op cit).

Mainstream mentan er eitt vanligt men ógreitt hugtak, ið kann fløkja eins væl og greiða kjakið um lívsstílar og frítíðarlív ungdómsins. Óansæð er tað eitt hent tól at hava, tá hugt verður at marknaðarføringini og forbrúkinum av nýggjum rákum og stílum í globalu ungdómsmentanunum, tí tað skilir ímillum ráðandi og alternativar undirgrundsstreymar í ungdómsmentanunum. Um sokallaðu *babyrockarnar* í Havn stendur til dømis á kjaksíðu hjá ungdóminum á alnetinum:

Eg havi okkurt ímóti teimum, tí tað eru teir, sum skapa balladuna í Havn. Leypa á óskyldig fólk og gera alt, teir kunnu, fyri at sleppa í bardaga. Tað passar, sum nógv hava sagt inni her áðrenn [á kjaksíðuni], at ikki allir babyrockarir eru soleiðis, men nógvir eru. Hugsa um tann sokallaða '21 bandan' – babyrockarnir. Leypa á fólk við knívi [...] Annars eru flestu babyrockarir børn/ung, sum hava problemir heima.. Tí rotta teir seg saman, drekka seg skít og tílíkt. Tá tey verða skít, fáa tey avreagerað og uppføra seg sum – ja, sum babyrockarnir gera..
(kelda: faroesechat.net, juli 2003)

Í Steinatúni, uttan fyri Pizzakjallaran og á takinum yvir kioskini á steðgiplássinum fyri býbussar, savnast fitt av fólki í tólv-sekstan ára aldri, tá myrkrið legst yvir býin. Nógv teirra hava skutarar, sum verða parkeraðir á takinum, ið er krógvað eitt sindur burtur frá stóru ferðsluni í Niels Winthersgøtu, Niels Finsensgøtu og Bøkjarabrekku. Ongin sær, hvat ið fyriferst á takinum, og, sambært løgregluni, er partur av hesum bólkinum marginaliseraður ungdómur, sum løgreglan kennir frá rúsevnis- og revsimálum, ið tey hava havt ein leiklut í (SvF). Tey í Steinatúni eru tó fyrst og fremst vanlig ungfólk, ið kanska ikki tíma at ganga til ítrótt ella tónleik, ei heldur at sita heima við hús, og nógv teirra brúka Margarinfabrikkina regluliga.

Stigmatisering (ella stempling) er partur av marginaliseringini av børnum og ungum. Tá ið tann útihýsti ungdómurin verður stigmatiseraður, so er ringt at sleppa inn í tann *væleydnaða* bólkin aftur. Stigmatisering kemur ofta av at vera fremmandur (útlendingur ella úr aðrari bygd); av at vera úr familju, sum av eini ella aðrari orsøk hevur fingið ringt orð á seg; ella av at hava sosialt samskifti við fremmand og marginaliserað fólk. Stigmatiseraður ungdómur finnur saman, serliga í teimum stóru plássunum, og kemur ofta í samband við vaksin, sum hoyra til eitt umhvørvi við misnýtslu og kriminaliteti.

Knúsarin (yrking á alnetinum)
Eg liggi í grasinum og hugsi um teg,
teg, sum eg eri bundin at,
tú, sum hevur oyðilagt mítt lív.
Eg royni at koma burtur frá tær,
men tú blívur við at halda fast í mær.
Mín familja vil ikki síggja meg,
og tað er tín skyld.
Tú stjelur mínar pengar,
tú stjelur mítt lív.
Tá eg eri saman við tær,
er tað gott at liva.
Tú rúsar mínar sansir.
Tú ert ikki mín vinur,
men mín fíggindi.
Fyrst bleiv eg bjóðaður tær,
so bleiv eg tvungin til tín.
Tú blívur mín deyði.
– tú ert narkotika!
Lulu_

Stigmatiseraður ungdómur skapar sína egnu ungdómsmentan við serligum rollumynstrum og hevur serlig støð at hittast á. Ofta hava tubakk, rúsdrekka og rúsevnir sum hassj stórt virði innan fyri bólkarnar. Tá ein fyrst er komin inn í *taparabólkin*, kann vera ringt at koma upp á rættkjøl aftur, og ofta missa foreldrini fullkomiliga tamarhaldið á børnunum.

Fyri nøkrum árum síðani vóru bara tveir, nú eru fimm politistar, sum burturav arbeiða við at finna vandamiklu rúsevnini, ið seld verða ólógliga [...] Tey, sum nýta sterku evnini, eru í øllum aldrum. Politistarnir eru komnir í samband við nøkur 14 ára gomul, heilt nógv 15 ára gomul, og uppaftur fleiri 16 ára gomul. Millum heilt tilkomin fólk er tað óvanligt at brúka sterku rúsevnini [amfetamin, FG]. – Tey byrja heilt ung, tí vit hava ofta 17 ára gomul, sum siga seg hava brúkt sterk evni í nøkur ár.
(Dimmalætting 3/9 2004)

Foreldrini og lokalar siðvenjur missa í stóran mun sínar ráðgevandi uppgávur, tá ið børnini sjálvi skulu skapa sín samleika. Útlendskar sjónvarpsstøðir, alnet, teldubrøv, fartelefonir, sms, og annað innan nýggju kunningartøknina, hava givið ungdóminum høvi sjálvur at avgera, hvørja vitan hann nemur sær.

Fýra ung oddafólk stóðu fyri 75 innbrotum, sum vóru framd kring alt landið í fjør. Stolið varð fyri meir enn eina hálva millión krónur tilsamans. Tey eru 18 til 22 ár. Innbrotini, sum byrjaðu á vári í fjør, eru framd í Klaksvík, Eysturoy, Suðuroy, Streymoy og serliga Havnini.
(Dimmalætting 3/3 2004)

Sosialur og mentanarligur kapitalur er sera týðandi, um ein skal vera førur fyri at taka røttu avgerðirnar og skapa sær eina góða framtíð. Mentanarligi kapitalurin gevur einstaklinginum eina heildarmynd av avleiðingunum av avgerðunum, ið skulu takast. Ung, ið hava skerdan mentanarligan kapital, taka ofta skeivar avgerðir, tí tey ikki hugsa um avleiðingarnar, ið síðan koma. Uttan mentanarligan kapital megnar tú ikki at rætta mistøkini og brúka nýggja vitan og nýggjar royndir á skilagóðan hátt.

Úr faldara hjá Náttarravnunum í Havn (2002)
- „tað eru tey í teimum gulu jakkunum…“
„Náttarravnarnir“ eru heilt vanlig vaksin, sum vilja stuðla trygdini hjá teimum ungu sum eru „í býnum“ -í góðum samstarvi við myndugleikarnar – til gleði fyri tey ungu.

[…]

Náttarravnarnir eru oftast í býnum seint fríggjadagar og leygardagar umframt við serlig høvi, tá nógv ung eru úti. Royndirnar úr øllum Norðurlondum eru at arbeiðið hjá Náttarravnunum økja lokalu trygdina.

Sálarligur kapitalur er eisini sera týðandi, sigur Giddens, tí hann gevur barninum styrki at *klára seg* ígjøgnum tilveruna (Giddens 1996 og Heggen et al 1999). Sálarligur kapitalur er í høvuðsheitum álit, stuðul og opinleiki. Kjarnin í sálarliga kapitalinum er tað grundleggjandi álitið millum foreldur og børn tey fyrstu liviárini hjá barninum. Nøkur marginaliserað ung, sum eg havi prátað við, hava upplivað eina røð av persónligum og mentanarligum tvídráttum í barndóminum heima við hús, í skúlanum og aðrastaðni. Tey kenna seg kroyst út úr skúlanum vegna ótolandi trupulleikar og stigmatiseringsgongdina, ið tíverri hevur fingið loyvi at menna seg (Heggen et al 1999). Trupulleikarnir vaksa sostatt, um børnini ongan stuðul fáa, áðrenn ov seint er. Marginaliseraður ungdómur hevur trupulleikar, sum ofta eru knýttir at hesum viðurskiftunum:

- sosialt tyngdar og marginaliseraðar familjur
- rúsdrekka- og/ella rúsevnismisnýtslu
- harðskapur og kriminalitetur
- stigmatisering í skúla og í lokalsamfelag
- sosial sambond við fá ella marginaliserað fólk

Sterk familjubond kundu hjálpt nógvum ungdómum á eggini, men tá familjan ikki er har, og tú ikki hevur sosial sambond við onnur væl virkandi vaksin, so stendur tú sera einsamallur og veikur. Tað eru ov fáir serfrøðingar í samfelagnum, og ungdómurin má bara passa seg sjálvan sum best. Skiftið frá teimum gomlu tíðunum við stórum og sterkum familjueindum til seinmodernaðu globaliseraðu tíðina hevur gingið skjótt í Føroyum, so skjótt kanska, at ein ikki veruliga hevur klárað at umstilla samfelagið enn.

Tað er nemt at geva foreldrunum ábyrgdina og at senda løgregluna út í gøturnar, men vit fáa óansæð ikki tað gamla samfelagið aftur. Vit mugu síggja í eyguni, at vit liva í einum øðrum samfelagi í dag enn fyri bara tjúgu árum síðani. Ein kann ikki avbyrgja ungdómin og geva honum alla skyldina fyri *nýggju* sosialu trupulleikarnar. Hann hevur ikki sjálvur valt sær hetta samfelagið. Tað er ikki hann, sum hevur gjørt av, at tann sterka familjueindin ikki er sjálvsøgd longur.

Nógvar uppgávur, sum húski og familjur fyrr loystu heima (ella í øllum førum skuldu eitast at loysa), verða nú fluttar út til almennar og privatar serstovnar við serfrøðingum innan ymisk málsøkir.

Skúlarnir vilja hava fleiri sosialráðgevarar og sálarfrøðingar; og í tí almenna kjakinum kemur fram, at vit mugu fáa fleiri viðgerðarstovnar til rúsevnis- og rúsdrekkamisnjótarar, til blandingsmisnjótarar, til ungar misnjótarar, til incestoffur; og fleiri ráðgevarar til familjur í sosialari neyð, til børn við atferðartrupulleikum, til heimleys o.s.fr. Onkur trupulleiki er nýggjur her á landi, men teir flestu hava bara verið tagdir burtur fyrr. Tað var ikki nakað, sum ein tosaði alment um, ið hvussu er ikki í fjølmiðlunum.

Gjárkvøldið

Eg hoyri at mamma grætur
Eg kenni bert hatur
Nú er hon lærd,
Og væl bard.
Helst er tað eg,
Sum havi gjørt fortreð.
Babba mín drekkur brennivín,
Og skjótt kemur hann inn til mín.
Eg má liggja stillur,
Ella verður hann illur.
Áh, Gud lova mær,
At hann ikki kemur nær.

(kelda: faroesechat.net 2002)

At ein misnjótari stendur fram í fjølmiðlunum og sigur, at øll tey ungu í Føroyum taka ecstacy, merkir ikki, at øll tey ungu í veruleikanum taka ecstacy. Tað sigur nógv um eitt ungdómsumhvørvið; tað, sum hann hoyrir til, men tað sigur ikki, hvussu øll tey ungu í Føroyum eru.

Úr faldara hjá Bláa Krossi Føroya (2002)

MISNÝTARIN	AVVARANDI
Hevur nervandi rúsevnisnýtslu	Verjir
Vil ikki lurta	Brikslar
Vil ikki broyta	Noktar
Noktar	Kennir máttloysi
Bagatelliserar	Hevur skuldarkenslu
Brikslar	Hevur skomm
Umber	Kennir avbyrging
Hevur oyðileggjandi misnýtslu	Kemur í ósemjur
Kennir avbyrging	Kennir Nervar og Ótta
Kemur í ósemjur	
Kennir nervar og ótta	

Tó er tað av stórum týdningi, sum áður nevnt, at síggja ungdómin í einum størri samfelagsligum høpi, tí hann livir í tí sama samfelagnum sum øll onnur, og marginaliseringin er líka nógv ein sosialur sum ein sálarligur spurningur. Um ein ikki roynir at seta seg inn í liviumstøður og lívsvirðir hansara, so kann ein undir ongum umstøðum skilja ungdómin.

Sálarfrøðingar og sosialráðgevarar, sum arbeiða við børnum og ungum, hava tó stóra vitan um livikorini hjá marginalbólkum í samfelagnum. Tað eru eisini hesi, sum nú royna at fáa myndugleikarnar at taka vaksandi rúsevnis- og rúsdrekkatrupulleikar millum ung í álvara.

> *Náttina til leygardagin var ein tilburður, har ein 43 ára gamal maður varð álopin av tveimum ungum dreingjum. Maðurin fekk álvarsligt kropsligt mein, men løgreglan stendur á berum og vil hava fólk at gera vart við seg.*
>
> *Uttan ávaring verður hann sligin niður. Síðani verður hann sparkaður og sligin fleiri ferðir í búkin, ryggin og í andlitið, meðan hann liggur. Tann 43 ára gamli maðurin misti vitið beinanvegin. Tá hann raknar viðaftur, fer hann omanaftur á kamarið hjá sær [á hotelli]. Dagin eftir fær hann vitjan av einum familjulimi, sum hevur frætt um støðuna, og hann verður síðani fluttur á landssjúkrahúsið.*
> *(Sosialurin 20/11 2001)*

Siðvenja og mentanarlig barlast eru ikki altýðandi fyri sosialiseringina av ungdóminum longur, tí hann skapar sín egna persónliga samleika útfrá selektivum úrvali av súmbolum, teknum, tulkingarhættum og virðum úr veruleikanum. Strukturellar forðingar kunnu forða tær í at náa tíni lívsmál, men í prinsippinum er ungdómurin púra fríur at velja sær eina lívsverkætlan. Og at vera fríur er bæði krevjandi og avbjóðandi, tí tú noyðist áhaldandi at taka avgerðir, at velja kós, og tað er ikki bara sum at siga tað, tá ein er ungur og droymandi.

Ung velja strategiir í felag, soleiðis at tey standa saman um ein lívsstíl og mentanarligan samleika (Mørch 2001). Tey, ið av ymsum

orsøkum ikki fáa tikið góðar avgerðir, viðhvørt tí tey ikki vita betur, hoyra ofta til bólkin av marginaliseraðum ungdómum.

Mobilitetur (bæði fysiskur og sosialur) er eitt hugtak, ið sera nógv knýta til seinmodernaða samfelagið. Mobilitetur er eitt mál, eitt virði og enntá eitt krav í nógvum kontekstum í dag. Flyting og ferðir er ein týðandi partur av samleikanum hjá nógvum føroyskum ungdómum.

[UNG OG FERÐIR]

Ferðir hava stóran týdning fyri nógv ung. Tey, ið hava ráð til tað, fara uttanlands í ferium, fjakka saman við vinum og vitja vinfólk í øðrum londum. Tað er vorðið lættari og bíligari at ferðast – og tað er modernað. Ferðir geva upplivingar, royndir, undirhald, skemt og nýtt forbrúk; ferðing er ein íløga. Summi uppsøkja eisini spenning og vandar. Tey ungu søkja forvitnisligar upplivingar. At ferðast er, verður sagt, at kenna seg frælsan, at stýra sínum lívi. Tað er eisini partur av einum lívsstíli: tí hjá fjakkaranum, kosmopolittinum, heimsborgarnum. Tað gevur ein mentanarligan kapital og tign. Ongantíð áður hava so nógvar lýsingar verið at sæð, ið royna at lokka ung út at ferðast.

„Smáar oyggjar eru bara gott stað at búgva hjá fuglum“, sigur Barba, ið er sera ring at fáast við, speiskt, í roadmoviefilminum *Bye Bye Blue Bird* (Ottarsdóttir 1999). „Kanska eru smáar oyggjar ikki bara fyri fuglar“, sigur vinkonan Rannvá við einum smíli í síðstu scenuni í filminum, ið fyrigongur á flogvøllinum í Vágunum., „men eisini fyri menniskju, ið ikki ynskja at flyta burtur“. Barba velur, púra óvæntað, í evstu løtu, at avlýsa ferðina aftur til útlondini. Hon blakar seg í føvningin á grátandi mammuni, eini mammu, hon annars ikki hevði sæð í fleiri ár. Barba er vorðin vaksin og ævintýrkenda og gátuføra ferð ungdómslívsins er at enda komin. Filmurin lýsir sera væl støðuna hjá nógvum ungdómum í Føroyum: ferð teirra í tíð og rúmi, frá barndómi til vaksnamannalív, frá smáum avbyrgdum

oyggjum til stóra fremmanda heimin – og aftur. Flytifuglar venda altíð heim.

Tað útlendska ævintýrið, ið víðkar sjónarringin hjá ungdóminum og gevur høgt mett minni fyri lívið, er næstan altíð avmarkað til nakrar mánaðir ella nøkur ár. Og helst skal tað vera áðrenn man *etablerar* seg við hjúnarfelaga, børnum, húsi og føstum arbeiðstíðum. Talan er í stóran mun um lívsskeið, eitt slag av skiftissiði, ið skal geva ein mentanarligan og súmbolskan kapital at njóta gott av seinni av lívinum. Tað er, kann eisini sigast, ein íløga í eksotiskar upplivingar og royndir, ið ikki kunnu heintast heima í norðuratlantiska havinum. Útlongsulin er stórur, men heimlongsulin líka sterkur.

> *Kára (fjúrtan ár, 2003) dámar væl at ferðast. Hon hevur danska mammu og føroyskan pápa, men hevur altíð búð í Havn. Hon hevur tvey systkin, eina stórasystir og ein lítlabeiggja. Í summarferiuni plagar hon at ferðast til Danmarkar, har hon hevur alla familju sína í kvennlegg. Hennara nærmastu í Danmark búgva í lítlum býi tætt við Faaborg á Fjóni. Hóast pápin er av Sandi ferðast hon sjáldan til Sandoyar. Tað gjørdi hon meira fyrr, sigur hon. Danska familja hennara kemur ikki ofta til Føroyar at ferðast. Í Danmark hevur hon ein javnaldra í sínum systkinabarni, og tær fylgjast, tá Kára er niðri. Sum oftast fer øll familjan saman til Danmarkar at ferðast. Burtursæð frá Danmark, so hevur Kára bara verið í Noreg á uttanlandsferð; hon fór til Noreg saman við skúlaflokkinum á sinni. Hon kundi hugsað sær at vitjað onnur lond, men, sum hon sigur: „tá man hevur familju í Danmark so...er tað nokkso nógv betri at fara til familjuna...“. Tá familjan fer niður plagar hon at flúgva til Keypmannahavnar og steðga nakrar dagar í danska høvuðsstaðnum, áðrenn farið verður víðari til Fjón. Í Keypmannahavn býr systir Káru, ið er 23 ár og lærir til sjúkrasystir. Kára ætlar sær sjálv at lesa uttanlands seinni – og hvar fer hon at búgva tá hon er liðug við útbúgvingina hjá sær? „...eg rokni ikki við í Føroyum...veit ikki ordiliga“, sigur hon. Hon hevur eisini skyldfólk í Danmark í kalllegg,*

men hesi fólkini hevur hon minni samband við. Hjá Káru er tað heilt natúrligt at halda leiðina til Danmarkar, tá summarið kemur. Tað er partur av hennara samleika.

Tað er tó heima í Føroyum tey flestu vilja skriva lívsins bók. Tað er her tey ynskja at skapa nakað varandi og uppfostra síni børn. Tilknýtiskenslan er sera sterk, nærmast magnetisk, og gevur nógvum føroyingum í (fastari) útlegd, sum eisini verður sagt í *Bye Bye Blue Bird*, kensluna av at vera landasvíkjarar.

Útisetar, ið av ymsum orsøkum ikki kunnu ella vilja venda heim, verða fyrst gloymdir, og síðan hvørva teir heilt út úr føroysku mentanarligu heimsmyndini. Tað skúmandi havið, ið skilir oyggjarnar frá umheiminum, súmboliserar eisini markið ímillum ímyndir av veruleika og dreymi, álvara og gaman, meining og gerð. Ferðin er ein óbindandi fjeppan við fremmand samfeløg og mentanir. Hon nøktar tørvin hjá teimum ungu fyri frælsi og spæli. *Bye Bye Blue Bird* er atfinnandi undirgrundsfilmur, ið roynir at spreingja hesa sterku dualismuna, ið avbyrgir oyggjarnar mentanarliga og ger heimferðina eftir áralangt uttanlandsuppihald tunga og harmiliga hjá nógvum. „Hvat annað land í heiminum“, siga tær villu og argandi vinkonurnar í filminum, „roknar sínar landsmenn í útlondum fyri landasvíkjarar?“. Støðan er í veruleikanum helst tann sama hjá flestøllum ungdómum, ið venda heim til smá lutfalsliga avbyrgd lokalsamfeløg.

Jóhan (fimtan ár, 2003) er úr Havn og skal til Hollands at ferðast saman við familju síni í summar. Hann hevur ikki familju í Hollandi og tað er fyrstu ferð, at hann skal til hetta landið. Tey fara við Norrønu til Hanstholm og síðan víðari í egnum bili. Hann hevur ikki verið uttanlands serliga ofta: „...nei tað er bara nakrar fáar ferðir...langt síðan síðst“, sigur hann. Tey skulu vera eina viku í Hollandi; tey fara til Amsterdam og annars at koyra runt í landinum. Jóhan hevur annars verið í Danmark nakrar ferðir, „tvær-tríggjar ferðir leingi...“, og har býr pápabeiggi hansara, ið er lækni og granskari.

Flyti- og ferðamynstrini hjá føroyskum ungdómi eru nógv broytt seinastu árini. Globaliseraði heimurin við sínum vaksandi rørslufrælsi (serliga fyri tey vælbjargaðu) á øllum lívsins økjum, ávirkar í dag eisini oyggjasamfeløgini í útnorði. Tað er vorðið lættari og bíligari at ferðast og fara burtur í fremmand lond. Vikuskiftisferðir til Reykjavíkar og Keypmannahavnar eru vælumtóktar av nógvum føroyingum við einum sindri av eyka peningi á bók. Ferðirnar eru vorðnar meira spontanar og tíðaravmarkaðar enn ofta fyrr.

Stórbýarferðir dámar nógvum ungdómum væl. Konsert- og festivalferðir, vín- og fótbóltsferðir, ja evnisferðir yvirhøvur eru vorðnar eitt realistiskt val hjá modernaðum føroyingum. Tær stóru forvitnisligu ferðirnar til fjarskotin lond eru eisini høgt í metum, hóast ævintýrsøkjandi backpackerungdómarnir eru nakað færri nú enn fyri tíggju árum síðani. Nú eru tað lutafalsliga rík, ið velja at fara til kend marglætisferðamál í Eysturasia og Latínamerika. Backpackararnir, ið ofta eru ung lesandi uttan fasta inntøku, eru ikki horvnir, men hava mist eitt sindur av sínari atdráttarmegi og sínum lutmentanarliga status vegna rákgongdina í tí globala ferðaídnaðinum og vesturheimsins ungdómsmentan sum heild.

Ferðaídnaðurin er, saman við teimum modernaðu elektronisku miðlunum, bjartasta dreymafabrikkin í okkara tíð. Ungdómur og ferðir súmbolisera harvið, tá tey verða knýtt saman, sterkastu fyrimyndina í mainstreammentanini; og tað er nakað tey flestu geva sær far um. Við ferðing sínari, verður sagt, realiserar ungdómurin seg sjálvan, tí tann fysiski mobiliteturin er tað størsta frælsið. Tað er eitt frælsi til at halda á við at vera fríur, til at sleppa frá at binda seg, til at gloyma, til at sleppa undan ábyrgd og bindingum. Ferðin er skiftistíð uttan greiðar statusar, leiklutir, uppgávur ella skyldur, ið sostatt rívur einstaklingin leysan frá samfelagsstrukturunum. Ferðin opnar fyri afturvendandi útseting av teimum stóru valunum viðvíkjandi samleika og framtíð (Bauman 2000). Ferðin rúsar sansirnar og strýkur smálutir gerandislívsins burtur. Men hvussu leingi kann ein liva í hesum standi? Hvat ynskir man í veruleikanum at koma fram til?

Jóna er fjúrtan og býr í Havn. Tó eru foreldrini ikki havnarfólk; mamman er av bygd og pápin útlendingur. Jóna hevur búð í Klaksvík í sjey ár og í Noreg í umleið eitt hálvt ár. Hon fór at vitja skyldfólk í Noreg „...og so dámdi mær so ræðuliga væl at vera har...so prøvaðu vit at vita, um eg skuldi bara flyta hartil...og so dámdi mær ikki at vera har...og so vildi eg flyta upp aftur", sigur hon og flennir. Í summar fer Jóna til Íslands at vitja familju. Tey búgva í Reykjavík, á Borgarnesi. Hon hevur ikki verið í íslandi í fleiri ár, sigur hon, so „tað verður rættiliga stuttligt!". Hon fer til Íslands saman við vinkonuni hjá sær í ár; ikki „við mammu og teimum" hesaferð. Vinkonan hevur eisini skyldfólk í Íslandi og tosar flótandi íslendskt. Jóna roynir at læra seg íslendskt. Hon ferðaðist nógv til Íslands sum barn, men hevur sum sagt ikki verið nógv í Íslandi seinastu árini. Hon umhugsar at flyta til Íslands aftaná skúlan. Foreldur hennara fara eisini til Íslands í summar, men eitt sindur seinni enn Jóna, ið fer í juli mánað. Vinkonurnar ætla sær at ferðast við Norrønu. Síðsta ár var Jóna í Danmark (Danland) saman við eini vinkonu úr flokkinum. Hon ferðast ikki so ofta saman við familju síni. Jóna hevur eisini familju í Danmark: ein pápabeiggja og systkinabørn. Tey eru íslendingar. Tá Jóna er í Danmark („tað er ræðuliga sjáldan...") vitjar hon íslendsku skyldfólk síni í landinum.

Genturnar, ið í *Bye Bye Blue Bird* venda heim til *fuglaoyggjarnar* eftir at hava hoyrt til ymisk evropeisk stórbýarumhvørvi, fáa ein veruligan skelk, tá tær hitta heilt vanlig fólk, ið so at siga liva *lokalt*. Sambandið við hesi jarðbundnu fólkini, ofta skyldfólk teirra, sendir genturnar inn í eina djúpa eksistensiella kreppu, ið tær mugu kempa seg burturúr. Endurtøkurnar og tann óttaleysa lívsrútman eru at byrja við ikki til at halda út hjá teimum friðleysu villkattunum úr anarkistisku stórbýarlutmentanunum. Óeftirgjørda náttúran virkar eisini trýstandi á tær, fastlæsandi, ráðandi, og gongur fram um alt annað. Tær kenna seg minni og minni í landslagnum, sum fangaðar í sterkum meldurstreymi; øðin drivin úr teimum, máttleysar av havinum og fjøllunum.

Tær eru í skiftistíð og spakuliga fáa tær stýr upp á sínar tankar og fáa ment tann persónliga og mentanarliga samleikan. Tær eru noyddar at taka hædd fyri søgu síni, umhvørvi sínum, og framtíðini. Tann innara ferðin, úr Suðuroy til Norðuroyggjar í einum gomlum fordbili, súmboliserar eisini eina ferð gjøgnum torgreidda og syndraða samleika teirra, ið førir genturnar til eina nýggja støðu – sum, í hvussu er í fyrstani, tykist meira støðug og skipað: vaksnamannalívið.

Talva 20. Flyting: Heldur tú, at tú fert at flyta nógv í tínum lívi?

Ja	2
Nei	12
Veit ikki	10
N=24	

Viðmerkingar, dømi: „kanska, um man ikki hevur ráð til hús“
„eg vil búgva í Havn, men eisini uttanlands eina tíð“
„nei, tí eg hati at flyta!“

(kanning, áttandaflokkur í Havn 2003)

Ferðavirksemið hjá føroyska ungdóminum kann knýtast til tann sosiobúskaparliga og ungdómsmentanarliga samleikan hjá einstaklingunum. Ein ferð, sæð sum ítriv ella kapitalur, hevur sera ójavnt virði innan fyri ymiskar ungdómsbólkar. Nøkur ung ferðast sera ofta og til fjølbroytt pláss bæði nær og fjar, meðan onnur næstan ongantíð fara av landinum og *bara* hava vitjað Keypmannahavn ella Jútland. Í seinmodernaðari tíð eru sferurnar frítíð – heim – skúli (ella arbeiði) sera tætt samanknýttar, og satsað verður uppá, at tær eru í javnvág, so at lívsstílarnir og virðini hjá einstaklingunum umfata allar sferurnar í senn. Mørkini eru flótandi og ógreið, samleikaarbeiðið støðugt, og uttanlandsferðir ofta ein blandingur av frítíð, feriu, arbeiði, familjuvitjan o.s.fr. Nógv ung fara í feriu saman við familjuni á sumri, í

venjingarlegu ella til kapping saman við fótbóltsliðnum, til konsert við ungdómsorkestrinum, til ráðstevnu við meinigheitini, til skeið í sambandi við tekniska útbúgving ella at vitja mammu ella pápa, ið býr uttanlands.

Tey ungu ferðast sostatt mest í sambandi við viðurskifti, ið hava beinleiðis samband við sosiala lív teirra heima í Føroyum., og ferðin súmboliserar, kann sigast, eina víðkan av tí grundfesta heimliga kontekstinum. Við øðrum orðum virka ferðirnar sum ein aktivur partur í tí lokala lívinum, og tær innibera ikki stórbroytingar í gerandisdegnum. Málið er ikki at sleppa so langt burtur sum gjørligt sum hjá nógvum backpackarum. Tvørturímóti roynir man at kenna seg heima í útlondum, at skáka sær undan mentanarhvøkkum og ov sterkum skakandi upplivingum. Talan er meira um rutinumerktan fysiskan mobilitet, ið ikki brýtur mørk – hóast farið verður um landamørk.

Vit mugu heldur ikki gloyma, at nógv ung als ikki hava áhuga í uttanlandsferðing. Tey vilja helst ferðast minst møguligt; tey hava heilt aðrar raðfestingar og virðir enn globetrottararnir. Hesi virka kanska í fyrstu atløgu meira lokal ella siðbundin enn umboðini fyri globala mainstreammentanina, men so einføld er støðan ikki. Ofta eru tey virknir luttakarar í globalum ungdómsmentanum við at brúka alnetið. Tey eru ferðandi á alnetinum, og tey eru ikki meira siðbundin enn tann flúgvandi ungdómurin, men hava møguliga sterkari bindingar til lokalsamfelagið vegna arbeiðsviðurskifti, búskaparstøðu og familjubond. Tað eru ikki bara fuglar, ið ynskja at búgva í oyggjunum. Og við tí góða sambandinum úr Føroyum til umheimin er lættari enn nakrantíð áður at ferðast. Oyggjarnar egna seg ikki bara til fuglalív.

Ein annar formur fyri mobiliteti, ið eisini er sera umtóktur millum ung, er bilakoyring millum bygdir og oyggjar. Bilarnir hava eftirhondini í nógv ár verið partur av fleiri ungdómsmentanum í landinum.

[BILAR OG FERÐSLUVANLUKKUR]

Bilisman í Føroyum byrjaði av álvara í sekstiárunum, tá dreingir, ið tjentu nógvar pengar, fingu sær stórar bilar. Síðan er bilferðslan vaksin nógv, og fleiri eru deyð í ferðsluni.

Eina góða viku eftir Ólavssøku 2005, mánakvøldið áttanda august, var eitt ferðsluóhapp í miðbýnum í Havn. Tað er ikki fyrstu (ei heldur síðstu) ferð, at tílíkt hendir. Tað óvanliga hesaferð var, at vanlukkan elvdi til alment kjak um ungar bilførarar, ið kappkoyra í havnargøtum. Vanlukkan kundi kostað mannalív, saktans, og fólk flest ørkymlast av risikoatferðina hjá teimum ungu. Tann stóri spurningurin, ið nú stingur seg upp, ljóðar soleiðis: Hvat kunnu vit gera fyri at steðga bilvanlukkunum? Og her er tíverri onki einfalt svar at leggja fram. Hóast ein ferðsluvanlukka er eitt sera konkret fyribrigdi (sera sjónligt) so er trupulleikin rættiliga samansettur. Vanlukkurnar umfata bæði maskinur og fólk, og atferðin og tankarnir hjá menniskjum eru, sum kunnugt, sera ring at spáa um.

Spurningurin „hví bera fólk seg at sum tey gera?“ hevur nógvar síður og kann ikki kannast, uttan at viðkomandi persónar fáa eitt orð at hava sagt. Og viðvíkjandi hesum er eisini nakað nýtt og jaligt hent: ungir bilførarar hava sagt sína meining um kjakið í fjølmiðlunum eftir áttanda august. Tað er at frøast yvir, tí nú koma nógv nýggj sjónarmið fram. Tey ungu vilja ikki revsast kollektivt fyri ørskapin hjá nøkrum fáum. Og tað er til at skilja. Tey flestu halda seg til ferðslulógina, vilja ikki seta lívið í váða, og halda seg yvirhøvur burturi frá tí risikosøkjandi bilungdóminum.

Hvussu fær man so fatur á teimum vandamiklu førarunum, ið seta egið og onnur lív í vanda? Hvussu kunnu hesi fáast til at broyta atferð og lívsstíl? Í Degi og Viku (18/8 2005) í Kringvarpi Føroya segði ein fyrrverandi kappkoyrari, at talan er um eina lutmentan, ið ikki bara savnast um kappkoyringina. Tað byrjaði, segði maðurin, við at man koyrdi vanligar biltúrar á kvøldi, men broyttist síðan til at blíva, hjá nøkrum, ein øgilig kapping um skjótleika og motorstyrki. Tað

einasta, ið er at gera, sambært hesum unga manninum, er at skapa serliga koyribreyt til endamálið at koyra kapp. Skipað viðurskifti, sum sagt verður.

Eg havi motomani – eg fái bert frið
í fimta gear
tá mítt skínandi stál rýkur fyrst í mál
á tá livi eg væl
eg havi motomani – um eg fari á glið
tað gerst ikki við
bert eg havi mín bil
kann verðin vera sum hon vil

Eg havi goldið kontant
eg havi onki lænt
tí eg havi ráð
eg havi fiskað nógv
og arbeitt í slógv
so eg havi ráð
kom bara upp í
so koyra vit alt føroya land runt
– her er leður og stál – hann hevur egna sál
og eg elski hann
(M. Joensen, Vestmenn)

Hetta er *eitt* boð uppá eina loysn. Eitt av mongum uppskotum. At brúka eitt hugtak sum lutmentan (bilmentan) rættvísger ikki væntandi ferðslumentanina hjá ávísum ungum monnum, men kann tó gera tað lættari at skilja, hvussu nøkur ting hanga saman.

Ein lutmentan umfatar ein serligan bólk við nøkrum serligum virðum og reglum. Tað eru serlig viðurskifti, ið geva status og heiður innan

fyri bólkin – í hesum førinum tað, ið hevur við bilin og koyringina at gera. Sostatt hevur trupulleikin av ferðsluvanlukkum eina mentanarliga og sálarliga dimensión, ið sjáldan verður viðgjørd.

Oftast er bilurin í fokus. Bilførarin kann noyðast at seta ferðina niður, um vit innføra nýggjar skipanir í undirstøðukervinum (til dømis ferðtálmar) ella enntá í bilmotorinum. Hesar verkætlanir geva eitt gott og skjótt úrslit, ið sæst beinanvegin. Men tær hava eisini ávísar veikleikar: ferðin fer kanska ov nógv niður á ávísum vegastrekkjum, kappkoyringin heldur fram á øðrum (kanska vandamiklari) vegum, gongufólk kenna ein falskan tryggleika o.s.fr. Kann man fáa ungar bilførarar at broyta hugburð? Møguliga. Í blaðnum *Lít* hjá Tryggingarfelagnum Føroyar (november 2001) verður av ungum manni sagt:

> *Hugburðsbroyting verður ofta nevnd sum eitt loysunarorð, men slíkt trýr Fróði lítið uppá. „Tað undrar meg als ikki, at nógvu ferðsluvanlukkurnar ikki rína við tey ungu. Tað ber ikki til at forða ungum dreingjum í at koyra skjótt. Eg dugi illa at síggja, at tað kann broytast [...] Dreingir mugu sleppa at royna kreftir, kappast og avreagera. Hetta eru ikki tankar, men bara ein gerð, eitt instinkt".*

Bilurin verður vegamótið, ið sameinir: vinir, frítíð, lívsstíl, o.s.fr. Hann verður eitt rullandi heim, ið er spennandi og uttan fyri foreldranna stýring. Bilurin verður ein *natúrligur* partur av gerandisdegnum, ið ongin skal taka frá teimum. Nøkur av hesum bilungdómum koyra ikki bara vanligar túrar, men skulu fara út um mørk, fáa blóðið upp at kóka og koyra kapp á myrkum landsvegum. Tað eru hesi, vit skulu hava fatur á. Danski sosiologurin Kevin Mogensen sigur í ritgerðini *Livet begynder ved 150 km/t* (2002):

> *Unge med risikoidentitet, risikounge eller risikotrafikanter er typisk unge der ikke noget andet sted kan udforske og udfordre deres identitet som andet end utilpasset og marginaliseret. Risikounge kan have det svært med at finde sig hjemme i institutionelle sammenhænge: familier, skoler,*

uddannelser og arbejdspladser, der stiller krav til den unge om at handle reflekteret og individualiseret. Der er derfor sammenhænge mellem de måder de unge forholder sig til samfundets krav og forventninger og så den måde de lever med risiko og usikkerhed.

Sambært hesi kanning úr Danmark eru tey ungu, ið hava høga risikoatferð, ofta marginaliserað í samfelagnum annars. Tey velja, púra tilvitað, risiko fram um trygd hóast ávarað og hótt verður ímóti tí og eru stolt av síni koyring og kapping. Sera torført er at fáa hesar persónar at halda ferðslulógirnar, tí mangan eru álvarsamar vanlukkur og beinbrot ikki nóg mikið til at fáa tey at steðga. Tey siga seg koyra eftir umstøðunum, tá ferðin liggur uppi á 150-200 km/t. Tað halda tey. Ein finsk kanning sigur um ungar finskar menn, ið eru í vandabólkinum:

Intoxicated eighteen- to twenty-year-old males with lower education dominate the accident statistics of the young, thus confirming the myth of the Finnish working-class, car-oriented, drinkloving masculinity [...] More than 75 percent of youths killed in road accidents between 1998 and 2002 were young men.
(Vaaranen 2004: 91-92)

Norski sálarfrøðingurin Pål Ulleberg sigur persónsmensku, virðir og atferð hava størsta leiklutin, tá ið hugt verður at teimum ungu, ið koyra bil. Hann hevur allýst seks kategoriir, ið tey ungu kunnu setast í. Talan er um: (1) Sosialt avvíkjandi ungdómur (2) Ágangandi ungdómur (3) Upplivingarsøkjandi ungdómur (4) Líkasælur ungdómur (5) Umhugsin ungdómur (6) Óttafullur ungdómur. Fyrstnevndi er tann vandamiklasti, meðan nr 5 og nr 6 eru tryggastu førararnir í ferðsluni. Tað er altíð ein stórur vandi við brúkinum av kategorium, ið sigast vera grundaðar á sálarlig eyðkenni hjá einstaklingum, tí nógvir bilførarar, ið eru í vandabólkinum, kunnu hava góðar eginleikar ella hava verið í tryggastu kategoriini áður, tí fólk broytast, og ung verða vaksin.

Tað er ein sera stór ábyrgd at vera bilførari. Tað er krevjandi (sálarliga og mentanarliga) at fáa eina trygga ferðslumentan. Ráðið fyri Ferðslutrygd (RFF) ger eitt stórt arbeiði fyri at upplýsa børn og ung um vandarnar, sum bilkoyringin førir til. Tó fara ung eisini í framtíðini at søkja vandar, spæla við lagnuna, men vónandi kunnu nøkur úr vandabólkinum læra at stýra sær – ella finna sær okkurt annað og stuttligari ítriv. Skal ein so koyra og koyra, skjótari og skjótari, kvøld eftir kvøld, bara tí, at hini gera tað?

Ferðslutrygd (Álit um ferðslutrygdarpolitikk í Føroyum, RFF 2003)

„Ferðslan á vegnum er sera fjølbroytt og fløkt. Í vegakervinum skulu hesi fólk og hesir felagsskapir samvirka:

- Tey, ið nýta vegakervið
- Bilframleiðarar
- Teir, ið gera vegir og ferðsluumhvørvið, t.e. vegamyndugleikar
- Løgtingið, meginfyrisitingin og løgreglan
- Marknaðurin

Flutningsskipanin er gjørd til okkum øll. Men ferðslutrygd skapa vit í felag, og tí hava allir teir partar, sum her eru nevndir, sína ábyrgd: teir, sum gera vegakervið, nýta vegakervið, bilframleiðarar, lóggávu- og politivald og bilasølur.“

Bilurin hevur sera høga raðfesting í gerandislívinum hjá nógvum ungum monnum í Føroyum. Hann er nógv meira enn flutningstól at koma frá A til B við. Bilurin hevur høgan status og nógvar uppgávur at røkja. Hann er ein virðismikil ogn, ið eigarin stoltur kann sýna fram fyri vinum og kenningum. Hann er eitt privat rúm, ið kann brúkast til veitslur og sosiala samveru við vinum og kenningum. Í bilinum stýrir hin ungi maðurin sjálvur ferðini og leiðini, tónleikinum og prátinum. Bilurin er *rossið* hjá atlantiska cowboyinum. Bilurin

umboðar eitt søtt frælsi, sum tey ungu leingjast eftir og gleða seg til í fleiri ár, áðrenn tey hava aldur at ogna sær koyrikortið. Tað er ein serligur lívsstílur, ið krevur bil, ið er í tonkunum. Atlantiskur ungdómur vil offra næstan alt fyri at sleppa at sita við rattið í tí rætta bilinum.

Frá bilinum fara vit til elektronisku miðlarnar, ið eru partur av gerandislívinum hjá teimum flestu í dag, og, ið hava broytt sosialu samskiftismynstrini hjá ungdóminum.

[7]

FARTELEFONIR

Nýggj tøkni í Føroyum

Fyrsta fartelefonin, skapt fyri 55 árum síðani, var risastór og vigaði heili 40 kg. Mong ár seinni, í 1987 (sama ár fáa Føroyar uttanlandssamband um fylgisvein) kemur fyrsta fartelefonin, ið veruliga kann berast og flytast, á marknaðin. Múgvandi fólk kunnu ogna sær hesa telefon, straks kallað *yuppie-bamse* í Danmark, ið kostar umleið 30.000 krónur. Ikki fyrr enn í 1990'árunum fara vanlig vaksin fólk at keypa sær fartelefonir, og í Føroyum verður GSM-skipanin ikki tikin í nýtslu fyrr enn í 1998. Gamla NMT-skipanin fyri fartelefonir, serliga hent hjá sjófólki, hevði tó verið virkin síðan 1990. Børn og ung koma ikki av álvara inn í myndina sum fartelefonnýtarar fyrr enn um túsundáraskiftið.

Ung ravtøknilig boðsending við heimsfevnandi afturljóði er grovt undirmettur kjarni í samfelagsmenningini í Føroyum seinastu mongu árini.

Talva 21. Fartelefonir í Føroyum ialt

1999	10.601
2000	16.814
2001	24.487
2002	32.917
2003	38.026 (GSM 36.787)
2004	41.298 (GSM 40.262)
2005	42.032 (GSM 41.501)
2006	49.965 (GSM 49.506)

kelda: hagstovan (www.hagstova.fo)

Sostatt hevur fartelefonin eina sera stutta søgu, hóast fólk flest ikki megna at ímynda sær eina tilveru uttan Sms-boð og lættar persónligar fartelefonir í dag. Og helst skal borgarin eiga spildurnýggja telefon við øllum teimum nýggjastu hentleikunum fyri ikki at verða forfjónaður. Gunn Reinert (2006) sigur í persónligum greinastubba í Dimmalætting um kæru Nokiatelefon sína, at „flest øll, ið ikki eru

partur av fartelefonnørdaliðnum, sum altíð hava nýggjastu, smartastu fartelefonirnar, kenna kensluna av skomm av at eiga eina tvey ella trý ára gamla fartelefon á stødd við ein postkassa“.

„Fartelefonin er komin fyri at vera“, segði Andras Róin í <ph_1> (eykablað fyri ung í Sosialinum) níggjunda oktober 2002. Og tey munnu vera sera fá, ung sum gomul, sum vilja nokta fyri, at hald er í orðunum hjá fyrrverandi stjóranum á Føroya Tele. Sjálvandi hvørvur fartelefonin ikki í bræði. Hinvegin broytist hon áhaldandi, tí fartelefonin er møguliga tað hátøkniliga tól, ið er í størstu og skjótastu menning. „Fartelefonin er“, sigur Andras Róin, „ein samantvinnan av nógvum ymsum. Tú kanst spæla, vera á internetinum, kjatta, lurta eftir útvarpinum, lurta eftir tónleiki, senda Sms-boð og ikki at gloyma tosa“. Í 2007 kunnu fartelefonir nógv meira enn sum so, til dømis kunnu tær senda og móttaka myndir og filmkut, og í framtíðini verða tær eitt tól, ið sameinir allar talgildar skipanir, so tað opnar fyri ófatandi møguleikum.

Talva 22. Fartelefonnýtsla íalt (min.)

	Innanlands	uttanlands	ferðsla íalt
2003	28.280.842	3.297.159	31.578.001
2004	31.729.673	3.477.179	35.206.752
2005	36.876.792	3.885.407	40.762.199
2006	43.777.095	4.414.520	48.191.615

kelda: hagstovan (www.hagstova.fo)

Sera ymist er, hvussu ung brúka fartelefonir sínar; summi samskifta einans við síni nærmastu, vinfólk og familju, meðan onnur hava stór fløkjaslig netverk og samskifta við kend og ókend úr ymsum býum og londum. Greitt samband er, kann eg nevna, millum fartelefon- og alnetsnýtslumynstrið hjá ungdóminum. Tey, ið brúka alnetið nógv eru sum oftast eisini stórnýtarar av fartelefonum.

Talva 23. Fartelefonnýtsla GSM íalt (min.)

2003	29.195.955
2004	33.924.635
2005	39.592.240
2006	47.891.114

kelda: hagstovan (www.hagstova.fo)

Í januar 2004 vóru 36.800 GSM-fartelefonir virknar í Føroyum (Árbók fyri Føroyar). Talið er seksfaldað seinastu fimm árini. Í Íslandi hava 97 prosent av íbúgvunum fartelefon, meðan tilsvarandi tøl fyri Danmark og Føroyar eru ávikavist 89 og 79 prosent (Dimmalætting 14/9 2004). Í 2005 hevur Føroya Tele meira enn 32.000 fartelefonfelagar, harav 16.500 brúka teletíðarkort, ið er vanligasta telefonhaldið hjá tí yngra ættarliðinum. Teletíð hevur einans verið útbjóðað síðan ár 2000.

Tey ungu eru stórnýtarar av fartelefonum, og sosiala samskifti teirra er tætt knýtt at fartelefonunum. Miðskeiðis í nítiárunum komu tær smáu snotiligu GSM fartelefonirnar, ið vóru ætlaðar einum breiðum brúkaraskara á marknaðinum. Tað gekk sera skjótt so høvdu flestøll vaksin fólk sína egnu fartelefon, kanska serliga tey 20-40 ára gomlu. Síðan hava bæði eldri og yngri aldursbólkar ognað sær fartelefonir, og í dag eru telefoneigararnir heilt niður í tíggju ára aldur. Føroyingar tykjast at vera skjótir at taka nýggja hátøkni til sín, og fólk royna mangan at ogna sær tað nýggjasta nýggja innan elektronikkina, ið er at finna á marknaðinum; fólk vilja gjarna vísa sínum vinum merkjavørur, ið tey hava ognað sær.

Rák og móti

Fartelefonin er ómissandi hjá nógvum tanáringum, ið hava lagað lívið eftir hesum lítla samskiftistóli. Stórnýtarar, ið allatíð eru í holt við at senda Sms-boð ella ringja, kenna seg avbyrgdar og ófrælsar tá telefonin ikki liggur tendrað, har hon eigur: í lummanum. Tey kenna seg eina, um tey ikki sleppa at senda tekstboð til vinirnar

og eru tætt knýtt at sínum telefonum. Fartelefonin er mangan teirra dýrasta ogn. Fartelefonin hevur als ikki somu funksjón hjá børnum sum hjá vaksnum. Hjá vaksnum er fartelefonin, sum heild, eitt hent virkistól at nýta í sambandi við arbeiðs-, familju- og frítíðarviðurskifti. Hon verður fyrst og fremst brúkt til at bera og móttaka týðandi boð, tá ið viðkomandi persónur ikki røkkur til telefonina heima ella á kontórinum. Fartelefonin verður nýtt sum ein vanlig telefon, sum tú kanst brúka, líkamikið, hvar tú ert staddur.

Hjá børnum og ungdómi er fartelefonin nógv meira enn ein boðberi. Fartelefonin er fyri tað fyrsta teirra einasta privata telefon (sum foreldrini ikki kunnu hava eftirlit við). Ongin kann kanna, hvønn tey tosa við, ella nær tey tosa í telefon. Fyri tað næsta, so er fartelefonin nakað, sum tey sýna fram fyri javnaldrum. Útsjóndin á fartelefonini sendir ein boðskap út um teg, og tí er ikki líka mikið hvat merki telefonin er.

Litirnir og mynstrini á telefonini senda eisini signalir út um, hvør typa telefoneigarin er. Tær best umtóktu fartelefonirnar millum tey heilt ungu hava eina framsíðu, ið kann skiftast út. Harvið kunnu tey keypa sær eina nýggja framsíðu í øðrum liti og mynstri, tá ið tey troyttast av tí gomlu. Til dømis kanst tú keypa eina framsíðu, sum passar til tey nýggju klæðini, sum tú hevur keypt tær. Øll taka tað ikki so tungt, hvussu fartelefonin sær út, men fyri nøkur er hon eitt slag av fetich, sum tey dyrka fyri at føla seg væl. Umframt litir og snið, so hava funksjónir sum spøl, ringitónar, kjatt, skermmyndir og líknandi stóran týdning fyri yngstu brúkararnar. Í <ph_1>, eykablað fyri ung í Sosialinum (9/10 2002), stendur um tær best umtóktu fartelefonirnar í Føroyum í 2002:

> *Í Telebúðini í Havn eru tey ikki í iva um, hvørjar fartelefonir selja mest. Tað eru Nokia telefonirnar 3410 og 3510. –Hetta kemst av Sms-boðunum. Myndirnar kunnu blinka, og so kanst tú eisini fáa ringitónar niður á telefonina, siga tey úr Telebúðini. –Eisini selja tær bíligu Siemens telefonirnar væl. Tað veri seg M50 og C45. Í telebúðini selja tey eisini nógvar*

> *„frontar“, sum tey kalla tað. Hetta er hylstur til telefonina, sum tú kanst seta uttaná ístaðin fyri vanliga hylstrið...*

Tað eru fáar nýtsluvørur, ið eru fyri skjótari menning enn fartelefonir, og tí eru upplýsingarnar frá Telebúðini frá oktober 2002 avoldaðar viðvíkjandi útsjónd og funksjónum á telefonum. Í somu útgávu av <ph_1> sigur ein fimtan ára gamal drongur, at hann keypti sær eina Siemenstelefon, men at hann síðan býtti hana við telefonina hjá mammu sínari, ið átti eina Nokia. „Nokiatelefonir egna seg betur til at senda eitt nú myndasms við, so tað var nokk tí. Eg brúki hana sera lítið, okkurt um 100 krónur um mánaðin.“ Drongurin sigur víðari, at hann fekk sær fartelefon „tí øll onnur hava fartelefon, og so eisini fyri at mamma og tey skulu kunna fáa fatur í mær“. Trý onnur ung í sama aldri siga nakað tað sama, at tey hava fingið sær fartelefon so at fólk kunnu fáa fatur á teimum; tey brúka fartelefonina mest til sms. „Fartelefon er sera gott at hava“, sigur ein trettan ára gomul genta, „og tí vildi eg hava eina“. Eitt nýtt frælsi gevur tó eisini nýggjan bundinskap. Tøknimenningin á økinum lovaði einstaklingum størri frælsi, sigur Hjarvard (2003),

> *så man kunne bevæge sig frit, uafhængig af tid og sted. Men prisen for den øgede mobilitet er en ny form for afhængighed, hvor kravet om den evige kontakt både medfører mere arbejde og betinger individets oplevelse af social tilknytning til andre mennesker.*

Teir ungu telefoneigararnir brúka sum oftast talitíðskort. Við talitíð kunnu tey ikki tosa fyri meira enn tað, tey hava goldið frammanundan. Tá talitíðin er við at vera uppi, keypa tey sær so eitt nýtt talitíðskort fyri ikki at koma í ta keðiligu og flóvisligu støðu ikki at kunna svara einum Sms-boðum. Tað er lættari at stýra peninganýtsluni við at velja talitíðskort framum fast telefonhald, men minuttprísurin er afturfyri eisini nógv hægri. Samanumtikið er talitíðskortið hin dýrasta loysnin, í hvussu er hjá teimum, sum tosa nógv í telefon. Um tú bara sendir Sms-boð ella hevur heilt stuttar samrøður, kann tað hóast alt loysa seg at velja talitíðskort. Sms er bergtakandi skipan,

ið gevur brúkaranum møguleikan, at sita og senda loynilig boð til ein loyniligan persón, samstundis sum ein til dømis situr og etur døgurða saman við familjuni uttan at nakar varnast nakað – bara tað at viðkomandi skrivar eitt ella annað. Fartelefonnýtslan hjá ungdóminum er avgjørt við til at broyta sosialu samskiftismynstrini hjá hesum samfelagsbólkinum (Kristensen 2006: 4-6).

Vinarbond og happing

Samstundis sum ein hevur grunnskygd sambond við nógv fólk um teldupost og sms, kann ein saktans vera avbyrgdur og týdningarlítil í tí lokala umhvørvinum. Elektroniska samskiftið, sum nógv fólk brúka fleiri tímar um dagin til, kann vísa seg, at vera røkt av ímyndaðum *vinarbondum*, sum hvørva, so skjótt telefonin ella teldan verður sløkt.

Um ein kennir seg útihýstan og happaðan í skúlanum, kann ein royna at skapa sær ein ímyndaðan samleika á alnetinum, har ein er tann smarti persónurin, ið nýtur stóra virðing millum vinir. Tað verður til eitt spæl við serligum leiklutum og hugmyndum.

Fartelefonir hava opnað fyri nýggjum møgulleikum at happa onnur. Ein kann nevniliga senda Sms-boð, uttan at móttakarin fær at vita hvør, ið hevur sent boðini. Tað er fleiri dømir um skúlabørn, ið verða happað ígjøgnum fartelefonir. Til dømis kann ein genta fáa eini tekstboð inn á sína telefon, har ið skrivað stendur, at hon hevur ljót klæðir, lítla bringu ella líknandi. Hon kann síðan bara royna at gita sær, hvør er avsendari. Í veruliga óndari happing eru fleiri samansvornir persónar, sum senda ljótar boðskapir til ein serligan persón, sum teir ynskja ilt. Fartelefonin verður sostatt ein marra heldur enn ein kærkomin ogn hjá offrinum. Ein kann brúka fartelefonina at fjala seg við. Tað, sum ein ber seg undan at siga opið av ótta fyri at síggja yvirbrá áhoyrarans, tað fortelur ein í Sms-boðum, sum eru skrivað í tryggari frástøðu frá móttakaranum.

Nógv ung pør bæði finna saman og fara frá hvørjum øðrum gjøgnum smssamskifti. Ein skákar sær á hendan hátt undan *uppgerðini*, ið

vanliga hevði verið, meðan persónarnir sóu og hoyrdu hvønn annan. Samskiftið verður her nakað, sum gongur fyri seg í einsemi uttan nakran fysiskan nærleika til hin partin. Alt sosialt samskifti millum fólk er ikki vorðið ópersónligt og tykisligt; men fartelefonirnar hava ávirkað mannagongdina, tá ið umræður, hvussu vit bera bæði persónlig og almenn boð nú á døgum.

Tey flestu hava stóra gleði av sínum fartelefonum, og tað er tí ongin grund til at mála eina svarta mynd av fylgjunum av tí nýggja telesamskiftinum. Børn og ung brúka fartelefonir, teldupost og kjatt á ein annan hátt enn vaksin fólk gera. Fartelefonin er ein partur av gerandisdegi og samleika teirra. Alnetið umboðar eitt persónligt sjálvræði, har tey ungu hava kensluna av at kunna vera seg sjálvi – uttan at noyðast at hugsa so nógv um hvat, ið eigur at vera sagt, og hvat ið ikki eigur at vera sagt. Stórur partur av tí málrættaða samskiftinum hjá teimum ungu á alnetinum er ímillum persónar, ið longu kennast úr tí veruliga lívinum (Stahl 2001: 34). Talan er oftast um vinir og familju. Samskiftið fær sostatt týdning sum dagføring og áminning um tann týdning relasjónin hevur fyri partarnar (op cit).

Samskifti í gaman og álvara

Hjá teimum yngstu brúkarunum eru Sms-boðini oftast súmbolsk, tey innihalda fáar konkretar upplýsingar, men onkra fúla skemtisøgu ella onkra lítla tilsiping um at hittast. Tað er ein spurningur um súmbolskan kapital, har tann, sum fær nógvar sms'ar frá nógvum persónum (helst av mótsetta kyni) er umhildin av hinum í vinarflokkinum. Fartelefonin er nakað, sum kann geva tær stóra virðing millum javnaldrar. Hjá teimum eldru tanáringunum er samskiftið meira praktiskt, ein nýtir fartelefonina at gera avtalur um at hittast og koma at kennast.

> *Det ser ud som om, der foregår en evig søgen efter nye relationer og nye fællesskaber. Hver gang man går ind og siger hej i et chatrum eller en nyhedsgruppe eller lignende, siger man goddag til nye bekendte. De flygtige møder kan måske kortvarigt blive til relationer – venskabelige, seksuelle,*

fortrolige – men de er lette at træde ud af, uden at de har efterladt sig spor.
(Gitte Stahl 2001: 32)

Føroyar líkjast nógv grannalondunum, tá tað kemur til nýtslu av fartelefon, hóast munir eru, sum til dømis at Føroyar eru eitt lítið og gjøgnumskygt samfelag, har tað er torført at fjala seg. Allar bygdir í Føroyum eru vavdar saman í samskiftinum hjá ungdóminum; hin sosiali og mentanarligi samleikin hjá ungdóminum er nógv ávirkaður av relasjónunum bæði í lokalumhvørvinum og gjøgnum alnet og fartelefon.

Tá ið ung úr Miðlabreytini á Argjum (Dimmalætting 11/2 2003) vóru á einum skúla í høvuðsstaðnum og spurdu 37 ung, um tey áttu fartelefon, svaraðu 32 teirra at tey áttu egna fartelefon, og tey søgdu eisini, at hon verður mest brúkt til sms. Næstan øll vaksin fólk í Føroyum hava eina persónliga fartelefon (nøkur hava enntá fleiri), men alt fleiri børn verða eisini fartelefoneigarar, ofta tí at foreldrini geva teimum gamlar fartelefonir fyri at kunna ringja til tey. Ein fjúrtan ára gamal drongur av Viðareiði fortelur til dømis í <ph_1> (9/10 2002):

Eg fekk ta fyrstu telefonina frá mammu, men hon er brotin. Hesa Nokia telefonina havi eg so fingið frá babba. Tað er okkurt um eitt til hálvtannað ár síðani, veit ikki ordiliga [...] Babba keypti telefonina til mín, so at tey kunna fáa fatur á mær, serliga um kvøldarnar, tí vit búgva á Viðareiði, og so er tað gott, tá eg eri í Klaksvík.

Sera nógv børn og ung hava, sum hesin drongurin, fingið eina fartelefon frá foreldrunum, men í dag eru tey ofta yngri, umleið tíggju ár, tá ið tey byrja at brúka fartelefon.

Ung stórbrúkarar av fartelefonum

Sambært eini gallupkanning í Vikublaðnum (1/4 2003) høvdu 73 prosent av øllum føroyingum fartelefon í 2003, meðan talið, ikki

óvæntað, er nakað hægri fyri tannáringar. Kanningin vísir eisini, kanska ikki heilt væntað, at lutfalsliga færri hava fartelefon í høvuðsstaðnum enn í restini av landinum. Eisini kann nevnast, at fleiri menn enn kvinnur hava fartelefon, sambært kanningini í Vikublaðnum.

Talva 24

15-19 ár – alt landið	94 prosent hava fartelefon
15-19 ár – Havnin	91 prosent
20-29 ár – alt landið	88 prosent
20-29 ár – Havnin	84 prosent
Menn – alt landið	79 prosent
Kvinnur – alt landið	66 prosent

Kelda: Vikublaðið 1/4 2003

Úrslitini eru áhugaverd, men skulu lesast við fyrivarni, tí at óvissur altíð eru í kanningum av hesum slag. Viðvíkjandi ungum og fartelefonum, so vísir mín kanning (2003), ið umfatar allar næmingar, ið ganga í níggjunda flokki í landinum, at bara 41 útav 637 næmingum ikki eiga nakra fartelefon. Tað svarar til 6.4 prosent; eitt tal ið samsvarar væl við úrslitini í kanningini hjá Vikublaðnum. Í einum áttanda flokki í Havn, sum eg vitjaði í 2003, høvdu 23 útav 24 næmingum fartelefon; og í tveimum níggjunda flokkum, eisini í høvuðsstaðarøkinum, ið eg vitjaði í 2002, høvdu tó einans nítjan av 27 næmingum fartelefon. Sum hesi tølini vísa, so hava flestøll ung í skúlaaldri fartelefon, hóast tað eru einstakir skúlaflokkar og ungdómsbólkar, har ið lutfalsliga nógv enn eru uttan telefon.

Tey, ið gingu í níggjunda flokki í 2002-03 fingu, sambært mínum tølum, sína fyrstu fartelefon, tá ið tey vóru trettan-fjúrtan ár, meðan tey, ið fáa sína fyrstu fartelefon í dag eru, sum áðurnevnt, umleið tíggju-ellivu ára gomul. Ein spurningur í tí landsumfatandi kanningini hjá mær var:

Talva 25. Hvussu gamal vart tú, tá tú fekk tína fyrstu fartelefon?

10 ár	6 persónar	0.9 prosent
11 ár	10 persónar	1.6 prosent
12 ár	43 persónar	6.8 prosent
13 ár	195 persónar	30.6 prosent
14 ár	276 persónar	43.3 prosent
15 ár	54 persónar	8.5 prosent

(restin, 8,3 prosent, hevur ikki fartelefon ella svaraði ikki)

Kelda: FG-kanning 2003

Hjá teimum ungu, tó kanska serliga børnum, verður fartelefonin mest brúkt til at senda og móttaka Sms-boð, tí at tað er væl bíligari enn at ringja. Fyri at eitt talitíðarkort, ið teir yngstu telefoneigararnir brúka, skal røkka til nakrar dagar ella vikur, so er neyðugt at spara uppá uppringingar. Ein trettan ára gomul genta sigur til dømis í <ph_1> (9/10 2002): „Eg havi teletíðarhald, sum eg gjaldi sjálv. Eg brúki hana kanska mest til sms boð, men onkuntíð ringi eg eisini. Fartelefonin er sera góð at hava, og tí vildi eg hava eina“.

Føroyingar senda fleiri milliónir Sms-boð um árið, og tey yngru ættarliðini standa fyri einum stórum parti av hesum. Næstan annarhvør unglingi í fjúrtan-fimtan ára aldri sendir meira enn tíggju Sms-boð út um dagin, sambært landsumfatandi kanning mínari (2003). Og einans fá, undir tíggju prosent av næmingunum, siga seg ikki senda Sms-boð hvønn dag.

Talva 26.
Hvussu nógv brúkar tú tína fartelefon til Sms-boð?

eg brúki hana min. 10 ferðir um dagin	269 persónar	42.2 prosent
eg brúki hana 5-9 ferðir um dagin	120 persónar	18.8 prosent
eg brúki hana 1-4 ferðir um dagin	134 persónar	21.0 prosent
eg brúki hana minni enn 1 ferð / dagin	55 persónar	8.6 prosent

(restin, 9.4 prosent, hevði ikki fartelefon ella svaraði ikki) (FG kanning 2003)

Teksturin í Sms-boðunum kann innihalda langar frágreiðingar, men sum oftast er talan um heilt stutt og einfald boð. Eftir sum teksturin helst skal vera sera stuttur er lætt at misskilja eini boð, um avsendarin ikki dugir at orða seg í stuttum. Ein norsk kanning vísir at,

> *sms kjennetegnes ved at den gir plass til begrenset og svært komprimert informasjon. Denne kommunikasjonsformen gir også svært lite tilleggsinformasjon (for eksempel kroppsspråk, ansiktsuttrykk osv.) som kan si noe om avsenders holdninger [...] Vi vil anta ut ifra dette at sms som kommunikasjonsform egner seg best til korte, enkle og utvetydige budskap. Ved mere komplekse budskap vil det gi for lite informasjon. (Jákupsstovu og Kjersem 2003)*

Í landsumfatandi kanningini hjá mær varð m.a. spurt um, hvønn tey ungu ringja til, og hvussu ofta tey ringja til hesi fólkini. Tað er týðiligt at lesa av úrslitunum, at tey fjúrtan-fimtan ára gomlu ringja væl meira til vinir enn til foreldur og nærmastu familju. Hvør fimti næmingur í níggjunda flokki ringir meira enn fimtan ferðir um vikuna til vinfólk. Tey flestu ungu ringja eina-fýra ferðir um vikuna til foreldur og systkin, og fleiri ringja til mammuna enn til pápan. Hvør fimti næmingur, 22 prosent, ringir fimmníggju ferðir um vikuna til mammuna, meðan

tilsvarandi tal fyri pápan einans er fjúrtan prosent. Nógv (18.4 prosent, 117 næmingar) ringja ongantíð til pápa sín, og tað kemst helst av fleiri orsøkum. Ofta er mamman lættari at fáa fatur á við telefon vegna arbeiðsumstøðurnar hjá foreldrunum. Tó er mest sannlíkt, at tey ungu ringja til mammu sína, tí at tað er hana ein oftast tosar við, tá ið boð skulu gevast um, hvat ein ger, hvar ein er, hvørjar ætlanir ein hevur, o.s.fr. Tað er oftast mamman, ið *samskipar* familjuna og heimið. Annars ringja tey ungu enn minni til síni systkin enn til foreldrini; bara tólv prosent ringja meira enn fýra ferð um vikuna til systkin, meðan heili 28 prosent ongantíð ringja til systkin. Nógv ung hava ongi systkin – ella bara systkin, sum eru smábørn uttan telefon. Og haraftrat hava tey kanska ikki *boð* at geva systkjum sínum, ið ikki kunnu bíða til døgurðaborðið heima við hús. Tey flestu síggjast dagliga heima, og, sum nevnt, so er tað vanliga mammuni, ein gevur tey týðandi boðini, tá ein er úti. Mamman kann síðan senda boðini víðari til hini

Fartelefonin verður mest brúkt til vinirnar, og 137 ung (t.v.s. 21,5 prosent) úr níggjundaflokki ringja fimtan ella fleiri ferðir um vikuna til vinirnar hjá sær, meðan bara 54 ung ongantíð ringja til vinirnar. Tað sær eisini út til, at tey, ið hava damu/ sjeik ringja nógv til sín útvalda. Tó ringja tey flestu, heili 53 prosent, ongantíð til damuna ella sjeikin, og tað er helst tí at tey ikki eru í nøkrum parlagi, men nøkur ung hava møguliga tulkað spurningin soleiðis, at hann ikki umfatar Sms-boð, og tí hava svarað „ongantíð“. Tað eru fyrst og fremst vinarbondini, ið skulu røkjast við fartelefonini, og 60 prosent av teimum ungu ringja meira enn fýra ferðir um vikuna til vinirnar.

Lýsing av sms

Sms, sum á enskum merkir *short message service*, er boðskipan, ið virkar á GSM-fartelefonkervum. Eini Sms-boð kunnu í mesta lagi innihalda 160 tekin íroknað millumrúm. Til ber at senda Sms-boð av alnetinum um sonevnd *sms gateways*, hóast boðini verða móttikin á fartelefonum. Høvuðsmunirnir á Sms-boðum og vanligum telefonsamrøðum eru mangan lýstir. Sms-boðini órógva ikki móttakaran. Hann kann lesa tekstin, tá hann hevur tíð og hug; boðini

kunnu móttakast uttan at geva ljóð. Sms-boð kunnu nýtast at fáa neyv boð um bústaðir, loynitøl, upphæddir og líknandi. Viðhvørt er lættari at lesa enn at lurta. Eisini ber til hjá móttakarunum at goyma Sms-boðini á telefonini hjá sær til seinni høvi.

Haraftrat koma alt fleiri smstænastur, har telefoneigarum verður bjóðað at fáa tíðindi og ráð, at luttaka í kappingum, at keypa vørur og tænastur, at heinta ringitónar o.s.fr. við at senda og móttaka Sms-boð. Avmarkingarnar eru eisini nógvar í mun til vanliga samrøðu. Sms-boðini eru stutt og ikki er lætt at skifta tónalag við reinum teksti. Tað ber til, men málið gerst øðrvísi.

Talva 27. Send sms íalt

2003	25.076.962
2004	31.427.630
2005	31.039.631
2006	35.349.441

Kelda: Hagstova Føroya (www.hagstova.fo)

Hóast smsskipanin tøkniliga tykist sera einføld og nærmast avoldað, so senda vit alt fleiri Sms-boð til alt fleiri fólk. Sms-boð eru stutt tekstboð, ið verða skrivað við at brúka knøttarnar á fartelefonini. Tey flestu, ið hava fartelefon, hava helst roynt at senda og móttaka Sms-boð. Harvið spælir sokallaða Sms-málið ein alt størri leiklut í samskiftinum í samfelagnum. Boðsendingin hevur afturljóð, ið hoyrist kring allan heim. Markleysa ravtøkniliga glaðingin, ið gevur ungdóminum nýggja frælsiskenslu, er tilstaðar uttan at síggjast á náttarhimlinum.

Vinir og sosial sambond

At sita einsamallur við ringum tannabiti og nærmast fáa krampa er ikki serliga hugaligt; men soleiðis kennist tað at hava gloymt fartelefonina hjá sær onkrastaðni og harvið ikki hava telefonsamband við vinirnar.

Tað stendur í áhugaverdari norskari kanning um ungdóm (Johnsen 2001: 83), men kundi eins væl verið sagt um føroyskar tannáringar í dag. Brennandi ynskið um at vera tøkur ella atkomuligur er ein av høvuðsorsøkunum til at ung ogna sær og brúka fartelefonir. Hjá teimum yngstu snýr tað seg fyrst og fremst um at „forældre og børn skal kunde få fat på hinanden, på tværs af forskellige sociale rum" (Olesen 2003). At vera *connected* ella *disconnected* – tað er spurningurin. Fartelefonin er, verður viðhvørt sagt, sjálvur nalvastrongurin í netverkssamfelagnum (Castells 1996). Hon virkar sum dagligur sambindingarliður millum einstaklingin og sosiala netverk hansara. Tað at vera tøkur verður sostatt fyri luttakararnar í sosialum netverkum meira týðandi enn landafrøðilig støða (Johnsen 2001: 85).

Fartelefonin verður í vaksandi mun nýtt at fyrireika sosialt frítíðarvirksemi av ymsum slag innan avmarkaðar ungdómsbólkar og sosial netverk. At leggja tiltøk og verkætlanir til rættis um fartelefon gerst, so løgið tað kann ljóða, ofta, sigur Manceron (í Johnsen 2001: 86), meira týðandi enn at føra ætlanirnar út í lívið. Tað snýr seg um at vísa, at man hevur eina felagsætlan og harvið nakað í felag – nakað, sum, so at siga, bindur einstaklingarnar í netverkinum saman í einum ímyndaðum felagsskapi. Við at vera tøkur og luttaka í sms-samskiftinum prógvar hin einstaki at hann er tilvitaður um leiklut sín í netverkinum. Fartelefonin fær harvið sera stórt virði sum amboð í sosialu samskiftisgongdini. Samskifti um kjak-, kjatt- og profilsíður er „læruríkt, samstundis sum ein hevur tað stuttligt", sigur Eilen Anthoniussen í Dimmalætting (2006).

Fartelefonin verður fyrst og fremst brúkt til at vera í samveru, í stuttligari samveru, og talan er um eitt endaleyst samskifti, ið kann tulkast sum frælsi og bundinskapur í senn.

Sms-mál

Sum flestum kunnugt minnir Sms-málið um talimálið, har dámurin ofta er sera óhátíðarligur og styttingarnar óteljandi. Næstan øll orð, ið kunnu skerast verða skorin; tey verða ofta pettað sundur fyri at

spara pláss. Sms-málið kann tulkast sum okkurt slag av loyndarmáli, sigur Petur Polson (Pálsson):

> *Eg veit ikki, men eitt veit eg, og tað er at tey, sum í dag eru ung (undir 33 ár) tosa hetta loyndarmálið flótandi, og tó at tey sjálv kanska ikki vilja hava tað at verða alment (tí at tað er kanska meira spennandi í loyndum, sum so mangt annað), so er tað ein inngrógvin og natúrligur partur av tí máli, sum verður tosað í Føroyum í dag. Orsøkin til hetta er fyrst og fremst alnetið og fartelefonin.*
> *(Dimmalætting 2006)*

Málið broytist og samskiftishættirnir broytast. Tað síggja vit í Føroyum og restini av Vesturheiminum. Lærarar og frøðingar siga, at tey ungu ikki longur duga at stava og skriva. Miðlarnir fáa ábyrgdina – serliga sjónvarpið og alnetið. Men Sms-málið kann eisini, sigur Jógvan í Lon Jacobsen, lýsast sum aldurstreytað málfyribrigdi – t.v.s. okkurt slag av ungdómsmáli. Sostatt er, sigur hann, vandin fyri óhepnari ávirkan á stavsetingina ikki so stórur, „tí hesin málformur er sleptur, áðrenn tey ungu gerast vaksnir ábyrgdarfullir borgarar“ (Dimmalætting 2006).

Sms-yrkingin er skrivilist, ið grundar á Sms-málið, og, sigur Jóannes Lamhauge (Dimmalætting 2006), „ongar reglur eru fyri hvussu ein Sms-yrking skal skrivast, hvussu long hon skal vera, ella hvat hon skal vera um“. Víðari sigur hann, at „tann nýggja Sms-yrkingin er fullkomiliga frí. Uttan arv, standard, kontekst og rammur – sjálvt ikki didaktiskar málsligar rammur“. Hon er eitt tankafar. Hon er dialogisk. Hon er allastaðni.

Ekko. Eg leiti innani men finni
einki bert eitt
ekko av ti id
einaferd var

(Sms-yrking, úr kappingini hjá Outsider Magazin 2006)

Sms-boðini og fartelefonin er okkara Bábelstorn, sigur Petur Polson (Dimmalætting 2006), ið kundi hugsað sær at skrivað bíbliuna á kjattmáli. Sms-boðini eru eitt hent samskiftisamboð, ið umskapar mál okkara av praktiskum orsøkum. Samskifti og sosial samvera eru lyklaorðini her. Ongin skrivar eini Sms-boð til sín sjálvs. Boðini og teksturin skapa ekkó, ið fara um mørk. Teksturin endurspeglast í einum aftursvari, ið eisini fær aftursvar, so at Sms-boðini ávirka samleika hins einstaka, eins og í kjatti og kjaki á alnetinum.

> *[Á]virkanin frá netkjaks- og Sms-málinum á aðrar miðlar er ógvuliga avmarkað. Netkjaksmálið er fyrst og fremst á kjaksíðum, og Sms-málið er í sms'um. Tað kemur eisini fyri í øðrum elektroniskum miðlum, til dømis teldubrøvum. Tá tað kemur fyri uttan fyri hesar miðlarnar, er talan um óformligt og persónligt samskifti ella skemt.*
> *(Jacobsen 2006: 68)*

Postkort

Ung senda Sms-boð, sum um talan var um ravtøknilig postkort. Stutt og fitt boð til vinir og kenningar. Boðini og sosiala samskiftið, hesi skapa, minna nógv um *smalltalk*, har ongir ómissandi boðskapir verða fluttir. Flestu boðini kunnu sendast klokkan tvey um náttina, klokkan trý seinnapartin ella klokkan níggju á kvøldi. Og aftusvarið kann koma seinni, um móttakarin svevur ella er upptikin av arbeiði og líknandi. Tá lítil innihaldsleys fríløta er, verður „hvat gert tú?" ella „hvar ert tú?" líka skrivað á telefonini og sent einum ella fleiri vinfólkum. Og tað er als ikki tí, tað er neyðugt at fáa nakað greitt svar beinanvegin. Tó skal sigast, og tað venda vit aftur til, at tað er av stórum týdningi hjá avsendaranum at fáa eitt smssvar, hóast aftursvarið møguliga kemur nógvar tímar, enntá dagar, seinni.

Tey ungu royna at styrkja sínámillum bond við stríðum streymum av Sms-boðum, har tey skiftast um at seta spurningar og fáa ferð á samrøðuna. Eisini tá ung vinfólk eru saman, verða fartelefonirnar tiknar fram og kannaðar. Vinirnir lesa Sms-boð hjá hvørjum øðrum,

hyggja at myndum, lurta eftir ringitónum o.s.fr. Sostatt er fartelefonin ofta, kanska serliga hjá teimum yngstu brúkarunum, í miðdeplinum, hóast vinirnir sita í sama rúmi.

Ravtøkniligu postkortini hjá ungdóminum eru ofta, sigur Johnsen (2001: 90), partar av *innihaldsleysum* samrøðum. Við hesum verður sagt, at ítøkiliga funksjónin hjá samrøðuni ella Sms-boðunum tykist vera nógv minni enn súmbolska innihaldið í samrøðuni. *Innihaldsleysa* samrøðan er mótpólurin til *kunnandi* samrøður, ið oftast byggja á samrøðupør, ið býta upplýsingar sínámillum. Samrøður í fartelefon kunnu hjá teimum, ið ikki beinleiðis luttaka í samrøðuni, tykjast sera innantómar og óskiljandi. Prátið hevur tó, sum sagt, ein týðandi leiklut fyri sosialu netverkini, ið fólk skapa og eru partar av. Samrøðurnar og Sms-boðini virka ofta sum staðfestingar av vinarbondum og bólkatilknýti.

Prátið í fartelefonum minnir her um prátið undir húsatekjunum á bygd. Fólk fortelja smá *tíðindi* um grannar og skyldfólk, um arbeiðsuppgávur, um veitslur, um veður, um skúla o.s.fr. Ofta eru *tíðindini* tó lutfalsliga gomul. Málið er, sum nevnt, fyrst og fremst at staðfesta og røkja felagsskapir, har viljin til samskifti er í hásæti. Sms-boðini egna seg væl til hesa uppgávu. Teksturin er, sigur Johnsen (2001: 93), „lite forpliktende, asynkron og begrenset i formen". Við at fortelja hvørjum øðrum søgur, slatur og anekdotur staðfesta luttakararnir í samskiftinum tilknýti til felags netverk.

Gávur

Sms-boð kunnu ikki bara tulkast sum postkort, men eisini sum (ravtøkniligar) gávur, og gávur skapa sum kunnugt sosial bond, ið innibera sosialar bindingar fyri allar partar í gávubýtinum. Gávur skulu rindast aftur, og tí er tað at rokna sum stórt brot á gamla siðvenju viðvíkjandi gávubýti ikki at svara Sms-boðum. Óansæð hvat, ið skrivað stendur í sjálvum tekstinum, so hevur móttakarin av *gávuni* skyldu at senda nýggja gávu til avsendaran fyri at skapa javnvág og ordan í samskiftinum (op cit). Í høvuðsheitum kann sigast at súmbolsku gávurnar skulu býtast við hesum reglum í huga:

- Gávurnar skulu ikki vera heilt eins. T.v.s. at teksturin í Sms-boðunum skal ikki vera heilt eins.
- Gávur skulu ikki rindast aftur ov skjótt, tí so hevur tú ikki havt tíð at njóta fyrstu gávuna. Tað kann tykjast, sum um tú ikki ynskir at fáa gávuna og sendir hana aftur til avsendaran.
- Vanligt er tó at svara Sms-boðum rættiliga skjótt. Avsendarin vil sum oftast gjarna hoyra frá tær, meðan hann nú hevur telefonina í hondini og tíð tøka at smssamskifta. T.v.s. at gáva í flestu førum eigur at verða send aftur lutfalsliga skjótt.
- Um tú móttekur nógv fleiri gávur, enn tú sendir til ein ávísan persón, so er gávubýtið ikki í javnvág, og stórur vandi er fyri, at samband tykkara fer at fáa ein bráðan enda.

Kenda ástøðið um gávubýtið, ið sosiologurin Marcel Mauss allýsti í verkinum *Essai Sur Le Don* (Gávan 1925), staðfestir at tríggjar grundreglur skapa gávurelasjónina: skyldan at geva gávur; skyldan at móttaka gávur; og skyldan at svara og geva aftur. Síðstnevnda regla inniber, at gávubýtið, fyri at endurskapa og styrkja vinarbond, ikki kann steðga, tá eitt avmarkað javnt býtt tal av gávum eru givnar. Gávubýtið heldur á, og Sms-boð verða send dag eftir dag, viku eftir viku. Víðfevndu sosialu netverkini hjá ungdóminum í Føroyum verða í stóran mun røkt og styrkt við ravtøkniligum postkortum, ið eru smáar súmbolskar gávur, sum luttakararnir í stórum tali senda út, sama hvar tey annars eru stødd í verðini, við sínum kæru fartelefonum. Fýra javnaldrar kunnu til dømis hava samband um fartelefonir á hendan hátt:

> *A og B senda ravtøknilig postkort sínámillum fleiri ferði um dagin, meðan C og D bara senda postkort sínámillum umleið eina ferð um vikuna; A og D hava eisini tætt samband, meðan B og C næstan ongantíð hava skrivað Sms-boð til hvønn annan. A og C skriva ongantíð saman, uttan tá tað snýr seg um avtalur, ið B ella D eisini kenna til. B og D skriva eisini Sms-boð sínámillum, men tað er eitt sindur loyniligt og hevur onki við A og C at gera. A skrivar til sera nógv onnur ung, meðan C als ikki tímir at sms'a og ger tað so lítið sum gjørligt.*

Postkort hava ein stuttan tekst. Talan er um stuttar vinarligar heilsanir. Sms-boðini vísa á sama hátt, at samband er millum tveir persónar, at teir hugsa um hvønn annan, og at teir virða og gleðast yvir at kenna hvønn annan. Hvørja ferð eitt aftursvar verður sent, so er tað ein nýggj staðfesting av sambandinum og tí sosiala felagsskapinum. Gávubýtið, sigur Thomas H. Eriksen (1995), „skaper på denne og andre måter sosiale forpliktelser og varige bånd mellom partene. Det finnes ingen gratis gaver". Øll hava skyldu til at taka ímóti og geva gávur og tænastur í samfelagnum. Annars valdar ruðuleiki og misskiljing.

Foreldur og børn

Krøvini um at altíð vera tøkur, vera fleksibul og taka skjótar avgerðir eru av teimum mest týðandi orsøkunum til, at ung í dag brúka fartelefon. Fleksibilitetskravið hevur m.a., sigur Olesen (2003: 9), samband við tey strukturellu viðurskiftini á norðurlendska arbeiðsmarknaðinum og í skúlaskipanini.

Aftaná skúlatíð fara børnini antin beinleiðis heim, í frítíðarskúla ella til vinfólk at spæla. Við fartelefon tøkari gerst tað munandi einfaldari at gera avtalur við foreldur um, nær og hvussu farið verður heim, um hvar og saman við hvørjum spælt verður o.s.fr. Hjá foreldrunum, oftast stødd á arbeiðsplássi sínum tá telefonsamrøðurnar fara fram, hevði ofta helst verið torført at samskift hesum viðvíkjandi uttan fartelefon. Oftast eru tað tey vaksnu, ið ynskja, at børnini fáa fartelefon, so at tey eru atkomulig í gerandisdegnum, hóast tað í miðlunum vanliga hoyrist, at børn krevja meira og meira av sínum stakkals glataðu foreldrum, ið noyðast at keypa teimum fartelefonir, longu tá børnini eru eini seks-sjey-ára gomul. Forbrúkið hjá børnum er í veruleikanum ofta knýtt at forbrúkinum hjá teimum vaksnu – mentanarliga, sosialt og búskaparliga.

Fartelefonirnar hava ávirkað sambandið børn-foreldur og kenslurnar av frælsibundinskapi hjá teimum yngstu, sum í grundini skulu vera tøk og atkomulig alt samdøgrið, nú tey eru brynjað við fartelefonum, ið foreldrini listilærd hava handað teimum, so at tey ikki skulu hvørva

úr eygsjón. Børn og foreldur samskifta ikki sum fyrr, verður sagt, tí nú eru ravtøknilig samskiftistól komin inn í myndina, umframt at familjumynstrini eru broytt (Williams og Williams 2005). Úrslitið av hesum er í stuttum, at børnini eru fríari, enn tey áður hava verið, tó ikki fríari enn, at tey vaksnu áhaldandi finna nýggjar hættir at hava eftirlit við rørslum og hugskotum ungdómsins.

Foreldur og børn skulu samskifta og samráðast um gerandislív ungdómsins, verður sagt, soleiðis at tey ungu hvørki verða ov frels ella ov bundin, tá tey eru úti. Foreldrini hava í ávísan mun sambært hesum sjónarmiði givið vald frá sær fyri at gerast javnsettir *vinir* hjá børnum sínum. Nú skulu børnini ikki einans taka ímóti boðum, men eisini sjálvi koma við uppskotum viðvíkjandi praktiskum viðurskiftum í húsarhaldinum. Hóast ósemja er um umrødda sjónarmið, so er tó ongin ivi um, at børn í teimum flestu familjunum í landinum hava vunnið sær fleiri rættindir, enn tey áður høvdu. Tey eru fríari á tann hátt, at tey sleppa at taka egnar avgerðir í serligum málum og duga stak væl at samráðast við vaksin fólk. Og her er fartelefonin eitt sera gott dømi um, hvussu børn og foreldur samskifta í Føroyum og aðrastaðni í dag.

Eftirsum børn og ung hava fingið eitt størri frælsi og harvið eisini ofta krevja meira enn áður, so er samskiftið við foreldrini vorðið nógv fløkjasligari og harðrendari, enn tað plagdi at vera. Telefonirnar verða dúgliga brúktar at samráðast við, at broyta og endurnýggja avtalur, at bera fram ynski og krøv, at klaga yvir ymisk mál o.s.fr. Børn og foreldur fundast og finna kreppuloysnir. Tey kappast og samstarva. Og børnini rokna ikki siðvenjur fyri *natúrligar* lógir, tí *alt* kann takast upp til kjak og nýggjar samráðingar.

Foreldrini ynskja, at børnini hava fartelefonir, fyri at tey skulu kenna seg tryggari og í ávísan mun kunna stýra børnunum. Tey vaksnu brúka fartelefonina at fáa eitt beinleiðis samband við frítíðarlívið hjá børnunum. Foreldrini ynskja at sleppa inn í tannáringaheimin at fylgja við tí,ið fyriferst (Williams og Williams 2005). Tey vilja vera til staðar, tó ósjónlig, og soleiðis sleppa at ávirka ungdómin ávísa

leið. Við at ringja til børnini, meðan hesi vitja vinfólk ella eru í ungdómsklubba, kunnu foreldrini minna tey á, at foreldrini fylgja við og vita, hvat gongur fyri seg. Foreldrini siga, kanska serliga í stórum býum, at tað er sera týðandi fyri trygdina altíð at hava fartelefonina hjá sær tendraða. Hóast veruligur vandi er á ferð, so brúka foreldur eisini ræðsluna fyri harðskapi og brotsverkum í býum til at hava eftirlit við børnunum umvegis fartelefonina. Á enskum kallast hetta fyribrigdið *stranger danger*.

Børnini siga sjáldan nei til at fáa eina fartelefon, hon er góð at hava, men tey eru samstundis væl vitandi um, at fartelefonirnar kunnu føra til eitt neiligt nágreiniligt eftirlit við øllum, tey gera, tá tey ikki eru stødd heima. Børnini og foreldrini síggja ymsar møguleikar í fartelefonunum og royna hvør sær at fáa sum mest burturúr. Børnini siga kanska, at fartelefonin ger, at foreldrini altíð kunnu ringja, um okkurt er á vási, ella øvugt, og at foreldrini sostatt ikki skulu stúra og áhaldandi spyrja, hvar børnini eru stødd, hvat tey gera, og saman við hvørjum. Foreldrini vilja tó helst hava greiðar avtalur um, nær børnini skulu koma heim um kvøldið, og hvagar tey sleppa at fara, sama um ringt verður við telefonini ella ei.

Tað er ikki bara samskiftið millum børn og foreldur, ið broytist og skapar nýggj mynstur fyri sosialari fyriskipan. Samskifti í sær sjálvum er lyklahugtak, ið flestøll í samfelagnum í dag noyðast at hugsa um og læra seg at brúka. Fartelefonin er miðil, ið letur upp fyri nýggjum samskiftishættum, ið tykjast fáa alt størri leiklut fyri frítíðarlív, familjulív, arbeiðsuppgávur og skúla hjá modernaðum menniskjum. Fartelefoneigarar halda seg ikki megna at liva uttan tólið, meðan tey fáu, ið ár 2006 framvegis ikki brúka fartelefon, tykjast sosialt marginaliserað – ella í øllum førum útihýst frá alskyns netverkum og sosialum felagsskapum. Tey eru ikki *connected* og hava sostatt ikki samband við sosialu netverkini, ið endurskapast við Sms-boðum. Tey ungu eru, sum flestum kunnugt, stórbrúkarar av fartelefonum og senda alt fleiri Sms-boð til alt fleiri fólk. Boðini eru við til at skapa mentanarliga samleika teirra. Tey siga nakað um teg; hvønn tú kennir, hvønn tú samskiftir við, hvat tær dámar og ikki dámar, o.s.fr.

Samvera og hugni

Vit eru blivin bundin av einum kravi um at áhaldandi vera í sambandi, og hetta ávirkar okkara uppliving av at hava sosialt samband við onnur. „Det kan være god grund til“, sigur Olesen (2003: 17), „at diskutere vore allesammens forbrug. Pointen er, at sådan en diskussion – hvad enten den vedrører børns eller de voksnes forbrug – må tage udgangspunkt i, hvad det er for et socialt og kulturelt liv, der opbygges omkring forbruget“.

Talva 28. Føroya Teletelefonkundar

	Fastnet	Fartelefon
2000	25.214	16.971
2001	23.156	24.487
2002	21.558	30.709
2003	20.111	30.288
2004	19.565	30.873
2005	19.286	32.763

Kelda: Føroya Tele (www..ft.fo)

(FT situr á umleið 80 prosent av marknaðinum)

Fartelefonir og Sms-boð, teldur og alnet, verða alt meira samantvinnað og kunnu longu sigast at hoyra til somu eind. Markið millum miðlarnar hvørvur so líðandi, samstundis sum nýggjar funktiónir og nýgg samskiftistøkni á hvørjum ári fær tey tól, ið vit ognaðu okkum árið fyri, at tykjast avoldað. Sms-boðini eru framvegis til, men fara í framtíðini at hoyra til ein størri *pakka* við myndum, filmum, tekningum, ljóði, tónleiki, o.s.fr.. Sms-málið fer eisini at mennast og fáa nýggjar skuggar. Alt hetta hoyrir til tann ómetaliga hugin til samskifti, ið menniskju flest kring heimin hava í dag.

Tøkniliga menningin seinastu árini hevur gjørt tað nærmast óavmarkað, hvussu nógv og víðfevnd samskifti einstaki borgarin kann hava. Tíðin er í veruleikanum tann einasta avmarkingin – umframt talið á

íbúgvum á klótuni. Har ung fyrr kundu fara á stevnu ella í dans at hitta fremmandafólk, ið ikki hoyrdu til lokalsamfelagið, kunnu tey í dag gerast limir í alnetasamfeløgum, ið hava fleiri hundrað milliónir skrásettar limir úr øllum heimsins herðashornum, til dømis amerikanska *Myspace* og *Facebook*, ið í løtuni er sera vælumtókt.

Jú nógv er hent síðan hin fyrsti telegrafkaðalin hjá Telefonverk Føroya Løgtings kom á land í Sandagerði í 1906. Tað, ið er hent farnu øldina, hevði ongin torað at droymt um. Og hvat tey næstu hundrað árini fara at bjóða okkum, tori eg als ikki at gita nakað um. Men eitt er púra vist: ungdómurin fer framvegis at samskifta sínámillum fyri at skapa og endurskapa sosial netverk, fyri at stuttleika sær, fyri at geva súmbolskar gávur, ið skulu efturrindast og fyri at skapa sær ein samleika. Sosialu grundreglurnar broytast ikki, hóast tøknin og málið hava sínar broytingartíðir.

Fartelefonin er komin fyri at vera, jú, men er hon veruliga tað, ið vit siga hana vera? Fartelefonin er vorðin hitt sterkasta súmbolið fyri sokallaða vitanar- og kunningarsamafelagið; ein verkætlan, sum fleiri milliardir krónur verða settar í. Danski fjølmiðlagranskarin Stig Hjarvard sigur, at vit liva í *det selskabelige samfund*, ið er eyðkent av, at fólk uttan slit práta og samskifta: mest fyri hugna og samveru, minni fyri vitan og kunning. Sera atfinnandi sigur hann (í Politiken 12/12 2003) at:

> *når det er blevet en milliardforretning at sende sms'er, er det ikke, fordi unge mennesker udveksler børsinformationer. Den information de udveksler er nøglen til samvær. Men i den offisielle retorik om videns- og informationssamfundet lader man, som om vi er drevet at en ubændig lyst til at vide mere – at lige så snart folk har internettet mellem hænderne, går de igang med at videreuddanne sig.*

Tey flestu av okkum eru, sigur Hjarvard, hjálparleysir fartelefon *junkies*, og einsemiskenslan grundar ikki longur í fysiskari avbyrgd, men í um vit eru *connected* ella *disconnected*; um vit hava elektroniskt

samband við umheimin ella ikki. Vit eru við øðrum orðum blivin bundin av einum kravi um at áhaldandi vera í sambandi, og hetta ávirkar okkara uppliving av at hava sosialt samband við onnur.

[8]

ALNET OG SAMSKIFTI

Ung í tí norðurlendska útjaðaranum eru stórnýtarar av alnetinum, ið hevur opnað fyri nýggjum møguleikum at *royna* og *spæla við* samleika hins einstaka – viðvíkjandi kyni, aldri, mentan og bústaði. Her fari eg at lýsa, hvussu hin føroyski ungdómurin nýtir alnetið at samskifta sínámillum fyri at skapa sær ein mentanarligan samleika og fyri at fáa íblástur úr globalum mentanarrákum. Lítið verður gjørt burtur úr alnetinum sum keldu til vitan (í útbúgvingar- og granskingarhøpi). Hugtøkini *útjaðari* og *miðdepil* eru týðandi, tí alnetið hevur verið við til at broyta mynstrini av landafrøðiligum útjaðarum og miðdeplum, so at til dømis Føroyar og Ísland í dag væl kunnu sigast at vera miðdeplar í tí globala samfelagnum. Hvussu brúka ung í Føroyum nágreiniliga alnetið? Hvussu verður tann lokala føroyska ungdómsmentanin ávirkað av globalum mentanarrákum á alnetinum? Hetta eru høvuðsspurningarnir, sum eg seti mær.

Skapandi miðlar

Alnetið er telduskipan, ið knýtir teldur kring allan heim saman í netið, ið hvørki hevur kjarna ella útjaðara, og sum seinastu árini er blivin hvørs mans ogn, serliga í framkomna vesturheiminum, men í vaksandi mun eisini í øðrum londum og heimspørtum. Alnetið er markleyst, kann vaksa út í endaloysið og verður skapt av øllum sínum brúkarum. Ofta verður sagt at alnetið sveimar onkrastaðni *uppi í luftini*, men neyvari er tó at siga, at hon er í øllum teldunum, ið eru knýttar at skipanini. Skipanin er eitt netverk av netverkum.

Alnetið varð stovnað í USA tíðliga í sekstiárunum og var upprunaliga ætlað sum samskiftisskipan, ið virkar ótarnað eftir eitt møguligt kjarnorkukrígg í heiminum (Castells 2000:45). Í september 1969 varð tað fyrsta teldunetverkið – ARPANET – roynt á hægri lærustovnum í samstarvi við ARPA, men skjótt fóru granskarar at brúka skipanina til annað samskifti enn tað reint hernaðarliga, og soleiðis byrjar søgan um alnetið, ið onki mark kennir. Alnetið hevur ment seg til at umboða nógv meira enn eitt hátøkniligt hjálpitól at loysa ávísar arbeiðsuppgávur við. Amerikanski sosiologurin og sálarfrøðingurin Sherry Turkle sigur í bókini *Life on the screen* (1995:9):

> *At one level, the computer is a tool. It helps us write, keep track of our accounts, and communicate with others. Beyond this, the computer offers us both new models of mind and a new medium on which to project our ideas and fantasies. More recently, the computer has become even more than tool and mirror: We are able to step through the looking glass. We are learning to live in virtual worlds.*

Alnetið er vorðin ein óloysandi partur av okkum. Og lívið í sonevnda *cyberspace* (eitt hugtak upprunaliga úr vísindaskaldskapi) fylgir heilt øðrum reglum og siðum enn teimum, sum vit kenna úr tí veruliga lívinum. Sum heild er tað serliga ung, bæði í Føroyum og uttanlands, ið brúka alnetið sum ímyndaða verð, har tey kunnu broyta samleika og verumáta sín, og har tey kunnu samskifta við fremmandafólk, sum tey spegla sær í (Sørensen 2000). Alnetið skapar eina verð, ið er meira flótandi og ósamanhangandi enn hin veruligi heimurin.

Tøkniliga menningin á telduøkinum er ovurhonds stór, og tey, ið granska alnetið og aðrar nýggjar elektroniskar miðlar, eru tískil alla tíðina afturúr í mun til menningina á økinum. Eisini í Føroyum broytist leikluturin, ið alnetið hevur í gerandislívinum hjá ungdóminum, ár undan ári. Tað, sum varð hildið at vera sera áhugavert og nýtt fyri fáum árum síðani, hevur nú mist atdráttarmegi sína. Eitt lív uttan samskiftistøkni er, sigur bretski sálarfrøðingurin Sonia Livingstone (2002: 1), óhugsandi í dag:

> *As we enter the twenty-first century, the home is being transformed into the site of a multimedia culture, integrating audiovisual, information and telecommunication services. There is much discussion of the potential benefits of the evermore significant, evermore multifunctional electronic screen. Media headlines regularly focus on the possible consequences – e-commerce, the virtual classroom, global consumer culture, cyber-democracy, and so forth.*

Tær stóru kanningarnar av teimum *nýggju* miðlunum í Føroyum

í áttati- og byrjanini av nítiárunum (til dømis Andreassen 1992, Forchhammer 1983 og 1998), ið lýstu ávirkan sjónvarpsins á føroyska mentan, hoyra eini farnari tíð til[1]. Fjølmiðlakjakið úr áttatiárunum hevur ikki verið dagført, síðan alnetið kom, onki framhald hevur verið í granskingini, og tí er alstórur tørvur á kanningum, ið kunnu geva okkum eina djúptøkna lýsing av føroyska nútíðarsamfelagnum.

Í byrjanini av nítiárunum kom alnetið, ið, meini eg, umboðar eina grundleggjandi øðrvísi samskiftisskipan enn teir eldru sjónvarps- og útvarpsmiðlarnir. Alnetið er interaktivur miðil, sum er ósambærligur við vanlig analog sjónvørp, har upplýsingarnir fara frá einum miðstøddum *avsendara* til *móttakarar* (Andreassen 1992: 120); ongantíð ímillum móttakararnar ella aftur til avsendaran. Teir interaktivu miðlarnir „gør op med Broadcastingformidling“, sigur Sørensen (2000: 26),

> *idet de bryder med den liniære måde at formidle, kommunikere og udtrykke sig på. Grænserne mellem reception og produktion og mellem massekommunikation og interpersonel kommunikation er begyndt at gå i opløsning.*

Børn og ung eru sostatt, viðvíkjandi nýggjum elektroniskum miðlum, farin frá at vera móttakarar til at vera virknir aktørar. Alnetið er skipan, ið sameinir nógvar aðrar miðlar; tað tekur eldri miðlar inn undir seg (til dømis sjónvarp, film og tekning), og umskapar teir í nýggjum samskiftisformum. Á alnetinum verða ljóð, tekstur og sjónmiðlar *remedieraðir* (Sørensen 2000). Tey ungu eru sera hugtikin av hesi skipanini, ið gevur teimum møguleikar at víðka sjónarringin og skapa nýggj sosial netverk. Tey ungu eru haraftrat, sigur Miles (2000: 78), von við

> *the sort of imageladen world that postmodernists describe and this environment effectively provides the mass media as a resource, a foundation upon which they can conduct their everyday lives.*

Børn og ung verða ávirkað av heimsmyndini hjá miðlunum, men samstundis mugu tey sigast at vera langt framman fyri eldru ættarliðini, hvat viðvíkur (ný)skapandi brúki av modernaðu miðlunum. Tað er ein íspunnin søga, at ung eru óvirkin og tankaleys í sambandi við virðir og fyrimyndir, sum elektronisku miðlarnir umboða. Alnetið skapar, kann sigast, eitt andligt frælsi fyri nógv skapandi ung, sum kanska kenna seg fremmand í skúlaskipanini.

Alnetið kring landið

Tað verða alt færri fólk í Føroyum, sum ikki hava teldu heima. Tey flestu føroysku húskini hava longu eina ella fleiri teldur í húsinum, og nógvar av hesum teldunum hava alnetsamband. Sambært eini gallupkanning í Vikublaðnum[2] í 2003 eiga 73 prosent av øllum húskjum í Føroyum teldu. Tær flestu teldurnar eru eisini, sambært kanningini, rættiliga nýggjar. Umleið helvtin av øllum privatum teldum í Føroyum eru keyptar seinastu tvey árini.

Talva 29. Teldur í Føroyum: Hvussu gomul er hon?

1-2 ár	46 prosent
2-3 ár	22 prosent
4-5 ár	19 prosent
> 5 ár	11 prosent
veit ikki	2 prosent

(Vikublaðið 4/3 2003)

Sum oftast er bara ein telda í húsinum, tó er ikki óvanligt at hava tvær teldur, og í Havn eru lutfalsliga fleiri teldur enn í restini av landinum. Undir tjúgu prosent av húskjunum í høvuðsstaðarøkinum eru uttan teldu, meðan samsvarandi tal fyri alt landið er 27 prosent. Sera fá hava fýra ella fleiri teldur undir somu tekju – einans tvey prosent av øllum húskjum í landinum.

Talva 30. Teldur í Føroyum: Hvussu nógvar í húsinum?

	Suðurstreymoy	Alt landið
eingin	19 prosent	27 prosent
ein	50 prosent	47 prosent
tvær	21 prosent	19 prosent
tríggjar	8 prosent	5 prosent
fýra	2 prosent	1 prosent
>fýra	1 prosent	1 prosent

(Vikublaðið 4/3 2003)

Í eini spurnakanning hjá mær (2002), har tveir níggjundaflokkar í einum fólkaskúla í Tórshavnar Kommunu luttóku, varð millum mangt annað spurt, um tey ungu eiga egna teldu ella farteldu og um tey hava alnetsamband heima[3]. Av teimum 27 næmingunum, ið svaraðu, áttu tríggir farteldu, meðan ikki færri enn fimtan áttu vanliga teldu. Tað er tó hugsandi, at fleiri næmingar meina við teldu, ið er í húsinum og sum tey frítt kunnu nýta, hóast tey ikki veruliga eiga telduna sjálvi. Tey flestu av teimum, sum hava egna teldu, hava óivað fingið tær brúktar frá systkjum ella foreldrum, tá ið tey hava valt at keypa sær eina nýggja. Viðvíkjandi alnetinum, so høvdu trettan næmingar alnetsamband heima.

Í áttandaflokkinum í Venjingarskúlanum fingu tey ungu líknandi spurnablað útflýggjað frá mær í 2003, og her høvdu trý og fjúrtan útav 23 ávikavist farteldu og vanliga teldu. Viðvíkjandi kostnaðarmiklum vørum sum til dømis teldum og DVD-avspælarum, so er ymist, hvat familjur hava ráð at keypa. Sosiobúskaparliga støðan hjá húskinum er avgerandi fyri, hvussu nógv kostnaðarmikil tól, børnini fáa í gávu. Nógv ung arbeiða eftir skúlatíð og í feriuni og kunnu sostatt sjálvi savna sær pening til tól, tey ynskja sær.

Teldupostur

Teldurnar verða í stóran mun brúktar til at sleppa út á alnetið, og

spurningurin er so, hvat ið ungdómurin nágreiniliga brúkar alnetið til. Í míni stóru kanning frá 2003, har næmingar úr øllum níggjunda flokkum landsins fingu spurnablað útflýggjað, varð m.a. spurt, hvussu nógv tey ungu brúka alnetið til teldubrøv, kjatt og heimasíður. Viðvíkjandi telduposti vísti tað seg, eitt sindur óvæntað, at meira enn helmingurin av øllum næmingum als ikki brúka teldupost. Undir tvey prosent brúka meira enn fýra tímar um vikuna til at skriva teldubrøv.

Næmingarnir brúka heldur fartelefon og Sms-boð at samskifta sínámillum við, tí tað er bæði skjótari og einfaldari enn at senda teldubrøv. Teksturin er nógv styttri í Sms-boðum, og tær nýtist ikki at sita við eina teldu, sum hevur alnetsamband fyri at fáa sent boðini avstað. Samskiftið hjá teimum ungu í Føroyum er eisini í høvuðsheitum rættiliga lokalt, og tað virkar eitt sindur roksut at seta seg niður at skriva teldubrøv til fólk, ein sær dagliga. Haraftrat eru nógv ung, ið ikki eiga egna teldu og sum tískil heldur ikki hava umstøður til at sita og skriva privat teldubrøv í gerandisdegnum. Teldupostur er nakað, sum nógvir næmingar knýta til arbeiði meira enn frítíð, men sum kann vera hent, tá ið ein vil samskifta við fólk, sum ein ikki sær serliga ofta, til dømis familju og vinir stødd uttanlands.

Talva 31. Hvussu nógv brúkar tú alnetið til teldubrøv?

ongantíð	325 pers.	51 prosent
0,5 tíma um vikuna	185 pers.	29 prosent
1 tíma um vikuna	43 pers.	6,8 prosent
2-4 tímar um vikuna	38 pers.	6 prosent
5-9 tímar um vikuna	8 pers.	1,3 prosent
>9 tímar um vikuna	3 pers.	0,5 prosent

(FG kanning 2003)

Í áðurnevndu kanning í tveimum níggjundaflokkum og einum áttandaflokki í Havn varð eisini kannað, hvussu nógv ung eru, sum

skriva teldubrøv. Her, vísir tað seg, eru lutfalsliga fleiri, sum skriva teldubrøv. Ein triðingur og ein fimtingur av næmingunum í ávikavist níggjunda- og áttandaflokkunum skriva ongantíð teldubrøv. Rættiliga fá skriva teldubrøv dagliga, men 74 prosent av teimum úr áttandaflokkunum skriva „viðhvørt“.

Talva 32. Hvussu ofta skrivar tú teldubrøv?

	níggjunda	áttanda
ongantíð	9	5
fleiri um dagin	0	1
eitt um dagin	1	0
viðhvørt	17	17
íalt	27	23

Tað eru vinirnir, sum hava hægstu raðfesting, tá ið teldubrøv verða skrivað. Eisini eru nógv, sum skriva teldubrøv til sjeikin ella damuna hjá sær, serliga í níggjundaflokkunum; tað eru, kann ein rokna við, fleiri fimtan-sekstan ára gomul enn fjúrtan-fimtan ára gomul, ið eru í einum parlag. Kjattvinir og floksfelagar skriva eisini teldubrøv sínámillum, men tey eru færri, og talan er í grundini eisini her um okkurt slag av *vinum*. Fá skriva til foreldur síni, ikki serliga óvæntað, tí tey flestu síggja foreldrini hvønn dag heima við hús.

Ikki øll skriva teldubrøv heima, tí, sum áður nevnt, hava ikki øll føroysk húski teldu við alnetsambandi heima. Tískil eru nøkur noydd at fara aðrastaðni at fáa atgongd til alnetið. Tað gerst alt vanligari at arbeiða við teldum í føroyskum skúlum, ofta fáa næmingarnir eisini høvi at *læra* seg at finna tilfar til skúlauppgávur á alnetinum. Føroysku skúlarnir, bæði á fólkaskúla- og miðnámsskúlastøði, hava eitt egið netverk á alnetinum (eitt sonevnt intranet), har allir skúlanæmingar landsins fáa privata teldupostadressu – líka mikið um tey brúka teldupost ella ei.

Kjatt

Sera nógv er broytt á hesum økinum seinastu trý-fýra árini. Og tí er kjakið um kjattkanalirnar, ið eru best umtóktar í Føroyum, ikki heilt umboðandi fyri kjattmentanina ár 2007. Til dømis er nýggj føroysk datingsíða komin, ið eisini hevur kjattskipan. Talan er um síðuna Faroedating (www.faroedating.fo), ið hevur fingið nógva umrøðu millum ung.

Kjattmentanin í Føroyum røkkur víða. Fleiri hundrað børn og ung sita og kjatta hvørt kvøld ella fleiri kvøld um vikuna. At tendra telduna hjá sær og fara inn í eitt kjattrúm er, sigur danski granskarin Birgitte Holm Sørensen (2001:11), „som at træde ind i et rum, hvor der er mange talende mennesker til stede, og hvor mange samtaletråde krydser hinanden og er i spil". Føroysk kjattmentan grundar á nýtslu av globalari kunningartøkni, alnetið, fyri at samskifta í einum tykisligum ungdómssamfelag. Tøknin skapar nakrar nýggjar møguleikar, men hon verður samstundis lagað til lokal viðurskifti av brúkaranum. Persónarnir so at siga forma og *temja* tøknina, men verða samstundis sjálvir lagaðir til tøknina, ið setir karmar og treytir fyri samskiftið (Sørensen 2000 og Sørensen et al 2002).

Góð ráð til nýggjar chattarar (á heimasíðuni hjá faroesechat)

Henda síðan er um, hvussu tú ansar tær sjálvum og øðrum á alnótini.

Í veruliga lívinum, er tað torført at geva seg út fyri, at vera ein annar enn man er. Men á alnótini sær heimurin heilt øðrvísi út.

Á alnótini er lætt at krógva seg aftanfyri nøvn sum „Mussarin28" ella „Rambo", soleiðis at tann, ið tú chattar við, ikki hevur ánilsi av, hvør tú í veruleikanum er. Og tað er í nógvum førum tað stuttliga við at hitta onnur á alnótini.

Líka nógv, ið er spennandi at spæla ein annar enn tú dagliga er, so kann anonymiteturin eisini hava vandar við sær. Tíverri er tað onki loyndarmál, at alnótin eisini verður brúkt av fólk-

um, ið ikki eru guðs bestu. M.a. fær løgreglan javnan ákærur frá foreldrum, har børn teirra hava verið út fyri sexuellum „álopum“ ígjøgnum alnótina og eisini persónar, har myndir og persónligir upplýsningar eru misbrúktir.

Tí hava vit nakrar umráðandi reglur at minnast á, tá tú hittir nýggjar vinir á chattinum. Vit fara at undirstrika, at vit ikki vilja ræða teg frá alnótini. Tvørturímóti. Men júst sum tú lærir at koyra bil, eigur tú eisini at læra teg reglur fyri trygt at rógva á alnótini.

Hetta er ikki bert galdandi, um tú sjálv/ur brúkar alnótina, men serliga eisini, um tú hevur eitt barn, ið javnan er á alnótini.

Umráðandi at minnast um trygdina:

Tá tú chattar, so gev ongantíð títt fulla navn, búðstað, navnið á skúla ella arbeiðsplássi, telefonnummar ella aðrar upplýsingar, ið kunna sporast aftur til tín. Tað er eisini eitt vánaligt hugskot at senda myndir av tær sjálvum til fólk tú ikki kennir í veruliga lívinum. Minst til, at myndir av tær eisini kunnu misnýtast.

Um ein chattsamrøða verður óbehagilig, so logga av ella vel funktiónina „ignorer“ – spyr ein oppara (tey, ið hava @ frammanfyri navn sítt) um, hvussu tú gert. Minst til, tú ræður yvir tær sjálvum!

Um tín chattvinur ein dagin bjóðar tær at hittast, far so ongantíð einsamøll/einsamallur – alt eftir, hvussu væl tú kennir viðkomandi. Men ver gløgg/ur. Tú verður ongantíð ov gamal/gomul at ansa eftir tær sjálvum!

Gev ongantíð nøkrum títt loyniorð. Heldur ikki tínum vinum. Eitt loyniorð er serstakliga fortróligt, og um tað kemur út, kann tað í ringasta føri merkja, at onnur kunnu misnýta, sletta ella oyðileggja tínar persónligu tænastur á alnótini. Av somu orsøk er tað eisini umráðandi, at tú altíð loggar heilt út, um tú hevur brúkt eina persónliga tænastu á alnótini á einum almennum staðið, til dømis á skúlanum, arbeiðinum ella á eini netcafé.

Hvat spurnakanning míni, sum fevnir um alt landið, viðvíkur, eru enn færri næmingar, sum geva sær tíð til kjatt enn til teldubrøv, táið teir eru á alnetinum, tí meira enn 60 prosent av teimum ungu í kanningini siga seg ongantíð kjatta. Umleið tjúgu prosent kjatta upp til ein tíma um vikuna, meðan einans tvey prosent brúka í minsta lagi tíggju tímar um vikuna til kjatt.

Talva 33. Hvussu nógv brúkar tú alnetið til kjatt?

ongantíð	388 pers.	60,9 prosent
½ tíma um vikuna	77 pers.	12,1 prosent
1 tíma um vikuna	53 pers.	8,3 prosent
2–4 tímar um vikuna	51 pers.	8 prosent
5–9 tímar um vikuna	23 pers.	3,6 prosent
>9 tímar um vikuna	12 pers.	1,9 prosent

(FG kanning 2003)

Í kanningunum í trimum skúlaflokkum í Havn vóru úrslitini eitt sindur øðrvísi. Kjattararnir eru fleiri í tali í hesum skúlaflokkum. Tó sigur helvtin av teimum í áttandaflokki seg ongantíð kjatta. Bara ein genta, garvaður kjattari, kjattar hvørt kvøld.

Talva 34. Kjattar tú?

	níggjunda	áttanda
hvønn dag	0	1
fleiri ferðir um vikuna	1	1
viðhvørt	3	4
sera sjáldan	12	6
ongantíð	11	12
íalt	27	24

Næstan allir føroyskir kjattarar, kanska serliga teir yngstu, hittast á Faroese_chat, ið verður vanliga stytt til FC og var tann best umtókta kjattkanalin í landinum í 2002-2005. Ein onnur vælumtókt kjattkanal er vaksnamanna_chat. Tann einasti veruligi munurin á teimum er, at fyrrnevnda hevur eitt sindur yngri kjattarar enn hin seinna. Nógvir kjattarar eru tó at finna á báðum kanalunum í senn. Kjattkanalirnar royna at skapa sær ein serligan samleika, at vera øðrvísi, og hava sínar egnu heimasíður við alskyns upplýsingum: um kjattarar, myndir, kjak, vegleiðing í sambandi við kjatt o.s.fr. Á heimasíðuni hjá Faroese_chat er ein kalendari, har føðingardagarnir hjá nógvum kjattarum standa skrivaðir. Eisini stendur um konsertir og DJ-show (diskotek), sum verða í næstum.

Tey, sum kjatta, eru sera ymisk, hóast tey hava felags áhugamál, ið hoyra til kjattmentanina. Tey hava eina grundleggjandi tøkniliga vitan um, hvussu ein fær atgongd til kjattkanalirnar, hvørji forrit ein skal leggja á telduna (um ein kjattar heima) og eina sosiala vitan um, hvussu ein ber seg at kanalunum.

Talva 35. Hvussu nógv kjatta hvørjar dagar?

1.10 2004	1160 tekstreglur	8.10 2004	1249
2.10 2004	508	9.10 2004	292
3.10 2004	1075	10.10 2004	526
4.10 2004	672	11.10 2004	826
5.10 2004	1040	12.10 2004	280
6.10 2004	1030	13.10 2004	222
7.10 2004	1040	14.10 2004	383

(kelda: www.faroesechat.net)

Nakað tað fyrsta, ein kjattari spyr um, er: aldur, kyn og bústaður, ið á enskum verður stytt til ASL (Age Sex Location). Tað kann tó virka eitt sindur ógvusligt at leggja fyri við *ASL* í fyrstu tekstreglu.

Nógvir kjattarar hava nøvn (nick), sum í sær sjálvum lýsa aldur, kyn og bústað teirra. Til dømis *Girl16* ella *Mr27*. Ein kjattsekvensur er mangan sera stuttur. Tveir persónar heilsa uppá hvønn annan, fortelja okkurt skemtiligt, og síðan endar samrøðan. Fyri nógv av teimum yngstu á kanalini er kjatt rein tíðarstytting, har ein ikki hevur ætlanir um at hitta og læra at kenna aðrar kjattarar.

Talva 36. Nær verður kjattað á Faroese chat?

kl 0–2	10,5 prosent	kl 12–14	7,9 prosent
kl 2–4	1,6 prosent	kl 14–16	13,2 prosent
kl 4–6	0,5 prosent	kl 16–18	18,2 prosent
kl 6–8	1 prosent	kl 18–20	21,1 prosent
kl 8–10	0,2 prosent	kl 20–22	12,2 prosent
kl 10–12	1,3 prosent	kl 22–24	12,1 prosent

(kelda: www.faroesechat.net. Tøl fyri 15/8–22/10 2004)

Tað er torført at vera navnleysur sum kjattari í Føroyum, í hvussu er um ein kjattar oftani, tí flestu kjattararnir vita um ella kenna hvønn annan. Harvið verður samskiftið mangan persónligt, hóast innihaldið í samskiftinum ikki altíð svarar til *vanligar* samrøður. Luttakararnir á kjattkanalunum eru úr øllum bygdum og oyggjum landsins, sjálvt smáum útoyggjum, og harvið kann ein fáa kjattsamband við fólk úr øllum pørtum av landinum.

Fert tú inn á Faroese_chat eitt kvøld um tíggju tíðina, so sært tú, at tað er háferðslutíð (ella hákjattingartíð) á alnetinum. Ofta eru yvir 100 nøvn á listanum yvir vitjandi á kanalini, og tey koma úr øllum landinum. Stórur partur av kjattsamskiftinum er innan fyri lokalsamfelagið, tí ung kjatta við sínar vinir og kenningar, mangan fólk, sum tey síggja og práta við í gerandisdegnum. Til dømis hittast vinarbólkar á kjattinum beint eftir konsert fyri at kjatta um tónleikin, fólkið sum var á konsertini, spennandi upplivingar undir konsertini, og annað.

Kjatt hevur verið frammi ímillum føroysk ung í skjótt tíggju ár, og nógv teirra, sum byrjaðu ellivu-tólv ára gomul, kjatta ikki longur, tí tey siga tað vera blivið keðiligt. Í Føroyum verður mest kjattað seint á kvøldi, og tá hava tey fjúrtan-fimtan ára gomlu kanska ikki atgongd til nakra teldu við alnetsambandi. Nógv ung eru eisini úti um kvøldini; tey ganga til ítrótt, tónleik og líknandi og hava sostatt als ikki tíð til kjatting. Og nøkur, sum hava roynt at kjatta, eru blivin vónsvikin; tey halda tað vera keðiligt, einsháttað og fjákut. Tey tíma ikki at brúka sína frítíð til at fara á alnetið. Ein genta í Havn sigur um kjatt, at „tað er tað sama hvørja ferð"; ein onnur, fimtan ár og eisini úr Havn, sigur tað vera rotið at kjatta:

FG: Hevur tú egna teldu?
Lisa: Ja, hon stendur í mínum kamari, men hon skal út...eg tími ikki at hava hana.
FG: OK, so tú kjattar ikki og sovorðið?
Lisa: Nei, havi ikki tol til tað, akkurát tað sama bara snakka í telefon, tað geri eg altíð.
FG: Ja, men í kjatt er tað ofta onkur, man ikki kennir, tað er eitt sindur øðrvísi.
Lisa: Ja, tað veit eg gott...tað er so rotið.
FG: Ha?
Lisa: Tað er ordiliga rotið, ja...eg var onkuntíð fyrr á kjattinum, eg forstandi ikki,
at man tímir.

Børn og ung í øllum heiminum brúka kjattkanalirnar á alnetinum fyri at royna samleika sín. Nógv er skrivað um kynsbýtið í samleika-arbeiðinum í *cyberspace*: tá ið fólk spæla, at tey hava mótsett kyn í kjattsamskifti. Sherry Turkle (1996: 216) skrivar um ein mann, ið hevur broytt kyn á alnetinum. Maðurin sigur:

> *... I wanted to experiment with the other side...I wanted to be collaborative and helpful, and I thought it would be easier as a female...As a man I was brought up to be territorial and competitive. I wanted to try something new.*

Tað er ikki bara kyn, ein kann skifta á alnetinum, ein kann eisini skifta til dømis aldur og etnisitet. Í prinsippinum er alt gjørligt á alnetinum; alt hevur eina tilvild í sær (Lalander og Johansson 2002: 91).

Tey ungu royna og vraka ymsar samleikar, skaffa sær royndir og velja tað út, ið tey halda hóska best til persónmensku teirra. Samleikaarbeiðið gongur fyri seg á alnetinum, men ikki einans á alnetinum, tí tey ungu liva í einum samfelag, har ein skal *skapa seg sjálvan* sum sosialan og mentanarligan persón. Kjatt á alnetinum er vorðið ein heilt vanligur samskiftisformur, ið ikki bara ung hava gleði av, og sum hevur broytt mynstrini yvir, hvussu einstaklingar skapa síni sosialu netverk við at bróta upp landafrøðilig og sosial mørk á ein hátt, ið hevði verið óhugsandi fyri 20-30 árum síðani (til dømis Dreyfus 2002, Gouyou-Beauchamps 2005, Hansen og Rasmussen 2006).

Telduspøl

Tey ungu velja, sambært landsdekkandi kanningini frá 2003, spøl á telduni fram um kjatt og teldupost. Spølini á alnetinum eru ein týðandi partur av frítíðini hjá nógvum av teimum ungu, ið verða so bitin av spæliheiminum, at tey í ringasta føri kunnu gerast beinleiðis bundin av teimum. Hvør fimti næmingur brúkar í minsta lagi tveir tímar um vikuna til spøl á alnetinum. Ofta spæla fleiri vinfólk saman *online*, hvør við sínari teldu, viðhvørt eisini hvør í sínum húsi. Ein fimtan ára gamal drongur úr Havn fortelur um *multiplay* við teldum:

> *Eg gjørdi tað leygardagin, tá vóru vit seks dreingir, sum tóku allar teldurnar oman til ein annan drong, so koyrdu vit allar*

teldurnar saman, linkaðu tær, og spældu ímóti hvørjum øðrum.

Á alnetinum eru tó eisini spøl, har fólk úr øllum heiminum spæla saman í senn. Á alnetinum broytast spølini regluliga, og brúkararnir eru sjálvir við til at menna tey ímyndaðu univers, sum spølini umboða. Spølini eru sera framkomin, og fólk í øllum aldrum og úr øllum sosialum bólkum teljast millum luttakararnar. Fyri stórnýtarar er hæddarpunktið í gerandisdegnum, tá ið teldan verður tendrað og ævintýrheimurin letur seg upp. Turkle (1997: 14) sigur í hesum sambandi, at nøkur fara so langt, at tey venda *veruleikanum* á høvdið:

> *As more people spend more time in these virtual spaces, some go so far as to challenge the idea of giving any priority to RL [real life] at all. „After all," says one dedicated MUD [MultiUser Domains, MultiUser Dungeons] player and IRC [Internet Relay Chat] user, „why grant such superior status to the self that has the body when the selves that don't have bodies are able to have different kinds of experiences?*

Fólk spæla, at tey hava ein annan samleika, eitt øðrvísi lív, á alnetinum, og hjá nøkrum endar spælið við at gerast ein veruleiki ájavnt við *real life*. Genturnar luttóku næstan ikki í spælimentanini á alnetinum fyrr, men tey seinastu árini eru alt fleiri kvinnur við í spælinum, og *cyberspace* er blivið eitt umhvørvi, har ið mørkini ímillum kynini verða alt meira flótandi og ógreið. Telduspøl kunnu illa samanberast við spøl úr eldri miðlum, tí børnini kunnu stýra meira av spælinum sjálvi á telduni. Tey eru sjálvi við til at seta mørkini í sambandi við samleika og kyn, og her verða viðurskifti úr tí sosiala veruleikanum, sum tey kenna úr sínum gerandisdegi, partvís flutt yvir í spæliheimin, partvís broytt og nýskapt (Dreyfus 2002). Danski granskarin B.H. Sørensen (2000: 233) sigur, at

> *[i] forhold til de tidligere medier foregår afprøvningerne på et interaktivt plan, hvor børnene selv er styrende indenfor*

de rammer, som ligger i spillene. De produktive processer over- og videreføre børns egne skabende processer fra fx. tegning, maling, video, foto, digte, historier og musik. De nye processer er af integrativ karakter, hvor børnene i multimedieprogrammer kan integrere disse i forskellige former for skaben, således at der bliver et samspil mellem de forskellige udtryksformer.

Umleið ein triðingur av teimum spurdu í kanningini hjá mær brúka í minsta lagi ein tíma um vikuna til spøl á telduni. Ein lítil bólkur, seks prosent, spæla meira enn níggju tímar um vikuna á alnetinum.

Talva 37. Hvussu nógv brúkar tú alnetið til spøl?

ongantíð	304 pers.	47,7 prosent
½ tíma um vikuna	117 pers.	18,4 prosent
1 tíma um vikuna	69 pers.	10,8 prosent
2–4 tímar um vikuna	57 pers.	8,9 prosent
5–9 tímar um vikuna	21 pers.	3,3 prosent
>9 tímar um vikuna	39 pers.	6,1 prosent

(FG kanning 2003)

Telduspølini eru sera fjølbroytt, og ymist er, hvørji spøl einstaklingarnir gerast hugtiknir av og fara at spæla. Munirnir á spølunum avspegla munirnar á samleikanum hjá luttakarunum. Nakrir ungdómsbólkar spæla ævintýrspøl, aðrir spæla krígsspøl. Bókin *Ringanna Harri* hjá Tolkien hevur skapt eina heila grein innan spøl, og hetta er óivað ein tann best umtókta spæligreinin. Talan er um rolluspølini, har luttakararnir spæla ein leiklut sum ein ávísur persónur ella figurur í ævintýrinum. Hesi spølini vara dagar og vikur, tey kunnu halda á í ævir, um ein ynskir tað.

Børn og ung í dag, sigur Turkle (1995:83), vita væl, at teldur ikki eru livandi, men „children are comfortable with the idea that inanimate

objects can both think and have a personality“. Teldan er ikki bara eitt tól ella ein spegil, sigur Turkle (1995: 9), sum áður nevnt, tí vit kunnu fara aftur um spegilin og læra okkum at liva í tí virtuella heiminum.

Alnet og frítíð

Tað er spennandi, í hvussu er eina løtu, at finna heimasíður og annað, sum ein ikki kennir frammanundan. Næstan tveir triðingar av øllum næmingum í stóru kanningini 2003 *surfa*, sum tað verður nevnt, eitt sindur hvørja viku. Alnetið minnir her um sjónvarpið; ein leypur bara frá síðu til síðu uttan nakað veruligt mál ella mið fyri at royna at spora okkurt undirhald. Talan er sum oftast um reina tíðarstytting, dagdvølju, tá ið ein onki annað hevur at fáast við. Ein verður drigin av sínum forvitni og leitar eftir onkrum ókendum, ið liggur í *cyberspace*, sum illa fæst yvirlit yvir. Tað er sum at vera ein postmodernaður ferðamaður ella fjakkari, sum ferðast úr stað í stað uttan at kenna sína leið ella endastød (Bauman 1995).

Tey ungu seta seg við telduna fyri at „surfa på nätet, för at hitta nya vänner, söka information, bli medlemmar i imaginära kollektiv och kanske hitta sitt ’livs kärlek’“ (Lalander og Johansson 2002: 93). Øll leita eftir onkrum at byggja sína tilveru á, onkrum at skapa samanhang í einum fragmentaraðum heimi, og alnetið verður sæð sum eitt nýtt land við óteljandi ónýttum møguleikum.

Talva 38. Hvussu nógv brúkar tú alnetið – til at surfa?

ongantíð	259 pers.	40,7 prosent
½ tíma um vikuna	104 pers.	16,3 prosent
1 tíma um vikuna	105 pers.	16,5 prosent
2–4 tímar um vikuna	85 pers.	13,3 prosent
5–9 tímar um vikuna	28 pers.	4,4 prosent
>9 tímar um vikuna	18 pers.	2,8 prosent

(FG kanning 2003)

Nógv fólk vilja eysæð, at tilvildarlig fólk, ið *surfa* á alnetinum, skulu detta inn á júst teirra heimasíðu. Á persónligum heimasíðum verður ein persónur vanliga lýstur, so at fremmand kunnu gera sær eina mynd av, hvør ið viðkomandi er; tilfar um lívssøguna, áhugamálini, arbeiðið, dreymarnar og frítíðina hjá viðkomandi er at lesa á síðuni umframt at myndir og tónleikur ofta eisini eru at finna.

Einans ein av teimum 27 næmingunum í níggjundaflokkunum í Havn hevur egna heimasíðu, men níggju av hinum kundu hugsað sær at fingið egna heimasíðu. Nógv fleiri næmingar í áttandaflokkinum, ið eg havi kannað, hava heimasíður; ikki færri enn sjey av teimum 23, ið svaraðu spurninginum, siga seg eiga heimasíðu. Her er helst talan um eitt rák í einum avmarkaðum bólki. Fyrst hevur ein næmingur havt heimasíðu, síðan hava fleiri onnur eisini fingið sær heimasíðu við tøkniligum stuðli frá floksfeløgum og vinum.

Ógvuliga ymist er, sum vit síggja, hvat tey ungu brúka alnetið til. Pláss er ikki her fyri at fara inn á øll øki, at nevna alt tað, ið alnetið kann nýtast til. Men undranarvert er at síggja, hvussu nógv ikki brúka alnetið yvirhøvur. Tað eru nógv ung, sum halda tað vera ov keðiligt og óvirkið virksemi at sita framman fyri einum telduskíggja í frítíðini. Tey hava aðrar hægri raðfestingar viðvíkjandi frítíðini og vilja heldur sleppa út. Ung í Føroyum í dag ganga til sera nógv ymisk skipað ítriv sum til dømis tónleik, ítrótt og átrúnaðarligt virksemi. Teirra netverk eru óheft av alnetinum. Her er brot úr samrøðu við fjúrtan ára gamla gentu úr Havn:

FG: Brúkar tú internet?
Elin: Okkurt til arbeiði og at spæla, og so ikki meira, bara tá eg eri í skúlanum.
FG: Bara tá tú ert í skúlanum?
Elin: Ja.
FG: Tú brúkar tað ikki til kjatt ella nakað sovorðið?
Elin: Nei.
FG: Tímir tú ikki?
Elin: Eg haldi, at tað er so rotið.
FG:Hava tit internet heima?
Elin: Ja.
FG: Brúkar tú heldur ikki e-mail?
Elin: Tað arbeiðir so spakuliga, so eg tími ikki inn á hana heima, bara í skúlanum brúki
eg e-mail.

Í fjølmiðlunum verður annars mangan sagt, at fólk nú á døgum royna at skaffa sær nýggja vitan á alnetinum fyri at *fylgja við*. Tey ungu, sigur danski fjølmiðlagranskarin Stig Hjarvard (Politiken 12/12 2003), brúka alnetið og fartelefonir til at skapa sosial netverk og til hugnaliga samveru, men

> *i den offisielle retorik om videns- og informationssamfundet lader man, som om vi er drevet at en ubændig lyst til at vide mere – at lige så snart folk har internettet mellem hænderne, går de igang med at videreuddanne sig.*

Alnetið er, serliga hjá teimum ungu, meira skemt enn álvara, meira til spæl enn til arbeiði. Í áttandaflokkinum úr Havn, har eg havi gjørt spurnakanningar og feltarbeiði, eru tey ungu sera virkin í skipaðum frítíðarítrivum og hava úr at gera næstan hvørt kvøld. Í samrøðu við fimtan ára gamlan drong úr flokkinum verður m.a. sagt:

FG: Brúkar tú computara?
Óli: Ja, inn ímillum, eg spæli ongantíð spøl...
FG: Brúkar tú internetið?
Óli: Ja.
FG: Hvat brúkar tú internetið til?
Óli: Tað er sum...tað er nógv vanligt...tað er bara at kekka e-mail og downloada okkurt sovorðið og...
FG: Ja, musikk?
Óli: Ja, eg hyggi eftir onkrum nýggjum, altso vita hvat tað er...
FG: Ja, kjatt?
Óli: Ikki akkurát nú, tí at nú er tað...Faroese chat hjá okkum, tað er oyðilagt, tí at mYRC [telduforrit] riggar ikki.
FG: Ná, tað riggar ikki?
Óli: Nei, men tvætl, tað bilar ikki.
FG: Nei, brúkar tú tað eisini til filmar? Kann man downloada filmar eisini?
Óli: Ja, men tað tekur so langa tíð.
FG: Ja, so verður tað dýrt, ha?
Óli: Tað tekur fleiri tímar, ein dag kanska, so...

Hjá børnum og ungum hava spæl og kreativitetur stóran týdning fyri ta sosialu og mentanarligu menningina, og, sigur Jette Forchhammer (1998),

> *mens de organiserede aktiviteter udføres i rammer, der sættes og styres af de voksne, så er børnene selv med til at sætte rammerne for den frie leg, der i stor udstrækning foregår på deres egne præmisser.*

Mynd 1. Hvussu nógv brúkar tú alnetið? (í tølum). FG kanning 2003. N=700



Alnetið er eitt amboð, sum kann brúkast í nógvum ymsum virksemi, meira enn eitt frítíðarítriv í sjálvum sær, og tí er torført at seta tal á, hvussu nógv, ið veruliga brúka alnetið í síni frítíð. Tónleikarar og ítróttafólk, skótar og DVD-hyggjarar, flestøll kunnu brúka alnetið í sambandi við frítíðarítriv síni. Alnetið gevur teimum møguleikan at skapa ein felagsskap, har luttakararnir eru staddir á ymsum plássum í landinum.

Í míni spurnakanning var spurningur um frítíðarítriv, har næmingarnir fingu tjúgu svarmøguleikar. At hyggja í sjónvarp er enn, sum sæst á mynd tvey, best umtókta ítriv hjá ungdóminum eftir skúlatíð. Meira enn tveir triðingar av øllum næmingum hava valt „sjónvarp“ sum eitt av sínum frítíðarítrivum. Ítrótturin kemur síðan á einum øðrum plássi við 60 prosentum, meðan „at ganga á diskotek/dans“ er nummar trý á listanum yvir vanligastu frítíðarítriv ungdómsins. Alnetið liggur eitt sindur longur afturí í raðfestingini hjá teimum ungu, hvat frítíðini viðvíkur; 39 prosent hava svarað, at hon er partur av teirra frítíðarvirksemi. Telduspøl, ið ofta eru heintað av alnetinum, eru lutfalsliga væl umtókt millum ung, tí 41 prosent siga

seg spæla spøl á telduni. Eitt annað frítíðarítriv á listanum (kjatt) er eisini knýtt at alnetinum, tí tú kanst ikki kjatta uttan at hava teldu við alnetsambandi. Kjattararnir telja nítjan prosent í kanningini hjá mær, so kjatt liggur sostatt nøkulunda í miðjuni á listanum yvir tey vanligastu frítíðarítrivini hjá teimum ungu.

Mynd 2. Hvørji frítíðarítriv hevur tú? (set ein ella fleiri krossar) % FG kanning 2003. N=700



Alnetið er, sum vit síggja, ikki ráðandi, tá ið ljós verður varpað á frítíðina hjá ungdóminum í Føroyum í dag. Av elektronisku miðlunum er sjónvarpið tann størsti, tjúgu prosentstig framman fyri alnetið í stóru spurnakanningini frá 2003. Mynstrið yvir hvussu børn og ung nýta alnetið broytist støðugt. Tey ungu eru ikki passivir brúkarar av

hesum kunningartøkniliga miðli, men tvørturímóti sera virknir aktørar, ið gjarna *framleiða* og ikki bara *brúka* tykisligu dimensiónina í ungdómsmentanini. Nýggj samskiftistøkni verður brúkt í einum føroyskum stíli og er við til at seta tað lokala í samband við tað globala.

1) Í blaðnum Nú (nr. 8 1979) stendur undir yvirskriftini „Nýggjar tíðir" m.a. um sjónvarp í Føroyum: „Seinastu tíðina hevur verið sjónligt, at okkurt fór at henda í Havn, tá stórar antennur vuksu upp um húsatekjurnar, at kalla á øðrum hvørjum húsi. Tað var at hoyra millum manna, at Sjónvarpsfelagið at enda hevði fingið sendiloyvi, og fyri at gera byrjanina so væleydnaða sum gjørligt og fyri at so nógv fólk sum gjørligt eisini kundu vera við, hevði antennufólkið ikki fingið eina fríløtu í fleiri vikur.

   Sjónvarpsfelagið er í dag sum sagt ein veruleiki, sum gevur okkum møguleika at fáa útheimin inn í stovurnar, og sjálvandi eisini tað, sum við hesum nýggja „mediunum" fylgir!"

2) Hvat háttalag kanningin í Vikublaðnum hevur støði í er mær ikki kunnugt. Gallup spurdi 528 fólk yvir fimtan ár, um tey høvdu teldu heima. Gallup hevur ringt til luttakararnar. Úrslitini stóðu í Vikublaðnum 4/3 2003.

3) Á einum skúla í Havn fingu næmingarnir í tveimum níggjundaflokkum spurnablað, sum teir skuldu fylla út í einum skúlatíma í 2002. 27 næmingar vóru í skúla henda dagin; tey luttóku øll í kanningini. Trý vóru burturstødd. Í einum áttandaflokki á einum øðrum skúla í Havn fingu næmingarnir eitt líknandi spurnablað (einasti munurin var, at nakrir fáir spurningar úr spurnablaðnum hjá níggjundaflokkunum vóru tiknir úr hesum spurnarblaðnum) útflýggjað í 2003. Her luttóku allir 24 næmingarnir. Eisini her varð ein skúlatími nýttur at fylla spurnablaðið út. Eg havi valt at halda úrslitini úr hesum kanningum sundurskild – nevna tey í tveimum røðum í talvunum – tí at talan er um tveir aldursbólkar, umframt at kanningarnar ikki eru gjørdar sama ár. Talan er her ikki um nakra hagfrøðiliga umboðandi kanning fyri ung í Føroyum.

[9]

TÓNLEIKALÍV

Í okkara tíðum við sterkum globalum netverkum, ið ávirka lokala lívið í landinum, og við einum ungdómi, ið íðin fylgir altjóða mentanarrákum, er framvegis neyðugt at kanna tann lokala mentanararvin nærri fyri at gera sær eina neyva mynd av leiklutinum, ið tónleikur hevur fyri føroysku ungdómsmentanirnar ár 2007. Eg fari her at royna at lýsa ríka og áhugaverda tónleikalív føroyska ungdómsins, ið má sigast at blóma í dag. Eg fari í hesum kapitli at royna at lýsa tann stóra leiklutin hjá ungdóminum á tí føroyska mentanarpallinum.

Ein góð blanding

Seinastu tíggju árini hava vit verið vitni til eina hugtakandi menning á lokala tónleikapallinum, ið ger tað ógjørligt at tosa um føroyskar ungdómslívsstílar uttan at koma inn á fjølbroyttu tónleikatiltøkini, ið eru kring alt landið. Forvitnisligt er at síggja tónlistarákið blanda modernaðar útlendskar stílar við eldri føroyskar tónar í stimbrandi og skapandi tónlistarligum royndum. Hetta er nakað nýtt. Markið, ið skilir føroyskt frá fremmandum í tónleiki er ikki heilt greitt, eftirsum ungu tónleikararnir leita sær íblástur úr ymsum tíðarskeiðum og londum. Tónleikararnir ferðast við øðrum orðum í tíði og rúmi fyri at finna *rætta* ljóðið og lagið, ið endurspegla føroyska samleika teirra.

Moderniserings- og individualiseringsgongdirnar, ið eyðkendu samfelagsmenningina í Føroyum í tjúgundu øld, skaptu karmar fyri tónlistarligum royndum, serliga eftir seinna veraldarbardaga, og ein tónlistarpall fyri ungdómin, ið var sterkt ávirkaður av nýggjum dansitónleiki úr USA og Stórabretlandi. Rútmiski dansitónleikurin, ið av álvara kom til landið í 1920'unum (fyrstu tíggjuárini serliga í Havn) fekk eitt sera virkið ungdómstónleikaumhvørvi, ið ikki hevði nevnivert samband við eldri føroyskan tónleik, upp at standa. Hesin tónleikurin kann býtast upp í tríggjar høvuðsbólkar: rockur, jazzur og undirhaldstónleikur (Fock 1984: 22). Rútmiski tónleikurin var serliga knýttur at dansitiltøkum; sostatt var tónleikavirksemið í landinum fyrst og fremst innan undirhaldstónleik.

Ungdómurin mentist nú sum argandi bólkur í samfelagnum við

sínum serkendu ungdómsmentanum og stílum, ið í stóran mun settu seg upp ímóti mentanini hjá eldru ættarliðunum. Í hálva øld, 1930-1980, var fólksligi tónleikurin í landinum fyrst og fremst ein ikki serliga væleydnað roynd at eftirlíkna undirhaldstónleik úr útlondum. Tónleikurin fann ikki rættiliga sín samleika millum siðbundnu og modernaðu tíðirnar. Seinasta tíggjuárið hava vit tó verið vitni til eina nýggja áhugaverda bylgju, føroyska bylgju, kann man siga, ið flytur rútmisku tónleikaframleiðsluna upp á nýggjar hæddir.

Rockur og fornøld

Stóra framgongdin í føroyskum tónleikalívi síðan umleið 1980 kemst av, at framleiðarar og tónleikarar nú arbeiða eftir einum meira professionellum leisti enn áður, men framgongdin er eisini eitt úrslit av, at tónleikur og list hava fingið munandi hægri mentanarpolitiska raðfesting í landinum. Samanborið við fólkatalið í landinum má sigast, at føroyingar hava eina rættiliga stóra framleiðslu av tónleiki, ið hoyrir til nógvar ymiskar stílar, til dømis fólkarock, harðrock, jazz, gospel, kór og blues. Fleiri føroyskir viðmerkjarar meina eisini avgjørt, at tónleikurin gongur á odda í føroyska mentanarlívinum hesi árini.

> *Music, for centuries part of the cultural life of the Faroes, has never thrived as now. Almost every kind of music has its following. The advent of a music school has produced many good young players and an impressive symphony orchestra. But the Faroese make their own music. A group of talented young musicians compose and record works which are influenced by their singular surroundings: the rugged landscape, the wild sea; at times by the gentleness and peace of the same landscape and sea; influenced too by the sounds and rhythms of the traditional music.*
> *(Blak 1996: 10)*

Føroyskur tónleikur er framvegis fyrst og fremst fyri føroyingar, eftirsum rættiliga fáir bólkar hava megnað at gjørt seg galdandi uttanlands. Tó sær tað út til, at hesir bólkarnir verða alt fleiri við

Teiti og Eivør sum bjartastu pop/rock fyrimyndirnar, ið hava nógvar fjepparar uttan fyri landoddarnar. Ein annar áhugaverdur bólkur í hesum viðfangi er *viking metal* bólkurin Týr við Hera Joensen á odda. Tónleikurin hjá Týr lýsir sera væl forvitnisligu bylgjuna í føroyskum rútmiskum tónleiki í dag – blandingin av gomlum føroyskum kvæðum og modernaðum útlendskum stílum. Tey ungu eru sera hugtikin av fornum søguligum tíðarskeiðum, tá forfedrarnir búleikaðust í landinum, og tað hevur havt við sær, at ungir tónleikarar leita aftur til siðbundnar tónlistarligar røtur sum ongantíð áður.

> *Profession of the Christian Faith or Decapitation; this was the choice given by Sigmundur to his Faroese Viking compatriot Tróndur í Gøtu. And so it was that in 999 AD the Christianization of the small, scenic, yet striking Føroyaland began, slowly but surely, casting a veil of oblivion over the ancient Scandinavian gods and only leaving the relics of forgotten heathenish dogma buried deep within the Christian ritual. Or so it was believed…*
>
> *Exactly 999 years later, a small group fondly remembering the archaic gods and rites came together to form the only Faroese Folk Metal band TÝR.*
> *(www.tyr.net)*

Týr, navnið á einum høvuðsgudi úr norrønu gudalæruni, var kendur krígsgudur, men eisini gudur fyri rættvísi. Bólkurin, uppkallaður eftir hesum máttmikla gudi, hevur sín best umtókta sang í modernaðari rockútgávu av kvæðinum um Ormin Langa. Regin Smiður, úr Sjúðrarkvæðunum, er eisini eitt kent rocklag hjá Týr. Bólkurin fekk sítt veruliga gjøgnumbrot við fløguútgávuni *Eric the Red*, ið eysturríkska plátufelagið Napalm Records selur kring heimin. Tónleikararnir í Týr eru sera ernir av síni bakgrund og lýsa tónlistarliga stílin og samleikan hjá Týr sum eitt úrslit av „Scandinavian mythology, viking warriors and heroic battles“ saman við „viking choruses, traditional melodies and timeless Heavy Metal“ (www.tyr.net).

Týr hevur givið nógvum føroyskum rockbólkum íblástur, men sera

fá hava valt at fylgja somu kós sum Týr (*Folk Metal*), eftirsum hugskotið, ið hevur gjørt bólkin kendan, longu onkursvegnað tykist úttømt. Aðrir bólkar, til dømis Clickhaze úr Gøtu, ið hevur fostrað so nógvar vælumtóktar rockbólkar seinastu árini, hava eisini krúddrað tónleikin hjá sær við gomlum føroyskum tekstum og løgum í alskyns royndum at endurskapa modernaða føroyska rútmutónleikin. Eivør, fyrrverandi Clickhaze-sangari, hevur veruliga fótað sær úti í heimi, og hevur marknaðarført navn sítt, so at tað verður knýtt at sagnum, ævintýrum og norrønu fornøldini. Øll í Føroyum kenna Eivør, og mynd hennara er í miðlunum hvørja viku.

Eivør hevur, sum fleiri onnur ung stjørnuskot í føroyska tónleikaumhvørvinum, røtur í einum bygdasamfelagi við fiskaídnaði og sterkum átrúnaðarligum samkomum (Kruse 2007). Átrúnaðarligi samleikin er ofta tætt knýttur at tónlistarliga boðskapinum og stílunum hjá ungdóminum; átrúnaðarligir spurningar seta ofta síni merki á tónleikaligu verkætlanirnar, ið endurspegla lívið í einum lítlum og tøttum samfelagi millum siðvenju og modernitet.

Samkomuhúsið Keldan í Skálabotni, ið er miðdepil fyri alskyns virksemi, ið stóra kristna samkoman skipar fyri, er eitt tað besta tónleikahúsið í landinum. Her eru javnan konsertir á skránni, og stóri árligi Fjarðafestivalurin hevur eisini Kelduna sum karm. Keldan er eitt gott dømi um, hvussu stórt arbeiði nógvar samkomur í landinum gera fyri at skapa eitt nútímans umhvørvi, ið hóskar til føroyska ungdómin *anno* 2007.

G! og aðrir festivalir

Gøta hevur verið skapandi høvuðsborg og vakstrarhús hjá tí rútmiska tónleikinum í Føroyum síðan 1990'árini. Tað er her, at samtakið Grót varð stovnað, ið hevur klakt so nógvar tónleikarar og bólkar, ið flestøll kenna – til dømis Petur Pálsson, Eivør, Gestir og Høgni Lisberg. Hesi hava myndað høvuðsrákið í føroyskum rocktónleiki í nógv ár. Grót er uttan iva mest áhugaverda umhvørvið og hugskotið viðvíkjandi nútíðar rocktónleiki í Føroyum, hóast vit eisini hava

áhugaverdar bólkar úr Klaksvík, Fuglafirði, Tórshavn, Tvøroyri og øðrum plássum hesum tíðarskeiði.

Grót, ið hevur bond til samkomur í Gøtu, setti í 2002 størsta og best umtókta summartónleikatiltakið, vit hava, á stovn: G!Festivalurin. Hesin árligi festivalur gongur fyri seg á náttúruvakra Syðragøtusandi tríggjar dagar seint í juli mánaði. Festivalurin veksur ár undan ári og hevur givið øðrum bygdum íblástur, so at tær hava skapt sínar egnu festivalir við líknandi stíli. Stóri leikluturin hjá G!Festivalinum fyri rútmutónleik og ungdómsmentan í Føroyum sæst aftur í tí sera stóra áhuganum, ung í í Føroyum og aðrastaðni í Norðurlondum, sýna tiltakinum. Í juli 2005 vóru 6.000 áskoðarar við atgongumerki og 3.000-4.000 aðrir forvitnir gestir staddir í Syðrugøtu fyri at uppliva tónleikin og veitsluna; hetta merkir at fimti hvør føroyingur í landinum var í Syðrugøtu samstundis, og tað er helst eindømi í Føroya søgu (www.gfestival.com). Størstu summartónleikafestivalirnir í Føroyum í dag eru G!Festivalurin (Gøtu), Summarfestivalurin (Klaksvík), Mjús (Sandur), Jóansøku-festivalurin (Tvøroyri/Vágur), Asfalt (Tórshavn) og Fjarðafestivalurin (Skálafjørður). Allir eru komnir síðstu árini.

Haraftrat eru nógvar eldri høgtíðir og stevnur, nakrar ganga aftur í Miðøldina, summarmánaðirnar í Føroyum, har Ólavsøkan umboðar stóru *finaluna*, ið føroyingar hava hildið í meira enn túsund ár. Summartíðin er full av festivalum, gomlum siðbundnum eins og modernaðum, ið kappast sínámillum at lokka fólk til sín fyri at yvirliva. Ólavsøkan plagdi at hýsa størsta árliga rocktiltakinum í landinum, men nýggju festivalirnir hava fullkomiliga broytt tónlistarliga landakortið, so Ólavsøkukonsertin nú tykist at hvørva heilt. Asfalt-tiltakið varð eisini skapt við tí fyri eygað, at bjarga høvuðsstaðnum eitt pláss á tónlistarliga landskortinum hjá teimum ungu.

Tónleikur og festivalir verða nú sæð sum týðandi mentanarligt tilfeingi, ið bygdarráðini og kommunurnar kring landið gera stórar íløgur í, eftirsum politikarar og onnur meina, at fólkslig mentanarlig tiltøk, ið lokka ungdómin til, fara at geva lokalsamfeløgunum virðismikið íkast fyri framtíðina – til dømis við at tykjast meira áhugaverd og

lokkandi sum bústaðarpláss. Fjølbroyttu tónleikatiltøkini mugu sigast at vera eina eydnusøgu í stríðnum hjá bygdasamfeløgum at yvirliva í eini tíð við bývøkstri og vaksandi mentanarligari miðsavnan í høvuðsstaðarøkinum.

> *Spælistovan [tónleika-] kravdi ongan forkunnleika innan tónleik, men var við til at kveikja áhugan og forvitni hjá børnunum. Har lærdu míni børn at gera nyttu av tónleiki og rørslum og at kasta av sær sorgbundnar løtur […] At síggja míni børn gleðast og sjálvi skapa gleði við tónleikinum, er so stórt fyri mær, at eg dugi ikki at siga tað í orðum, tí tað er eingin sjálvfylgja í Føroyum í dag, at børn eiga ommur og abbar at vera hjá og fáa upplivingar frá sum eingin skúli kann geva […] Tá eg gekk í fólkaskúla fingu vit tilboð um at spæla ymisk ljóðføri ókeypis og sum ein partur av skúlatíðini, hetta førdi meg upp um mangan høgan tind og gjøgnum mangan djúpan dal uttan at fara meira inn á detaljur.*
> *(Maud Wang Hansen, Sosialurin 2004)*

Fyrimyndir og umhvørvi

Nýggja bylgjan í Føroyskum rocktónleiki, ið blómaði í 1990'árunum, var, sum sagt, knýtt at sterkum sosialum netverkum í bygdum við ríkum song- og tónleikaarvi, og hevði ofta eisini (til dømis hjá Grót) tætt samband við átrúnaðarliga samleikan hjá teimum ungu tónleikarunum (Kruse 2007). Flestu ungu rocktónleikararnir í dag hava eisini fingið íblástur frá sera væl umtókta klaksvíksbólkinum Frændur, ið var ráðandi á tónleikapallinum upp ígjøgnum 1980'árini. Tó var tónleikastílurin hjá Frændum nakað øðrvísi. Tónleikurin hjá Frændum var romantiskur og nakað góðvarin í sínum tekstum. Frændur er tó eitt sera áhugavert dømi, tí bólkurin framleiddi fleiri ófjaldar politiskar sangtekstir, ið talaðu fyri føroyskum sjálvræði, og sostatt tók bólkurin tráðin upp eftir vísur og tættir, ið føroyingar skrivaðu síðst í nítjandu øld (Huhtamäki 2005). Frændur hevði stóra ávirkan á eitt heilt ættarlið av ungfólki, eftirsum bólkurin lýsti kenslusom evni og súmbol, ið tey ungu, onkursvegna, longdust eftir

at fáa í eini tíð við stórum og djúpum samfelagsbroytingum. Globalar ungdóms- og undirhaldsmentanir komu til landið, tá føroyingar fingu sjónvarp og aðrar miðlar tíðliga í 1980'árunum.

Ørindi úr 80'ini (Eyðun Nolsøe, Frændur)

vit elska og liva
syngja og skriva
um heimin vit øll hoyra til
og vit vilja øll flenna
práta og kenna
ein kærleika – har alt verður til
har alt ber til
har eg verði til …

Frændur kann sostatt sigast at umboða eina høvuðskeldu til íblástur, ið nýggju tónleikararnir hava funnið sær í modernaðum føroyskum rútmutónleiki, hóast dagsins rocktónleikur er nógv meira fjølbroyttur, samansettur og altjóða í stíli, enn bleytu hugnaligu tónarnir við politiskari framtíðaridealismu úr 1980'árunum. Frændur var ikki knýtt at átrúnaðarliga umhvørvinum í Klaksvík, men fekk íblástur úr sosialistiskum og tjóðskaparligum vísum og tónleiki úr Svøríki og øðrum Norðurlondum. Bólkurin hevði ikki sum týðandi mál at fáa eitt altjóða gjøgnumbrot og brúkti ikki, sum nógvir nýggir bólkar gera, enskt mál í sangtekstum sínum (Huhtamäki 2005: 124). Rútmutónleikurin í dag endurspeglar eitt samfelag við nýggjum kjaki, nýggjum virðum og súmbolum, og nýggjum blandaðum listamáli.

> *Børnene vil hellere spille musik end fodbold. Skoleelevernes fremtidige ønskejob skal findes i musikbranchen. Der er et hav af aktive bands og musikforeninger selvom de kun er 45.000 øboere. Musikken er ofte hård og skånselsløs ligesom det barske Atlanterhav der omgiver „fårenes øer" – Føroyar…*
> *(Danskur blaðmaður, Oyggjatíðindi 25/6 2003)*

Ung í Føroyum hava, meini eg, munandi betri møguleikar at útinna sínar tónleikaætlanir og dreymar í dag enn fyri bara 20-30 árum síðani, tí stóra takið hjá foreldraættarliðnum at geva tónleikarum betri sømdir hevur givið úrslit og fört til eina jaliga menning. Plátufelagið Tutl, kjarnin í føroyskum tónleikalívi síðan 1977, er hin mest týðandi listarligi stovnurin, ið sameinir tónleikarar innan allar stílar í Føroyum. Leiðarin, Kristian Blak, ein tónleikari av donskum uppruna búsitandi í Havn, er *Mr Faroe Music,* tí hann offrar alla sína tíð og orku føroyskum tónleiki at frama.

> *Tutl is a Faroese record company collectively owned by musicians and composers. A wide range of musical genres – ethnic, folk, jazz, pop, rock, classical, choral, children's music, country and gospel – have been released on the Tutl label, original compositions comprising the greater part of the production […]*
>
> *Musicians and groups from Tutl tour widely abroad, particularly in Europe and North and South America. Tutl releases are available worldwide, both through local Tutl distributors as far away as Japan and through internet sale.*
>
> *Recent years have shown growing artistic activity in the Faroe Islands. Tutl now releases approximately 15 new CDs each year, in addition to reissues of CDs from its back catalogue. The Tutl catalogue comprises over 200 releases, most of which have received national as well as international acclaim.*
> *(www.tutl.com)*

Tónleikurin sameinir nógvar ymsar ungdómsbólkar og lutmentanir í dag, og hetta er eisini ein avleiðing av mentanarligu individualiseringsgongdini, ið gevur nýggjari skapandi list livirúm; gongdin førir eisini til, at broyttir átrúnaðarligir, sosialir og mentanarligir samleikar koma til sjóndar. Nógvir ungir rocktónleikarar við bakgrund úr lutfalsliga afturlatnum og átrúnaðarligum samkomum umskapa sín persónliga andaliga samleika og sína heimsmynd; sostatt

skapa teir eina týðiliga frástøðu millum seg og afturhaldssinnaðu virðini, ið átrúnaðarligir leiðarar í nógvum førum tala fyri.

List og frælsi

Listarliga orkan, ið sæst aftur í blómandi tónleikaumhvørvinum í dag, er ein avleiðing av (listarliga) frælsinum, ið tey ungu kenna og brúka. Persónligu ambitiónirnar og listarliga sjálvsálitið tykjast vera nógv størri nú, ið tónleikarar sum heild fáa eina meira professionella ráðgeving og dyggan stuðul. Ungir føroyskir tónleikarar, sum eg havi prátað við, eru sannførdir um, at teir taka lut í veldugari mission fullari av ókannaðum møguleikum og avbjóðingum, ið kunnu leiða teir til altjóða viðurkenning og eydnu. Við øðrum orðum, spælið hjá ungdómstónleikarum er eftirhondini viðurkent sum áhugaverd mentanarlig tónlist. Talan er um ung fólk við stórum glæsiligum vónum og framtíðarætlanum. Tónleikur teirra er avgjørt vorðin til meira enn skemt og undirhald í frítíðini.

Alnetið og útlendskar sjónvarpsrásir mugu nevnast, tá ungdómsmentan og tónleikur eru á dagsskránni, tí rákini og menningin í føroyskum tónleiki síðan 1990'ini kunnu ikki greiðast, uttan at hugt verður nærri at nýggju miðlatøknini. Frændur hoyra til skeiðið, áðrenn alnetið kom, meðan Sic, Krit, Makrel, Gestir og líknandi bólkar hoyra til føroysku alnetøldina. Ungir tónleikarar brúka alnetið, tá teir søkja eftir nýggjum tónum og rútmum, og tað hevur eisini elvt til, at tónleikur framleiddur í Føroyum í dag má sigast at vera sera fjølbroyttur.

Vanligi popptónleikurin fær tískil eisini harða kapping frá heilt øðrum tónleikagreinum. Útlendska ávirkanin plagdi fyrr at koma úr Danmark, ið var einasta portrið út til stóra umheimin, men í dag eru bondini til aðrar partar av heiminum styrkt munandi viðvíkjandi ungdómsmentan. G!Festivalurin lýsir sera væl, hvussu globala samskiftið millum ung úr ymsum londum veksur, tí festivalurin virkar sum savningarpláss fyri føroyskum og útlendskum ungdómi við áhuga fyri rocktónleiki.

Útlendskir viðmerkjarar hava viðhvørt roynt at peika á styrkina í føroyskum tónleiki við at vísa til tann sterka lokala og tjóðskaparliga samleikan við gomlum *siðvenjum* sum livandi parti av seinmodernaða lívinum ár 2007. Hví eru so nógvir tónleikarar í einum so lítlum samfelagi? Hvussu kunnu teir framleiða so stórar nøgdir av áhugaverdum tónleiki? Hesir spurningarnir, ið danska blaðið *Modspil* reisti í 1988, hava onki einfalt svar. Forni føroyski tónleikaarvurin er ein mentanarligur karmur, ið framvegis endurspeglar áskoðanir, virðir og sosialar siðvenjur hjá nógvum føroyingum. Hesin tónlistarligi arvurin var í nítjandu øld avloystur (rættari sagt, settur til síðis) av evropeiskum miðalstættartónleiki í pørtum av tí borgarliga umhvørvinum í Havn, tí útlendingar við framúr tónlistargávum og royndum komu til landið. Hetta var í tíðini, tá handilsligi fiskaídnaðurin og fríhandilin fótaðu sær í 1850-1880.

Felagssangur og fólksligt almennið

Klassiski tónleikurin, burtursæð frá forvitnisligu royndunum hjá Sunleifi Rasmussen og tveimum-trimum øðrum føroyskum tónaskøldum, hevur ikki verið blandaður saman við gomlu kvæðini og vísurnar, ella føroyska náttúru, og er tískil ikki partur av ungdómsmentanunum, ið knýta seg til summarfestivalirnar og konsertirnar.

Søgan hjá modernaða rútmutónleikinum í Føroyum er knýtt at *fólksliga mentanarliga almenninum* og sostatt partur av sosiala lívinum hjá føroyingum úr øllum stættum og oyggjum.

Fólksliga almennið er mótpólur til borgarliga almennið, og rocktónleikurin hjá ungdóminum hoyrir avgjørt til fyrra økið, eins og føroyski dansurin hevur gjørt upp ígjøgnum øldirnar (Andreassen 1992). Fólksliga almennið er eyðkent av forvitnisligum samskiftismynstrum, ið avdúka snøklar av føroyskum samleikum.

> *The form of communication in the popular public sphere differs fundamentally from that of the bourgeois one. The form of communication is collective, and it is the collective*

> *itself which is the producer, communicator and receiver in the process. In the popular cultural process of communication the entire process takes place within the collective itself […]*
>
> *Dancing and festival traditions have been used as examples of forms of communication in the popular public sphere. They originated and developed in preindustrial forms of society. Contributing to shaping these social and communication forms were the isolation in local communities and the stability of these. This resulted in a mutual dependence between the people who lived in a village or a region, a dependence applying to all aspects of life.*
> *(Andreassen 1992: 305)*

Kollektiva sosiala funktiónin, ið tónleikurin og dansurin høvdu í tí siðbundna samfelagnum, broyttist tíðliga í tjúgundu øld, men føroyingar virðismeta framvegis tann kollektiva dámin í føroyskum tónleiki og (felags)sangi; tað verður av mongum roknað sum serlig dygd í tí føroyska mentanarliga samleikanum. At syngja er hjá nógvum føroyingum júst *tað*, ið sameinir allar føroyingar og endurskapar týðandi mentanarlig virði. Tónlistarlig professionalisma við greiðum sundurbýti millum úrvalslið og frítíðartónleikarar passar ikki rættiliga til fólksliga almennið, og tí eru nógv fólk (kanska serliga eldri fólk), ið síggja hana sum ein vanda og halda hana fara at elva til sosiala og mentanarliga fragmentering. Í *Okkara Sangbók* (2006) stendur í stuttum formæli (s. 4) at

> *tað hevur verið ein avbjóðing at velja út júst teir sangir, sum eiga innivist ímillum hesar báðar permurnar. Vit hava tí ráðført okkum við mong – eldri sum yngri – um val av sangum, og at enda gjørdist innihaldið hetta tygum nú sita við.*

Hetta ótrúliga varsemi vísir, hvussu ómetaliga týðandi tað er at fáa allar føroyingar at kenna at bókin er teirra sangbók. Málið er, at savna allar íbúgvarnar í Føroyum í ein samansjóvaðan bólk. Hetta er ein ætlan, ið er trupul at útinna nú á døgum, tí nógv ung nýta

sítt mentanarliga frælsi at fylgja øðrum ókannaðum tónlistarligum stíggjum, ið ganga langt burtur frá fólksligu sangunum og vísunum, ið foreldur teirra syngja og njóta.

> *Føroyingar elska at syngja!*
> *Tað hevur verið nógv yrkt og sungið her heima á klettunum síðani Tróndur úr Gøtu á sinni skrivaði sálm, sum enn stendur í Sálmabókini. Og aldargamla kvæðamentanin hevur ivaleyst gjørt sítt til, at fólkið hevði meira at savnast um enn bert dagliga stríðið og strevið. Vit vita, at sungið varð til gamans og álvara, til heiðurs og til spei [...]*
> *Okkara sangbók er ætlað sum eitt íkast til hesa virðismiklu og ljómandi mentan okkara, sum ikki so sjáldan fær fremmandafólk at undrast. Tað skal vera ynski okkara, at føroyingar, sum koma saman – bæði nú og í framtíðini – framhaldandi fara at syngja saman.*
> *(Okkara sangbók, s. 5)*

Ung í Føroyum bjóða sangsiðvenjuni, ið grundar á felagssang úr songbókum, av. Og tað er, í vissan mun, ein avleiðing av stóru samfelagsbroytingunum í í 1980'árunum og 1990'árunum, ið gjørdu tað minni *natúrligt* og týðandi fyri samleikan hjá ungdóminum at luttaka í veitslum við endurtakandi felagssangi. Nógv ung, ið eg havi tosað við, seta sær høg persónlig tónlistarlig mál, ið hava røtur í føroyskari mentan, tó uttan at altíð hava nakað tætt tilknýti til (áhugakendu) fólksligu mentanina úr farnu tíggjuárunum. Ungdómur ár 2007 er ikki serliga trúgvur mótvegis ungdómsmentanini hjá foreldrunum. Hann er nógv meira atfinnandi mótvegis lokala tónlistaarvinum og hugsar meira um persónligar dygdir og eginleikar, ið kunnu leiða tónleikaran upp á nýggjar hæddir í tónleikaheiminum.

Samfelagið, sonevnda refleksiva seinmodernaða samfelagið, hevur givið ungdóminum nýggjar møguleikar at skapa sín egna mentanarliga samleika við túsundára sang- og dansisiðvenjum til taks. Ein mentanarlig individualisering hevur givið lokalu og globalu dimensiónunum í ungdómsmentanini nýggjan týdning. Siðvenjur eru ikki

sjálvsagdar longur; tær tæna í dag einum serligum og strategiskum leikluti í leikinum um tónleik og samleika, sum tá tungmálmbólkurin Týr gevur gomlum kvæðum nýggjan ham.

Tónleikur og samleiki

Framtíðin er óviss, men blómandi tónleikalívið gevur eina ljósa og jaliga ábending um komandi árini. Glataðu spælimenninir í Havn, úr skaldsøguni hjá W. Heinesen, reistu eina prýðiliga súlu við at taka tónlistarliga íblásturin uttan úr heimi og knýta hann til egnar dygdir og gávur. Soleiðis lyftu teir føroyska tónleikalívið upp á nýggjar hæddir (Jespersen 1988). Samspælið millum nýtt og gamalt, globalt (útlendskt) og lokalt, er ein kveikjandi gongd, ið ávirkar rákini í rútmutónleikinum hjá ungum føroyingum í dag. Lutfalsliga sterka og djúpa lokala rótfestið, ið ungir føroyingar hava sum barlast, óansæð hvar tónlistarliga siglingin førir tey, er, sambært *Modspil* (1988), nakað heilt avgerandi fyri skapanarevni og samleika føroyinga. Føroyar fáa okkum at taka í egnan barm, sigur danskur blaðmaður, og landið fær *outsidaran* (útlendingin) at síggja, at okkurt manglar í samleika hansara... (Jespersen 1988).

Nú, tvey tíggjuár eftir at *Modspil* prentaði sína serútgávu um tónleik í Føroyum undir yvirskriftini *En kultur i en brydningstid*, hava føroyingar tikið risafet fram og eru í nógv størri mun tilbúnir altjóða tónlistapallinum; eisini eru teir betri kunnaðir um sín egna tónlistarliga kapital. Tónleikaídnaðurin veksur ár undan ári og verður í dag av fleiri politikarum skírdur at verða týðandi føroysk útflutningsvinna í komandi tíðum. Áhugavert er at síggja, at tað eru bygdirnar, serliga miðalstórar bygdir við einum ídnum og fjølbroyttum mentanarlívi, ið standa á odda; tær fáa ágóða av sínum tónlistarliga kapitali og netverkum, ið tykjast bera av Havnini, ið annars á nógvum øðrum økjum er einaráðandi. Við øðrum orðum kann sigast, at bygdirnar, ið viðhvørt verða roknaðar sum minni modernaðar og forvitnisligar enn Havnin í samfelagskjaki, eru, tónlistarliga sæð, sterkasti leikarin við bestu kortunum í hondini.

Hesin teksturin hevur einans lýst brot úr tónleikasøgu føroyinga og skal tí lesast og tulkast við fyrivarni. Føroyar hava, sum víst, eitt ríkt ungdómstónleikalív, ið umfatar allar oyggjarnar; sostatt passar samfelagið ikki til myndir, ið viðhvørt verða skaptar, ið lýsa norðuratlantiska útjaðaran sum doyggjandi leivd úr fornum tíðum. Tónleikurin hjá ungdóminum í Føroyum avdúkar tvørturímóti, at røturnar aftur til farnar øldir skulu fatast sum týðandi tilfeingi (sosialt, mentanarligt og átrúnaðarligt), ið er neyðugt, tá ung skulu *finna* sín egna samleika í sínum egna samfelagi.

[10]

MANSLYNDI

Hóast hesin tekstur er mest um menn og manslyndi, so er hann við til at siga nakað um, hvørjar munir eru á kynunum í dag. Føroyskar kvinnur hava eisini broytt seg nógv seinastu tíggjuárini og tískil kundi eg eins væl havt skrivað um kvinnurnar í landinum í hesum kapitli. Kvinnurnar eru komnar í eina tvístøðu millum gomul føroysk kvinnuvirði og alt tað nýggja, ið komið er. Krøvini til kvinnur eru stór, og støðan er framvegis tann, at fólk flest halda at kvinnurnar eiga at taka sær av heiminum, samstundis sum tær skulu arbeiða fulla tíð úti.

Í eldri tíðum varð sagt, at ein maður skuldi vera sinniligur og duga at standa ímóti freistingum og ágangi, tó skuldi hann ikki góðtaka eyðmýkjandi og argandi atburð. Ein maður skuldi ikki berjast, ongantíð tykjast áleypandi og hóttandi, og ongantíð, skammiliga, gera ov nógv av, tá hann var undir likamligum ella sálarligum trýsti. Henda lutfalsliga milda og bleyta myndin av monnum passar ikki til modernaðar stereotypiir av grovum *macho*sjómonnum (Minervudóttir 2003). Fyrimyndin við róligum stoiskum monnum, ið sjáldan østu seg upp um smálutir gerandislívsins, hoyrir til farnar øldir. Føroyingar vóru, kann sigast, lagaðir til treytirnar, ið sera harða náttúruumhvørvið við stormi og illveðri setti. Maður var veiðimaður við ótamdum sinni. (Lévi-Strauss 1955)

Tað, ið kann tykjast sum mótsøgn í fyrstu atløgu, er, at føroyskir menn, sambært nøkrum granskarum, vóru bleytir og meinaleysir, kenslusamir og góðvarnir, sjálvt kvinnuligir, uttan stereotypisku *macho*virðini, ið ofta verða knýtt at fiskimonnum aðrastaðni í Evropa (Minervudóttir 2003). Sjálvsøkin fólk vóru sum heild illa dámd og sæð sum hóttan ímóti familjuni og lokalsamfelagnum. Samfelagið líktist einari familju; ongin loynikrókur var at sleppa undan sosialum eftirliti; ikki so mikið sum nøkur trø.

Ein maður er...

Ein rættur maður er vanlig vending at lýsa menn og maskulinitet í Føroyum. Maskulinitetur hevur við manslyndi og mansligheit at gera, eyðkenni hjá einum vaksnum manni, meðan *machismo* er sterka

(ella ov nógv avgjørda) „sense of masculinity stressing attributes such as physical courage, virility, domination of women, and aggressiveness“ (Farlex 2005). At vera reystur, ágrýtin og *ótamdur* av mentan eru týðandi eyðkenni í fleiri stereotypium av modernaðum maskuliniteti, men fragmenteraði heimur okkara hevur fleiri ymisk sløg av maskuliniteti, ið knýta seg til sosialu, mentanarligu, etnisku ella átrúnaðarligu bakgrund hins einstaka, eins væl og aldursbólkin (Connell 2005). Ungir menn hoyra til ymsar lutmentanir við fjølbroyttum fatanum av kynsmununum, av samskiftinum millum ættarliðini, av kynsligum samleikum og av manslyndi sum heild (Whitehead og Barrett 2001: 2-26).

> *What is masculinity? The nearest that we get to an 'answer' is to state that masculinities are those behaviours, languages and practices, existing in specific cultural and organizational locations, which are commonly associated with males and thus culturally defined as not feminine*
> *(op cit)*

Føroyskir dreingir

Mín hypotesa er at ungfólk verða eggjað (enntá trýst) til at frígera seg frá statiskum arvaðum familju- og lokalsamleikabondum, harvið verða tey eisini noydd at uppbyggja sín egna mentanarliga samleika við støði í persónligum ynskjum og raðfestingum. Við øðrum orðum hoyra fólk ikki bara til mentanir longur, tey hava ein virknan leiklut, tá tey velja sær samleika. Eg meti allar maskulinitetir, ið síggjast í Føroyum, at umboða lutmentanarligt tilfeingi, ið skal hjálpa dreingjum at laga lívsstílin til avbjóðingar nútíðarsamfelagsins. Og allir maskulinitetirnir hava, á hvør sín hátt, røtur í eldri føroyskari mentan, hóast altjóða ávirkanin, sum vit fara at síggja, er sterkari hjá tí sonevnda urbana ungdóminum enn hjá tí atlantiska ungdóminum.

Fýra bólkar av ungum monnum verða lýstir her: atlantiskur, urbanur, avbyrgdur og glokalur (pragmatiskur) ungdómur. Høvuðsbólkarnir (atlantiskur og urbanur ungdómur) umboða manslyndini í teimum

ráðandi lokalu og globalu ungdómsmentanunum, meðan smáu bólkarnir (avbyrgdur og pragmatiskur ungdómur) antin sambinda høvuðsbólkarnar ella stilla seg heilt uttan fyri alla *mainstream* mentan. Ungir menn í Føroyum brúka ikki heilt tey somu hugtøkini sum eg, tá teir tosa um lívsstíl og samleika, hóast teir kjakast um súmbolini, virðirni og stílarnar, sum eg viðgeri í hesum kapitli.

Lýsingarnar byggja í høvuðsheitum á tilfar, sum eg havi savnað saman í tíðarskeiðnum 2003-05. Talan er um bæði empiriskt tilfar úr feltarbeiðinum og blandað tilfar úr miðlunum (bløð, sjónvarp, alnet, o.s.f.r.). Fyri hvønn maskulinitet havi eg eisini tikið fram ein persón, ið fortelur sína søgu. Hetta eru persónar, ið eg kenni, og, ið eg meti vera góð dømi uppá atlantiskar, urbanar, avbyrgdar og pragmatiskar ungdómar.

Samleikin er ongantíð uppbygdur *a priori* uttan nakra ávísing til sosialar og mentanarligar kontekstir, og teir fýra bólkarnir, sum eg her fari at lýsa, umboða hvør sær nýggj fet fram í søguni hjá norður-atlantiskum evropearum (Andersen 1979). Ung hava í dag nógvar ymsar ímyndir og meiningar tá manslyndi er í fokus, og allar knýta seg til áskoðanir um ómansligar og kvinnuligar samleikar, tó eisini til onnur øðrvísi manslyndi.

Allahandamaður

Høgu tignina, ið menn við fjølbroyttum praktiskum kunnleikum og hegni nutu (teir, ið dugdu at loysa alskyns uppgávur og trupulleikar í arbeiðslívinum á bygd) gjørdi teir eisini til vinnarar í veiðisamfelagnum. *Lívsins bók* var meira týðandi fyri menn enn formlig útbúgving við (abstraktari) vísindaligari vitan av hægri lærustovni. Veiðimaðurin bardist ímóti stormum lívsins við funktionellu konkretu vísindini sum hjálpara. Menn vóru bæði fiskimenn og bøndur, uttan nakað knívskorið arbeiðsbýti sum tað vit kenna úr framkomnum ídnaðarlondum. Ein sterkur persónur (maður ella kvinna), ið klaraði seg ígjøgnum lívið, var rættiliga sjálvbjargin og megnaði at taka sær av mongum truplum uppgávum uttan nakra hjálp frá serfrøðingum.

Allahandamaðurin (*handyman*) er framvegis ein týðandi fyrimynd í Føroyum. Føroyskir menn hava altíð brotið mørk og roynt seg fram við at sjálvir umvæla og umbyggja tól og amboð av øllum slag.

Atlantiskur ungdómur

Atlantiskur ungdómur, kanska nakrir túsund mans íalt, flestu teirra búsitandi á bygd, hava í fleiri tíggjuár sett sín dám á samfelagið við sínum serkenda maskuliniteti. Tað er bara í Havn, at tann atlantiski ungdómurin fær nakað veruligt mótspæl frá tí urbana ungdóminum og øðrum bólkum, hóast atlantisku dreingirnir eisini mugu sigast at standa sterkir í høvuðsstaðarøkinum.

Atlantiskur ungdómur, ið ofta, av tí urbana ungdóminum, verður skírdur at vera trongskygdur og *bygdasligur*, kemur í stóran mun frá familjum, ið arbeiða í fiski og hoyra til nakað, ið minnir um eina føroyska arbeiðarastætt. Í Føroyum er torført at finna nakra veruliga arbeiðarastætt og nógvir atlantiskir dreingir hava høga inntøku, ið er vunnin á fiskiskipum.

Atlantiski ungdómurin er ungir menn úr øllum landinum, ið brúka sera nógva tíð og orku til ítriv, ið hava við bilar at gera. Mentan teirra kann lýsast sum eitt slag av føroyskari arbeiðaramentan, ið sameinir fisk og amerikanska forbrúks- og ungdómsmentan. *Cowboymentanin*, har bilurin stendur í miðdeplinum, fær í dag eitt sterkt mótspæl frá ungdómi, ið er meira staðarleysur í sínum sjónarmiðum og lívsstílum.

„Ungir menn hava bensin í blóðinum og koyra sum djevlar. Teir seta lívið í váða og lurta ikki eftir nøkrum. Teir vilja hava stóra ferð, stórar bilar og stóra atdráttarmegi. Bilurin og maðurin hoyra saman“. Er tað veruliga soleiðis ungir menn skulu lýsast? Ella er talan bert um mýtu, ið ger ungum monnum órætt? Ungir menn umboða ein fjølbroyttan samfelagsbólk og kunnu ikki allir sum ein setast í básin, sum eg júst havi markerað. Rættari hevði verið at sagt, at ein ávísur bólkur av ungdómum (bæði gentum og dreingjum, tó mest

dreingjum) hoyrir til ungdómsmentan, ið hámetir bilin. Tann bólkur av ungum monnum, sum eg nevni atlantiskur ungdómur, er, sum sagt, serliga forvitnisligur hesum viðvíkjandi.

Hesir menninir eru ofta úr familjum, ið arbeiða í fiskivinnuni og hava sum heild rættiliga sterkar røtur í lokalsamfelagnum. Ofta fara teir heilt ungir út at arbeiða og hava harvið sjáldan nakra drúgva útbúgving. Tó hava nógvir eina høga inntøku, ið m.a. verður brúkt til bilin og aðrar luksusvørur. Forbrúkið er stórt og lívið skal livast her og nú. Ungu menninir søkja spenning og skemt og kenna seg avbyrgdar og smáar uttan billyklarnar. Teir vilja stuttleika sær saman við vinum, men eru samstundis ofta jarðbundnir familjumenn, ið ynskja sær eitt vanligt borgarligt lív við konu og børnum, egnum sethúsum og frítíðarbát. Teir eru *action-seekers*, ið tó hava eina trygga støðuga tilveru at halda seg til. Teir eru kanska argandi og ólátaðir í vikuskiftunum, men hava annars eina lutfalsliga afturhaldssinnaða lívsáskoðan, ið hámetir virðir og siðvenjur, ið hava beinleiðis samband við religiøsa og mentanarliga samleika teirra. Atlantiski ungdómurin kennir seg sum rættar menn, tá bilurin rullar elegant á vegunum millum bygdirnar. Bilurin er eitt villdjór, sum teir hava tamarhald á.

Eg reið mær avstað til Texas bý
yvir preriur, fløtur, fjøll og líð.
Eg reið mærhendan langa veg,
tí eg skuldi hitta teg,
mín hestur, mín saðil og eg.
(H. Miðberg, Vestmenn)

Atlantisku dreingirnir hava stóra vitan um bilar. Teir eru praktiskir allahandamenn, ið klára at umvæla flestallar smærri skaðar, sum bilurin kann fáa. Praktisk handalig vitan verður raðfest hægri enn

formlig akademisk vitan. Teir byggja hjallar, mála hús, stoypa garðar, fara á flot, skifta motorolju á bilinum, o.s.fr. uttan at hava eitt lið av fakfólkum fyri neyðini. Teir eru rættiliga sjálvbjargnir og fleksiblir og hava stór sosial netverk í lokalsamfelagnum at stuðla sær í alskyns arbeiðsuppgávum.

Atlantiskur ungdómur er lutfalsliga siðbundin og trívist best saman við sínum nærmastu. Hann ynskir ongar stórar broytingar í samfelagnum og er sum heild sera nøgdur við sína støðu. Heldur enn at søkja nýggjar øðrvísi avbjóðingar vil hesin ungdómurin hava tingini at vera sum tey *altíð hava verið.* Tað fjálga og kenda er tað besta. Teir kenna seg sum rættar føroyskar menn við stórum M og mistrúgva ofta ungdómum, ið taka fremmandakendar ungdómsmentanir úr útlondum til sín. Atlantiskur ungdómur er ikki í iva um, at lívsstílur hansara er tann *natúrligi* føroyski, meðan aðrar manstýpur kunnu vera beinleiðis skaðiligar og kventasligar.

Atlantiskur ungdómur heldur lítið um mentanarligar minnilutar og ungdóm, ið ikki hevur somu virðir sum hann sjálvur hevur. Hann hevur ein serligan maskulinan samleika, ið tykist lutfalsliga ráur og harður, og sum fordømir menn, ið spilla dýrabæru tíð sína til bókligt og listarligt virksemi heldur enn at velja sær eitt lív sum atlantiskur ungdómur og verða partur av felagsskapinum. At lesa og taka akademiska útbúgving er, sambært mongum atlantiskum ungdómum, at rokna sum ómansligt arbeiði, ið einans elvir til undarlig hugskot og avbronglaðar heimsmyndir.

Atlantiskur ungdómur hevur í longri tíð verið rættiliga ráðandi í tí almenna rúminum í Føroyum, men hevur seinastu árini fingið kapping frá øðrum ungdómsbólkum, ið als ikki passa inn í myndina av Føroyum, sum atlantiski ungdómurin hevur skapt. Tað vísir seg nú, at allir ungdómar ikki ynskja at hoyra sama tónleik, ganga í somu klæðum, drekka í somu hølum ella liva á sama hátt sum antlantiski ungdómurin. Nógv ung vilja heldur keypa sær íbúð ella ferðast enn at keypa sær ein dýran bil. Bilurin er sostatt ikki bara frælsi – men eisini leinkja.

Serliga í høvuðsstaðnum hevur bilmentanin mist eitt sindur av sínari tign – og serliga hjá tí yngra ættarliðnum. Nógv ung hava onki brennandi ynski um at fáa sær ein stóran flottan bil. Tey eru meira áhugað í tí,ið hendir á globala ungdómsmentanarliga pallinum enn í kappkoyringini á landsvegum landsins. Tey hava ikki ráð til bil og spyrja seg kanska: hví skal eg hava ein bil at sýna fram? Atlantiskur ungdómur er skúgvaður eitt sindur burtur úr høvuðsstaðnum, hóast nógv ung framvegis hava bil,ið hvørt kvøld rullar í havnargøtum.

Í Havn er eftirhondini nógv annað spennandi at brúka tíðina til enn at koyra í ring í tímar. Samfelagið og mentanin eru nógv broytt seinastu árini og tann ráa einfalda manstýpan, sum atlantiski ungdómurin kann sigast at umboða, hevur ikki somu hevjaðu støðu ímillum ung longur. Tíðirnar eru broyttar. Sera nógvir dreingir í Føroyum hava ongar ætlanir um at vera sjómenn, arbeiða við bilum, hava tungt kroppsligt arbeiði, ella verja nakra gamla mansfyrimynd.

Menn og bilar eru framvegis par, men myndin er, sum eg í hesum teksti havi roynt at vísst, ikki eins einføld og vit ofta hava hug at gera hana til. Tey ungu hoyra til ymiskar ungdómsmentanir,ið hava ymsar stílar og virðir,ið ávirka fatan teirra av bilum og bilakoyring. Og hóast talið á bilum er vaksandi og vegakervið gerst betri, so er atlantiski ungdómurin ikki líka sjónligur, sum hann fyrr var.

Tað at vera maður hevur fingið eitt heilt nýtt innihald, so at persónliga frælsið er størri og tulkingin av maskuliniteti nógv opnari enn fyrr. Atlantiskur ungdómur tykist sostatt av mongum at vera afturúrsilgdur og eitt sindur serur. Mansmynd teirra er, halda mong, ov avmarkandi. Menn og bilar fylgjast, men bilurin kann, sum súmbol og maskina, skiftast út við mangt annað, tá menn skulu lýsa sín egna samleika.

> *Áki (persónur,ið eg havi prátað við) býr í eini bygd í Eysturoynni og hann hevur ongar ætlanir um at flyta til nakað annað pláss. Hann er tjúgu ár og livir saman við foreldrum sínum í einum vøkrum og nokkso nýggjum húsum við frálíkum útsýni*

yvir Skálafjørðin. Bæði foreldrini eru ættað úr bygdini, men Áki hevur eisini skyldfólk, heilt nær í familjuni, aðrastaðni í landinum. Pápin arbeiðir á einum stórum modernaðum trolara og er tí ikki nógv heima hjá familjuni. Børnini síggja ikki nógv til hann. Mamman er heimagangandi og tekur sær av teimum yngstu børnunum. Børnini ganga ikki í barnagarði. Áki arbeiðir á flakavirki í grannabygdini og hevur ikki ætlanir um at taka hægri útbúgving. Hann vónar at fáa ein kjans á einum trolara, líkasum pápin, í nærmastu framtíð, og vónirnar eru góðar. Pápin kennir allar menninar í økinum og hevur sitið í bygdaráðnum í fleiri ár. Mamman hjá Áka plagar at fara til fundir og á møtir hjá samkomu í bygdini hvørja viku. Hon hevur góða rødd og syngur í kórinum hjá samkomuni. Áki plagdi at ganga til møtir í samkomuni saman við mammuni tá hann var yngri, men seinastu árini hevur hann ikki verið serliga ofta í samkomuhúsinum. Hann hevur ein bil, ein flottan bil, ið hann koyrir í saman við vinum um kvøldarnar. Teir koyra ofta til Havnar í vikuskiftinum, men vanlig kvøld koyra teir mest til grannabygdir fyri at heilsa uppá vinfólk, keypa okkurt at eta, leiga ein film, ella bara koyra biltúr, meðan tónleikurin er frá. Áki er errin av at eiga tann bilin, sum hann eigur, og av at sjálvur hava umvælt hann, tí hann var nærmast vrak, tá Áki keypti hann fyri einum ári síðani. Áki hevur gentu í aðrari bygd í Eysturoynni, men tey koyra sjáldan saman í toyotabilinum. Hann vitjar hana ofta, men hon situr sum oftast í bilinum hjá sínum vinkonum, tá hon fer út. Hon er átjan ár og gongur á studentaskúla í Kambsdali. Hon ætlar sær niður at lesa víðari, tá hon næsta ár fær studentsprógv. Hon er eitt sindur troytt av heimbygdini hjá sær. Hon heldur, at tað eru ov fáir møguleikar og ov fáar avbjóðingar í bygdini, sum hon býr í. Tað eru ov fáir valmøguleikar viðvíkjandi lívsstíli og starvsleið. Áki roynir at fáa hana at broyta meining. Hann heldur at hon einans roynir at vera sum útlendingar og at hon átti at verið nøgd við sína støðu – og við hann!

Urbanur ungdómur

Urbanur ungdómur, tann seinni høvuðsbólkurin av dreingjum, kanska undir túsund fólk í alt, umfatar ein breiðan og litríkan hóp av ungum monnum. Markið millum atlantisku og urbanu menninar er ikki púra greitt, tí nógvir dreingir eru staddir í eini grásonu, ið er knýtt at báðum bólkunum. Hugtakið *urbanur* skal her tulkast breitt, eftirsum urbanur ungdómur eisini er at finna á minni plássum samstundis sum nógvir ungir menn í Havn ikki eru knýttir at hesum bólki. Urbanur vísir í hesum kapitli til serligar stílar og virði, ið kunnu sigast at hava *urban* eyðkenni. Hugtakið vísir eisini til stóru ávirkanina úr altjóða ungdómsmentanum, hóast hetta er ein einfalding av einum samansettum veruleika. Urbanur ungdómur er tann sterkasti mótpólurin til tann atlantiska ungdómin, og bólkarnir bresta saman í kjakinum um manslyndi og mansvirðir.

Urbanur ungdómur er altíð dagførdur viðvíkjandi mótarákum í ungdómsmentanini. Ungir urbanir menn, eisini teir búsitandi á bygd, samanbera sínar lívsstílar við lívið í stórbýum vesturheimsins. Teir eru lutfalsliga individualiseraðir og ikki serliga vanabundnir, tá hugt verður at verumáta og stíli. Teir kenna seg óansæð ikki minni knýttar at føroysku mentanarsøguni enn atlantisku dreingirnir ella nakar annar føroyingur.

Teir flestu urbanu dreingirnir brúka nógvar pengar til hárfríðkan, mótaklæðir, møblar o.s.fr. Nógvir eru eisini sera tilvitaðir um hvussu teir skulu skapa sær ein fullfíggjaðan stíl, ið ikki stendur nakað aftan fyri tann hjá ungdómi í størri býum í Evropa og USA. Teir royna at vísa, at teir hava tamarhald, frælsi og skapanarevni, ið halda høga støðið, sum mótabløð leggja fram (Benwell 2003). Likamlig venjing og lokkandi útsjónd hava sera høgt virði sum mentanarligur kapitalur hjá urbanum ungdómi (Bro og Abegg 2002: 31, Voss 2005: 43-44). Menninir skammast ikki yvir at brúka spegilin á vegginum, og teir kanna gjølla hvussu teir síggja út. Í dag er vanligt at menn miðvíst arbeiða fyri at vera væl fyri likamliga og halda kropsvektini niðri, hóast ein lítil partur av tí atlantiska ungdóminum heldur tað vera tápuligt og ómansligt at laga gerandisdagin hjá sær til málið: at halda kropsvektini niðri.

Sonevndir *metrosexuellir* menn (hugtak Mark Simpson fyrstu ferð lýsti í 1994), ein nógv umrøddur undirbólkur av urbanum ungdómi, eru rættiliga fáfongdir og sjálvelskandi. Bæði gentur og dreingir eru hugtikin av hesum monnum, ið hava okkurt slag av ókynsligum samleika. David Beckham, bretsk fótbóltsstjørna, er hin kendasti persónurin, ið verður knýttur at metrosexualiteti. Hann er, verður sagt, ein inkarnatión av forvitnisliga nýggja fyribrigdinum, ið verður kallað metrosexualitetur.

Tann metrosexuelli maðurin er argandi og umstríddur, eftirsum hann umskapar kategoriskar ímyndir av kynsmunum og fjeppast uppi í stílum hjá samkyndum monnum og tí *óvanliga* yvirhøvur (Benwell 2003). Metrosexuelli maðurin roynir eisini djarvt at brúka ymiskar etniskar (maskulinar) stílar, sum tá tann ljósi David Beckham skifti hársnið og túsundtals ungir menn kring heimin síðan gjørdu tað sama: teir fingu sær afrikanskar purlur – *dread-locks*.

Urbanir menn eru sum heild lutfalsliga fordómsleysir viðvíkjandi kynsligu og mentanarligu samleikunum, fólk velja sær. Teir stríðast ikki fyri at verja nakran einkultan snævran maskulinan samleika. Ein partur av urbanum ungdómum er úr familjum, ið hava egnar fyritøkur og sostatt ofta rættiliga góð búskaparlig kor, og hesi viðurskifti eru við til at tryggja dreingjunum eina tilveru við kostnaðarmiklum frítíðarlívi, undirhaldi og forbrúki sum heild. Nógvir ungir menn hava víðfevnd netverk, ið umfata fólk úr nógvum býum og bygdum við fjøltáttaðari sosialari og mentanarligari bakgrund. Hetta er við til at fáa teir at kenna seg meira heimsborgarligar og smartar enn vanligar atlantiskir ungdómar.

Urbanur ungdómur hevur, kann sigast, partvís undirgrundarmentan, partvís mainstream-mentan. Sum nevnt, so er bólkurin sera fjølbroyttur, hóast flestallir dreingirnir í bólkinum brúka vinirnar meira enn familjuna í sínum sosiala netverki; teir eru eisini sum heild rættiliga (mentanarliga) individualiseraðir og ikki serliga siðbundnir og lokalir. Urbanir dreingir seta sær ofta sera høg mál og neyvt umhugsaðar ætlanir fyri framtíðini – viðvíkjandi arbeiði, frítíðarlívi og

familjulívi. Ungir urbanir menn skapa sær ein maskulinitet grundaðan á mótan úr miðlunum, men eisini á persónligar refleksivar tulkingar av hesum mentanarligu modellunum (Christensen et al 2006). Urbanur ungdómur er minni (mentanarliga) afturhaldssinnaður enn atlantiskur ungdómur, tó er hann eisini undir einum stórum trýsti at laga seg til miðlarák og høvuðsrák úr globalari ungdómsmentan. Mentanarligi kapitalurin hjá urbanum dreingjum broytist sostatt skjótt. Maskulinitetur teirra endurspeglar ikki gerandislívið og familjubakgrundina eins nógv og hjá atlantiskum ungdómi.

Nógvir urbanir dreingir dáma at gera mat og at vera heima; teimum dáma at keypa inn, vaska klæðir og at fara til foreldrafundir hjá børnunum. Teir umboða hugtakið, ið lívsstílabløð viðhvørt kalla tann (modernaða) *nýggja mannin*, sum er ein kærur familjumaður, ið tekst við traditionel ítriv: heimið, garðin, matgerð, familjuveitslur, familjuferðir o.s.fr. Tó skal sigast, at hesi viðurskiftini í veruleikanum eru meira knýtt at stereotypium av modernaðum kvinnum enn føroyskum kvinnum í eldri tíðum. Tað er tann ábyrgdarfulli og reiðiligi maðurin mótvegis tí hástóra sjálvgóða machomanninum við ágangandi og harðrendum atburði (Benwell 2003).

Hetta er stereotypiir, ið ikki reiðiliga kunnu lýsa munirnar á atlantiskum og urbanum ungdómi í Føroyum. Nógvir atlantiskir menn eru, sum sagt, familjumenn, ið brúka nógva tíð saman við familjuni hjá sær. Tað villa og grova í atburði teirra hevur oftast tilknýti til sjómanna- ella arbeiðarasamleika teirra, og sostatt ikki beinleiðis samband við nakran macho kvinnuniðrandi samleika sum so.

> *Preoccupations with intimacy, friendship, the meaning of life, death, love, family, belonging, sexuality, pleasure, the body and emotions are a development of the transformations of Western societies. TV talk shows become public lessons in a newly emerging language of intimacy and ethical decision-making. What were once the private, domestic languages of women are being projected into the public arena. Men's*

lifestyle magazines are both a part of this trend and a reaction to it.
(Rutherford 2003: 4-5)

Urbanur ungdómur hevur stóran áhuga fyri øllum tí, ið hevur við frítíðarlív at gera. Arbeiðslívið og lokalmentan hava minni týdning. Bilar hava heldur ikki alstórt virði hjá hesum ungdómi (Voss 2003). Tað, ið er knýtt at ævintýrum, royndum og sosialum ítrivum, hevur hægstu raðfesting.

Petur (persónur, ið eg havi prátað við) er seytjan ár og býr í Havn. Hann býr saman við foreldrunum hjá sær og einari systir, í einum trongum gomlum húsum í vesturbýnum. Petur búði saman við familjuni í Danmark undir kreppuni, áðrenn foreldrini avgjørdu at flyta heim til Føroyar. Tað tók langa tíð at venja seg við at búgva í Føroyum aftur, eftir so nógv ár uttanlands. Petur gongur í studentaskúla og ætlar sær heilt avgjørt at flyta av landinum, helst til Onglands ella USA, fyri at lesa búskaparfrøði eftir at hava fingið studentsprógvið. Honum dámar væl at búgva í Havn, men hann er ikki vísur í at hann fer at flyta heimaftur, tá hann einaferð hevur fingið sítt universitetsprógv, av tí at landið er so lítið og nógv fólk so snævurskygd. Petur hevur stóran áhuga í modernaðari list og filmslist. Hann luttekur í nógvum kjakum á alnetinum, ið hava samband við áhugamál hansara. Honum dámar eisini sera væl at spæla poker á alnetinum, hóast hann ikki er serliga stoltur av hesum. Petur hevur ikki arbeitt nógv í sínum lívið, og hansara einastu arbeiðsroyndir eru frá tveimum-trimum summarferiustørvum í einum matvøruhandli og á einum flakavirki. Hann arbeiðir tilvitað sum minst, tí honum dámar ikki at arbeiða, og hann sigur seg hava annað at gera. Pápi hansara er ættaður úr lítlari bygd í Norðuroyggjum. Petur dámar sera væl at vitja bygdina og práta við eldri fólk úr friðarligu bygdini. Petur tekur nógvar myndir, tá hann ferðast í Føroyum og øðrum londum. Peturi og vinmonnum hansara dáma at sita og drekka kaffi og práta um alt millum himmal

og jørð – frá eysturlendskari trúgv og eletroniskum tónleiki til matvørur og hármóta. Petur málar eisini í frítíðini. Hann hevur málað myndir av vinfólkunum og vónar at sleppa at hava egna framsýning einaferð í framtíðini. Hann vil lesa búskaparfrøði fyri at skilja, hvussu pengarnir stýra heiminum. Ikki, sigur hann, fyri at gerast ríkur.

Urbanur ungdómur er fjøltáttaður bólkur av ungum monnum við nógvum stílum og virðum; tað teir kunnu sigast at hava í felag, er eina mótstøðu ímóti maskulinitetinum hjá atlantiskum monnum.

Avbyrgdur ungdómur

Avbyrgdur ungdómur merkir í hesum teksti menn við avmarkaðum sosialum sambondum, ið eru størsta partin av tíðini heima. Ungir menn, ið liva í avbyrging í miðlaríkum kømurum í íbúðum ella sethúsum er altjóða fyribrigdi, serliga vanligt í stórbýarumhvørvum (til dømis í Japan). Rík modernað lond, har fyribrigdið er mest útbreitt, eiga at taka hetta í størsta álvara. Ungu menninir eru einsamallir, men ikki altíð, sambært teimum sjálvum, merktir av einsemiskenslu. Tað er ein sjálvvald avbyrging. Friðarliga trygga tilveran innan fyri fýra veggirnar er tilvitað val teirra, men hon er, vónandi, ikki ætlað fyri alt lívið. Nógvir avbyrgdir dreingir kenna seg illa í sosialari samveru, summir ræðast enntá (ókend) menniskju. Nógvir líða av sosiofobi í einum ella øðrum formi. Avbyrgdu dreingirnir líða av samansettum trupulleikum og torført er at lýsa bólkin sum eina heild.

Teir avbyrgdu eru fámentir, talan er um hægst nakrar hundrað dreingir í alt; vegna sín serliga lívsstíl eru teir sera ósjónligir og marginaliseraðir í samfelagnum. Teir eru tó áhugaverdir at granska, tí teir fylgja eini øðrvísi leið viðvíkjandi maskuliniteti. Atlantiskir og urbanir dreingir hava tilsvarandi kvinnuligar bólkar (okkurt slag av atlantiskum og urbanum gentum), men teir avbyrgdu hava ikki nakran kvinnubólk. Tá tosað verður um avbyrgdan ungdóm, er talan sum oftast um dreingir. Sera fáar gentur, burtursæð frá teimum við álvarsomum sálarligum trupulleikum, liva einsamallar í sjálvvaldari

avbyrging. *Steðgið heiminum* er ljóðleysi boðskapurin hjá nógvum avbyrgdum dreingjum, ið kenna tað sum um teir ferðast á aðrari bylgjulongd enn onnur fólk (Loe 2004).

Teir avbyrgdu eru ikki, sum ofta verður hildið, glataðir holubúgvar uttan praktiskar ella aðrar førleikar, hóast sosiali kapitalurin er lutfalsliga veikur. Teir avbyrgdu eru ikki serliga opnir, tó ikki sjálvsøknir ella heilt óvitandi um umheimin og samfelagsgongdina. Nógvir teirra brúka modernaðar miðlar fyri at fylgja við og hava samband við umheimin. Viðhvørt eru teir avbyrgdu enntá serføðingar á sínum avmarkaða vitanarøki. Sostatt hava teir avbyrgdu ofta barlast, ið kann menna teir til framúr góð listafólk, (teldu) verkfrøðingar og vísindafólk. Teir vita, hvat hini gera, men ongin veit hvat teir gera.

Teir avbyrgdu kenna seg ikki minni maskulinar enn aðrar menn, og summir hevda enntá, at teir umboða eina heiðurliga mannliga mótstøðu ímóti nútíðarsamfelagsins almennu týning av veruligum mansvirðum. Aðrir siga hinvegin, at tyngjandi og plágandi gamlar maskulinitetsfyrimyndir, ið trýsta ungar dreingir at fylgja somu normum, forða teimum at liva í frælsi; teir mótmæla áganginum við at búra seg inni. Teir kenna seg stemplaðar og valdsleysar. Hetta er neilig gongd, ið tekur dik á seg tá teir avbyrgdu missa sína støðu á arbeiðsmarknaðinum, á útbúgvingarstovninum og millum vinir. At enda standa teir púra einsamallir uttan inntøku ella sosial netverk.

Teir avbyrgdu eru tigandi menn, ið liva av náði, ið familjan sýnir teimum. Er avgerðin hjá tí avbyrgda eitt mistak ella ein eydnusøga? Svarið veldst um persónin, ein spyr. Kennir hann seg sum tapara, pínslavátta ella vinnara? Teir avbyrgdu eru, sum nevnt, ofta dugnaligir á einum rættiliga avmarkaðum vitanarøki, men nógv skerdir av ræðslu og sosiofobi, ið fær teir at søkja absolutta trygd sum strategi.

Føroyar eru lítið samfelag við tøttum familjubondum, og hetta ger eina fullkomna avbyrging, ið kanska kann fara fram í stórbýum í øðrum londum, so at siga ógjørligt hjá teimum avbyrgdu. Sum oftast búgva teir avbyrgdu í Føroyum hjá foreldrum sínum, eitt trygt og

friðarligt pláss, har teir hava atgongd til nýmótans hentleikar. Úr hesum sjónarhorni tykjast teir at hava eitt hugnaligt og róligt lív uttan stress og harða kapping. Teir avbyrgdu, óansæð hvar teir búgva, hava altíð samband við nøkur fólk, ið liva í húsinum ella vitja har regluliga. Tað kundi verðið sannur sorgarleikur um hin avbyrgdi brádliga varð tveittur út úr húsinum og misti alt tað, ið umboðar hansara trygga skipaða heim. At liva einsamallur í einum kamari við sjónvarpi, útvarpi og teldu við alnetsambandi er ikki nakar trupulleiki í sær sjálvum hjá teimum avbyrgdu, men væntandi viðurkenning og samband við gentur er ein stórur og nívandi missur hjá teimum flestu.

Óli (persónur, ið eg havi prátað við) er 21 og býr hjá mammu sínari í einum stórum húsum í Havn. Hann hevur tríggjar brøður. Pápin doyði fyri nógvum árum síðani. Óli hevur altíð búð her og fór í fleiri ár næstan ikki út fyri dyr. Hansara heimur var allur sum hann var innan fyri veggirnar í húsinum. Mamman tók sær av innkeypi, matgerð, vasking og øllum øðrum praktiskum uppgávum, meðan Óli svav, las bøkur, hugdi í sjónvarp, lurtaði eftir tónleiki, spældi spøl á alnetinum og tosaði við tey fólkini, ið vitjaðu í húsinum. Seinastu tvey árini er lívið hjá Óla tó broytt nógv. Ein av brøðrum hansara tók sær av honum og fekk at hann at fara út úr húsinum, og í dag hevur Óli fulltíðarstarv í býnum. Óli var í fleiri ár sera avbyrgdur og rættiliga hugtungur. Hetta hevði heilt klárt samband við deyða pápans, ið hendi tá Óli var smádrongur. Óli varð bangin og søkti frið og tryggleika. Dagur og nátt var tað sama, hugtakið vikuskifti gav onga meining, og sjónvarpið var frá alt samdøgrið. Hann orkaði ikki at arbeiða ella fáast við krevjandi uppgávur og tyktist at liva heilt í síni egnu verð. Kamarið hjá honum var myrkt og sera óruddiligt. Hann hevði tjúkkar gardinur, ið forðaðu sólini at koma inn. Mamman tók sær av honum sum var hann eitt smábarn og gjørdi onki fyri at fáa Óla at fara út og mennast sosialt. Hon vildi verja hann, fjálga um dreingin, og ynskti ikki at lata Óla tosa við nakran sálarfrøðing ella annan fremmandan serfrøðing. Men

alt broyttist tá hann byrjaði at fara út og ganga í kvøldskúla. Eitt nýtt lívsskeið byrjaði, hóast Óli ikki hevur nakað stórt sosialt netverk og ikki plagar at fara út í býin um kvøldarnar. Hann hugnar sær heima eftir langan strævnan arbeiðsdag við nýggjum upplivingum.

Tað ber sum sagt illa til at liva fulkomiliga avbyrgdur í einum lítlum samfelagi sum tí føroyska, og teir avbyrgdu kunnu ikki skifta samleika (gerast atlantiskur ella urbanur ungdómur) uttan tol og stórt arbeiði. Teir avbyrgdu kunnu bara vera ósjónligir heima, tí so skjótt teir fara út og eru í sosialari samveru, verða teir settir í bás og ofta stemplaðir. Viðhvørt er lættari hjá avbyrgdum at fáa eydnu í lívinum við at taka tað stóra stigið og flyta av landinum til eitt fulkomiliga ókent umhvørvi (at fáa nýggja byrjan við *tabula rasa*) enn at royna at laga seg til lokalsamfelagið.

Pragmatikarar

Pragmatisku dreingirnir eru persónar, ið uttan stórvegis hóvasták flyta millum høvuðsbólkarnar (atlantiska og urbana ungdómin) útfrá persónligum strategium, hóast teir ofta hava ilt við at taka gomlu machovirðini hjá atlantiska ungdóminum fyri fult. Teir eru fleksiblir og praktiskir dreingir, ið fáa tað besta burtur úr báðum høvuðsbólkunum við støði í kontekstinum teir standa í. Pragmatiskir dreingir skulu ikki fatast sum persónar, ið standa í grásonu millum atlantiskan og urbanan ungdóm. Pragmatikarar blanda ikki høvuðskategoriirnar saman, teir bróta ikki mørk, tí teir eru meklarar og *brikoleurar*, ið eru knýttir at báðum bólkunum.

Vinningur í sosialari tign og umdømi er hjá pragmatikarum við øðrum orðum beinleiðis knýttur at mununum millum høvuðsbólkarnar. Pragmatisku dreingirnir eru gløggir postmodernaðir opportunistar uttan sterkar hugmyndir sum grundarlag fyri sínum maskuliniteti. Pragmatikarar eru ofta mentanarligar kameleónir, ið sleppa frá hóttandi mótstøðu við at, væl umhugsað, stilla seg í vandaleysa *outsider*legu. Nógvir pragmatiskir dreingir eru útlendingar, ið liva

í Føroyum, men eisini føroyingar, ið eru fluttir heim eftir at hava livað uttanlands í mong ár. Pragmatikarar eru eisini ofta persónar, ið standa í eini eitt sindur óvanligari skiftistíð í lívinum (skifta arbeiði, trúgv, bústað, vinfólk o.s.fr.), ið fríger teir eina stund frá sterkum familju- og sosialum bondum. Pragmatikarar kunnu til dømis vera útlendskir skiftisnæmingar, ið eru í landinum í eitt ár ella styttri tíð. Føroyskir pragmatikarar eru ofta menn, ið aftur og aftur søkja handilslig ævintýr við peningaligari eydnu, og klára tað eisini við at skapa óvanligar alliansur í handilsverkætlanum sínum.

Pragmatiskur ungdómur er miðvísur og karrierurættaður; ofta eru pragmatikarar eisini fíggjarliga væl fyri og sera sjálvstøðugir við einum sterkum sjálvsáliti. Teir knýta globalar og lokalar samleikar saman og byggja brýr í tí føroyska samfelagnum. Teir hava sosiala kapitalin, ið krevst fyri at kunna flyta seg smidliga í samfelagnum og enntá seta veruligar samfelagsbroytingar ígongd. Teir eru entreprenørar við framgongd í tíðarskeiðum tá samfelagið er í vøkstri, og afturgongd í niðurgangstíðum. Starvslívsrensl teirra er rød av upp- og niðurtúrum. Teirra sterka síða er, so at siga, eisini teirra veika punkt. Teir eru fleksiblir, tó eisini sera kenslusamir. Pragmatikarar eru sum heild framtakshugaðir lyklaspælarar tá stórar samfelagsligar avgerðir skulu takast.

Marknaøkið millum urbanan og pragmatiskan ungdóm er eitt sindur ógreitt og flótandi, tí nógvir persónar kundu verið settir í báðar kategoriirnar. Ungir akademikarar – fólk við hægri útbúgving úr Danmark og øðrum londum – ið koma heim eftir at hava livað í býum uttanlands í fleiri ár fyri at skapa sær eina áhugaverda starvsleið heima, hóska best til hesa kategori.

Tann blómandi KT-ídnaðurin er áhugavert nýtt vinnuøki, ið fær alt størri týdning í samfelagnum. Í hesum framkomna ídnaði arbeiða ungir menn og ungar kvinnur úr flestøllum mentanarligum bólkum í landinum. KT-vinnan umfatar atlantiskar, urbanar og pragmatiskar ungdómar – sjálvt fyrrverandi avbyrgdar ungdómar. Onkrar KT-fyritøkur verða riknar nærmast sum føroyskt fiskiskip: sterk maskulin

súmbol (ið ávirka málið og atburðurin á staðnum), nógv óformligt og súmbolskt samskifti, hierarkiskar skipanir, sera hørð kapping millum einstaklingar o.s.fr.

Pragmatikarar eru ofta skapandi og nýhugsandi í sínum arbeiði og duga væl at finna nýggjar (KT-) loysnir. Atlantiskur og urbanur ungdómur hjálpir og stuðlar pragmatiska ungdóminum í ymsum uppgávum. Um ein vinnulig verkætlan vísir seg at ikki geva avkast, so fara pragmatikararnir straks í holt við nýggja vinnuliga verkætlan við nýggjum navni og nýggjum luttakarum. Teir javna síni spor, skifta arbeiðspláss og finna nýggjar áhugaverdar íleggjarar. Teir hava onki djúpt tilknýti til nakað lokalsamfelag.

> *Ingi (persónur, ið eg havi prátað við) er ættleiddur, men hevur búð í Føroyum síðan hann var umleið fimm ára gamal. Áðrenn hann kom til Føroya livdi hann í Danmark í nøkur ár saman við føroysku foreldrunum. Í dag er Ingi 34 ár og hevur sína egnu familju. Hann hevur konu og trý børn. Honum dámar sera væl at búgva í Føroyum og hann kundi ikki funnið uppá at flutt til nakað annað land. Honum dámar at halda summarferiu í Danmark, líkasum foreldur hansara altíð hava gjørt, men hann hevur ongan áhuga í at ferðast til onnur lond. Ingi brúkar tað mesta av síni frítíð heima hjá familjuni. Hann er sera nøgdur og stoltur av tí, hann hevur fingið í lívinum: hann hevur eitt gott starv, familju, hús, bil og alskyns tøknilig tól (sjónvarp, teldur, fartelefonir, DVD-avspælarar o.s.fr.), sum honum dámar so væl. Hann hevur eitt rættiliga stórt sosialt netverk, ið umfatar fólk úr nógvum átrúnaðarligum, sosialum og mentanarligum bólkum í Føroyum. Ingi er ein persónur, ið lættliga kemur á tal við fólk, ið hann hittir. Hann hevur stórt sjálvsálit og trívist best við at vera í miðdeplinum og at fáa sín vilja. Hann dugir stak væl at persónliga fáa mest gjørligt burturúr sosialum samskifti. Ingi er sera tilvitaður um sína bakgrund, sínar sigrar og síni tap, og roynir altíð at hava fulla stýring yvir sínum lívi. Ingi hevur, áðrenn hann giftist fyri nøkrum árum síðani, royndir úr nógvum ymiskum ófaklærdum starvsplássum og hann hevur nógv vinfólk úr*

fjølbroyttum mentanarligum umhvørvum. Hann hevur altíð verið okkurt slag av insidara og outsidara í senn, allastaðni hann hevur verið; fleksibul tá hann kemur í eina nýggja støðu, men eisini til reiðar at venda við og skifta kós í lívinum. Honum dámar best at vera heima saman við familjuni. Ingi hevur sterkan sosialan kapital – hann hevur gott lag, vinarligan tóna og dugir væl at føra seg fram *– og fekk sum ungdómur dyggan fíggjarligan stuðul frá sínum gávumildu foreldrum. Hann hevur ongantíð verið í veruliga penganeyð, hóast hansara forbrúk til tíðir hevur verið rættiliga stórt. Hann er ein strembari, ið veit hvussu ein gerst vinur hjá teimum sterkastu, og, sum verður roknaður sum álítandi viðspælarari í fleiri ymiskum samfelagsbólkum við ymiskum virðum og stílum. Sjálvur hevur hann, púra tilvitað, ongantíð sett seg sjálvan í nakra kategori.*

Ungir pragmatiskir menn rokna seg ikki sum nakran egnan bólk ella nakra serstaka kategori. Teimum dámar betur at vera *outsidarar*, ið tó arbeiða innanfyri bólkarnar.

Maskulinitetur í broyting

Teir fýra bólkarnir, ið her eru lýstir, hava áhugaverdar líkleikar og ymisleikar, men eisini innan fyri einstaku bólkarnar er rættiliga stórur munur á einstaklingum. Allýsingarnar av bólkunum av ungum monnum eru sínámillum samanknýttar, tí lýsingarnar grunda á strukturellar kontrastir millum bólkarnar. Sjálvsamleikin er skaptur av viðurkenning og givnum samleika. Hetta sæst tíðiliga, tá hugt verður at atlantiskum og urbanum ungdómi; hesir føra eit súmbolskt mentanarligt valdsstríð, ið leggur áherðslu á munirnar *ið skapa munirnar* (Bateson 1999). Maskulinititetsbólkarnir í hesum teksti umfata nógvar lutmentanir. Bólkarnir umfata bygdar- og býarumhvørvi, lokal og global mentanarlig eyðkenni, siðbundna og seinmodernaða samfelagið, hóast mynstrini viðvíkjandi hesum viðurskiftunum eru sera ymisk alt eftir, hvønn maskulinitetsbólk hugt verður eftir.

Atlantiskur ungdómur er hvørki siðbundin ella seinmodernaður. Hann knýtir ótilvitað ymisk tíðarskeið saman, men hevur sum heild lítlan áhuga fyri søgu og siðvenjum. Hann er hvørki afturlítandi nostalgikari ella lærdur alheimsborgari.

Urbanur ungdómur er tann bólkurin av ungum monnum, ið er í størstum vøkstri í Føroyum nú. Flestu tanáringarnir í landinum í dag hoyra til í bólkinum. Lívsstílar teirra hava fingið stóra umrøðu í miðlunum. Atlantiskur ungdómur gerst eldri og fámentari, hóast hann framvegis fyllir nógv í tí almenna kjakinum. Atlantiskur ungdómur missir vald, nú fiskaídnaðurin hevur mist sína høgu tign sum framtíðararbeiðspláss hjá nógvum ungdómum. Atlantisku menninir verða í alt størri mun skúgvaðir til viks av tí urbana úrvalsliðnum.

Ein annar trupulleiki er, at atlantisku menninir ofta onga hægri útbúgving hava og sostatt hava ilt við at fóta sær á arbeiðsmarknaðinum, ið annars plagdi at hava pláss fyri teimum, ið høvdu aðrar førleikar og royndir enn langa formliga útbúgving.

Við øðrum orðum er ikki longur nóg mikið at hava eina sterka støðu í lokalsamfelagnum og eitt gott familjunetverk fyri at tryggja sær eina sterka støðu á arbeiðsmarknaðinum. Tann lokali sosiali kapitalurin hjá atlantiskum ungdómi hevur mist eitt sindur av sínum virði.

> *[A] focus on the concept of unmanliness allows for a deeper understanding of the emotional and personal costs that specific male ideals can cause individuals or groups of men. A man can never be sure of his masculinity, but must constantly prove his gendered value in order to be affirmed, both as a human being and a man by the surrounding world. The fear of being demasculinised and thus regarded as unworthy of the label 'real man' is something that is implanted in men from an early age […] The fear of failing into unmanliness is thus present as a constantly accompanying shadow and as a hidden driving force underlying men's objective of upholding their male identity…*
> (Ekenstam 2005: 31)

Maskulinitetur er nakað, ið broytist og endurspeglar sosialu og mentanarligu broytingarnar í tí føroyska samfelagnum. Mentanarligi kapitalurin, ið gevur einstaklingum eydnu á lívsleið, broytir ham. Tær fýra kategoriirnar, ið lýstar og greiddar eru, kundu verið býttar sundur í fleiri aðrar sjálvstøðugar eindir. Bólkarnir eru ikki *natúrligir* og ævigir, men varpa ljós á sosialu gongdina, ið Føroyar eru eyðkendar av.

Einaferð vóru menn; nú eru teir farnir og útskiftir við nógvum variatiónum av somu monnum, ið verða ávirkaðir av ymsum virðum og fyrimyndum úr lokalum og globalum mentanarligum rákum. Stereotypiirnar av kynsmunum, ið síggjast í fólksligum miðlum, skapa ein maskulinitet, ið einans heilt fáir menn kenna aftur. Í hesum teksti havi eg roynt at varpa ljós á maskulinitet úr øðrum sjónarhorni.

[11]

FRAMTÍÐ OG ARBEIÐI

Samfelagsbroytingar

Ung í Føroyum í dag víkja, sum nevnt áður, í nógvum førum frá eldru ættarliðunum, ikki einans orsakað av sannroyndini at tey eru ung og harvið stríðast ímóti nógvum av teimum virðum, ið verða knýtt til foreldur teirra, men eins nógv orsakað av teimum radikalu broytingunum, ið føroyska samfelagið hevur verið ígjøgnum síðan miðjuna av áttatiárunum. Tey ungu í 2007 vuksu upp undir og stutt eftir álvarsomu búskaparkreppuni fyrst í nítiárunum. Tey fløkjasligu árini í byrjanini av nítiárunum, tá ið tann búskaparliga skipanin datt sundur, og meira enn tíggju prosent av íbúgvunum fluttu av landinum, ávirkaðu tær flestu familjurnar í Føroyum álvarsamt; liviumstøðurnar versnaðu munandi (Arge 2000 og Jespersen 1994).

Talva 39.
Hvat er mest týðandi fyri framtíðararbeiðið hjá tær?

tað er avbjóðandi og spennandi	203
tað er væl lønt	176
tað hóskar til førleikar mínar	153
tað er fjølbroytt	93
tað hóskar til mín	51
arbeiðslív – familjulív passar saman	51
eg havi góðar starvsfelagar	38
tað inniber góðar møguleikar at fáa hægri størv	25
at vera saman við øðrum fólkum	20
eg avgeri sjálvur hvussu uppgávurnar verða loystar	19
eg læri ymist nýtt	12
tað hevur samfelagsnyttu	10
eg kann arbeiða í heimstaðnum/økinum	5

kelda: kanning hjá Granskingardeplinum fyri Økismenning (2003). 856 svar

Áhugin fyri fiski og fiskiskapi er ikki so stórur ímillum føroyskar tannáringar ár 2006, kanska serliga hvat ung úr høvuðsstaðnum viðvíkur. Fá ung úr framhaldsdeild fólkaskúlans hava ætlanir um at fáa

sær eina yrkisleið í fiskivinnuni, og væntandi verða tey enn færri í komandi tíðum. Virðingin og mætið, ið fiskivinnan hevur havt sum arbeiðspláss, er minkað nógv ímillum ung, serliga tað likamliga harða og siðbundna arbeiðið í vinnuni hevur mist atdráttarmegina.

Frítíð og arbeiði

Tey ungu hava eitt fjølbroytt frítíðarvirksemi, og at fiska er als ikki ímillum tey best umtóktu í dag. Einans 74 útav 637 næmingum úr níggjunda flokki, tað svarar til tólv prosent, nevna „at fiska“ sum eitt av frítíðarítrivum sínum í mínari landsumfatandi spurnarkanning úr 2003 (í ESPAD 03 spurnarblaðnum). Spurningurin innihelt tjúgu frítíðarítrivvalmøguleikar í alt, og bara tríggir teirra vóru minni umtóktir enn „fiskiskapur“ í samlaða úrslitinum. Myndin er tann sama, tá hugt verður at aðrari landsumfatandi kanning (2003), sum Granskingardepilin fyri Økismenning í Klaksvík stóð fyri: minni enn tíggju prosent av umleið 900 persónum hava „fiska og sigla“ sum frítíðarítriv, meðan „ítróttur“ og „tónleikur og filmur“ eru tey bestumtóktu ítrivini við úrsliti omanfyri 50 prosent. „Fiska og sigla“ og „tónleikur og filmur“ eru partur av frítíðarvirkseminum hjá ávikavist 85 og 550 ungdómum, eitt týðiligt tekin um, at rocktónleikurin er ráðandi sum frítíðarítriv samanborið við fiskiskap. Niðast á listanum, við minni enn fimm prosentum sum úrslit, standa „politiskt virksemi“ og tann opna kategoriin „annað“.

Spurnarkanningin, skal viðmerkjast, umfatar allar næmingar í níggjunda flokki í øllum fólkaskúlum landsins, tað vil siga ein heilan árgang og allar næmingarnar í tí síðsta skúlaárinum í øllum miðnámsskúlunum í landinum.

Spurd, í somu kanning, hvat tey ynskja at arbeiða við í framtíðini, hvørja yrkisleið tey vilja satsa uppá, fingu fleiri *trendy* arbeiði betri úrslit enn fiskivinnan. Fiskiskapur á sjógvi endaði á einum fimtaplássi, meðan fiskiskapur á landi og alivinnan vóru av teimum minst umtóktu arbeiðsplássunum á listanum, ið umfataði heilar 22 valmøguleikar. Kategoriin „frisør og andlits- og kropsrøkt“ er tað

bestumtókta arbeiðsøkið av øllum, fyrstaval hjá 172 næmingum (í høvuðsheitum kvinnum), meðan „tónleikur og list“ og „sakførari og grannskoðan“ fylgja á ávikavist øðrum og triðja plássi. Fiskiskapur (á sjógvi) er, kann nevnast, bestumtókta framtíðarstarvið hjá 116 næmingum.

Sum sæst klárt, so eru best umtóktu framtíðastørvini hjá ungdóminum ikki beinleiðis knýtt at fiskivinnuni. Av teimum ungu, ið vita hvørja førleikagevandi útbúgving tey ætla at fáa sær, er listin yvir tey bestumtóktu framtíðarstørvini eitt sindur øðrvísi: (1) handil og kontór; (2) sjúkrarøktarfrøðingar; (3) námsfrøðingur; (4) frisør og andlits- og kroppsrøkt; (5) skipari. Sakførari, kokkur og mekanikari eru eisini lutfalsliga væl dámd arbeiði. Talan er um ein fjølbroyttan hóp av størvum, ið tó hava nøkur eyðkenni í felag. Tey ungu vilja sambært hesum báðum kanningunum vera skapandi, fagurfrøðilig og sjálvstøðug, umframt at tey ynskja at brúka sítt vit og sínar gávur. Tey smoyggja sær undan tí, sum tey rokna fyri at vera keðiligt vanabundið arbeiði uttan nevniverdar avbjóðingar. Størv í fiskivinnuni á sjógvi, sum hava høga tign, eru, sum sæst, skipari, eitt starv við góðari løn og stórum valdi, og kokkur, eitt starv ið verður knýtt at listarligum dugnaskapi, síðan matgerð varð modernað (fyri bæði kvinnur og menn) ígjøgnum føroyskar og útlendskar sjónvarpssendingar í Føroyum.

Verður hugt at raðfestingum og ynskjum viðvíkjandi víðari skúlagongd og útbúgving, ynskja (í áttanda flokkinum í Venjingarskúlanum í 2003) sekstan næmingar at fara á HF/student eftir fólkaskúlan, fýra næmingar siga kanska, og fýra vita ikki. Ein meirluti ætlar sær haraftrat í tíggjunda flokk á Venjingarskúlanum. Flestallir næmingar ætla sær eisini at taka hægri útbúgving seinni; einans tveir ætla sær ikki, meðan tríggir næmingar ivast. Spurd hvat tey kundu tonkt sær at arbeitt við, svara tey ungu soleiðis:

Skateboard – make-up artist – kosmetolog ella sakførari – lækni – lækni ella sjúkrasystir – bilmekanikari – bilmekanikari – timburmaður – timburmaður, elektrikari ella bilmekanikari – bilmekanikari ella kokkur – sigla úti – flogskipari – flogskipari – arbeiði við børnum – arbeiði við børnum – arbeiði við fólkum – arbeiði við fólkum – veit ikki

Í sosiologiskari kanning (Jónsson et al 2000) vórðu 538 ung úr Føroyum, Íslandi og Grønlandi spurd: „hvat væntar tú verður títt framtíðarstarv?“. Seks prosent av teimum ungu úr Føroyum søgdu „landbúnaður/fiskivinna“, meðan tilsvarandi tøl fyri Ísland og Grønland vóru lægri: ávikavist 3.7 og 2.5 prosent. 92 føroysk ung við einum miðalaldri uppá nítjan luttóku í kanningini. Og heilir átjan svarmøguleikar vóru til nevnda spurning. Bestumtóktu framtíðarstørvini hjá føroyingum vóru eitt sindur óneyvu „samfelagsvísind“ og „handil og kontór“ kategoriirnar, ið fingu trettan prosent í part. Flestu ungdómarnir í Føroyum hava arbeiði í summarfrítíðini hjá sær, nøkur eisini um kvøldarnar gerandisdagar. Tá ið tey í føstum starvi fara í summarfrí, fáa tey ungu møguleikan at royna seg sum avloysarar og tjena nakrar hart vunnar krónur. Meira enn helvtin av næmingunum í kanningini hjá Granskingardeplinum (2003) hava roynt at arbeitt í fiskivinnuni ella alivinnuni, og Havnin er hitt einasta plássið í landinum, har minni enn helmingurin av næmingunum hava royndir úr arbeiði í fiskivinnuni, meðan umleið 75 prosent av ungdóminum úr stórum bygdum við fiskaídnaði hava arbeiðsroyndir úr vinnuni. Næmingarnir, ið hava roynt at arbeitt í fiskivinnuni, hava oftast arbeitt á flakavirkjum, har mest brúk er fyri fólki uttan hægri útbúgving ella drúgvar royndir. Tá ið alt arbeiðið aftaná skúlatíð verður tikið við, hava ung úr Havn tó líka nógvar arbeiðsroyndir sum onnur ung í landinum.

Talva 40.
Hvat fyri frítíðarítriv hevur tú? (fleiri krossar)

	N	%
Sjónvarp	442	69.4
Ítróttur	380	59.7
Diskotek og dansur	342	53.7
Dvd & video	324	50.9
Biografur	314	49.3
Telduspøl	259	40.7
Alnet	246	38.6
Sangur og dansur	238	37.3
Kirkja og samkomur	218	34.2
Spæla tónleik	202	31.7
Lesa	152	23.9
Kjatt á alnetinum	119	18.7
Skóti og/ella at fiska	103	16.2
Bowling	102	16.0
Annað	101	15.9
Skriva	80	12.6
Spæla sjónleik	17	2.7
Politiskt arbeiði og virksemi	8	1.3

Kelda: FG kanning 2003

Framtíðin

Framtíðarvánirnar hjá føroysku fiskivinnuni síggja kanska ikki so bjartar út, tá hugt verður at úrslitunum í teimum nevndu spurnarkanningunum, tí fiskivinnan hevur lutfalsliga lága raðfesting; hinvegin arbeiða flestu føroyingar longu í øðrum vinnum enn fiskivinnuni. Tað er onki nýtt. Fiskaídnaðurin hevur ikki brúk fyri allari arbeiðsorkuni í landinum fyri at halda seg ígongd. Málið er at fáa vælútbúgvin og evnarík ung inn í vinnuna.

> *Skal skúlin vera skúli fyri børn, ið liva í nútíðini og í einum nútíðarsamfelag og taka støði í gerandisdegnum og teimum praksisformum, ið børn sjálv brúka, og sum virka, so nyttar ikki nógv at hugsa um skúla soleiðis, sum hann var skipaður í ídnaðarsamfelagnum, har øll skuldu læra tað sama, á sama hátt samstundis og á sama aldursstigi.*
> *(Thomsen 2006: 83-84)*

Hóast ungfólk flest hava okkurt tilknýti til fiskivinnuna ígjøgnum familju og vinir, so ynskir meirilutin, sum vit hava sæð, heldur at royna seg í øðrum sektorum á arbeiðsmarknaðinum. Í feltarbeiði mínum í Havn gjørdi eg eina kanning, sum vísti, at bara tveir út av 24 næmingum høvdu framtíðarætlanir, ið komu undir fiskivinnuna: „at arbeiða á einum skipi“ og „kokkur“. Skúlaflokkurin varð eisini spurdur um frítíðarítriv, og har nevndi ongin „at fiska“, ið var ein av seytjan svarmøguleikum. Hóast tey frítt kundu velja fleiri ítriv, tey flestu valdu í minsta lagi trý, so fekk kategoriin „at fiska“ null stig. Á einum øðrum fólkaskúla í høvuðsstaðnum gav eg tveimum níggjunda flokkum somu spurningarnar um frítíð: her høvdu tríggir út av 27 næmingum „at fiska“ sum frítíðarítriv.

Eisini spurdi eg næmingarnar í áttanda flokkinum, um tey væntaðu, at tey sum vaksin fóru at ogna sær bil, bát ella summarhús. Øll 24 heimildarfólkini væntaðu sær at verða bileigarar, nógv eisini summarhúseigarar, men einans tveir dreingir væntaðu, at teir fóru at eiga bát; fimm aðrir svaraðu „kanska ein bát“.

Í mínum feltarbeiði savnaði eg eisini tilfar saman, í samrøðum, um tilknýtið ungdómsins til fiskivinnuna; ein av næmingunum fortaldi mær, at hann væntaði, at hann fór til skips í summarfrítíðini; pápi hansara sigldi. Tveir næmingar høvdu brøður, ið sigldu úti; pápin hjá einari gentu var maskinmeistari á fiskiskipi; og tveir dreingir ynsktu, sum longu nevnt, sjálvir at arbeiða í fiskivinnuni – í hvussu er í nøkur ár. Ein teirra (A), ið spældi gittara í einum rockbólki, fortaldi mær, at dreymur hansara var at liva av tónleikinum, men at

hann ikki væntaði at dreymurin fór at verða veruleiki, og tí ætlaði hann sær at satsa uppá eina yrkisleið í fiskivinnuni.

A: eg kundi tonkt mær at vera maskinmeistari, og so fara til skips í eini tvey ár, so koma heimaftur, og so vera timburmaður ella okkurt sovorðið...ella arbeiða víðari sum maskinmeistari...
[...]
FG: men hví ikki meira enn tvey ár?
A: tí at tað verður eitt sindur keðiligt eftirhondini...kanska longri, tað veit eg ikki ordiliga...
FG: tú heldur at tú verður troyttur av tí kanska?
A: ja, nógv verða ofta troytt av tí, ja...siti í einum maskinrúmi har niðri, ha...so eg veit ikki, kanska um eg fari at dáma tað gott...kanska verði eg longri...
FG: ja
A: men man kann eisini gera nógv her beint við maskinmeistaraútbúgving...
[...]
FG: eru tað fleiri í familjuni hjá tær sum sigla?
A: ja...ikki akkurát nú, men tað hava verið nøkur...altso mammubeiggi mín, hann er skipari, og sonurin hjá honum var við viðhvørt, og so var tað eisini...abbi hann sigldi, so tað er mest handan familjan har, sum siglir...altso tað er ígjøgnum mammu mína...og tað er onkur..
FG: ja, hvat slag av skipi kundi tú tonkt tær at siglt við?
A: tað má heldur vera okkurt sum man tjenar gott av ha?

Hesin drongurin úr Havn hevur eina ætlan, ið kann sigast at vera úrslitið av refleksivari umhugsan um framtíð og lívsstíl. Hann ynskir at arbeiða á einum skipi í nøkur ár, at royna tað lívið og vónandi vinna fitt av peningi, síðan at arbeiða á landi, tí at lívið á sjónum

verður, sum hann sigur, ov *keðiligt* sum maskinmeistari. Hann hevur, kann ein rokna við, eisini onnur viðurskifti at taka hædd fyri: at spæla gittara í frítíðini; at stovna eina familju við einum modernaðum familjulívi, sum tað kann vera torført at fáa í lag sum sjómaður; at fáa royndir úr øðrum størvum; o.s.fr.

Tær stóru inntøkurnar, ið verða settar í samband við partar av fiskivinnuni (á sjógvi), ger at arbeiðið hevur stóra atdráttarmegi á ungfólk, men trupla tvístøðan kemst av, at lívsstílurin og arbeiðsumstøðurnar hjá sjómonnum ikki er nakað, sum meirilutin av ungdómi í dag tráar eftir. Hin drongurin (B) í flokkinum, sum hevði ætlanir um at arbeiða í fiskivinnuni, var meira avgjørdur viðvíkjandi eini framtíð á sjónum og hevði ikki fyrivarni viðvíkjandi sjómansyrkinum. Hann vónaði, líkasum floksfelagi hansara, at verða partur av manningini á einum av teimum skipum, ið fiska rættiliga væl fyri at vinna sær heilt góðar pengar.

B: eg ætli mær at vera stýrimaður ella skipari ella okkurt sovorðið
FG: ja, so tú kundi tonkt tær at siglt?
B: ja
FG: er tað nakað tú altíð hevur hugsað tær?
B: ja
FG: eru tað onnur, sum hava siglt í familjuni hjá tær?
B: ja, nógv
FG: so skalt tú á sjómannskúla?
B: ja
[...]
FG: er tað nøkrum serligum skipi tú kundi tonkt tær við?
B: nei tað veit eg ikki...onkrum góðum bara...har man tjenar nógv
FG: ja, einum trolara kanska?
B: ja, kanska ja

Úrslitið av samfelagsbroytingunum í áttati- og nítiárunum er okkurt slag av individualiseraðum vitanarsamfelagi, ið gevur einstaklingum ábyrgdina av sínari lagnu. Hesar broytingarnar ávirka relasjónirnar ímillum ættarliðini, og sostatt eisini mentanarliga framhaldið og sosialu endurskapanina í samfelagnum. Guy Debord sigur: „Men resemble their times more than their fathers“ (endurgivin í Bauman 2002: 128).

Raðfestingar og ynskir

Í syðra partinum av Suðuroy er fiskur og fiskiskapur í størri mun í tonkunum hjá ungdóminum enn í Havn; flestu íbúgvarnir í økinum arbeiða í og eru knýttir at fiskivinnuni. (Apostle et al 2002). Ung úr Vági og grannabygdunum fortelja sína fatan av fiski og fiskiskapi í frágreiðingini *Northern Futures Young Voices* (Bjørndal og Aarsæther 2000, Holm 1999). Hugsanirnar hjá ungdóminum í Vági vísir, hvussu margháttað kjakið um fisk og fiskiskap er: siðvenja, lokalsamfelag, arbeiðspláss, náttúra, ítriv, o.s.fr., spæla inn. Tað er sostatt ikki bara ein búskaparligur spurningur; fiskurin hevur eina nógv djypri og víðari merking fyri samleikan og mentanini hjá føroyingum. „Mær dámar at búgva her, tí man kann altíð fara út at fiska og tí pápi mín er bóndi“, sigur ein sekstan ára gamal drongur úr Sumba um heimsstað sín í frágreiðingini (op cit).

At sleppa undan fiskivinnuni er ein stríggin fyritøka, tí tað er ofta ein spurningur um at verða verandi ella flyta burtur; at fylgja ella bróta siðvenjuna. Ein drongur úr Vági ynskir at arbeiða í fiskivinnuni, men hann vil eisini gjarna fáa sær eina útbúgving, ið kann geva honum fjølbroyttar møguleikar at fáa arbeiði í framtíðini.

Fólkatalið í Suðuroy minkar ár undan ári (Økismenningarálitið 2001). Tey ungu úr oynni flyta burtur í stórum tali, nógv fyri at arbeiða ella lesa í Havn ella uttanlands, tey flestu venda ongantíð aftur til Suðuroyar fyri at búsetast varandi. Framtíðin hjá oynni sambært einum drongi av Økrum (Holm 1999): „Nógvastaðni fer fólkatalið

at vaksa, og alt verður bundið at teldum, men í mínari bygd trúgvi eg ikki nakað fer at broytast, men eg vóni at fólk fara at búgva her í framtíðini".

Tey ungu hava eitt dilemma; tey noyðast ofta at velja ímillum fiskivinnuna og hægri útbúgving; ímillum eina skjóta (men ótrygga) inntøku ella vitanarførleika og *støðugt* arbeiði; ímillum siðvenju og refleksivitet. Tó er ikki neyðugt at stilla fiskivinnu og útbúgving upp soleiðis, sum mótsetningar, ið ikki kunnu samansjóvast. Fiskivinnan hevur brúk fyri eini nýggjari mynd fyri ikki at halda á við at verða roknað sum keðiligt arbeiði uttan høga virðing. At fiska ella ikki fiska er ein spurningur, ið nógv ung kring landið seta sær, tá tey umhugsa sína framtíð í heimbygdini, tí tann lokali búskaparligi struktururin ger tað tungt at stovna aðrar vinnur, hóast tað sanniliga er ein møgulig og ynskilig uppgáva at loysa.

Tað er ikki lætt at finna sær eitt pláss á arbeiðsmarknaðinum uttan at hava prógv frá hægri lærustovni sum atgongumerki; krøvini til útbúgving eru vaksin á øllum økjum í samfelagnum, eisini í fiskaídnaðinum. Tey best umtóktu størvini í fiskivinnuni eru fyri fólk við drúgvum royndum og høgari útbúgving. Nógv ung rokna tíverri fiskivinnuarbeiði sum nakað, ið hóskar teimum uttan útbúgving. Um alt annað gongur galið, so kanst tú finna tær eitt starv í fiskivinnuni, hoyrist viðhvørt frá næmingum í miðnámsskúlunum. Í veruleikanum er fiskivinnan hámodernað vinna, har ið til dømis teldutøkni er ein sjálvsagdur partur av arbeiðsgongdini.

Neiligi hugburðurin mótvegis fiskaídnaðinum er ein fylgja av seigu myndini av fiskiskapi sum nakað kalt, skitið og avoldað trælaarbeiði; ein lýsing, sum als ikki hóskar til veruleikan í dag; tað er ein trupulleiki, ið onkursvegna má loysast, um ein skal fáa fleiri høgtútbúgvin fólk inn í vinnuna í komandi tíðum.

Talva 41.
Hvat er tað mest týðandi fyri at fáa teg at dáma títt arbeiði?
Vinir, løn, spennandi og avbjóðingar...
Alt, men mest arbeiðstíðir og vinir...
Alt, at tað er spennandi og at lønin er góð...
Løn, vinir, arbeiðstíðir...
Nøgdur við lønina og hava gott umhvørvi og tíma at arbeiða har ið eg arbeiði...
Løn, vinir, avbjóðingar, spennandi...
At man veit at man ger okkurt til nyttu...
Vinir, spenningur…lønin sjálvandi eisini...
O.s.fr.

Fert tú at vilja hava nógva frítíð ella fert tú at vilja arbeiða mest møguligt?
Tað kann gera tað sama...
Mest møguligt arbeiði...
Líka nógv av hvørjum...
Arbeiða frá 8-16...
Nógva frítíð...
Frítíð…eg fái stress...
Vanliga tíð...
O.s.fr.

(Kanning: áttandaflokkur í Havn 2003)

Nógv meina, at fiskivinnan er ein vinna, har rúm ikki er fyri skapandi evnum, persónligari menning og hugsan; tað er ein afturlatin verð av hørðum normum og virðum, ið, sigst, eru ósambærilig við samleikan hjá nógvum føroyingum í dag.

Raðfestingin hjá teimum ungu, hvat arbeiði viðvíkur, er tætt knýtt at frítíðarlívinum og lívsstílunum – eitt eyðkenni fyri sonevnda seinmodernaða samfelagið. Tað ið bara plagdi at vera frítíðarvirksemi fyrr,

er nú mangan eisini dreymastarvið hjá ungfólki, og øvut; nakað ið sæst týðiliga hvat ítrótti og tónleiki viðvíkur. Føroysk ung vilja spæla rocktónleik, ikki sigla úti, sigur danski tónleikablaðmaðurin Morten Steen Nielsen (Oyggjatíðindi 25/6 2003) eftir at hava verið til konsert í Føroyum í nakrar fáar dagar. Hetta er ein staðfesting ið skal takast við fyrivarni; rocktónleikur er sera vælumtóktur sum frítíðarítriv í Føroyum, men sera fá fólk enda við at verða yrkistónleikarar; í nógvum førum er tónleikalívið partur av ungdómsmentanini og sostatt knýtt at og avmarkað til ávíst lívsskeið. Tað er ongin sjálvmótsøgn at arbeiða á sjónum og spæla við í einum tónleikabólki.

[12]

SAMANDRÁTTUR

Fyri umleið tjúgu árum síðani, tá SvF varð stovnað, stutt fyri kreppuna, byrjaði ein grundleggjandi samfelagslig skiftistíð. Nýggju miðlarnir, ið koma til landið í áttatiárunum (sjónvarp, video, parabolantennur, o.s.fr.) føra til eina sera umfatandi ávirkan uttan úr heimi, sum børnini og tey ungu eru skjót at taka til sín og laga til sína egnu ungdómsmentan. Tað gerst nú lættari sum føroyingur at fylgja við í tí, sum hendir í heimsmetropolum vesturheimsins, at knýta seg til ungdómsmentanarlig rák úr Evropa og USA, til dømis viðvíkjandi tónleiki, móta og filmslist.

Síðan kemur kreppan síðst í áttatiárunum, sum tær ungu barnafamiljurnar eru serliga hart raktar av. Kreppan førir til eina modernisering av tí føroyska samfelagnum, ið umboðar eitt skifti, ið eisini hevur gjørt grøvina ímillum ættarliðini djypri og breiðari enn hon var. Tey ungu í dag kenna ikki til samfelagið úr áttatiárunum, men eru uppvaksin í einum samfelag, ið er tætt knýtt at tí globaliserða heiminum. Talan er um eitt nýtt ættarlið, eina nýggja tíð, eitt nýtt samfelag.

Eg meini, at vit í dag hava nakað, sum kann kallast fyri eitt seinmodernað samfelag við refleksivum moderniteti, har premodernaðar siðvenjur tó ikki eru horvnar fullkomiliga, men heldur ikki, so at siga, eru *natúrligar* longur. Tær eru ikki sjálvsagdar, tí einstaklingar velja ella frávelja gamlan sið út frá egnum strategium og raðfestingum. Mentanin er frísett, sum Ziehe (1983) sigur, og harvið kann einhvør í prinsippinum skapa sín egna mentanarliga samleika.

Ungdómurin er vorðin meira óstýrligur enn fyrr. Nú kann hann heinta sær upplýsingar og nema sær vitan gjøgnum alnetið, uttan at lærari ella foreldur vita av nøkrum. Ungdómurin kennir seg frían við fartelefon, alneti og sjónvarpi, sum opna eina nýggja verð fyri honum. Ungdómur søkir altíð eftir tí nýggja og ókenda fyri at finna útav, um tað er gott ella ringt fyri hann (Illeris et al 2002). Saman við øllum valmøguleikunum eru eisini nógvir vandar, ið kunnu taka hann av fótum.

Ungdómsmentan, tónleikur og list broytast alla tíðina. Nýggj vitan og nýggjar royndir broyta støðu tína í samfelagnum. Fyrr var yrkisleiðin hjá ungdóminum nærmast avgjørd av sær sjálvum. Flestøll væntaðu tann unga mannin at ganga í fótasporunum hjá pápa sínum, men so er ikki longur.

Tey ungu eru djørv og velja sær lívsstílar og verumátar, sum pláss ikki plagdi at vera fyri. Klæðir, atferð og frítíðarítriv siga, hvønn bólk tey ungu hoyra til. Mørkini eru tó ikki so neyv; nógv flyta seg ímillum bólkar. Vinirnir hoyra ofta eisini til ymsar bólkar. Heimið, skúlin og frítíðin eru sosialir kontekstir, sum tú ferðast ímillum, og hvørt pláss hevur sítt serkenda umhvørvi, sínar luttakarar og sínar reglur.

Ungdómsmentanin í Føroyum er nakað, ið verður stýrt av tí lokala–globala samspælinum, ið alla tíðina er ígongd. Stílar, sum verða knýttir at hip-hop, techno, gothic, hardrock o.s.fr., eru allir at finna í tí føroyska samfelagnum, hóast umboðini fyri stílarnar ofta eru fá og spjadd um alt landið. Bólkarnir hava sjáldan sínar egnu klubbar og serligu savningarpláss í býnum. Landið er ov lítið til at hava neyvt avmarkaðar ungdómsmentanir, hóast stílarnir og súmbolini eru at finna í landinum. Familjubondini og sosialu netverkini hjá teimum ungu fara oftast um mørk, so at ein hevur samband við og tilknýti til fleiri ungdómsmentanir.

Føroysk ungdómsmentan er ikki bara ein endurspegling av altjóða rákum innan tónleik, list, stíl, súmbolir, mál og virðir, tí hon hevur heilt serlig eyðkenni, ið hoyra til eitt lokalsamfelag og eina søgu. Globaliseringsgongdin gongur hond í hond við einum vaksandi áhuga fyri tí gamla siðbundna.

Meðan tað listarliga arbeiðið, sum nógv ung fáast við, er nakað, ið ikki fer fram í feløgum við avmarkandi karmum, so er frítíðarlívið hjá nógvum sera skipað. Við øllum teimum valmøguleikum, sum tey ungu í dag hava, kann tað hjá nógvum kennast sum eitt trýst áhaldandi at noyðast at velja og frávelja, men eisini at velja nógv ymist virksemi at luttaka í, tí tey ungu, verður sagt, mugu ikki *spilla* sínar møguleikar.

Føroysku klæðini eru til dømis nógv vanligari í dag enn fyri 20-30 árum síðani. Her verður *gamalt* siðbundið tikið fram, sett í ein nýggjan kontekst og gjørt til súmbol fyri nakað føroyskt í globaliseraðum heimi. Dømini er nógv um, hvussu vit í dag leita eftir onkrum gomlum at seta upp ímóti øllum tí nýggja fremmanda, ið kemur uttan úr heimi. Samstundis sum tey ungu hava heimin sum leikpall, so vil eg eisini siga, at tey leita sum ongantíð áður eftir onkrum føstum autentiskum at halda seg til.

Tann lutfalsliga stóra frástøðan millum ættarliðini merkir ikki, at vit í nærmastu framtíð fara at missa alt samband við okkara fortíð og mentanararv. Tvørturímóti kann tað tykjast, sum tað lokala og *serføroyska* í vaksandi mun, í framtíðini, verður partur av mentanarliga samleikanum hjá ungdóminum. Tað seinmodernaða samfelagið er, eins og fleiri postmodernismuástøði føra fram, eyðkent av einum blandingi av gomlum og nýggjum, har einstaklingar í stóran mun klippa og líma saman ymist úr lokalum og globalum mentanarrákum (*bricolage*) fyri at skapa nakað nýtt og øðrvísi.

Tey ungu ynskja sær eitt starv, ið hóskar til frítíðarlív og lívsstíl teirra, heldur enn øvugt. Tey ungu vilja ikki arbeiða bara fyri at arbeiða – ella bara fyri lønina. Tó er siðvenja eisini nakað týðandi hjá teimum ungu í dag; siðvenja (traditión) sum nakað modernað og valt. Í nútíðarsamfelagnum er traditiónin ein partur av refleksiva tilvitaða arbeiðinum við at skapa sær ein samleika.

Ungdómurin setur hægri krøv í dag og hevur fleiri valmøguleikar viðvíkjandi lívsstíli, útbúgving og yrkisleið. Tað sæst til dømis í fatan ungdómsins av føroysku fiskivinnuni. Arbeiðslívið skal passa saman við frítíðar- og familjulívið, tí tað er ikki longur bara ein spurningur um at tryggja sær framtíðina við fastari løn og sáttmála. Tey ungu hava nýggjar raðfestingar, fjølbroyttar framtíðardreymar og eru ávirkað av tí, sum hendir á tí globala ungdómsmentanarliga pallinum.

Føroyar eru í einum landafrøðiligum útjaðara í Evropa, men frástøðan

til meginlandið í kilometrum hevur ikki tann sama týdningin fyri samfelag og mentan, sum hon í farnum tíðum hevði. Tað er blivið nógv lættari, skjótari og bíligari at ferðast til og úr Føroyum, og fáir núlivandi føroyingar hava ongantíð verið í útlondum. Seinastu tjúgu árini er samskiftið við umheimin vaksið við eini øgiligari ferð, so at føroyingar í dag kunnu fylgja við í næstan øllum, sum hendir úti í heimi uttan at noyðast at vera afturúr í tíð.

Átrúnaður er eisini faktorur, ið í ein ávísan mun ávirkar lívsstílarnar og virðini hjá tannáringum í Føroyum. Tey ungu, ið eru virkin í samkomum (fríkirkjum), skapa ofta sínar egnu bólkar, ið eru lutfalsliga avbyrgdir frá øðrum ungdómsbólkum. Sosialt marginaliseraður ungdómur er eisini ofta skipaður sum ein egin ungdómsbólkur, ið hevur lítið samband við aðrar ungdómsbólkar uttan fyri skúlatíð.

Tey ungu í Føroyum ganga til sera nógv skipað frítíðarvirksemi. Hjá nógvum fer hvørt gerandiskvøld í vikuni til fimleik, hondbólt, klaverspæl og onnur ítriv, sum tey eru meldað til. Tað kostar at luttaka, og øll hava ikki foreldur, ið hava yvirskot til hesar útreiðslurnar. Sostatt ávirkar sosiobúskaparliga støðan heima frítíðarlívið hjá børnunum. Tað er harvið ikki einans áhugamál og persónlig ynskir, ið avgera, hvat børnini ganga til.

Sosialt marginaliseraði ungdómurin luttekur sjáldan í skipaðum frítíðarvirksemi ella bara tey fyrstu skúlaárini, men fær tíðina at ganga við øðrum meira tilvildarligum ítrivum. Frítíðin verður roknað sum týðandi kapitalur í tilveruni í tí seinmodernaða samfelagnum.

Frítíðin er tann sferan, har ungdómsmentanirnar koma týðiligast til sjóndar, her verða tær endurskaptar og samskiftar, sosialu netverkini eru virkin, og, ikki minst, forbrúksmynstur koma til sjóndar. Væntandi (búskaparligt) tilfeingi til at luttaka og virka sum fullgyldur limur í vanligu brúkaramentanini er støða, ið trýstir ávís ung út á eggina – til tann marginala ungdómin við sínum serligu lívsstílum.

Nógv ung í Havn halda til niðri í miðbýnum, har tey brúka tey

almennu rúmini sum fríøki uttan fastar rammur og reglur (Paulsen et al 2003). Býurin er fyri øll, men sera nógv, ung sum gomul, brúka hann næstan ikki, og harvið gerast tey, ið brúka býrúmið, sera sjónlig. Her stýra tey sjálvi gongdini; her hitta tey vinir og kenningar; og her brúka tey pengar.

Ungdómurin í Føroyum livir í einum framkomnum og miðlaríkum samfelagi, ið, hóast eg havi kallað tað seinmodernað við ástøði Giddens' í huganum, má sigast at vera í onkrum slagi av skiftistíð (broytingartíð), har nógv áhugamál, virði og sjónarmið stoyta saman.

Við at hyggja at ungdóminum og alnetbrúki hansara fær ein eina hóming av kompleksitetinum í seinmodernitetinum. Mynstrið yvir hvussu børn og ung nýta alnetið broytist støðugt. Tey ungu eru ikki passivir brúkarar av hesum kunningartøkniliga miðli, men tvørturímóti sera virknir aktørar.

Ungdómurin umboðar eitt nýtt ættarlið, ið er meira altjóðasinnað enn foreldrini, og sum fegið broytir og endurskapar føroyskar *siðvenjur*. Sum heild minnir ungdómurin í Føroyum í dag sera nógv um ungdóm úr øðrum londum í Evropa, men hann kennir seg á ongan hátt minni føroyskan enn forfedrarnir av hesi orsøk.

Ungdómurin í Føroyum brúkar nýggju elektronisku miðlarnar, serliga alnetið og fartelefonirnar, at endurnýggja føroysku ungdómsmentanina og tulka sín egna samleika við. Miðlarnir verða brúktir til kjak, skemt, undirhald, upplýsing, samskifti við vinir og fremmand og til at fylgja við í forbrúks- og ungdómentanini uttan úr heimi. Miðlarnir umboða eisini eitt frítt rúm, ið ung kunnu brúka til kjak, uttan at foreldur og onnur vaksin sleppa at hava eftirlit við orðaskiftinum.

Føroyska mentanin er ikki hótt av alnetinum og seinmodernaða samfelagnum, tí alnetið verður í stóran mun brúkt júst til at endurskapa tað fólksliga almennið, sum nógvir granskarar hildu vera farið í søguna vegna nýggjar tíðir við sjónvarpi og útvarpi í hvørjum heimi.

Framtíðin kemur ikki av sær sjálvari og er altíð eitt framhald av nøkrum gomlum og nøkrum nýggjum. Tey ungu síggja møguleikar, har onnur kanska síggja vansar, og framstig, har onnur kanska síggja afturstig, men eru tilvitað um, at útbúgving og hart arbeiði er neyðugt, um dreymarnir skulu ganga út, samstundis sum tey eru rættiliga pragmatisk og fleksibul viðvíkjandi hesum dreymum: teir rúma nógvar møguleikar, eru eitt sindur abstraktir; til dømis sigur onkur seg vilja arbeiða við fólki, heldur enn at siga, at viðkomandi ætlar sær at verða sálarfrøðingur ella lækni ella námsfrøðingur.

Framtíðin er eisini, kanska serliga í seinmodernaðu tíðini, nakað, ið inniheldur vandar og óvissur, og sum harvið ongin, uttan fyrivarni, kann spáa um. Í globalu øldini mugu øll, sigur Giddens (2000:37), „forsøge at håndtere en række nye risiko-situationer". Við ótryggleika og mongum valmøguleikum, sigur hann, „får begreberne tillid og risiko en særlig betydning" (1996: 11).

Framtíðin er í dag líka óútroknilig hjá ungdóminum sum hjá øðrum samfelagsbólkum, hóast tey ungu sum vaksin fara at fáa ein týðandi leiklut í framtíðarsamfelagnum. Tey ungu skulu ferðast inn í framtíðina uttan nakra greiða ferðaætlan.

Heimildir

Amit-Talai, V. og H. Wulff (ritstj.) 1995. Youth Cultures: A Cross-Cultural Perspective. London & New York: Routledge

Andersen, M. 1971. Føroyskar gentur í Keypmannahavn. Keypmannahavn: Hitt føroyska studentafelagið í Keypmannahavn

Andersen, R. (ritstj.) 1979. North Atlantic Maritime Cultures. Anthropological Essays on Changing Adaptations. Hague, Prague & New York: Mouton

Andreassen, E. 1992. Folkelig offentlighed. En undersøgelse af kulturelle former på Færøerne i 100 år. Keypmannahavn: Museum Tusculanums Forlag

Anthoniussen, E. 2006. Kjak og kjatt. Eitt heilt øðrvísi fundarstað. Dimmalætting 5/5. Tórshavn

Apostle, R., D. Holm, G. Hovgaard, Ó. Waag Høgnesen og B. Mortensen. 2002. The Restructuration of the Faroese Economy. Frederiksberg: Samfundslitteratur

Álit – Børn og ung í Tórshavnar kommunu. 1996. Tórshavn

Álit um ung í Tórshavnar kommunu. 2006. Tórshavn

Árbók fyri Føroyar 2003. Tórshavn: Hagstova Føroya

Árbók fyri Føroyar 2004. Tórshavn: Hagstova Føroya

Árbók fyri Føroyar 2005. Tórshavn: Hagstova Føroya

Árbók fyri Føroyar 2006. Tórshavn: Hagstova Føroya

Arge, E. 2000. Fráflyting og búskaparkreppa – útisetakanning. Tórshavn: Føroya Skúlabókagrunnur

Ariès, P. 1962. Centuries of Childhood. New York: Vintage Books

Barnard, A. og J. Spencer (ritstj.) 2002. Encyclopedia of Social and Cultural Anthropology. London & New York: Routledge

Barth, F. 1980. Andres liv – og vårt eget. Oslo: Gyldendal Norsk Forlag

Barth, F. 1989. The analysis of culture in complex societies. In Ethnos 54. London

Bateson, G. 1999. Steps to an Ecology of Mind. Chicago: University of Chicago Press

Bauman, Z. 1995. Life in fragments. Essays in Postmodern Morality. Oxford: Blackwell Publishers

Bauman, Z. 2000. Liquid Modernity. Cambridge: Polity Press

Bauman, Z. 2001. Globalisering. De menneskelige konsekvenser. Keypmannahavn: Hans Reitzels forlag

Bäck-Wiklund, M. 2003. *Senmoderne famileliv og børns hverdag*. In Bäck-Wiklund, M. & T. Lundström (ritstj.). Børns hverdag i det senmoderne. Keypmannahavn: Hans Reitzels forlag

Beck, U. & E. Beck-Gernsheim. 1996. *Individualization and precarious freedoms: Perspectives and controversies of a subject-orientated sociology*. In Heelas, P., S. Lash og P. Morris (ritstj.) Detraditionalization: Critical reflextions on Authority and Identity. Oxford: Blackwell Publishers

Becker, H. S. 1963. The Outsiders. New York: Free Press

Benwell, B. (ritstj.) 2003. Masculinity and Men's Lifestyle Magazines. Oxford & Malden: Blackwell Publishing

Bjarnadóttir, R. 2004. *Modern adolescents' leisure activities: A new field for education?* In YOUNG Nordic Journal of Youth Research vol. 12 no. 4. London, Thousand Oaks & Delhi: SAGE Publications

Bjurström, E. 2005. *Det moderna som tradition. Ungdomskulturfoskningens utveckling och problem.* In Öhlund, T. og G. Bolin (ritstj.) Ungdomsforskning – kritik, reflektioner och framtida möjligheter. Stockholm: Ungdomskultur vid Stockholms Universitet

Bjørndal, C. R. P. og N. Aarsæther (ritst.). 2000. Northern Futures Young Voices – A comparison of young people's presentations of their communities in Canada, Iceland, the Faeroe Islands, Norway, Sweden, Finland and Russia. (A report from the UNESCO MOST Circumpolar Coping Processes Project). Tromsø

Blak, Kristian (ritstj.) 1996. Traditional music in the Faroe Islands. Tórshavn: Føroya Skúlabókagrunnur

Brattaberg, B. T. 2007. Ein skúlatími, fríggjadagin 15. mars í árinum 2007. In Skúlablaðið 3/2007. Torshavn: Bókadeild Føroya Lærarafelags

Bro, K. og T. Abegg 2002. kropskontrol. In Ungdomsforskning nr. 3. Roskilde: Center for Ungdomsforskning

Castells, M. 2000. The Rise of the Network Society (2nd edition) Oxford: Blackwell Publishers

Christensen, K, C. Graugaard, H. Bonde, J.W. Helge og S.Å. Madsen. 2006. Kend din krop, mand. Keypmannahavn: Aschehoug

Connell, R. W. 2005. Masculinities (2nd edition) Cambridge: Polity Press

Coté, J. 1990. Arrested Adulthood. The Changing Nature of Maturity and Identity. New York & London: New York University Press

Coulon, A. 1992. L'école de Chicago (3. útg.) Paris: Presses Universitaires de France

Dahl, Á. (ritstj.) 1998. Føroya Lærarafelag 100 ár: 1898-1998. Tórshavn: Føroya Lærarafelag

Daun, Å. 1982. Ethnological research on children. Ethnologia Scandinavia. Lund

Davies, C. A. 1999. Reflexive Ethnography. A Guide to Researching Selves and Others. London & New York: Routledge

Didriksen, K. 1996. Tey vóru ung undir krígnum. Tórshavn: Forlagið Loðin

Dimmalætting 11/2 2003

Dimmalætting 12/2 2003

Dimmalætting 3/3 2004

Dimmalætting 3/9 2004

Dimmalætting 14/9 2004

Dimmalætting 25/3 2005

Dimmalætting 23/3 2006

Dimmalætting 12/4 2006

Dimmalætting 5/5 2006

Dreyfus, H. L. 2002. Livet på nettet. Keypmannahavn: Hans Reitzels forlag

Drotner, K. 1999. Unge, medier og modernitet – Pejlinger i et foranderligt landskab. Keypmannahavn: Borgen

du Bois-Reymond, M. 2004. *Youth – learning – Europe: ménage à trois?* In YOUNG Nordic Journal of Youth Research, vol 12 nr. 3. London, Thousand Oaks & Delhi: SAGE Publications

Ekenstam, C. 2005. *Fear of Falling. In* NIKK Magasin no. 3. Oslo: Nordic Institute for Women's Study and Gender Research

Ellen, R. F. 1984. Ethnographic Research. A Guide to General Conduct. London & San Diego: Academic Press

Epstein, J. S. 1998. *Introduction: Generation X, Youth Culture, and Identity*. In Epstein, J. S. (ritstj.). Youth culture – Identity in a Postmodern World. Oxford & Malden: Blackwell Publishers

Eriksen, T. H. 1993. Små steder store spørsmål. Innføring i sosialantropologi. Oslo: Universitetsforlaget

Eriksen, T. H. 1995. Etterord. In Mauss, Marcel. 1995 [1925]. Gaven. Oslo

Farlex.com (2005, síða á alnetinum)

Faroedating.fo (síða á alnetinum)

Faroesechat.net (síða á alnetinum)

Fock, E. 1984. Rytmisk dansemusik på Færøerne (ritgerð). Aalborg: Aalborg Universitets Center

Forchhammer, J. 1983. Børn før TV: en kultursociologisk rapport om færøske børns fritidsaktiviteter omkring tidspunktet for indførelse af TV. Keypmannahavn: Nordisk Ministerråd

Forchhammer, J. 1998. Børn med tv (Nord 1998: 5). Keypmannahavn: Nordisk Ministerråd

Fornäs, J. 1995. *Youth, culture and modernity*. In Fornäs, J. og G. Bolin (ritstj.). Youth culture in late modernity. London, Thousand Oaks & Delhi: SAGE Publications

Fornäs, J., U. Lindberg & O. Sernhede. 1995. In Garageland. Rock, Youth and Modernity. London & New York: Routledge

Ft.fo (síða á alnetinum)

Furlong, A. & F. Cartmel. 1997. Young People and Social Change. Individualization and risk in late modernity. Buckingham & Philadelphia: Open University Press

Furlong, A. & F. Cartmel. 1999. *Changing Contexts of Youth: Individualization, Risk and Transition*. In Puuronen, V. (ritstj.) Youth in Everyday Life Contexts. Joensuu: University of Joensuu

Fyvel, T. R. 1963. The Insecure Offenders: Rebellious Youth in the Welfare State. Harmondsworth: Penguin

Gennep, A. van. 1960. The rites of passage. Chicago: University of Chicago Press

Gfestival.fo (síða á alnetinum)

Giddens, A. 1976. New Rules of Sociological Method. A Positive Critique of Interpretative Sociologies. London: Hutchinson

Giddens, A. 1991. Modernity and Self Identity. Self and Society in the Late Modern Age. Oxford: Policy Press

Giddens, A. 1996. Modernitet og selvidentitet. Selvet og samfundet under senmoderniteten. Keypmannahavn: Hans Reitzels forlag

Giddens, A. 2000. En løbsk verden. Hvordan globaliseringen forandrer vores tilværelse. Keypmannahavn: Hans Reitzels forlag

Goethe, J. W. von. 2005. Den unge Werthers lidelser. Keypmannahavn: Gyldendal

Gouyou-Beauchamps, M. 2005. Le développement d'internet dans un archipel de l'atlantique nord, Lés Iles Féroé (ritgerð) Paris: Université Paris I – Panthéon Sorbonne

Hagstova.fo (síða á alnetinum)

Hannertz, U. 1980. Exploring the City. Inquiries Towards an Urban Anthropology. New York: Columbia University Press

Hansen, H. R. og D. Rasmussen. 2006. *Brug og misbrug af chat mellem børn og unge.* In Ungdomsforskning. Keypmannahavn: Center for Ungdomsforskning

Hansen, J. A. og J. P. Joensen. 2006. Føroyar og bankarnir í 100 ár. Tórshavn: Føroya Banki

Hauan, M. og G. Heggli. 2002. Younger than yesterday, older than tomorrow. Turku: Folkloristics, Åbo Akademi

Heggen, K., G. Jørgensen og G. Paulgaard. 1999. Ungdom med liten utdanning. Marginalisering? Notat nr. 5 Volda: Møreforskning

Heinesen, J. P. 1981. Yrkjarin úr Selvík og vinmenn hansara (2. útg.) Tórshavn: Føroya Lærarafelag

Holm, D. 1999. Óprentaðar samrøður við ung í Suðuroy – í sambandi við Bjørndal og Aarsæther 2000.

Hjarvard, S. 2003. (í samrøðu um kjatt) Politiken 12/12. Keypmannahavn

Holland, D. og N. Quinn (ritstj.) 1987. Cultural Models in Language and Thought. New York: Cambridge University Press

Holm, D. og B. Mortensen. 2002. *Economic life on the periphery. A comparative study of economic development in two towns on Suðuroy*. In Apostle, R., D. Holm, G. Hovgaard, Ó. Waag Høgnesen og Bjarni Mortensen. 2002. The Restructuration of the Faroese Economy. Frederiksberg: Samfundslitteratur

Hovgaard, G. og R. Apostle. 2002. *Case studies of socioeconomic change: analytical concerns*. In Apostle, R., D. Holm, G. Hovgaard, Ó. Waag Høgnesen og Bjarni Mortensen. 2002. The Restructuration of the Faroese Economy. Frederiksberg: Samfundslitteratur

Hovgaard, G. 1998. *At lesa seg av bygdini. Um leiklut skúlans í nútíðar samfelagnum*. In Dahl, Á. (ritstj.) Føroya Lærarafelag 100 ár: 1898-1998. Tórshavn: Føroya Lærarafelag

Howe, N. og W. Strauss. 2000. Millenials Rising: The Next Great Generation. Minneapolis: Tandem Library

Huhtamäki, M. 2005. Baksa við frælsum veingjum (ritgerð). Helsinki: Helsinkis Universitet

Høgnesen, Ó. Waag. 1982. Ungdómur hevur altíð verið ungdómur. In Tjak! Teori & Praksis. Tórshavn

Illeris, K., N. Katznelson, B. Simonsen og L. Ulriksen. 2002. Ungdom, identitet og uddannelse. Roskilde: Roskilde Universitetsforlag

Jacobsen, M. D. 1988. Handan fyri havið. Býurin og bygdin. Tórshavn: EXLIBRIS

Jacobsen, E. 2004. Ungdómurin – mitt álit. In Sosialurin 13/7. Tórshavn

Jacobsen, J-F. 1958, Det dyrebare liv. Keypmannahavn: Gyldendal

Jacobsen, J. í Lon. 2006. Kjatt og sms-føroyskt. Dimmalætting 26/4. Tórshavn

Jákupsstovu, B. í og E. Kjersem. 2003. Hva gjør sms med ungdomstiden? (undersøkelse) Molde: Høgskolen i Molde

Jensen, H. S. 2005. *New Year's Contemplations.* In Learning Lab Denmark Quarterly 4/4 05. Keypmannahavn: Danmarks Pædagogiske Universitet

Jespersen, H. T. 1988. Musik på Færøerne – en kultur i brydningstid. MODSPIL – de store ørers musiktidsskrift nr 38. Keypmannahavn: Forlaget Rhodos

Jespersen, J. 1994. Økonomisk genopretning af Færøerne? Et politisk spørgsmål. Roskilde: Arbejdspapirer 4 (Roskilde Universitetscenter)

Joensen, E. V. 2003. Lossingarmenn í Havn. Tórshavn: Føroya Fróðskaparfelag

Joensen, J. P. 1975. Færøske sluppfiskere. Etnologisk undersøgelse af en erhvervsgruppes liv. Lund: Folklivsarkivet

Joensen, M. 1977. Fiskimenn. Tórshavn: Bókagarður

Joensen, Sigurð. 1987. Eg stoyti heitt II. Tórshavn: Ungu Føroyar

Johansen, O. 2004. Sebastians Hús. Keypmannahavn: Mentunargrunnur studentafelagsins

Johnsen, T. E. 2001. Teknologiens sosiale nettverksfunksjon. NordNytt nr 82. Keypmannahavn

Jónsson, F. H., H. Guðmundsdóttir og K. Sigurðsson. 2000. De unges livssyn i Vestnorden. De unges livsværdier i Island, Grønland og på Færøerne. Reykjavík: Háskóla Íslands

Karlsen, U. D. 2001. Ung i spenningens land. Analyser av preferanser knyttet til valg av utdannelse, yrke og bosted blant nordnorsk ungdom (Avhandling for graden doctor rerum politicarum). Tromsø: Universitetet i Tromsø

Key, E. 1900. Barnets Århundrade. Stockholm: Albert Bonniers Förlag

Kjølbro, T. 2006. Rættast at savna allar næmingar í størri skúlum so tíðliga sum gjørligt (samrøða við Jan Mortensen). In Skúlablaðið 1. Tórshavn: Bókadeild Føroya Lærarafelags

Kristensen, K. 2006. Samlingspunktet. In Ny Viden nr 2. Odense: Syddansk Universitet

Kruse, B. 2007. Persónlig samrøða við Birgir Kruse um tónleikalívið í Føroyum.

Lalander, P. og T. Johansson. 2002. Ungdomsgrupper i teori och praksis. Lund: Studentliteratur

Lamhauge, J. 2006. (tankafar) um sms-yrking. www.olewich.com

Lévi-Strauss, C. 1955. Tristes Tropiques. Paris: Plon

Lieberg, M. 1992a. Att ta staden i besittning. Om ungas rum och rörelser i offentlig miljö (ritgerð). Lund: Lunds Universitet

Lieberg, M. 1992b. *Vi ses på Domus. Om varuhuset som ungdomsmiljö*. In Löfgren, A. og M. Norell (ritsj.) Att förstå ungdom. Identitet och mening i en föränderlig värld. Stockholm/Stehag: Brutus Östlings bokförlag Symposium

Livingstone, S. 2002. Young people and new media. Childhood and the changing media environment. London, Thousand Oaks & Delhi: SAGE Publications

Loe, E. 2004. Doppler. Oslo: Cappelen

Luke, T. W. 1996. *Identity, Meaning and Globalization: Space-Time Compression and the Political Economy of Everyday Life*. In Heelas, P., S. Lash og P. Morris (ritstj.) Detraditionalization: Critical reflextions on Authority and Identity. Cambridge: Blackwell Publishers

Löfgren, A. og M. Norell (ritstj.) 1992. At förstå ungdom. Identitet och mening i en foränderlig värld. Stockholm: Brutus Östlings Bokförlag Symposium

Madsen, H. 1994. Børn og ung í Føroyum. Vadum (DK): Forlagið Skúvanes

Martin, J. R. 1992. The Schoolhome. Rethinking schools for changing families. Cambridge (MA) & London: Harvad University Press

Mauss, M. 1995 [1925]. Gaven. Oslo: Cappelen

Mead, M. 1928. Coming of Age in Samoa. A Study of Adolescence and Sex in Primitive Societies. New York: William Morrow

Miles, S. 2002. Youth lifestyles in a changing world. Buckingham & Philadelphia: Open University Press

Minervudóttir, G. E. 2003. The kingdom of God on the Bottom of the Ocean. In Sigurðsson, H. (ritstj.) Inside – outside. Iceland, Greenland and the Faroes. Akureyri: Listasafnið á Akureyrið

Mogensen, K. 2002. Livet begynderved 150 km/t (rapport). Roskilde: Center for ungdomsforskning

Mortensen, A. (ritstj.) 2005. Fólkaleikur. Heiðursrit til Jóan Paula Joensen. Tórshavn: Fróðskaparfelag Føroya

Mortensen, E. 1996. Ljósini slóknað. Ung undir krígnum. Tórshavn: Bókadeild Føroya Lærarafelags

Mørch, S. 2001. Har de unge kultur? In Uddannelse nr 10. Keypmannahavn: Undervisningsministeriet

Mørch, S. 2005. *Researching youth life.* In Helve, Helena (ritsj.) Mixed Methods in Youth Research. Helsinki: Finnish Youth Research Network

Mørch, S. og H. Andersen. 2006. *Individualization and the changing youth life.* In Leccardi, C. og E. Ruspini (ritstj.) A New Youth? Young People, Generations and Family Life. Aldershot: Ashgate

Nielsen, P. 1998. *Skúlasøgan*. In Dahl, Á. (ritstj.) Føroya Lærarafelag 100 ár: 1898-1998. Tórshavn: Føroya Lærarafelag

NÚ myndablaðið nr. 5 1974

NÚ myndablaðið nr. 8 1979

NÚ myndablaðið nr. 10 1979

Nyyssölä, K. 1998. *From School to Where? Labor market transitions of young Finnish people in 1980-1993.* In Antilla, A. & A. Uusitalo (ritstj.) Contemporary Marginalization and Exclusion of Young People – Whose Reality Counts? Helsinki: Advisory Council for Youth Affairs and Mannerheim League for Child Welfare

Okkara sangbók. 2006. Olsen, M. og E. S. Olsen (ritstj.) Tórshavn: Forlagið á Deild

Olesen, J. 2003. *Børn, forbrug og mobiltelefoner: den sociale konstruktion af behovet for mobiltelefoner blandt børn.* In Tidsskrift for børne- og ungdomskultur nr. 46. Keypmannahavn: BUKS Børne- og ungdomskultursammenslutningen

Olewich.com (síða á alnetinum)

Ottarsdóttir, K. 1999. Bye Bye Blue Bird (filmur). Keypmannahavn

Oyggjatíðini 25/6 2003 (grein hjá Morten Steen Nielsen, um tónleik)

OutsiderMagasin. 2006. Nakrar sms-yrkingar. Keypmannahavn

Paulsen, T., M. Vesterager og T. Jepsen. 2003. Rapport om ungdom fra Torshavn. Roskilde: Institut for Geografi og Internationale Udviklingsstudier, Roskilde Universitet

Peacock, J. L. 1986. The Anthropological Lense. Harsh Light, Soft Focus. Cambridge: Cambridge University Press

Petersen, L. 1994. Skole på Færøerne i 1000 år. En skolehistorisk håndbog. Tórshavn: Ludvig Petersen

Pólsson, P. 2006. loynimálið – Bábel revisited. Dimmalætting 12/4. Tórshavn

Poulsen, J. 1980. TV – og den færøske kulturs fremtid. Tórshavn: Føroya Fróðskaparfelag & Aalborg Universitetsforlag
Powdermaker, H. 1966. Stranger and Friend. The Way of the Anthropologist. New York & London: W. W. Norton & Company

Reimer, B. 1995. *Youth and modern lifestyles*. In Fornäs, J. og G. Bolin (ritstj.) Youth culture in late modernity. London, Thousand Oaks & Delhi: SAGE Publications

Reinert, M. 1996. Duldar leiðir. Keypmannahavn: Mentunargrunnur studentafelagsins

Reinert, G. 2006. Tá eitt kultfyribrigdi takkaði fyri seg. Dimmalætting 23/3

Ridderstrøm, H. 2005. *Ungdommens kombinasjonskunst – bricolage for en ny tid.* In Tidsskrift for Ungdomsforskning nr 1. Bergen: Fagbokforlaget

Álit um ferðslutrygdarpolitikk í Føroyum. 2003. Tórshavn: Ráðið fyri ferðslutrygd

Rousseau, J. J. 1961. Émile ou De L'éducation. Paris: Garnier

Rutherford, J. 2003. *Preface.* In Benwell, B. (ritstj.) Masculinity and Men's Lifestyle Magazines. Oxford & Malden: Blackwell Publishing

Sernhede, Ove. 1996. Ungdomskulturen och de Andra. Sex essäer om ungas skapande och fascinationen inför svart kultur. Gøteborg: Daidalos

Simpson, M. 1994. Here come the mirror men! In The Independent 15th November. London

Skulin.fo/ven (síða á alnetinum)

Sosialurin 20/11 2001

Sosialurin 9/10 2002

Sosialurin 13/7 2004

Sosialurin 26/7 2004

Stahl, G. 2001. *Søger net – chat, netværk, unge.* In Uddannelse nr 10. Keypmannahavn: Undervisningsministeriet

Stigen, A. 1982. Tenkningens historie (bind 2) Den nyere tid. Oslo: Gyldendal Norsk forlag

Sørensen, B. Holm. 2000. *Børn i en digital kultur*. In Sørensen, B. Holm og B. R. Olesen (ritsj.) Børn i en digital kultur. Forksningsperspektiver. Keypmannahavn: GADS Forlag

Sørensen, B. Holm (ritstj.) 2001. Chat: leg, identitet, socialisering og læring. Keypmannahavn: GADS Forlag

Sørensen, B. Holm, C. Jessen og B. R. Olesen. 2002. *Indledning*. In Sørensen, B. Holm, C. Jessen og B. R. Olesen (ritstj.) Børn på nettet. Kommunikation og læring. Keypmannahavn: GADS Forlag

Thomassen, R. 1996. Útisetar og heimlandið. Fregnir nr 8. Keypmannahavn: MFS

Thomsen, R. 2006. *Skúli og tykisheimur á felags slóð.* In Durhuus, K. (ritstj.) Halló – brot úr einum fjarskiftandi alheimi (Føroya Tele 100 ár). Tórshavn: Føroya Tele

TJAK! 1982 nr 2. Tórshavn

Tryggingarfelagið Føroyar. 2001. Lít (blað, nov.) Tórshavn

Turkle, S. 1995. Life on the screen. Identity in the age of the internet. New York: Simon & Schuster
Tutl.com (síða á alnetinum)

Tylor, E.B. 1871. Primitive Culture: Researches into the Development of Mythology, Philosophy, Religion, Art and Custom. London: John Murray Ltd

Tyr.net (síða á alnetinum)

Útoyggjaálitið. 2001. Tórshavn: Løgmansskrivstovan

Ulleberg, P. 2002 Influencing subgroups of young drivers and their passengers. Motivational influences of personality traits on risktaking attitudes and driving behaviour. PhD dissertation. Trondheim: Norges teknisknaturvitenskapelige universitet NTNU

Valentine, G., T. Skelton og D. Chambers. 1998. *Cool Places: an Introduction to Youth and Youth Cultures*. In Skelton, T. & G. Valentine (ritstj.) Cool Places. Geographies of Youth Cultures. London & New York: Routledge

Vaaranen, H. 2004. The Emotional Experience of Class: Interpreting Working-Class Kids' Street Racing in Helsinki. The American Academy of Political and Social Sciences, annals 2004, vol. 595

Viderø, M. 2003. Samrøða. In Paulsen, T., M. Vesterager & T. Jepsen. 2003. Rapport om ungdom fra Torshavn. Roskilde: Institut for Geografi og Internationale Udviklingsstudier, Roskilde Universitet

Vikublaðið 4/3 2003

Vikublaðið 1/4 2004

Voss, M. 2005. *Overflade og identitet – to sider af samme sag*. In Ungdomsforskning nr. 1. Keypmannahavn: Center for Ungdomsforskning (DPU)

Wadel, C. 1991. Feltarbeid i egen kultur. Flekkefjord: SEEK A/S

Wang Hansen, M. 2004. At bróta sosiala arvin og gjøgnum tónleik at vinna sær frælsi og lívsvirðir sum kunnu vara. Sosialurin 26/7. Tórshavn

Whitehead, S. M. og F. J. Barrett (ritstj.) 2001. The Masculinities Reader. Cambridge: Polity Press

Whyte, W. F. 1955. Street Corner Society. The social structure of an italian slum (2nd edition). Chicago: University of Chicago Press

Williams, S. og L. Williams. 2005. Space invaders: the negociation of teenage boundaries through the mobile phone. In Sociological Review. Oxford & Malden (USA)

Willis, P. E. 1977. Learning to labour. How working class kids get working class jobs. Farnborough, Hants: Saxon House

Wulff, H. 1995. *Introducing Youth Culture*. In Amit-Talai, V. og H. Wulff (ritstj.) Youth Cultures: A Cross-Cultural Perspective. London & New York: Routledge

Young, M. og P. Willmott. 1990 [1957]. Family and Kinship in East London. London: Penguin Books

Ziehe, T. og H. Stubenrauch. 1983. Ny ungdom og sædvanlige læreprocesser. Kulturel frisættelse og subjektivering. Keypmannahavn: Politisk Revy

Økismenningarálitið. 2001. Tórshavn: Mentamálastýrið

Greinar hjá Firouz Gaini, ið eru brúktar til ritgerðina

Gaini, Firouz. 1997. *Hvørji eru øll hesi lesandi?* In Fjølnir nr 4 1997. Keypmannahavn: MFS

Gaini, Firouz. 2001. *Ikke medierne der er problemet*. In CeFU netskrift. Roskilde: Center for Ungdomsforskning

Gaini, Firouz. 2002. *Skyldfólk og onnur – familjan í Føroyum*. In FRØÐI 1/2002. Tórshavn: Føroya Fróðskaparfelag

Gaini, Firouz. 2003a. Ung í Føroyum. Námsrit 1/2003. Klaksvík: Granskingardepilin fyri Økismenning

Gaini, Firouz. 2003b. *Færøerne. Et nordatlantisk øsamfunds ungdom*. In Helve, Helena (ritstj.) Ung i utkant. Aktuell forskning om glesbygsungdomar i Norden. Keypmannahavn: Nordisk Ministerråd

Hovgaard, Gestur og Firouz Gaini. 2003c. *Fisk og mus på Færøerne*. In Ungdomsforskning. Roskilde: Center for Ungdomsforskning

Gaini, Firouz. 2003d. *Kjattarar. Ung á netinum*. In FRØÐI 2/2003. Tórshavn: Føroya Fróðskaparfelag

Gaini, Firouz. 2004a. *To fish or not to fish. The meaning of fish and fisheries among young people in the Faroe Islands*. In Fróðskaparrit 52. bók. Tórshavn: Føroya Fróðskaparfelag

Gaini, Firouz. 2004b. *KOM og FAR telefon*. In FRØÐI 1/2004. Tórshavn: Føroya Fróðskaparfelag

Gaini, Firouz. 2005a. *Faroese Youth: Preferences of Education, Work and Leisure*. In Puuronen, Vesa, Jarna Soilevuo-Grønnerød og Jatta Herranen (ritstj.) Youth – Similarities, Differences, Inequalities. (Report of the Karelian Institute No1/2005) Joensuu: University of Joensuu Press

Gaini, Firouz. 2005b. *Ungdómsins býur*. In Mortensen, Andras (ritstj.) Fólkaleikur. Heiðursrit til Jóan Paula Joensen. Tórshavn: Føroya Fróðskaparfelag

Gaini, Firouz. 2005c. *The Stranger in the class: ethnographic fieldwork experiences from a lower secondary school*. In Helve, Helena (ritstj.) Mixed Methods in Youth Research. Helsinki: Finnish Youth Research Network

Gaini, Firouz. 2005d. *Trækfugle vender altid hjem*. In Ungdomsforskning. Keypmannahavn: Center for Ungdomsforskning (Danmarks Pædagogiske Universitet)

Gaini, Firouz. 2005e. *Framtíðarung*. In Pedagogblaðið. Tórshavn: Pedagogfelagið

Gaini, Firouz. 2005f. *Ung, mentan og alnót í Føroyum*. In Snædal, Magnus og Anfinnur Johansen (ritstj.) Frændafundur 5. Fyrilestrar frá íslendsk-føroyskari ráðstevnu í Reykjavík 19.-20. juni 2004. Reykjavík: Háskólaútgáfan

Gaini, Firouz. 2005g. *Ungdómur og mentanarlig globalisering*. Námsrit/2005. Klaksvík: Granskingardepilin fyri Økismenning

Gaini, Firouz. 2006a. *Familie, leg og erfaring. Børnehavebørn og moderniseringsprocessen på Færøerne. In* BARN nr 3 (Senter for barneforskning). Trondheim

Gaini, Firouz. 2006b. *Internet Chatting in the Faroe Islands*. In Fróðskaparrit 54. bók. Tórshavn: Fróðskapur

Gaini, Firouz. 2006c. *Once Were Men*. In Fróðskaparrit bók 54. Tórshavn: Fróðskapur

Gaini, Firouz. 2006d. *Eg bíði eftir svari*. In Durhuus, Kári (ritstj.) Halló – brot úr einum fjarskiftandi alheimi (Føroya Tele 100 ár). Tórshavn: FT

Gaini, Firouz. 2006e. *Atlantiskir cowboyar*. In FRØÐI. Tórshavn: Fróðskapur

Gaini, Firouz. 2006f. *Ein nýggjur skúli*. Skúlablaðið. Tórshavn: Bókadeild Føroya Lærarafelags

Gaini, Firouz. 2007a. Ungdómur og ungdómsgransking. Keypmannahavn: Underskoven

Gaini, Firouz. 2008. *Sms-beskeder, symbolske gaver og sproglige eksperimenter*. In Nordiske sprog- og litteraturdage i København. Keypmannahavn: Nordatlantens Brygge

Gaini, Firouz. 2008b (verður prentað seinni). *Lost Musicians Recovered*. In Isnart, Cyril (ritstj.) Frakland